LANDSGRANNSKOÐANIN

Fíggjarárið 2015

Ársfrágreiðing

latin
løgtingsgrannskoðarunum

sambært § 12 í Ll. nr. 25/1999
“um grannskoðan av landsroknskapinum v.m.”

AUGUST 2016

Innihaldsyvirlit

0 INNGANGUR 7

0.1 LANDSROKNSKAPURIN 2015 7
0.2 GRANNSKOÐAN AV ROKNSKAPINUM 7
0.3 FRAMLØGA 9

1 ALMENNAR VIÐMERKINGAR 11

1.1 KT-TRYGD 11
1.2 EGNAR BÚSKAPARSKIPANIR 12
1.3 LØGUJÁTTANIR OG VANLIGAR RAKSTRARÚTREIÐSLUR 12
1.4 SKIPAN AV ROKNSKAPARHALDINUM 13
1.5 OGNIR OG ÚTBÚNAÐUR 13
1.6 MEIRVIRÐISGJALD 14

2 LØGMANSFYRISITINGIN 15

2.1 SENDISTOVA FØROYA TIL DANMARKAR (LG 2015/202-0131) 15

3 FÍGGJARMÁL 17

3.1 LANDSROKNSKAPURIN IKKI FULLFÍGGJAÐUR (LG 2014/100-0001) 17
3.2 FÍGGJARSTØÐA (LG 2015/300-0000) 18
3.2.1 FÍGGJARLIGUR ÚTBÚNAÐUR (LG 2015/300-0102) 19
3.2.2 ÁOGN 23
3.2.3 GOYMSLUR 24
3.2.4 OGNIR OG ÚTBÚNAÐUR (LG 2015/300-0101) 24
3.2.5 TØKUR PENINGUR 25
3.2.6 SKULD 27
3.2.7 MVG-EFTIRSTØÐUR (LG 2014/220-0522) 28
3.3 GRANNSKOÐAN AV EFTIRLØNUM (LG 2015/203-0181) 29
3.4 KERVISSKOÐAN 32
3.4.1 KERVISSKOÐAN HJÁ TAKS 32
3.4.2 KERVISSKOÐAN HJÁ GJALDSTOVUNI 34
3.4.3 KERVISSKOÐAN HJÁ KT LANDSINS 34
3.4.4 KT-EFTIRLITSSKIPANIR Á FØROYA GJALDSTOVU OG KT LANDSINS 35
3.5 FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ (LG 2014/203-0111) 36
3.6 TAKS (LG 2015/203-0151) 36
3.7 HAGSTOVA FØROYA (LG 2015/203-0152) 36

3.8 REGLUR UM MATSTOVUR (LG 2014/203-0111) 39
3.9 SØLA AV ALMENNUM BYGNINGUM (LG 2015/203-0111) 39
3.10 ÓMAKSGJØLD (LG 2014/203-0151) 41
3.11 FÍGGING LANDSINS (LG 2014/203-0151) 41
3.11.1 LANDSKASSASKULD 42
3.11.2 PORTEFØLJUSKIPANIN OG PLASERINGAR AV GJALDFØRI 44
3.12 LANDSVERK (LG 2015/203-0381) 45
3.12.1 INNTØKUFÍGGJAÐ VIRKSEMI, JÁTTAN 3.38.1.02.40. 48
3.12.2 LANDSVEGAHALD, JÁTTAN 3.38.1.02.30. 50
3.12.3 NÝGGIR LANDSVEGIR, JÁTTAN 3.38.1.07. 51
3.12.4 FLYTING AV LØNARÚTREIÐSLUM TIL LØGUR 52
3.12.5 MEIRVIRÐISGJALD 53
3.13 LANDSVERK, LØGUJÁTTANIR (LG 2015/203-0381) 54
3.13.1 UMBYGGING Í TINGANESI 54
3.13.2 UMVÆLING AV ALMENNUM BYGNINGUM 55
3.13.3 LANDSSJÚKRAHÚSIÐ, ÚTBYGGING 58
3.13.4 BÚSTOVNAR O.A. 61
3.14 TINGLÝSINGARGJALD (LG 2014/220-0522) 64
3.15 TVØRGANGANDI LØNARGRANNSKOÐAN (LG 2015/511-0000) 65

4 FISKIVINNUMÁL 67

4.1 MRCC OG TÓRSHAVN RADIO (LG 2015/205-0311) 67
4.2 BÚNAÐARSTOVAN (LG 2014/205-0332) 69
4.3 UMHVØRVISSTOVAN (LG 2015/206-0374) 70
4.4 AVGJALD AV FISKATILFEINGI (LG 2014/220-0522) 70

5 VINNUMÁL 73

5.1 KUNNGERÐIR O.A. TIL VINNUFELAGALÓGINA (LG 2014/206-0111) 73
5.2 SJÓVINNUSTÝRIÐ (LG 2015/206-0351) 74
5.3 UMSITING AV ALILOYVUM (LG 2015/206-0361) 76
5.4 BRÚKARAUMBOÐIÐ (LG 2015/206-0371) 77
5.5 RÚSDREKKASØLA LANDSINS (LG 2015/206-0373) 79
5.6 STRANDFARASKIP LANDSINS (LG 2015/206-0382) 79
5.6.1 INNTØKUR OG SKULDARAR 81
5.6.2 KEYP AV VØRUM OG TÆNASTUM 84
5.6.3 LØNIR 88
5.6.4 HØVUÐSKONTA 6.38.2.02. STRANDFARASKIP LANDSINS, LØGUJÁTTAN. 94
5.6.5 VIÐMERKINGAR FRÁ LANDSSTÝRISMANNINUM 94
5.7 AKSTOVAN (LG 2015/206-0384) 94
5.8 BARSILSSKIPANIN (LG 2014/220-0521) 95

6 MENTAMÁL 97

6.1 MENTAMÁLARÁÐIÐ (LG 2014/207-0111) 97
6.2 NÁM (LG 2014/207-0231) 97
6.3 RÁSIN (LG 2014/207-0232) 98
6.4 FISKIVINNUSKÚLIN (LG 2014/207-0233) 99

6.5 MUSIKKSKÚLASKIPANIN (LG 2014/207-0235) 100
6.6 FRÍTÍÐARUNDIRVÍSING (LG 2014/207-0235) 100
6.7 GRANSKINGARRÁÐ FØROYA (LG 2014/207-0236) 101
6.8 SJÓNÁM (LG 2014/207-0236) 101
6.9 FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA (LG 2014/207-0236) 102
6.10 TJÓÐPALLUR FØROYA (LG 2015/207-0242) 103
6.11 MENTANARGRUNNUR LANDSINS (LG 2015/207-0242) 108
6.12 SØVN LANDSINS (LG 2014/207-0243) 112
6.13 KIRKJUGRUNNURIN (LG 2014/207-0245) 113

7 HEILSUMÁL 115

7.1 LÆKNAKANNINGAR AV BØRNUM (LG 2014/211-0201) 115
7.2 HEILSUTRYGD (LG 2015/211-0202) 116
7.2.1 HEILSUTRYGDARVEITINGAR 117
7.2.2 FÍGGJARSTØÐA 118
7.2.3 KOMMUNULÆKNASKIPANIN, JÁTTAN 11.20.2.04. 119

8 ALMANNAMÁL 121

8.1 BARNAPENINGUR VEITTUR Í FORSKOTI (LG 2015/212-0213) 121
8.2 EINKJUBARNASTYRKUR (LG 2014/212-0213) 123
8.3 BARNAÍSKOYTI (LG 2015/212-0213) 126
8.4 DAGPENINGUR VEGNA SJÚKU V.M. (LG 2014/212-0214) 127
8.5 ANSINGARSAMSÝNING (LG 2014/212-0216) 129
8.6 ELDRI OG SERFORSORG (LG 2014/212-0216) 130
8.7 VANLIG FORSORG (LG 2014/212-0217) 130
8.8 § 15 Í FORSORGARLÓGINI (LG 2014/212-0217) 131
8.9 VARANDI VEITING (LG 2015/212-0217) 131
8.10 SJÚKRATRYGD (LG 2015/212-0344) 133

9 ORÐALISTI 137

0 Inngangur

0.1 Landsroknskapurin 2015

§ 45, stk. 1, í stýrisskipanarlógini ásetir, at landskassaroknskapurin skal verða lagdur fyri Løgtingið í seinasta lagi seks mánaðir eftir fíggjarárslok. Sambært § 1, stk. 1, í løgtingslóg nr. 33 frá 23. mars 1994 "um landsins almenna roknskaparhald v.m." skal Landsstýrið, innan mai mánaður er liðin, leggja fyri Løgtingið samlaða landsroknskapin fyri undanfarna fíggjarár.[1]

Tað er eisini ásett í § 11, stk. 1, í grannskoðanarlógini, at landsstýrismaðurin í seinasta lagi 5 mánaðir eftir fíggjarárslok skal lata løgtingsgrannskoðarunum og Landsgrannskoðanini tann árliga landsroknskapin fyri undanfarna fíggjarár.

Neyvari reglur um roknskaparhaldið eru ásettar í kunngerð nr. 22 frá 14. mars 2007 "um roknskaparverk landsins o.t."

Aðalráðini og teir stovnar, sum hoyra undir aðalráðini, skulu leggja fram ársroknskap, sum er gjørdur í Búskaparskipan landsins, og sum gevur eina rætta mynd av inntøkum og útreiðslum í fíggjarárinum og av ognum og skuld við fíggjarárslok.

Aðalráð og stovnar skulu leggja fram ein rættan roknskap – gjørdur í BSL.

Aðalráðini og stovnar teirra skulu eisini støðugt hava tað innanhýsis eftirlit, ið skal til, fyri at ársroknskapur kann verða gjørdur, sum gevur eina rættvísandi mynd uttan stórvegis skeivleikar.

Sambært § 10 í roknskaparkunngerðini verða roknskaparupplýsingar samsvarandi góðkendum ársroknskapum tiknar við í landsroknskapin, sum Gjaldstovan setir upp.

Gjaldstovan setir landsroknskapin upp.

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum skal, áðrenn mai mánaður er liðin, leggja fyri Løgtingið samlaða landsroknskapin.

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum skal leggja fram samlaðan landsroknskap.

Landsroknskapurin fyri fíggjarárið 2015 varð latin Løgtinginum 28. mai 2016.

0.2 Grannskoðan av roknskapinum

Yvirskipaðu reglurnar um grannskoðan av almennum roknskapum eru ásettar í § 45 í stýrisskipanarlógini. Neyvari reglur eru ásettar í løgtingslóg nr. 25 frá 21. apríl 1999 "um grannskoðan av landsroknskapinum v.m."

Endamálið við grannskoðanini

Sambært grannskoðanarlógini er endamálið við grannskoðanini at ansa eftir,

Endamálið við grannskoðanini.

- at allar inntøkur landsins eru settar í roknskapin,
- at ongin útreiðsla er goldin uttan við heimild í fíggjarlóg ella aðrari játtanarlóg,

[1] Í 2015 er tíðarfreistin stytt úr 6 mánaðum í 5 mánaðir.

at roknskapurin er rættur, og at tær avgerðir, roknskapurin fevnir um, eru samsvarandi veittum játtanum, galdandi lógum og fyriskipanum, verandi avtalum og vanligum siði,
at hóskandi er atborið fíggjarliga í sambandi við umsiting av ognum og víkjandi rakstri av teimum stovnum og tí virksemi, roknskapurin fevnir um, og
at roknskapar- og eftirlitsskipanir eru tryggar.

Landsgrannskoðanin

Ábyrgd grannskoðarans.

Landsgrannskoðanin er stovnur undir Løgtinginum og er óheft í virki sínum. Landsgrannskoðanin skal grannskoða árliga landsroknskapin, t.e. samlaða roknskapin fyri landsumsitingina og allar landsstovnarnar.[2]

Grannskoðanin skal fevna um fíggjarliga grannskoðan, løgfrøðiliga-kritiska grannskoðan og fyrisitingargrannskoðan. Harafturat skal grannskoðanin regluliga kanna, um roknskapar- og eftirlitsskipanir eru tryggar.

Landsgrannskoðanin ger sjálv av, hvussu grannskoðanin verður útint.

Grannskoðanin verður løgd soleiðis til rættis, at øki og stovnar verða grannskoðað við jøvnum millumbili. Landsgrannskoðanin fer út á stovnar og deildir at kanna t.d. roknskapar- og lønarviðurskifti ella at kanna mannagongdir fyri umsiting av lóggávu og játtanum. Aðrar uppgávur eru t.d. játtanareftirlit, gjøgnumgongd av fíggjarstøðu og avstemman.

Frágreiðingar umbidnar av løgtingsgrannskoðarunum

Løgtingsgrannskoðararnir kunnu áleggja Landsgrannskoðanini at gera frágreiðingar um viðurskifti, sum teir vilja hava lýst. Løgtingsgrannskoðararnir kunnu eisini áleggja Landsgrannskoðanini at gera víðkaða fyrisitingargrannskoðan á ávísum økjum ella at gera tvørgangandi fyrisitingargrannskoðan, sum fevnir um fleiri játtanir, stovnar o.a.

Privatir grannskoðarar

Hjá nøkrum landsstovnum og grunnum er tað við lóg, kunngerð ella viðtøkum ásett, at grannskoðanin skal verða útint av løggildum ella skrásettum grannskoðarum. Í øðrum førum verður grannskoðanin útint sambært avtalu ella siðvenju.

Grannskoðararnir lata løgtingsgrannskoðarunum frágreiðingar um úrslitini av grannskoðanunum. Seinnu árini hava løgtingsgrannskoðararnir gjørt ein samandrátt av frágreiðingunum frá privatu grannskoðarunum, sum er latin Løgtinginum saman við uppskoti til samtyktar um góðkenning av landsroknskapinum.

Viðmerkingar og fráboðanir frá landsstýrismonnum

Í § 12, stk. 1, í grannskoðanarlógini er ásett, at landsstýrismaðurin skal hava eina skrivliga fráboðan um úrslitið av grannskoðanini. Vanligt er, at stovnsleiðslan frammanundan fær høvi at gera sínar viðmerkingar til frágreiðingina. Tað er fyri at tryggja, at ongar misskiljingar eru, og at tey skriv, sum verða send landsstýrismanninum, eru so røtt sum gjørligt, og at allir partar fáa høvi at lýsa síni sjónarmið.

Landsstýrismaðurin skal hava frágreiðingar til viðmerkingar.

Í § 12, stk. 3, er ásett, at áðrenn frágreiðing um úrslitið av einari grannskoðan verður latin løgtingsgrannskoðarunum, skal hon verða løgd fyri viðkomandi landsstýrismann til viðmerkingar. Møguligar viðmerkingar og fráboðanir frá landsstýrismanninum um tiltøk og ætlanir, sum frágreiðingin hevur elvt til, skulu takast við í frágreiðingina til løgtingsgrannskoðararnar.

[2] Tó ikki roknskapirnar hjá teimum har tað í lóg, kunngerð, viðtøkum, siðvenju e.l. er ásett, at grannskoðanin verður útint av løggildum ella skrásettum grannskoðarum.

Frágreiðingin skal sendast landsstýrismanninum til viðmerkingar til tess at tryggja, at tað tilfar, sum verður latið løgtingsgrannskoðarunum, verður so objektivt rætt sum gjørligt, og at eisini landsstýrismaðurin fær høvi at lýsa síni sjónarmið.

0.3 Framløga

Sambært § 12, stk. 2, í grannskoðanarlógini skal roknskapargrannskoðanin innan 8 mánaðir[3] eftir fíggjarárslok lata løgtingsgrannskoðarunum frágreiðing um úrslitið av grannskoðanini.

Við hesum letur Landsgrannskoðanin løgtingsgrannskoðarunum ársfrágreiðing sína í sambandi við, at løgtingsgrannskoðararnir skulu leggja landsroknskapin 2015 fyri Løgtingið til samtyktar.

Frágreiðingin er skipað eftir sama málsøkjabýti sum landsroknskapurin fyri 2015.

Frágreiðingin er løgd fyri tey landsstýrisfólk, sum nú umsita avvarðandi øki, til viðmerkingar. Møguligar viðmerkingar og fráboðanir frá landsstýrisfólkunum um tiltøk og ætlanir, frágreiðingin hevur elvt til, eru tiknar við.

Landsgrannskoðanin roknar grannskoðanina av landsroknskapinum 2015 sum lidna. Kortini kann Landsgrannskoðanin seinni fara at kanna mál og spurningar, sum viðvíkja bæði 2015 og eldri árum. Upplýsingar kunnu koma fram, sum elva til, at tey mál, sum eru umrødd í hesari frágreiðing, verða mett og viðgjørd av nýggjum.

Argir, 31. august 2016

Beinta Dam
landsgrannskoðari

[3] Í 2015 er freistin stytt úr 10 mánaðum í 8 mánaðir.

1 Almennar viðmerkingar

1.1 KT-trygd

Reglurnar hjá landinum viðvíkjandi KT-trygd eru lýstar í rundskrivi frá Vinnumálaráðnum 22. desember 2004. Har er ásett, at leiðslurnar á øllum ábyrgdarøkjum í landsfyrisitingini hava ábyrgd av, fyri 1. februar 2006, at seta í verk KT-trygd, sum neyvari greinað í rundskrivinum. Sambært dagførdum rundskrivi 21. juni 2007 varð freistin longd til 1. apríl 2010.

KT-trygd snýr seg í høvuðsheitum um trúnað við upplýsingum, rættleika við upplýsingum og viðgerð av teimum, umframt atgongd til upplýsingar og telduskipanir. Endamálið við rundskrivinum var at gera nýtsluna av kunningartøknini í landsfyrisitingini trygga.

KT-trygd snýr seg um trúnað, rættleika og atgongd til upplýsingar.

Sum liður í stovnsvitjanum og øðrum kanningum hjá Landsgrannskoðanini, spyrja vit aloftast um stovnsins KT og KT-trygd, og hvussu grannskoðaðu stovnarnir røkja ta uppgávuna.

Einstakir stovnar hava sett í verk KT-trygd, sum lýkur krøvini í oman fyri nevnda rundskrivi. Tað hevur tó víst seg at vera nærum ógjørligt hjá øllum stovnum at liva upp til ásetingarnar í rundskrivnum. Summir stovnar hava at kalla kasta frá sær, tá tað kemur til KT-trygd; meðan aðrir hava keyptar loysnir, sum tó sjáldan gerast til eina virkna trygdarfyriskipan.

Ymiskt er eisini, hvussu stovnar handfara KT-trygdina. Summir hava sett í verk KT-trygd á høgum støði, sum er undir støðugum eftirliti bæði innaníframá og uttaníframá, meðan aðrir ikki hava tikið støðu til mest grundleggjandi viðurskiftini viðvíkjandi nýtsluni av KT til stovnsins virksemi.

Ásannandi, at kunningartøkni í alsamt størri og vaksandi mun stuðlar undir fyrisiting og virksemi stovnanna, hevur Gjaldstovan seinastu árini av sínum eintingum gjørt ein trygdarpakka, sum í høvuðsheitum býður stovnunum høvi at fáa gongd á grundleggjandi KT-trygd. Nógvir smáir og størri stovnar hava tikið tað til sín, og hava gjørt váðameting og flokkað dátur, soleiðis at ein grundleggjandi KT-trygd á stovnunum kann gerast veruleiki.

Gjaldstovan hevur bjóðað smáu stovnunum trygdarpakka.

Skal KT-trygd gerast ein súla undir góðari leiðslu, sum kravt í rundskrivinum, krevur tað, at leiðslurnar støðugt taka støðu til dátutilfeingið hjá stovninum; hvussu tilfeingið skal brúkast, varðveitast, hvønn týdning KT hevur fyri vanliga raksturin hjá stovninum, og hvussu kunningartøknin stuðlar uppgávunum, sum eru álagdar stovninum.

Landsgrannskoðanin hevur roynt at hildið stovnsleiðslurnar fastar í, at ábyrgdin av kunningartøknini liggur hjá stovnsleiðsluni og kann ikki veitast út, sjálvt um servarar, back-up gongdir, skipanir og dátur eru løgd til onnur at umsita.

Ábyrgd av KT-trygd kann ikki veitast út.

Evsta trygdin, fyri at kunningartøknin kann verða eitt neyðugt og gagnligt amboð, er, at stovnsleiðslan tekur støðu til, hvørjir váðarnir eru, og tekur stig til at fyribyrgja ella avmarka teir. Í hesum einfaldni liggur størsta trygdin.

1.2 Egnar búskaparskipanir

Í roknskaparkunngerðini er ásett, at allir almennir stovnar skulu nýta Búskaparskipan landsins. Stovnarnir skulu lata skipanini upplýsingar og eftirkanna tað tilfar, teir fáa úr skipanini.

Tó at nógv teir flestu stovnarnir skráseta sínar roknskapardátur beinleiðis í Búskaparskipan landsins, er tað hjá nøkrum stovnum neyðugt ella ynskiligt at hava egnar búskaparskipanir til at gjalda út, føra bókhald, umsita lønir, lán, skuldarar o.a. Fíggjarmálaráðið kann loyva stovnum við serligum tørvi heilt ella lutvíst at nýta sínar egnu búskaparskipanir. Tá skal ein skrivlig rakstraravtala verða gjørd við Gjaldstovuna, sum gjøllari útgreinar treytirnar fyri dátusamskifti o.t.

Tá ið Búskaparskipanin er grundarlagið undir landsroknskapinum og tí samlaða landsroknskapinum, sum Løgtingið samtykkir, hevur tað stóran týdning, at skrásetingarnar í henni eru tær røttu. Landsgrannskoðanin hevur tó staðfest, at samsvar er ikki altíð millum skipanirnar.

Feskasta dømi um avleiðingarnar, tá ið munir eru millum skipanirnar, eru tær rættingarnar í roknskapartølunum hjá Strandfaraskipum landsins, sum neyðugt var at gera í landsroknskapinum 2014. Tey tøl, sum høvdu verið fráboðað Búskaparskipan landsins vóru ikki røtt, og fjaldu yvir 9,9 mió.kr. í útreiðslum, sum ikki høvdu verið tiknar við í landsroknskapunum árini 2007 til 2013.

Tað er av týdningi, at samsvar er ímillum BSL og aðrar búskaparskipanir.

Landsgrannskoðanin skal tí vísa á týdningin, at samsvarið millum Búskaparskipan landsins og egnar búskaparskipanir verður tryggjað, og at góðkenningarmanna-gongdir verða tiknar í álvara, tá ið stovnsleiðslur vátta, at samsvar er millum skipanirnar.

Leggjast kann afturat, at tað er stovnsleiðarin, sum hevur ábyrgd av at upplýsing-arnar í egnari búskaparskipan eru rættar, og at tær samsvara upplýsingunum í Búskaparskipan landins.

1.3 Løgujáttanir og vanligar rakstrarútreiðslur

Tað er ikki rætt at spjaða fyrisitingar-útreiðslur á aðrar játtanir, ið stovnurin umsitur.

Landsgrannskoðanin hevur millum ár og dag fleiri ferðir reist spurningin um at spjaða fyrisitingarútreiðslur, og hevur eisini gjøgnum árini gjørt stovnar varugar við, at tað er ikki rætt at blanda fyrisitingarútreiðslur hjá einum stovni saman við øðrum játtanum, ið stovnurin umsitur.

Ein stovnur, sum umsitur nógvar og stórar játtanir er Landsverk, sum bæði umsitur fleiri løgujáttanirnar vegna aðalráðini og er byggiharri. Onkuntíð er Landsverk samstundis eisini arbeiðstakari.

Landsgrannskoðanin hevur vístá, at flytingarnar frá løgujáttanum til Landsverk kunnu roknast fyri at vera flytingar millum nærstandandi partar, og hevur tí mælt til at gera reglur um, hvørjar útreiðslur viðvíkjandi starvsfólkum hjá Landsverki kunnu rindast av løgujáttanini.

Talan er um fleiri milliónir, sum verða fluttar frá løgujáttanum til Landsverk, fyri løn og umsitingargjald. Hóast Landsverk umframt lønina fær umsitingargjald, rinda

verkætlanir/løgujáttanir eisini ferðaútreiðslur, starvsfólkaútreiðslur, skeið o.a., og tí kann ivi vera sáddur, um stovnurin fær útreiðslurnar goldnar tvær ferðir.

Ivamálini kunnu vera tey somu, tá ið stovnur hevur inntøkufíggjað virksemi. Hvørjar útreiðslur kunnu haldast av løgujáttan, inntøkufíggjaðum virksemi og hvørjar eiga at verða skrásettar á raksturin hjá stovninum sjálvum.

Í hesari frágreiðingini nevna vit til dømis, at innanhýsis tiltøk verða skrásett at hoyra til inntøkufíggjaða virksemi. Vælvitandi, at kunngerðin um rakstrarjáttan gevur heimild at brúka yvirskot frá inntøkufíggjaðum virksemi til raksturin, men tað hevur týdning at rakstrarútreiðslurnar verða skrásettar, har sum tær hoyra heima, soleiðis at veruligu rakstrarútreiðslurnar hjá stovninum síggjast í landsroknskapinum.

1.4 Skipan av roknskaparhaldinum

Ll. nr. 33/1994 “um landsins almenna roknskaparhald v.m.” og K. nr. 22/2007 “um roknskaparverk landsins o.t.” áseta, hvussu roknskaparhaldið hjá landinum skal vera skipað. Ein týðandi partur er, at stovnar o.o. gera eina roknskaparreglugerð, sum sigur, hvussu roknskaparhaldið á stovninum skal vera fyriskipað, og at roknskaparreglugerðin verður dagførd. Stovnsleiðarin skal ansa eftir, at roknskaparreglugerðin við ábyrgdar- og heimildarreglum verður hildin.

Roknskaparreglugerðirnar verða ikki dagførdar.

Grannskoðan okkara seinastu nógvu árini hevur víst, at roknskaparreglugerðir eru fyri at kalla øll roknskaparøki, sum roknskaparlógin fevnir um, men í alt ov nógvum førum verða roknskaparreglugerðirnar ikki dagførdar. Havandi í huga at roknskaparreglugerðirnar eru ein sundurgreinað verksetan av ræðisrættinum fyri virkisøkini, er reglugerðin hjá tí einstaka stovninum eitt týðandi amboð hjá leiðsluni at stýra út frá heimildum, herundir at fyribyrgja misnýtslu og ógreiðu.

Landsgrannskoðanin hevur áður víst á, at ein roknskaparreglugerð, sum ikki er dagførd, er í besta føri til onga nyttu og í ringasta føri villeiðandi og spill av tilfeingi.

1.5 Ognir og útbúnaður

Ognaryvirlitini verða ikki dagførd ella als ikki gjørd.

Sambært § 20 í roknskaparkunngerðini skal yvirlit yvir ognir og útbúnað vera á øllum stovnum. Sambært roknskaparrundskrivinum skulu allir stovnar hava yvirlit yvir innbúgv, maskinur, bøkur og annan virðismiklan útbúnað við støði í roknskaparskjølum, og skulu yvirlitini m.a. fevna um slag, útveganarvirði, livitíð, og hvar ognin er. Vit hava fleiri ferðir víst á, at bert fáir stovnar hava dagførd yvirlit.

Sum víst á aðrastaðni í frágreiðingini, eru enn fleiri stovnar, sum ikki hava dagførd yvirlit yvir ognir og útbúnað.

Seinastu árini hevur landsstýrismaðurin í fíggjamálum aftur og aftur greitt frá, at arbeitt verður við at dagføra roknskaparkunngerðina frá 2007 og roknskaparrundskrivið frá 2001 “um roknskaparreglugerðir”. Í oktober 2013 segði landsstýrismaðurin, at roknskaparkunngerðin og roknskaparrundskrivið eftir ætlan fóru at verða dagførd seinni sama ár.

Nú í august 2016 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at arbeitt verður framvegis við at dagføra kunngerðina og rundskrivið.

Landsgrannskoðanin kann bert enn eina ferð staðfesta, at reglurnar um at skráseta ognir og útbúnað, sum komu í gildi í 2001, verða ikki hildnar, og enn eru reglurnar óbroyttar.

1.6 Meirvirðisgjald

Allir almennir stovnar og aðalráð skráseta keyps-MVG av vørum og tænastum, tey keypa frá MVG-skrásettum fyritøkum og stovnum í Føroyum, á StRk. 7510 “Keyps-MVG land”. Tá ið koyringar fyri mánaðarenda verða gjørdar í Búskaparskipanini, verður saldan á 7510 ”endurrindað” stovnunum.

Verða MVG-útreiðslur hildnar á játtanarsløgunum "onnur játtan" og "lógarbundin játtan" skulu tær verða bókaðar á somu kontu, sum keypið av vøruni ella tænastuni.

Fleiri almennir stovnar krevja inn meirvirðisgjald av sølu, tí virksemi ella partar av virkseminum hjá teimum er meirvirðisgjaldsskyldugt sambært reglunum í MVG-lógini, um so er, at teir selja vørur og tænastur í kapping við vinnurekandi virkir.

MVG-skyldugir landsstovnar skulu einans krevja sølu-MVG av vørum ella tænastum, teir lata ímóti gjaldi til onnur enn til sín sjálvs. Landsgrannskoðanin undrast tí á niðurstøðuna hjá TAKS um, at Landsverk á sínari játtan skal skráseta sølu-MVG av leigu av persónbilum til sín sjálvs.

Stovnar hava torført við at skráseta MVG.

Okkara kanningar vísa, at MVG-skyldugir stovnar hava torført við at skráseta meirvirðisgjaldið rætt og at avrokna uppgerðir til TAKS rættstundis. Til dømis verða MVG-skyldug og MVG-frí virksemi blandað saman, MVG av keypi verður skrásett á kontu fyri “Keyps-MVG land” ella á “Keyps-MVG, rakstur” hvørt um annað, og MVG av íløgum verður ikki skrásett á kontu til “Keyps-MVG, íløgur”.

Tá ið MVG av keypi ikki verður skrásett á rætta kontu, eru roknskapirnir á kontustøði ikki rættir.

Samanumtikið heldur Landsgrannskoðanin, at stovnarnir gera sum frægast, uttan at geva sær nóg nógv fær um, at tað hevur týdning, at meirvirðisgjaldið verður rætt skrásett og rætt avroknað. Vit halda tað hava týdning, at stovnar, ið eru MVG-skyldugir, halda reglurnar í MVG-lógini og at teir eiga at syrgja fyri, at uppgerðirnar til TAKS eru rættar og latnar inn til tíðina.

2 Løgmansfyrisitingin

2.1 Sendistova Føroya til Danmarkar (LG 2015/202-0131)

Í 2015 grannskoðaði Landsgrannskoðanin Sendistovuna til Danmarkar. Vit gjørdu vart við, at reglur vantaðu í roknskaparreglugerðini viðvíkjandi stovnskassa, inntøkum og gjaldkorti.

Uttanríkistænastan, sum nú er vorðin partur av Uttanríkis- og vinnumálaráðnum, hevur kunnað um, at arbeitt verður við at fáa hóskandi reglur um stovnskassa, inntøkur og gjaldkort í roknskaparreglugerðina hjá Uttanríkis- og vinnumálaráðnum.

Landsgrannskoðanin vísti á, at starvsfólk átti munandi fleiri tímar tilgóðar, enn roknskaparreglugerðin ásetir. Tímarnir vórðu avgreiddir beint eftir grannskoðanina. Í juli 2016 hevur Sendistovan kunnað um, at vegna neyðugt yvirarbeiði er saldan hjá starvsfólki økt nakað aftur, men avtala er gjørd um at avgreiða tímarnar.

3 Fíggjarmál

3.1 Landsroknskapurin ikki fullfíggjaður (LG 2014/100-0001)

Í 2013 setti Fíggjarmálaráðið, við heimild í Ll. nr. 33/1994 “um landsins almenna roknskaparhald v.m.”, í gildi K. nr. 95/2013 “um at lata inn roknskaparupplýsingar um alment virksemi til búskaparliga ráðlegging, stýring og eftirlit”. Endamálið við kunngerðini var at fáa til vega upplýsingar um alment virksemi, sum ikki er við í fíggjarlógini, men er fevnt av almennu roknskaparlógini.

Landsroknskapurin fevnir um næstan allar landsstovnar og alment virksemi, sum landið varðar av. Somuleiðis er við gjaldføri o.ø. hjá landinum.

Í nógv ár hava Landsgrannskoðanin og løgtingsgrannskoðararnir gjørt vart við, at fleiri stovnar og grunnar eru ikki við í fíggjarlógini og í landsroknskapinum. Skiftandi landsstýrismenn hava greitt frá um hesar stovnar og grunnar, uttan tó at komið er á mál við at greiða ivamálini um játtanar-, roknskapar- og grannskoðanarviðurskiftini.

Fleiri stovnar og grunnar eru ikki við í fíggjarlógini og lands-roknskapinum.

Í fleiri førum er ásett í lógum, at inntøkur og útreiðslur hjá stovnum skulu ikki takast við í fíggjarlógina. Framvegis er virksemið hjá stovnunum og grunnunum ikki við í landsroknskapinum, og heldur ikki eru sjálvstøðugir roknskapir fyri virksemi teirra lagdir fyri Løgtingið.

Talan er um týðandi alment virksemi, sum ikki er við í landsroknskapinum, og sum heldur ikki verður lagt fyri Tingið. Í frágreiðing okkara frá mai 2014 “um leiklutin hjá landinum í partafeløgum, grunnum og øðrum virkiseindum” eru viðurskiftini nærri viðgjørd. Dømi um tílíkar almennar grunnar eru Føroya Realkreditstovnur og Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin, sum hava eginogn á einar 2 mia.kr.

Í oktober 2014, í oktober 2015 og aftur nú í august 2016 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at tað framvegis verður arbeitt við, hvussu samlaði almenni roknskapurin skal gerast upp.

Arbeitt verður framvegis við, hvussu samlaði almenni roknskapurin skal gerast upp.

Fyri Frítíðargrunnin leggur Gjaldstovan upp til, at hann, eins og Arbeiðsmarknaðar-eftirlønargrunnurin skal bóka beinleiðis í Búskaparskipan landsins, meðan TAKS krevur inn gjøldini frá arbeiðsgevarunum. Enn er mánaðarliga innlatingin av roknskapartølum frá Búnaðargrunninum og Bústøðum (Húsalánsgrunnurin) ikki heilt komin í rættlag, men sambært Fíggjarmálaráðnum verður framvegis arbeitt við tí.

Grunnarnir eru tiknir við sum einstakir postar í notu í landsroknskapinum, og eru roknskapirnir tiknir við undir partinum “Eksternir grunnar”. Ætlanin er, at egin-peningurin í Bústøðum, Búnaðargrunninum, Granskingargrunninum, Mentanar-grunninum og Vinnuframa í framtíðini verður tikin við í landsroknskapinum undir “Innistandandi í landsfyritøkum, grunnum o.t.”

Sambært landsstýrismanninum er eftir at fáa greiði á, hvussu Arbeiðsloysisskipanin, Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin, Framtaksgrunnur Føroya og Realurin kunnu verða tikin við í landsroknskapin.

Alment virksemi er fevnt av almennum fyriskipanum og reglum, herundir at tað verður játtað í fíggjarlóg og er partur av landsroknskapinum ella sjálvstøðugum roknskapi, sum verður lagdur fyri Løgtingið.

Seinastu árini er alsamt meira virksemi hjá landinum lagt í virkiseindir, sum eru skildar frá landsfyrisitingini, t.d. í partafeløg. Sum víst á í frágreiðing okkara frá mai 2014, er talan um týðandi virksemi. Feskasta dømi er P/f Eystur- og Sandoyartunlar, sum skal gera tveir undirsjóvartunlar komandi árini.

Flestu almennu reglurnar og fyriskipanirnar galda ikki almennu partafeløgini. Feløgini eru heldur ikki partur av fíggjarlóg ella roknskapum, sum verða lagdir fyri Løgtingið.

Vit kunnu tí siga, at landsroknskapurin í minni mun avspeglar veruliga virksemið, váðar o.a. hjá landinum, umframt at tílíkt virksemi í stóran mun ikki skal fylgja øðrum almennum reglum.

Fíggjarmálaráðið er samt við Landsgrannskoðanini um vandan, ið kann standast av, at ov nógv virksemi verður lagt í almenn partafeløg uttan fyri fíggjarlóg, har ikki sama gjøgnumskygni, almenn stýring og almennar reglur eru galdandi.

Egnar búskaparskipanir

Flestu stovnar skráseta sínar roknskapir beinleiðis í Búskaparskipan landsins, meðan nakrir almennir stovnar nýta egnar búskaparskipanir. Sambært § 4, stk. 4, í roknskaparkunngerðini hava stovnarnir skyldu at nýta Búskaparskipan landsins. Stovnarnir skulu lata skipanini upplýsingar og skulu eftirkanna tað tilfar, teir fáa úr skipanini. Tað merkir, at stovnar við egnari búskaparskipan hava skyldu at kanna eftir, at samsvar er millum teirra skipan og Búskaparskipan landsins. Stovnar við egnari búskaparskipan skulu eisini vátta, at skrásetingarnar í Búskaparskipan landsins samsvara við teirra búskaparskipan. Landsgrannskoðanin hevur í fleiri førum staðfest, at samsvar er ikki altíð millum skipanirnar.

Samsvar er ikki altíð millum egnar búskaparskipanir og Búskaparskipan landsins.

Í uppskoti til samtyktar fyri fíggjarárið 2014, vístu løgtingsgrannskoðararnir á týdningin, at skrásetingarnar í Búskaparskipan landsins eru rættar, eftirsum tær eru grundarlagið undir landsroknskapinum, og at tað er samlaði landsroknskapurin, sum Løgtingið samtykkir á hvørjum ári.

Í august 2016 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at við tíðini er talið av stovnum, sum nýta egnar búskaparskipanir alsamt minkað. Fyri teir stovnarnar er týdningarmikið, at samsvar er millum skrásetingarnar í egnum búskaparskipanum og Búskaparskipan landsins.

Fíggjarmálaráðið heldur, at samsvarið kann verða tryggjað við ásetingum til stovnarnar, tá ið Fíggjarmálaráðið loyvir teimum at nýta egna búskaparskipan, og við uppfylging og eftirliti Gjaldstovunar av skrásetingunum. Harafturat kann grannskoðan tryggjað, at samsvar er millum skrásetingar í egnum búskaparskipanum og skrásetingar í Búskaparskipan landsins. Tað má verða ásett sum treyt til grannskoðanina av stovnunum.

3.2 Fíggjarstøða (LG 2015/300-0000)

Fíggjarstøðan í landsroknskapinum er ein samandráttur av fíggjarstøðuni hjá øllum “vanligum” landsstovnum, sum eru við í fíggjarlógini. Harafturat eru nakrir postar,

sum eru felags, t.d. størsti parturin av tøka peninginum og av skuldini. Fíggingargrunnurin frá 1992 er við undir "kapitalinnskot", og partafeløg, sum landið eigur, eru tikin við undir "virðisbrøv".

Landsgrannskoðanin hevur í stóran mun bygt grannskoðanina av postum í fíggjarstøðuni 2015 á tey eftirlit og tær avstemmanir, ið Gjaldstovan støðugt fremur.

Í talvuni niðanfyri eru samandráttir úr fíggjarstøðuni við árslok árini 2011 til 2015.

mió.kr.

	2011	2012	2013	2014	2015
OGN					
Kapitalinnskot	538	297	285	459	382
Virðisbrøv	1.336	1.386	1.470	1.480	1.485
Útlán	433	131	127	126	125
Áogn o.a.	515	591	496	544	506
Tøkur peningur	2.865	2.559	3.150	2.536	2.792
Ogn tilsamans	**5.687**	**4.964**	**5.528**	**5.145**	**5.290**
SKULD					
Skuld	5.599	5.416	6.113	5.750	6.006
Útjavningarkonta	88	-452	-585	-605	-716
Skuld tilsamans	**5.687**	**4.964**	**5.528**	**5.145**	**5.290**

3.2.1 Fíggjarligur útbúnaður (LG 2015/300-0102)

Kapitalinnskot

Kapitalinnskotið fevnir um Fíggingargrunnin frá 1992, sum eigur 33,4% av P/f BankNordik.

t.kr.

	2013	2014	2015
Sambært roknskapinum	285.216	459.468	381.812

Í 2014 hækkaði kapitalognin 174,3 mió.kr., úr 285,2 mió.kr. í 459,5 mió.kr., og í 2015 lækkaði hon 77,7 mió.kr. til 381,8 mió.kr. Kapitalognin verður javnað hvørt ár, soleiðis at hon samsvarar við eginpeningin í roknskapinum hjá Fíggingargrunninum fyri roknskaparárið frammanundan. Sostatt verður ognin í landsroknskapinum javnað eitt ár afturút.

Av tí at roknskapurin hjá Fíggingargrunninum fyri farið roknskaparár ikki er tøkur fyrr enn eftir, at landsroknskapurin er liðugur, og fyri ikki at bóka eitt fyribils tal út frá einari meting, hevur Gjaldstovan valt at nýta tølini úr seinast lidna roknskapinum hjá Fíggingargrunninum, sí talvu niðanfyri:

t.kr.

Kapitalogn í landsfyritøkum	2013	2014	2015
Kapitalogn við ársbyrjan	297.277	285.216	459.468
Javning, kapitalognin samsvarar við eginognina í roknskapinum hjá Fíggingargrunninum	-12.061	174.252	-77.656
Kapitalogn við ársenda	**285.216**	**459.468**	**381.812**

Viðmerkjast kann, at eginpeningurin í Fíggingargrunninum við árslok 2015 var 460,4 mió.kr., t.v.s. 78,6 mió.kr. hægri enn við árslok 2014. Sambært ársfrásøgnini 2015 er høvuðsorsøkin til hækkingina, at virðið á partabrøvunum í P/f BankNordik er hækkað. Kursurin við árslok 2014 var 104,5, meðan hann var 127,5 við árslok 2015.

Fíggingargrunnurin hevur fingið 5 mió.kr. í vinningsbýti frá P/f BankNordik fyri fíggjarárið 2014, sum er útlutað víðari til landskassan í 2015.

Í ársfrásøgnini hjá Fíggingargrunninum fyri 2014 var ognarparturin í P/f BankNordik bókaður til 349,3 mió.kr., sum svaraði til kursvirðið á partabrøvunum 31. desember 2014. Kursvirðið var 78,5 mió.kr. lægri enn við árslok 2013, tá ið kursvirðið var 427,8

mió.kr. Í ársfrágreiðingini greiðir leiðslan frá, at kursurin á partabrøvunum hjá P/f BankNordik lækkaði úr 128 við árslok 2013 í 104,5 við árslok 2014.

Landsgrannskoðanin hevur samanborið tølini í roknskapinum hjá Fíggingargrunninum frá 1992 við tølini í landsroknskapinum árini 2013 og 2014, umframt at vit hava eftirroknað ognarpartin í P/f BankNordik. Landsgrannskoðanin hevur onki at finnast at.

Í nógv ár hevur Løgtingið[4] mælt til at fáa greiði á hesum roknskaparposti, soleiðis at ikki bert Fíggingargrunnurin, men eisini aðrir grunnar o.l., sum landið eigur, verða skrásettir í landsroknskapinum, t.d. sum "Kapitalogn í landsfyritøkum".

Í oktober 2013 kunnaði landsstýrismaðurin um, at hesir grunnar verða ikki tiknir við í landsroknskapin, men verða partur av samlaða almenna roknskapinum.

Í 2014, 2015 og aftur í august 2016 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at arbeitt verður framvegis við spurninginum, hvussu samlaði almenni roknskapurin skal gerast upp. Gjaldstovan leggur upp til, at Frítíðargrunnurin, eins og Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin, bókar beinleiðis í Búskaparskipan landsins, meðan krøvini frá arbeiðsgevarum verða kravd inn um TAKS skipanina. Enn er mánaðarliga innlatingin av roknskapartølum frá Búnaðargrunninum og Bústøðum (Húsalánsgrunnurin) ikki heilt komin í rættlag.

Grunnarnir eru tiknir við sum einstakir postar í notu í landsroknskapinum, og roknskapirnir eru tiknir við undir partinum Eksternir grunnar. Frameftir er ætlanin, at eginpeningurin í Bústøðum, Búnaðargrunninum, Granskingargrunninum, Mentanargrunninum og Vinnuframagrunninum verður tikin við í landsroknskapin undir "Innistandandi í landsfyritøkum, grunnum o.t."

Eftir er at fáa greiði á, hvussu Arbeiðsloysisskipanin og Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin, sum eru arbeiðsmarknaðargrunnar, og Framtak og Realurin, sum eru vinnurekandi grunnar, kunnu takast við í landsroknskapin.

Virðisbrøv

t.kr.

	2013	2014	2015
Sambært roknskapinum	1.469.587	1.479.821	1.484.821

Frá 2013 til 2014 eru virðisbrøvini hækkað 10,2 mió.kr., og frá 2014 til 2015 eru tey hækkað 5 mió.kr. Orsøkin til hækkingina frá 2014 til 2015 er, at landið sambært Ll. nr. 30/2014 hevur sett 5 mió.kr. í partapeningi í P/f Eystur- og Sandoyartunlar.

[4] Í uppskotum til samtyktar um at góðkenna landsroknskapin.

Yvirlit yvir partabrøv, sum eru skrásett í landsroknskapinum:

t.kr.

Skrásett í landsroknskapinum	2013	2014	2015	Til skjals
P/f Vágatunnilin	160.300	160.300	160.300	Ja
P/f Norðoyatunnilin	235.000	235.000	235.000	Ja
P/f Føroya Tele	77.948	77.948	77.948	Ja
P/f Postverk Føroya	43.000	43.000	43.000	Ja
P/f Fiskaaling	17.375	17.375	17.375	Ja
P/f Føroya Lívstrygging	500	500	500	Ja
P/f Vága Floghavn	807.818	807.818	807.818	Ja
P/f Atlantic Airways	85.090	86.912	86.912	Ja *)
P/f Virðisbrævamarknaður Føroya	7.088	0	0	Ja
P/f Elektron	2.347	2.347	2.347	Ja
P/f Føroya Dátusavn	200	200	200	Ja
Sp/f Ítróttavedding	20	20	20	Nei
P/f Smyril Line	32.760	32.760	32.760	Ja
P/f Tjaldur	140	140	140	Nei
P/f Føroya Banki	1	1	1	Ja *)
P/f Visit Faroe Islands	-	500	500	Nei
P/f Eystur- og Sandoyartunlar	-	15.000	20.000	Nei
Partabrøv tilsamans	**1.469.587**	**1.479.821**	**1.484.821**	

*) Partabrøvini eru skrásett "elektroniskt" og tí pappírsleys. Útskrift er fingin til vega frá Værdipapircentralen.

Viðmerkjast kann, at P/f Føroya Dátusavn er strikað í partafelagsskránni í januar 2016.

Í 10 feløgum eigur landið allan partapeningin:

t.kr.

Roknskapartøl 2015	Brutto vinningur	Ársúrslit	Samlað ogn	Egin-peningur
P/f Vágatunnilin	11.541	275	187.288	176.041
P/f Norðoyatunnilin	18.013	4.826	278.482	246.833
P/f Føroya Tele (samtak)	264.934	29.794	775.651	436.298
P/f Postverk Føroya (samtak)	61.583	3.317	142.638	30.628
P/f Fiskaaling	22.848	181	36.398	9.804
P/f Føroya Lívstrygging (samtak)*)	252.876	-12.578	2.010.620	124.387
P/f Vága Floghavn (samtak)	44.632	7.464	847.852	806.542
P/f Atlantic Airways	186.874	17.643	528.118	189.974
P/f Visit Faroe Islands	3.324	7	1.228	507
P/f Eystur- og Sandoyartunlar	-556	-2.215	48.542	17.014
Tilsamans	**866.069**	**48.714**	**4.856.817**	**2.038.028**

*)Tryggingargjøld fyri egna rokning tilsamans.

Samlað roknskapartøl fyri feløg, sum landið eigur einsamalt.

Samlaða úrslitið hjá hesum feløgum varð ein vinningur 48,7 mió.kr. eftir skatt, og samlaði eginpeningurin varð 2.038 mió.kr. Í 2014 var samlaða úrslitið hjá somu feløgum 67,1 mió.kr. og eginpeningurin 1.820 mió.kr.

Í 2015 áttu minnilutapartaeigararnir í P/f Føroya Tele 7,9 mió.kr. (í dótturfeløgum hjá Føroya Tele), og minnilutapartaeigararnir í P/f Vága Floghavn áttu 4,6 mió.kr.

Í 2007 var ein triðingur av Atlantic Airways einskildur, og partabrøvini skrásett á keypsskálunum í Reykjavík sama ár og í Keypmannahavn í 2008. Politisk avgerð varð seinni tikin at tjóðartaka Atlantic Airways. Felagið varð strikað av báðum keypsskálunum í juni 2014. Síðani varð semja gjørd um, at tað almenna fekk møguleika at keypa tey eftirverandi partabrøvini, ið felagið sjálvt ella Føroya Landsstýri ikki longur áttu. Við árslok 2015 áttu Atlantic Airways og Føroya Landsstýri samanlagt alla partabrævaognina.

Samlað roknskapartøl hjá feløgum

Yvirlit yvir samlaðu roknskapartølini árini 2008 til 2015 fyri feløg, sum landið eigur allan partapeningin í, síggjast í talvuni niðanfyri:

t.kr.

Ár	Brutto vinn-ingur/søla	Ársúrslit	Samlað ogn	Eginpeningur
2008	925.524	-42.241	5.005.434	1.300.876
2009	695.048	-23.045	5.185.597	1.421.735
2010	714.585	27.672	5.983.268	1.524.940
2011	732.782	-268.123	7.241.118	2.201.249
2012	608.022	-513.502	3.730.656	1.631.006
2013	620.290	91.263	3.898.691	1.710.169
2014	660.020	67.148	4.201.625	1.819.871
2015	866.069	48.714	4.856.817	2.038.028

Virðismeting

Gjaldstovan hevur sett reglur fyri, hvussu partabrøv eiga at verða goymd. Tá ið tey verða keypt, skulu tey verða latin Gjaldstovuni. Sama er galdandi fyri onnur virðisbrøv. Reglurnar viðgera ikki upp- og niðurskrivingar av partapeningi.

Skrásetti partapeningurin gevur onga ábending um ítøkiliga virðið.

Í landsroknskapinum 2015 er partapeningurin skrásettur við keypsvirðinum. Talan er bæði um keyp til undirkurs, til yvirkurs og til útgávukurs. Skrásetti partapeningurin gevur sostatt onga ábending um ítøkiliga virðið á felløgunum.

Niðanfyri sæst innara virðið hjá 12 felløgum, samanborið við keypsvirðið sambært ársfrásagnunum fyri 2015:

t.kr.

	Keypsvirðið sambært landsroknskapinum	Innara virðið
P/f Vágatunnilin	160.300	176.041
P/f Norðoyatunnilin	235.000	246.833
P/f Vága Floghavn *)	807.818	806.542
P/f Føroya Tele **)	77.948	436.298
P/f Postverk Føroya	43.000	30.628
P/f Fiskaaling	17.376	9.804
P/f Føroya Lívstrygging	500	124.387
P/f Atlantic Airways	86.912	189.974
P/f Elektron	2.347	2.846
P/f Smyril Line	32.760	38.615
P/f Visit Faroe Islands	500	507
P/f Eystur- og Sandoyartunlar	20.000	17.014
Partabrøv tilsamans	**1.484.461**	**2.079.489**

*) Parturin hjá minnilutapartaeigarum var 4,6 mió.kr.
**)Parturin hjá minnilutapartaeigarum var 7,9 mió.kr.

Sum sæst í yvirlitinum, er keypsvirðið í nøkrum førum munandi lægri enn innara virðið. Í 2012 segði landsstýrismaðurin, at Gjaldstovan hevði slept ætlanini at nýta innara virðið í landsroknskapinum, í øllum førum fyribils.

Í 2008 kannaði Landsgrannskoðanin, um partabrøvini vóru til skjals í teimum førum, har “pappírs” partabrøv eru. Landsgrannskoðanin fekk goymsluyvirlit frá Værdipapircentralen, har partabrøvini bert eru elektroniskt skrásett. Síðani hevur Landsgrannskoðanin bert kannað broytingar í partabrævagoymsluni.

Vinningsbýti frá partafelløgum, har landskassin er einasti partaeigari:

t.kr.

	2013	2014	2015
P/f Føroya Tele	30.000	30.000	32.000

Í 2015 fekk landskassin harafturat 4,9 mió.kr. útlutaðar frá P/f Smyril Line og 157 t.kr. frá P/f Tjaldur.

Rentu- og avdráttarfrí útlán

t.kr.

	2013	2014	2015
Rentu- og avdráttarfrí lán ársbyrjan	269.028	268.965	272.427
Tilgongd í árinum	0	3.500	6.000
Frágongd í árinum	-63	-38	0
Rentu- og avdráttarfrí lán ársenda	**268.965**	**272.427**	**278.427**
Sett av móti tapi	-268.965	-272.427	-278.427
Sambært roknskapinum	**0**	**0**	**0**

Talan er um lán til Framtaksgrunnin, sjálvsognarstovnar, studningslán, eldrasambýlir og Postverk Føroya. Sí notu nr. 3 í landsroknskapinum.

Eitt studningslán er hækkað við 6 mió.kr. í 2015.

Sambært landsroknskapinum verða rentu- og avdráttarfrí lán tikin við í roknskapin við virðinum 0 kr. Orsøkin er, at talan er um treytað lán, sum bert skulu rindast aftur, um bygningar o.t., sum lán eru veitt til, verða brúkt til annað enn upprunaliga endamálið.

Útlán

t.kr.

	2013	2014	2015
Útlán ársbyrjan	352.443	350.136	329.646
Tilgongd í árinum	14.883	18.464	20.132
Frágongd í árinum	-17.190	-38.954	-19.030
Útlán ársenda brutto	**350.136**	**329.646**	**330.748**
Sett av ímóti tapi	-222.853	-203.814	-205.534
Sambært roknskapinum	**127.283**	**125.832**	**125.214**

Heitið útlán fevnir um veðhaldsútlegg, lestrarlán, ymisk vinnulán, serlán, kurslán og stuðulslán. Tilgongdin stavar í høvuðsheitum frá, at nýggj lestrarlán eru veitt, og at lán er veitt til umvæling av ellis- og røktarheiminum á Sýnini í Vágum. Frágongdin stavar í høvuðsheitum frá, at lestrarlán eru goldin aftur, og at tvey onnur lán eru niðurgoldin. Samanlagt eru útlánini lækkað 618 t.kr. frá 2014 til 2015.

Sett er av ímóti tapi. Virðini á veðhaldsútleggum, serlánum, kurslánum og stuðulslánum sambært roknskapinum eru sett til 0 kr. Avsetingin svarar í høvuðsheitum til útlán til privata vinnu, sum ikki frammanundan eru avskrivað ella løgd um til rentu- og avdráttarfrí útlán.

Landsgrannskoðanin hevur kannað nakrar stórar broytingar í útlánum í 2015 og hevur onki at finnast at.

3.2.2 Áogn

Skatta-, toll- o.t. skuldarar

t.kr.

	2013	2014	2015
Áogn landskassans brutto	344.588	398.677	346.743
Sett av ímóti tapi	-134.289	-91.723	-54.636
Sambært roknskapinum	**210.299**	**306.954**	**292.107**

Frá 2014 til 2015 eru skuldararnir lækkaðir 14,8 mió.kr. netto. Størstu broytingarnar kunnu útgreinast soleiðis:

	t.kr.
Broytingar 2014 – 2015	
Vanligur landsskattur	48.083
Kapitalvinningsskattur	3.700
Felagsskattur	-11.234
Tollavgjøld	-25.622
Meirvirðisgjald	-31.719

Landsgrannskoðanin hevur kannað nakrar avstemmingar millum TAKS skipanir og "skatta-, toll- o.t. skuldarar" í Búskaparskipan landsins. Onki var at finnast at.

Tænastu-, vøru- og aðrir skuldarar

Talan er um tænastu- og vøruskuldarar hjá Apoteksverkinum, Landsverki, Kringvarpinum, Landssjúkrahúsinum og øðrum stovnum. "Aðrir skuldarar" eru m.a. inntøkur og endurgjøld, sum vanliga verða tíðaravmarkað fyri at geva eina rætta mynd av áognini. Eisini er talan um millumrokningar við landsstovnar, lønarútgjalds-skipanir, skipanir hjá TAKS, kommunum o.a.

Niðanfyri eru upphæddirnar útgreinaðar:

	2013	2014	2015
			t.kr.
Apoteksverkið	27.679	22.706	28.308
Avgjald á fiskatilfeingi	-	10.119	20.795
Kringvarp Føroya	13.216	10.141	11.612
Landsverk, inntøkufíggjað virksemi	7.129	8.168	9.089
Landssjúkrahúsið	10.655	8.019	6.330
Kapitalvinningsskattur, tíðaravmarking	9.425	8.689	5.587
Heilsufrøðiliga starvsstovan	-	-	5.287
Niðurlaðing av Búnaðargrunninum	8.240	-	-
Tøkugjald á alivinnu	-	9.436	-
Víddargjøld	-	8.018	-
Ríkisstuðul – endurgjald	-	6.949	-
Jarðfeingi	29.123	-	-
Vága Floghavn, útbygging	20.200	-	-
Ymiskir skuldarar	95.893	79.295	57.397
Tilsamans sambært roknskapinum	**221.560**	**171.540**	**144.405**

Talan er um fleiri hækkingar og lækkingar, sum netto geva eina lækking 27 mió.kr. Landsgrannskoðanin hevur við stakroyndum kannað tænastu-, vøru- og aðrar skuldarar fyri at sanna, at upphæddirnar eru rættar og rætt bókaðar. Vit høvdu onki at finnast at.

3.2.3 Goymslur

	2013	2014	2015
			t.kr.
Sambært roknskapinum	64.305	65.008	68.898

Talan er um vørugoymslurnar hjá Rúsdrekkasølu landsins, Apoteksverkinum, Strandfaraskipum landsins, Námi (útgávuvirksemi), Landsverki, KT landsins og Tekniska skúla í Klaksvík.

Netto er virðið á goymslunum hækkað 3,9 mió.kr. frá 2014 til 2015. Millum annað er goymslan hjá Apoteksverkinum hækkað 5 mió.kr. og hjá Rúsdrekkasølu landsins 1,8 mió.kr. Hinvegin er goymslan hjá Námi lækkað 1,9 mió.kr.

3.2.4 Ognir og útbúnaður (LG 2015/300-0101)

Bert fáir stovnar hava yvirlit yvir ognir og útbúnað.

Sambært § 20 í roknskaparkunngerðini skal yvirlit yvir ognir og útbúnað vera á øllum stovnum. Í sambandi við vitjanir á stovnum í 2015 staðfestu vit aftur, at enn eru fleiri stovnar, sum ikki hava dagførd yvirlit yvir ognir og útbúnað.

Í oktober 2012 kunnaði landsstýrismaðurin um, at framvegis var ætlanin, at Fíggjarmálaráðið saman við Gjaldstovuni skuldi fremja málrættað átøk fyri at fáa stovnar landsins at hava dagførd ognaryvirlit. Sum liður í hesum var ætlanin at lækka smálutakravið til ognaryvirlit. Tí varð lagt upp til, at § 20, stk. 2, í roknskapar-kunngerðini varð strikað og stk. 3 broytt samsvarandi. Sambært stk. 2 skulu stovnarnir hava eitt yvirlit yvir útbúnað o.t., hvørs keypsvirði er minni enn 75 t.kr. Í yvirlitinum skal eisini vera útbúnaður, sum er á stovninum, men sum onnur enn stovnurin eiga.

Í august 2016 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at arbeitt verður framvegis við at dagføra roknskaparkunngerðina og roknskaparrundskrivið. Í 2014 gjørdi Gjaldstovan uppskot til dagføring av kunngerðini. Fíggjarmálaráðið er, saman við Gjaldstovuni, farið undir at gjøgnumganga uppskotið.

Fyribils er avgjørt at gera smávegis broytingar í verandi roknskaparkunngerð, herundir at broyta ásetingina um ognaryvirlit. Broytingarnar verða væntandi kunngjørdar í næstum.

Landsgrannskoðanin kann enn eina ferð staðfesta, at reglurnar um at skráseta ognir og útbúnað, verða ikki hildnar og at reglurnar enn eru óbroyttar.

3.2.5 Tøkur peningur

Gjaldføri landsins verður umsitið av Gjaldstovuni.

Tøkur peningur fatar um gjaldføri landsins. Sambært § 3, stk. 1, í Ll. nr. 140/2012 “um landsins gjaldføris- og skuldarfyrisiting” verður gjaldføri landsins umsitið av Gjaldstovuni eftir ásetingum frá Gjaldstovuráðnum. Endamálið við umsitingini er, at:

- landið altíð hevur neyðugt gjaldføri tøkt, soleiðis at tað kann rinda sínar skyldur,
- landsins gjaldføri verður fyrisitið væl við atliti at tryggleika, herundir at samváðin millum landsins gjaldføri og føroyska búskapin verður sum minst, og
- landsins gjaldføri verður rentað til marknaðarkor.

Sambært § 3, stk. 2 og 3, fevnir gjaldføri landsins um alt gjaldførið hjá allari lands-umsitingini, øllum landsstovnum v.m. Gjaldførið verður roknað sum landsins kassapeningur, innistandandi í peningastovnum, ótrektir kredittir í peningastovnum og óveðsettar virðisbrævaognir.

Í fíggjarstøðuni er tøkur peningur býttur í tveir bólkar:

1. Virðisbrøv o.tíl., og
2. Bankakontur, girokontur og kassapeningur.

Virðisbrøv o.t.

Landsbanki Føroya varð tikin av við virknaði frá 1. apríl 2013, og umsitingin av gjaldføri og skuld landsins flutt til Gjaldstovuna. Sambært landsroknskapinum 2015 (síðu 266) var tann parturin av tøka peninginum, sum Landsbanki Føroya áður hevði sett í stuttfreistað virðisbrøv, flokkaður sum “Innistandandi í Landsbanka Føroya”. Posturin nevnist nú “Virðisbrøv o.tíl.”

t.kr.

	2013	2014	2015
Sambært roknskapinum	2.456.124	2.014.750	2.374.359

Fígging landsins, sum er deild undir Gjaldstovuni, hevur dagligu umsitingina av plaseringini av gjaldførinum hjá landinum. Plaseringin byggir á ein íløguinstruks frá Gjaldstovuráðnum, har ásetingar eru um, m.a. hvussu nógv kann plaserast í ávís sløg av virðisbrøvum.

Uttanhýsis grannskoðanarvirki, sum Landsgrannskoðanin hevur útveitt henda partin av grannskoðanini til, hevur m.a. kannað, um plaseringarnar av gjaldførinum eru

sambært íløgureglunum í Ll. nr. 140/2012, og eisini um tær eru sambært íløguinstruksinum. Grannskoðarin hevur onki at finnast at. Sí eisini brot um grannskoðan av Fígging landsins.

Banka- og girokontur og kassapeningur

t.kr.

	2013	2014	2015
Sambært roknskapinum	693.854	521.734	417.996

Banka- og girokontur

Roknskaparposturin vísir ikki, hvussu nógv landskassin tilsamans hevur standandi á banka- og girokontum. Fleiri landsstovnar og -grunnar við leysum tilknýti til fíggjarlóg ella landsroknskap hava nógvan pening standandi í virðisbrøvum og á peninga-stovnskontum, sum ikki eru við í landsroknskapinum.

Í 2015 kann upphæddin greinast sundur í tær banka- og girokontur, sum Gjaldstovan umsitur, og tann partin, sum aðrir stovnar umsita.

Landsgrannskoðanin hevur kannað:

1. Um kontuavrit fra peningastovnum stemma við Búskaparskipan landsins.
2. Um peningur í fremmandum gjaldoyra er tikin við í roknskapin við røttum virði.
3. Um saldur av plaseringum hjá Fígging landsins eru rætt skrásettar í landsroknskapinum og Búskaparskipan landsins.
4. Um Fígging landsins liggur inni við ov nógvum gjaldføri.
5. Um reglurnar um minsta gjaldføri eru hildnar.

Ad. 4) Fígging landsins hevur gjørt innanhýsis reglugerð um, hvussu nógvur tøkur peningur kann standa í føroyskum peningastovnum, í hvørjum peningastovni sær og samanlagt. Við árslok 2015 var innistandandi í peningastovnunum í tráð við reglugerðina.

Ad. 5) Sambært § 4 í lógini skal landsstýrismaðurin í fíggjarmálum fyriskipa, at landsins gjaldføri, sambært § 3, stk. 2 og 3, í minsta lagi samsvarar við 15% av bruttotjóðarúrtøkuni í undanfarna ári. Gjaldstovuráðið skal í august mánað áseta minsta gjaldføri. Fígging landsins hevur upplýst, at av tí at bruttotjóðarúrtøkan fyri undanfarna ár ikki altíð er gjørd upp, tá ið Gjaldstovuráðið skal áseta minstagjaldføri, verður seinasta uppgjørda talið brúkt, eisini um talan er um fyribilstal.

Talvan niðanfyri vísir gongdina í tøka peninginum 2013 til 2015:

t.kr.

	2013	2014	2015
Sambært roknskapinum	3.149.977	2.536.484	2.792.356
Harav minstagjaldføri	1.975.000	2.025.000	2.150.000
Munur ml. gjaldføri og minstagjaldføri	**1.174.977**	**511.484**	**642.356**

§ 3 ásetir, at gjaldførið fevnir um alt gjaldførið hjá allari landsumsitingini, øllum landsstovnum v.m., og sum er trygt og lætt tøkt. Gjaldførið fevnir eisini um trygg, lætt sølubær og óveðsett virðisbrøv. Sambært Fígging landsins kemur allur tøki peningurin í fíggjarstøðuni undir hesar treytir og verður tí roknaður sum gjaldføri hjá landskassanum.

Tøki peningurin hjá landskassanum er hækkaður 255,9 mió.kr. frá 2014 til 2015, meðan kravið til minstagjaldførið er hækkað 125 mió.kr., t.v.s. at munurin millum tøka peningin (gjaldførið) og minstagjaldførið er øktur við 130,9 mió.kr. frá 2014 til 2015.

Landsgrannskoðanin hevði ikki aðrar viðmerkingar til gjøgnumgongdina enn tær, sum eru til pkt. 4 og 5.

Kassapeningur
Landsgrannskoðanin hevur gjørt nøkur kassaeftirlit í 2015, har vit hava stemmað kassapeningin av við kassauppgerðir, Búskaparskipan landsins v.m. Hava stovnarnir peningastovnskontur, verða tær stemmaðar av við kontuavrit frá peningastovnum og Búskaparskipan landsins. Eisini kannaðu vit konturnar fyri óvanligar bókingar í eitt ávíst tíðarskeið. Kassaeftirlitini eru umrødd undir hvørjum stovni sær.

3.2.6 Skuld

Innanlandsskuld, langfreistað

t.kr.

	2013	2014	2015
Sambært roknskapinum	4.820.091	4.417.294	4.574.022

Við árslok 2015 var talan um 5 lánsbrævarøðir:

- FO-LB 160622, áljóðandi 1.350 mió.kr., sum fellur til gjaldingar 22. juni 2016.
- FO-LB 170627, áljóðandi 1.000 mió.kr., sum fellur til gjaldingar 27. juni 2017.
- FO-LB 180610, áljóðandi 31 mió.kr., sum verður niðurgoldin fram til 10. juni 2018.
- FO-LB 190620, áljóðandi 1.100 mió.kr., sum fellur til gjaldingar 20. juni 2019.
- FO-LB 200611, áljóðandi 1.045 mió.kr., sum fellur til gjaldingar 11. juni 2020.

Við árslok 2015 var samlaða áljóðandi skuldin 4.526 mió.kr.

Fíggjarmálaráðið broytti í 2011 meginreglurnar fyri, hvussu lánsbrøv og broytingar í kursvirðum verða viðgjørd í landsroknskapinum soleiðis, at skuldin ikki sum áður verður tikin við til marknaðarvirði. Í staðin fyri var farið yvir at nýta amortiserings-meginregluna. Lánsbrøv verða tikin við í fíggjarstøðuna við áljóðandi virði, og møguligir kursmunir, sum koma í sambandi við útgávuna, verða avskrivaðir liniert yvir ætlaðu afturgjaldstíðina. Verður partur av lánsbrævarød keyptur aftur fyri tíð, verður útgávukursmunurin, sum hoyrir til henda partin, avskrivaður í afturgjaldsárinum. Endamálið við broytingini var, at rentuútreiðslur landskassans, har kursmunir eisini verða bókaðir, ikki skuldu verða merktar av teimum sveiggjum, sum leypandi broytingar í kursvirðunum hava við sær.

Kursmunir verða amortiseraðir.

Fígging landsins hevur í 2016 kunnað um, at frá fíggjarárinum 2016 verða lánini aftur gjørd upp eftir marknaðarvirði, m.a. tí at tey hava ásannað, at tað er óheppið, at sama prinsipp ikki verður nýtt til rentuútreiðslur sum til rentuinntøkur.

Í 2016 verða lánini aftur gjørd upp eftir marknaðarvirði.

Gjaldstovan selur meginpartin av brævalánunum uttanlands, og óvist er, hvør keyparin er. Heitið á roknskaparpostinum, “Innanlandsskuld, langfreistað”, er tí helst ikki so beinrakið.

Nevnast kann, at Fígging landsins, vegna landskassan, hevur endurnýggjað lánsbrævalán 1.350 mió.kr. (FO-LB 210622) í juni 2016.

Uttanlandsskuld, langfreistað

t.kr.

	2013	2014	2015
Sambært roknskapinum	500.000	500.000	500.000

Upphæddin er eitt lán, 500 mió.kr., ið stavar frá avtaluni 10. juni 1998 ímillum donsku stjórnina og Landsstýrið. Sambært avtaluni er lánið rentu- og avdráttarfrítt við teimum treytum, sum standa í lánsavtaluni: “Afviklingen af lånet aftales i takt med eventuelle indtægter fra fremtidig råstofudvinding. Dog afskrives gælden efter 20 år, såfremt der ikke på det tidspunkt er startet udvinding af råstoffer.”

Partur av langfreistaðu skuldini, ið fellur til gjaldingar í komandi ári

t.kr.

	2013	2014	2015
Sambært roknskapinum	1.483.000	889.500	1.360.000

Sambært Fígging landsins vóru veruligu afturgjøldini:

- Eftir skránni fullu 1.225 mió.kr. av FO-LB 140407 í apríl 2014 og 9,1 mió.kr. vórðu goldnar av FO-LB 180610. Í apríl 2014 vórðu harafturat 248 mió.kr. av FO-LB 150611 goldnar fyri tíð. Tilsamans vórðu 1.482,1 mió.kr. goldnar í 2014.
- Eftir skránni fullu 880 mió.kr. av FO-LB 150611 í juni 2015 og 9,5 mió.kr. vórðu goldnar av FO-LB 180610. Tilsamans vórðu 889,5 mió.kr. goldnar í 2015.

Sambært Fígging landsins eru 1.350 mió.kr. av FO-LB 160622 goldnar í juni 2016 umframt 9,8 mió.kr. av FO-LB 180610. Tilsamans eru 1.359,8 mió.kr. goldnar fram til august 2016.

Stuttfreistað skuld (onnur skuld)

t.kr.

	2013	2014	2015
Sambært roknskapinum	793.173	832.744	932.225

Talan er í høvuðsheitum um vanligar kreditorar, millumrokningar við kommunur, tíðaravmarkingar og skuld, sum er greidd til útgjaldingar frá ymiskum skipanum. Skrásettu upphæddirnar í landsroknskapinum samsvara við sundurgreiningar, sum liggja aftanfyri.

Landsgrannskoðanin hevur við stakroyndum kannað stuttfreistaða skuld, um upphæddirnar eru rættar, og um tær eru bókaðar rætt. Onki var at finnast at.

Útjavningarkonta (LG 2015/300-0203)

t.kr.

	2013	2014	2015
Salda 1. januar	-458.681	-585.037	-604.930
RLÚ-úrslit	-237.592	-249.514	-78.559
Ymiskar broytingar	111.236	229.621	-33.145
Salda 31. desember	**-585.037**	**-604.930**	**-716.634**

“Ymiskar broytingar” fevnir um broytingar í fíggjarstøðuni, sum ikki verða førdar yvir raksturin. Talan er m.a. um tøkniligar munir, sum standast av broytingum í roknskaparmeginreglum, rættingum av skeivum bókingum, sum viðvíkja undanfarnum árum, avtøkum av grunnum, úrslitum hjá internum grunnum, broytingum í avsetingum, mótbókingum til útlánsroknskap og mótbókingum til kapitalinnskot.

Útjavningarkontan líkist ikki “kontu fyri eginpening” í einum privatum virki. Ognirnar í landsroknskapinum verða virðismettar øðrvísi, og materiell støðisogn, t.d. bygningar, skip og vegir, verða ikki virðisásett í roknskapinum. Útjavningarkontan hevur tí so at siga bert eitt tøkniligt endamál.

3.2.7 MVG-eftirstøður (LG 2014/220-0522)

Landsgrannskoðanin hevur í seinastu frágreiðingunum lýst MVG-eftirstøðurnar.

Fyri at lýsa gongdina í eftirstøðunum í mun til inntøkur landskassans av MVG hava vit samanborið tær við samlaðu MVG-inntøkurnar árini 2006 til 2015. Eftirstøðurnar eru lýstar bæði sum eftirstøður við árslok og sum miðal eftirstøður í árinum. Inntøkurnar eru nettoinntøkur av meirvirðisgjaldi.

t.kr.

Ár	Inntøkur	Eftirstøður (árslok)	Eftirstøður (miðal árið)	Eftirstøður í mun til inntøkur árslok (miðal)
2006	1.148.828	70.855	60.228	6,2% (5,2%)
2007	1.297.848	60.225	60.575	4,6% (4,7%)
2008	1.240.192	72.955	61.255	5,9% (4,9%)
2009	1.149.699	91.128	78.506	7,9% (6,8%)
2010	1.182.288	112.518	102.496	9,5% (8,7%)
2011	1.173.212	119.379	112.437	10,2% (9,6%)
2012	1.209.980	117.423	108.998	9,7% (9,0%)
2013	1.165.112	89.580	99.800	7,7% (8,6%)
2014	1.315.312	89.272	76.625	6,8% (5,8%)
2015	1.310.207	66.985	71.917	5,1% (5,5%)

Við árslok 2015 eru eftirstøðurnar 67 mió.kr. Í 2011, tá ið eftirstøðan var størst, var hon 119,4 mió.kr.

Tølini vísa, at árini 2006 til 2008 vóru eftirstøðurnar millum 4,6% og 6,2% av samlaðu inntøkunum, men í 2009 byrjaðu tær at vaksa í mun til inntøkurnar og vóru størst í 2011, tá ið tær vóru 10,2% av samlaðu inntøkunum. Í 2015 er eftirstøðan lækkað til 5,1% av inntøkunum.

Árini 2006 til 2015 hevur TAKS avskrivað 129 mió.kr. av MVG-skuld:

t.kr.

	Avskriving
2006	5.096
2007	8.707
2008	5.527
2009	7.652
2010	14.214
2011	19.385
2012	17.372
2013	29.136
2014	10.937
2015	10.858
Tilsamans	**128.884**

Møguleikarnir hjá TAKS at avskriva MVG-skuld eru bert til staðar, um skuldarin hevur fingið játtaða skuldarumlegging, fingið skuldarsanering, ella um felag er strikað úr partafelagsskránni. Stórur partur av avskrivingunum er fyribilsásett MVG og renta.

3.3 Grannskoðan av eftirlønum (LG 2015/203-0181)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað játtanirnar til eftirlønir. Grannskoðanin fevndi um lógarbundnar tænastumannaeftirlønir, læraraeftirlønir, eftirlønir innan heilsuverkið, Postverk Føroya, eftirlønir, Eftirlønir og eftirløn landsstýrismanna.

Endamálið við grannskoðanini var m.a. at kanna, at roknskapurin er rættur, at eftirlitsskipanirnar eru tryggar og at tær avgerðir, roknskapurin fevnir um, eru samsvarandi veittum játtanum, galdandi lógum og fyriskipanum, verandi avtalum og vanligum siði.

Roknskapartøl

Yvirlit yvir útreiðslur til eftirlønir frá 2012 til 2015:

t.kr.

	2012	2013	2014	2015
Tænastumannaeftirlønir	20.801	22.667	24.125	26.286
Læraraeftirlønir	34.477	37.303	42.510	46.749
Eftirlønir innan heilsuverkið	12.306	12.403	12.538	12.608
Postverk Føroya, eftirlønir	7.229	7.775	8.260	8.437
Eftirlønir	457	472	475	481
Eftirløn landsstýrismanna	1.985	2.116	2.138	2.520
Tilsamans	**77.255**	**82.736**	**90.046**	**97.081**

Umsiting av eftirlønum

Fíggjarmálaráðið og Gjaldstovan umsita eftirlønir.

Gjaldstovan umsitur læraraeftirlønir og eftirlønir til starvsfólk innan heilsuverkið. Allar aðrar eftirlønir verða umsitnar av Fíggjarmálaráðnum, sum gevur Gjaldstovuni boð um at gjalda eftirlønir. Tá ið persónur doyr, fær Gjaldstovan boð frá Skiftirættinum.

Eftirlønarmál eru fløkt at umsita og nógv undantøk eru. Ivamálini standast mest av lógarbroytingum, av yvirtøkum frá donskum myndugleikum og av samantvinning av danskari og føroyskari lóggávu. Trý starvsfólk á Gjaldstovuni, sum eru serkøn í at umsita eftirlønir, viðgera eftirlønarmálini í felag, serliga ivamál, fyri at tryggja, at tey verða rætt avgreidd.

Við stakroyndum kannaðu vit nøkur eftirlønarmál. Niðanfyri hava vit tikið samanum úrslitið av grannskoðanini.

Tænastumannaeftirlønir (3.18.1.01.)

Eftirlønir til tænastumenn verða goldnar sambært Ll. nr. 32 frá 5. juli 1971 “um tænastumannaeftirlønir”. Tey, sum fáa eftirløn eftir hesi lóg, eru: tænastumenn, sum eru farnir frá fyri aldur, sjúku e.ø., eftirsitandi hjúnafelagi eftir tænastumann ella eftirsitandi børn hjá tænastumanni, til tey eru 21 ár.

Vit kannaðu tríggjar tænastumannaeftirlønir útgoldnar í november 2015. Í tveimum av teimum var onki at finnast at. Í triðja eftirlønarmálinum er munur á okkara útrokningum og útgoldnu eftirlønini. Gjaldstovan hevur boðað frá, at eftirlønin er rættað, í samráði við Fíggjarmálaráðið, saman við útgjaldinum fyri august 2016.

Læraraeftirlønir (3.18.1.04.)

Tænastumenn, sum hava verið settir í føroyska skúlaverkinum og tey, sum hava verið sett við eftirlønarrætti sum tænastumenn í fólkaskúlanum, koma undir hesa skipan. Eftirlønirnar verða veittar eftir somu reglum, sum hjá teimum, ið fáa tænastumannaeftirløn.

Fyri teir tænastumenn, sum eru eftirløntir eftir 30. juni 1997, er lógargrundarlagið Ll. nr. 32/1971. Teir, sum eru eftirløntir fyri 30. juni 1997, eru eftirløntir eftir danskari lóg.

Vit kannaðu fýra læraraeftirlønir útgoldnar í november 2015. Vit høvdu onki at finnast at.

Eftirlønir innan heilsuverkið (3.18.1.07.)

Játtanin er nýtt til eftirlønir til tænastumenn, ið hava starvast í heilsuverkinum. Eftirlønirnar verða ásettar eftir talvunum hjá Danske Regioner, og Fíggjarmálaráðið hevur givið Gjaldstovuni boð um at fylgja hesum talvunum.

Landsgrannskoðanin kannaði tvær eftirlønir útgoldnar í november 2015. Vit høvdu í høvuðsheitum onki at finnast at, tó er ivamál, um rætt lønarstig er nýtt í øðrum málinum. Gjaldstovan hevur kunnað um, at stig verða tikin til at kanna tað.

Postverk Føroya, eftirlønir (3.18.1.10.)
Í sambandi við at Postverk Føroya varð yvirtikið í 1976, yvirtók postverkið 76 tænastumenn, sum gjørdust starvsmenn við sama eftirlønarrætti sum tænastumenn.

Eftirlønarskyldan er ásett í § 1 í Ll. nr. 45/1976 "um viðurskifti hjá starvsfólki á postverkinum í sambandi við yvirtøku". Eftirlønarbyrðan verður býtt millum statin og Føroya Landsstýri í mun til eftirlønaraldur hjá starvsfólkum áðrenn yvirtøkuna, og eftirlønaraldurin eftir yvirtøkuna. Postverk Føroya fær endurgoldið donsku eftirlønarútreiðslurnar frá danska statinum, men fíggjaði sjálvt útreiðslurnar av rakstrinum, fyri starvstíðina eftir yvirtøkuna fram til árslok 2004. Peningur verður nú játtaður í fíggjarlógini til endamálið.

Landsgrannskoðanin kannaði tvær eftirlønir útgoldnar í november 2015. Vit høvdu í høvuðsheitum onki at finnast at. Í tí eina førinum er talan um ein lítlan mun, tí ósamsvar er ímillum lønarstigið, sum Gjaldstovan hevur fingið upplýst frá Fíggjarmálaráðnum og lønarstigið, sum Landsgrannskoðanin hevur fingið upplýst frá Posta. Lønardeildin í Fíggjarmálaráðnum hevur upplýst, at stig verða tikin til at kanna málið.

Eftirlønir (3.18.2.01.)
Sambært samtykt Landsstýrisins og fíggjarnevnd Løgtingsins verða eftirlønir veittar teimum, sum vóru í starvi hjá tí almenna 1. apríl 1949, og sum eftir 30 ára aldur hava starvast í minsta lagi 15 ár hjá tí almenna.

Landsgrannskoðanin kannaði eina eftirløn útgoldin í november 2015. Í eftirlønarútgjaldinum er trekt frá fyri samskipanarfrádrátt. Við Ll. nr. 24/1997 varð samskipanarfrádrátturin strikaður, og útrokningargrundarlagið fyri eftirlønirnar broytt soleiðis, at eftirlønirnar lækkaðu samsvarandi.

Gjaldstovan hevur greitt frá, at í sambandi við broytingina í lógini, varð ásett, at tey, sum longu eru eftirlønt, skulu ikki fara niður í eftirløn. Tey skulu fáa viðbót, sum útjavnar munin. Av praktiskum ávum er tað umsitið soleiðis, at eftirlønin hjá teimum verður ikki broytt, men er framhaldandi roknað eftir gomlu lógini, við samskipanarfrádrátti, heldur enn at rokna eftir nýggju lógini og áseta viðbót.

Eftirløn landsstýrismanna (3.18.2.07.)
Sambært Ll. nr. 10/1993 "um samsýning og eftirløn landsstýrismanna v.m." verður eftirløn veitt teimum, sum hava verið landsstýrismenn.

Landsgrannskoðanin kannaði tvær eftirlønir útgoldnar í november 2015. Í tí eina eftirlønarmálinum er fólkatingseftirlønin mótroknað pr. 1. apríl 2014. Landsgrannskoðanin spurdi, um fólkatingseftirlønin ikki átti at verði mótroknað pr. 1. apríl 2015.

Gjaldstovan hevur greitt frá, at tað fer at verða gjørt. Ásetingarnar um hesar mótrokningar eru truplar at umsita. Tá ið føroyska eftirlønin verður javnað, kannar Gjaldstovan samstundis donsku eftirlønina fyri tíðarskeiðið. Føroysku eftirlønirnar eru ikki javnaðar síðani 1. oktober 2014. Tá ið Fíggjarmálaráðið næstu ferð ger semju við Tænastumannafelagið, verður mótrokningin fyri donsku eftirlønina roknað fyri sama tíðarskeið.

Í hinum eftirlønarmálinum var munur millum okkara útrokning og útgoldnu eftirlønina. Gjaldstovan hevur kunnað um, at stig verða tikin til at rætta í útgjaldinum fyri september 2016. Tað verður gjørt í samráði við Fíggjarmálaráðið, sum varar av játtanini.

Niðurstøðan av stakroyndunum
Vit tóku 14 stakroyndir av eftirlønarmálum, har vit kannaðu, um móttakararnir eru rætt skrásettir við starvsaldri, lønartalvum og lønarstigi, og um eftirlønirnar eru rætt roknaðar. Samanumtikið hava vit onki at finnast at.

Stakroyndirnar vístu, at samanumtikið var onki at finnast at.

Endurrindan frá statinum

Danski staturin endurrindar part av nøkrum eftirlønum.

Danski staturin endurrindar sín part av egineftirløn, hjúnafelagaeftirløn, barnaeftirløn og barnaískoytiseftirløn við støði í L. nr. 474/1997 "om ophævelse af lov om tjenestemænd m.fl. i folkeskolen på Færøerne". Staturin endurrindar 80% av útreiðslunum til tænastumenn v.fl. í fólkaskúlanum, sum eru farin frá áðrenn 1. januar 1988, herundir eftirsitandi, sum hava rætt til eftirlønina. Harafturat endurrindar staturin 80% av tí parti av útreiðslunum, sum varð vunnin inntil 31. desember 1987.

Sum partur av grannskoðanini av endurgjaldinum, sum staturin rindar, hevur Landsgrannskoðanin kannað 13 eftirlønarmál.

Einaferð um mánaðin sendir Gjaldstovan Moderniseringsstyrelsen krav um endurgjald fyri læraraeftirlønir. Við uppgerðini fylgir eitt yvirlit yvir endurgjalds-skyldugu upphæddirnar. Tá ið Gjaldstovan ger útgoldnu eftirlønirnar endaliga upp, ger hon eisini endaliga uppgerð yvir upphæddirnar, sum staturin skal rinda fyri sín part av eftirlønunum.

Landsgrannskoðanin hevur við støði í lógum, avtalum og grannskoðaraleiðbeining kannað eftir, um:

- eftirlønarmóttakarnir á teimum báðum yvirlitinum uppfylla ásetingarnar,
- útgoldnu eftirlønarupphæddirnar geva rætt til endurgjald, og
- um endurgjaldskrøvini eru rætt roknaði.

Eftirlønirnar eru rættar, men ivamál er um býtislykil.

Niðurstøðan er, at eftirlønarmóttakarnir í yvirlitum frá Gjaldstovuni hava rætt til eftirløn, og at landsstýrið hevur rætt til endurgjald frá statinum fyri útgoldnu eftirlønar-upphæddirnar. Landsgrannskoðanin ivast í, um býtislykilin er rættur sambært ásetingum í § 6, stk. 2, í avtaluni millum landsstýrið og statin um, hvussu danski tænastualdurin skal avrundast. Landsgrannskoðanin mælti til, at staturin og landsstýrið fáa greiði á, hvussu avtalan um avrundingina skal skiljast.

Í fýra av eftirlønarmálunum eru smávegis munir í býtisprosentinum og starvs-aldrinum.

Sambært okkara uppgerð, og undir tí fortreyt, at avrundingin av tænastualdrinum er røtt, vísir munurin ímillum endurgjaldskrøvini og samlaða yvirlitið frá Gjaldstovuni, at staturin hevur goldið 25 t.kr. ov lítið. Niðanfyri er yvirlit yvir, hvat staturin hevur goldið, og hvat hann sambært endaligu uppgerðunum átti at goldið:

kr.

Ár	Goldið	Eftirlønarlisti 1	Eftirlønarlisti 2	Endurgjaldskrav	Ov lítið goldið
2015	25.837.140	1.332.923	24.529.337	25.862.260	25.120

Sum talvan vísir, er 0,1% á muni millum tað, sum er goldið og tað, sum endaliga uppgerðin vísir. Gjaldstovan hevur greitt frá, at munurin stavar frá, at eftir at endurgjaldskrøvini fyri mars, mai og september 2015 vóru send statinum, vórðu nakrar eftirlønir útgoldnar, sum lógu eftir, og tí ikki vóru við í kravinum.

3.4 Kervisskoðan

3.4.1 Kervisskoðan hjá TAKS

Grundarlagið undir samstarvinum millum TAKS og P/f Elektron er ein sáttmáli frá 1999. Tað eru síðani gjørdar rættingar og uppískoyti til sáttmálan, og í desember 2015 varð ein ískoytisavtala gjørd.

Í mai 2004 góðkendu TAKS, Elektron, grannskoðarin hjá Elektron og innanhýsis kervisskoðarin á Elektron avtalu um kervisskoðan av skipanunum hjá TAKS, sum eru á Elektron.

Hóast í avtaluni er ásett, at kervisskoðarin skal skoða eina brúkaraskipan um árið, er ongin slík skoðan gjørd síðan 2004. Tær serskipanir, sum higartil eru skoðaðar: eTollur og innkrevjingarskipanin, eru millum tær nýggjastu skipanirnar, og millum tær tryggastu og frægast skjalfestu. Høvdu aðrar og eldri skipanir verið kannaðar, høvdu tað upp á seg helst verið fleiri viðmerkingar. Skattaskipanin, sum er tann elsta og týdningarmesta skipanin hjá TAKS, sum er á Elektron, er ikki skoðað.

Ongin brúkaraskipan skoðað síðani 2004.

Húsaleiguskipanin verður skoðað í 2016.

Trygdarleiðarin hevur í august 2016 kunnað um, at Húsaleiguskipanin verður skoðað í 2016.

Avtalan frá 2004 fevnir um tann partin av teldukervinum, sum Elektron hevur ábyrgdina av, men ikki um brúkaraumsiting, mannagongdir o.a hjá TAKS. Átekningar frá kervisskoðaranum eru tí treytaðar av, at mannagongdir og skipanir hjá TAKS eru tryggar.

Kervisskoðanin á Elektron er í 2015 útveitt til uttanhýsis grannskoðara.

Frágreiðingar um kervisskoðan

Fyri árið 2015 hevur TAKS útflýggjað Landsgrannskoðanini avrit av trimum frágreiðingum. Tær eru:

- Frágreiðing 2015, grannskoðan av almennum KT-eftirlitsskipanum á Elektron fyri TAKS.
- Ársfrágreiðing frá kervisgrannskoðan, kervisgrannskoðanararbeiðið fyri TAKS í 2015.
- ISAE 3402-váttan um almennar KT-eftirlitsskipanir hjá P/f Elektron fyri árið 2015 í mun til SLA-avtalu við TAKS.

Um viðurskifti eru, sum ikki eru nøktandi, gevur kervisskoðarin ítøkilig tilmæli.

Við árslok 2015 hevði kervisskoðanin tilsamans 7 óloyst tilmæli, av teimum høvdu 6 miðal raðfesting og eitt lága raðfesting. Talvan niðanfyri vísir gongdina í óavgreiddum tilmælum frá kervisskoðanini árini 2011 til 2015:

Óavgreidd tilmæli árslok	2011	2012	2013	2014	2015
Høg raðfesting	3	2	2	2	0
Miðal raðfesting	5	4	6	2	6
Lág raðfesting	6	4	3	3	1
Tilsamans	**14**	**10**	**11**	**7**	**7**
Av hesum eldri enn eitt ár	*14*	*9*	*8*	*7*	*1*

Niðurstøðan hjá kervisskoðaranum er m.a., at:

> *"Gjøgnumgongdin av útvaldum økjum innan almennar KT-eftirlitsskipanir vísti, at skjalfestingin av týðandi skipanum hjá TAKS framvegis ikki er fullfíggjað og talgild. Arbeiðið við at skjalfesta skipanirnar hevur tó verið í gongd í eina tíð, og er væl ávegis. Kervisgrannskoðanin metir, at hetta arbeiðið framhaldandi eigur at raðfestast høgt, men tað er ein sannroynd, at tað er tíðarkrevjandi at gera fullfíggjaða skjalfesting til tíggjutals KT-skipanir.*
>
> *Sum heild er niðurstøða okkara, at - burtursæð frá teimum viðmerktu viðurskiftunum – er eftirlits- og trygdarstigið kring skipanir og dátur sum TAKS nýtir, nøktandi, og at krøvini í avtaluni partanna millum hava verið yvirhildin av Elektron í tíðarskeiðinum".*

Skjalfestingin av týðandi skipanum hjá TAKS ikki fullfíggjað og talgild.

Arbeiðið at skjalfesta er í gongd og væl áleiðis.

Í oktober 2015 kunnaði landsstýrismaðurin um, at TAKS áhaldandi arbeiðir við at loysa grannskoðanartilmælini. Ein ætlan er gjørd fyri at skjalfesta skipanirnar. Ein triðingur av arbeiðinum var gjørdur, og væntast skuldi, at tað fór at taka 2-3 ár afturat at gera arbeiðið liðugt.

Landsstýrismaðurin er nøgdur við, at støðug gongd er í málinum.

Í august 2016 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at hann fer at fylgja málinum neyvt, og er annars nøgdur við, at støðug gongd er í málinum at avgreiða tilmæli frá kervisskoðaranum.

3.4.2 Kervisskoðan hjá Gjaldstovuni

Í sambandi við, at Gjaldstovan hevur útveitt KT-skipanirnar til Elektron, er ein rakstrar- og viðlíkahaldsavtala (SLA) gjørd millum partarnar. Í tí sambandi varð í 2009 ein avtala um grannskoðan gjørd millum Gjaldstovuna, Elektron og innanhýsis kervisskoðanina á Elektron, sum m.a. ásetir, at tey hvørt ár gjøgnumganga generellu KT-kontrollarnar. Grannskoðanin av KT-kontrollunum á Elektron tekur støði í rakstrar- og viðlíkahaldsavtaluni millum Elektron og Gjaldstovuna frá 2012.

Kervisskoðanin á Elektron er í 2015 útveitt til uttanhýsis grannskoðara.

Fyri árið 2015 hevur kervisskoðarin gjørt tríggjar frágreiðingar um KT-viðurskiftini millum Gjaldstovuna og Elektron:

- Frágreiðing 2015, grannskoðan av almennum KT-eftirlitsskipanum á Elektron fyri Føroya Gjaldstovu.
- Ársfrágreiðing frá kervisgrannskoðan, kervisgrannskoðanararbeiðið fyri Gjaldstovuna í 2015.
- ISAE 3402-váttan um almennar KT-eftirlitsskipanir hjá P/f Elektron fyri árið 2015 í mun til SLA-avtalu við Gjaldstovuna.

Úrslitið av kervisskoðanini er, at fýra manglar ella veikleikar vórðu staðfestir. Kervisskoðarin heldur, at øll fýra tilmælini hava miðal raðfesting. Onki nýtt tilmæli var í 2015, og eitt tilmæli er avgreitt. Øll tilmælini eru eldri enn eitt ár.

Hóast manglar, er trygdar- og eftirlitsstøðið nøktandi.

Hóast manglarnar, er niðurstøðan hjá kervisskoðaranum, at sum heild er trygdar- og eftirlitsstøðið um skipanir og dátur hjá Gjaldstovuni nøktandi, og at Elektron hevur hildið krøvini í avtaluni partanna millum.

Í august 2016 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at hann er nøgdur við, at støðug gongd er í málinum at avgreiða tilmæli frá kervisskoðaranum.

3.4.3 Kervisskoðan hjá KT landsins

Kervisskoðarin hjá Elektron hevur í 2015 grannskoðað generellu KT-kontrollarnar í sambandi við, at Elektron veitir tænastur til KT landsins og kundar tess. Kervisskoðarin hevur eisini grannskoðað KT-kontrollarnar v.m. í sambandi við KT-tænastur, sum P/f Formula veitir KT landsins. Grannskoðanin er framd sambært SLA avtalum millum partarnar.

P/f Elektron

Kervisskoðarin hevur fyri árið 2015 gjørt tríggjar frágreiðingar um KT-viðurskiftini millum KT landsins og Elektron:

- Frágreiðing 2015, grannskoðan av almennum KT-eftirlitsskipanum á Elektron fyri KT landsins.
- Ársfrágreiðing frá kervisgrannskoðan, kervisgrannskoðanararbeiðið fyri KT landsins í 2015.
- ISAE 3402-váttan um almennar KT-eftirlitsskipanir hjá P/f Elektron fyri árið 2015 í mun til SLA-avtalu við KT landsins.

Úrslitið av kervisskoðanini er, at tveir manglar ella veikleikar vórðu staðfestir, annar við miðal raðfesting og hin við lágari raðfesting. Síðani 2014 er eitt nýtt tilmæli komið, og eitt tilmæli avgreitt. Eitt tilmæli er eldri enn eitt ár.

Yvirhøvur er trygdar- og eftirlitsstøðið nøktandi.

Tá sæð verður burtur frá nevndu manglum og veikleikum, heldur kervisskoðarin, at yvirhøvur er eitt nøktandi trygdar- og eftirlitsstøði skipað við atliti at skipanum og

dátum, sum viðvíkja KT landsins. Kervisskoðarin heldur eisini, at Elektron hevur hildið krøvini í SLA-avtaluni í tíðarskeiðnum.

P/f Formula

Kervisskoðarin hjá Elektron hevur fyri árið 2015 gjørt tvær frágreiðingar um KT-viðurskiftini millum KT landsins og P/f Formula:

- Ársfrágreiðing frá kervisgrannskoðan, kervisgrannskoðanararbeiðið fyri KT landsins í 2015.
- ISAE 3402-váttan um almennar KT-eftirlitsskipanir hjá P/f Elektron fyri árið 2015 í mun til SLA-avtalu við KT landsins.

Úrslitið av kervisskoðanini er, at 13 manglar ella veikleikar vórðu staðfestir, 7 við miðal raðfesting og 6 við lágari raðfesting. Síðani 2014 er onki nýtt tilmæli, meðan 6 tilmælir eru avgreidd í 2015.

Kervisskoðarin sigur m.a.:

> *"Grannskoðanin av almennu KT-eftirlitsskipanunum hjá Formula í mun til SLA-avtaluna við KT landsins vísti, at Formula hevur arbeitt miðvíst við at betra um trygdina á fleiri týðandi økjum, og hevur sostatt minkað um talið av opnum grannskoðaratilmælum í árinum.*
>
> *Ávís viðurskifti eru tó framvegis galdandi, sum eiga at verða betrað, og sum ikki verða mett at samsvara á nøktandi hátt við avtalaða trygdarstøðið í SLA-avtaluni partanna millum."*

Ávís viðurskifti eiga at verða betrað, men samanumtikið er trygdar- og eftirlits-støðið nøktandi.

Samanumtikið er niðurstøðan hjá kervisskoðaranum tó, at – burtursæð frá teimum viðmerktu viðurskiftunum – er eftirlits- og trygdarstigið kring skipanir og dátur, sum KT landsins nýtir hjá Formula, nøktandi, og at krøvini í avtaluni partanna millum hava verið yvirhildin av Formula í tíðarskeiðnum.

Í august 2016 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at hann er nøgdur við, at støðug gongd er í málinum at avgreiða tilmæli frá kervisskoðaranum.

3.4.4 KT-eftirlitsskipanir á Føroya Gjaldstovu og KT landsins

Kervisskoðarin hevur gjørt avtalu við Gjaldstovuna og KT landsins um at grannskoða innanhýsis KT-viðurskifti og KT-stýring hjá Gjaldstovuni og KT landsins, eins og tað verður gjørt fyri KT-veitararnar. Endamálið er m.a. at tryggja, at grundleggjandi og týðandi viðurskifti viðvíkjandi almennum KT-eftirliti eru í samsvari við trygdarásetingarnar hjá Gjaldstovuni og KT landsins, umframt at meta um, hvørt nøktandi trygdar- og eftirlitsstig eru sett í verk.

Úrslitið av grannskoðanini er, at 18 manglar og veikleikar eru staðfestir, 4 við miðal raðfesting og 14 við lágari raðfesting. Síðani grannskoðanina fyri 2014 er eitt nýtt tilmæli.

Fleiri veikleikar eru á týðandi økjum, sum tó ikki eru kritiskir. Arbeitt verður støðugt at bøta um trygdarviðurskiftini.

Niðurstøðan hjá grannskoðaranum er m.a., at Gjaldstovan og KT landsins hava gjølla og nøktandi stýring av sínum KT-umhvørvi á flestu økjum, og at tað støðugt verður arbeitt við at bøta um trygdarviðurskiftini. Grannskoðanin hevur víst, at Gjaldstovan og KT landsins hava loyst fleiri av tilmælunum, ið vórðu givin stovnunum til seinastu grannskoðan. Hinvegin eru fleiri veikleikar framvegis á týðandi økjum. Veikleikarnir eru tó ikki kritiskir. Samanumtikið er niðurstøðan, at trygdar- og eftirlitsstigið, ið er sett í verk innan almennu eftirlitsskipanirnar hjá Gjaldstovuni og KT landsins, við undantaki av nevndu veikleikunum, er nøktandi.

3.5 Fíggjarmálaráðið (LG 2014/203-0111)

Í frágreiðing okkara til løgtingsgrannskoðararnar í oktober 2012 umrøddu vit roknskaparviðurskifti hjá Fíggjarmálaráðnum.

Roknskaparreglugerð og ognaryvirlit ikki dagførd.

Fíggjarmálaráðið hevði eina roknskaparreglugerð frá 2001, sum ikki var dagførd. Sambært Fíggjarmálaráðnum arbeiddu tey tá við at dagføra hana.

Fíggjarmálaráðið hevði onki ognaryvirlit sambært ásetingunum í roknskaparkunngerðini. Sambært Fíggjarmálaráðnum arbeiddu tey tá við at gera eitt ognaryvirlit.

Í oktober 2013 og aftur í oktober 2015 greiddi landsstýrismaðurin frá, at arbeitt varð við at dagføra roknskaparrundskrivið og roknskaparkunngerðina. Fíggjarmálaráðið ætlaði at gera nýggja roknskaparreglugerð og ognaryvirlit, tá ið hesar dagføringar vóru gjørdar.

Í august 2016 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at arbeitt verður framvegis við at dagføra roknskaparkunngerðina og roknskaparrundskrivið. Fíggjarmálaráðið er saman við Gjaldstovuni farið undir at gjøgnumganga uppskotið, men enn er ikki komið á mál.

Fyribils er avgjørt at gera smávegis broytingar í verandi roknskaparkunngerð, herundir at broyta ásetingina um ognaryvirlit. Broytingarnar verða væntandi kunngjørdar í næstum.

3.6 TAKS (LG 2015/203-0151)

Í mai 2016 var Landsgrannskoðanin á ófráboðaðum kassaeftirliti á skrivstovuni hjá tolleftirlitinum á Eystaru bryggju í Tórshavn.

Munur var á upptalda kassapeninginum og skrásetta kassapeninginum í Búskaparskipan landsins. TAKS hevur greitt frá, at kassapeningurin er hækkaður, men hækkingin er ikki skrásett í Búskaparskipan landsins. Tað verður nú gjørt.

Landsgrannskoðanin mælti til, at leiðslan ger kassaeftirlit við jøvnum millumbilum, soleiðis sum tað er ásett í roknskaparkunngerðini.

Í roknskaparreglugerðini hjá TAKS eru ongar ásetingar um umsitingina av kassunum hjá tolleftirlitinum. TAKS heldur, at verandi mannagongdir eru tryggar og fer at seta tær í roknskaparreglugerðina.

3.7 Hagstova Føroya (LG 2015/203-0152)

Hagstovan er almenni hagtalsmyndugleikin, og er skipaður sum stovnur undir Fíggjarmálaráðnum. Mest avgerandi hagtølini, sum Hagstovan framleiðir, er tjóðarroknskapurin og hagtøl um gjaldsjavna, uttanlandshandil, arbeiðsmarknað, íbúgvaviðurskifti, vinnugreinar, inntøkur og brúkaraprístal.

Hagstovan virkar sambært Ll. nr. 33/1991 “um Hagstovu Føroya”. Uppgávur stovnsins eru lýstar í § 1, stk. 2 og 3.

Landsgrannskoðanin hevur í 2016 grannskoðað roknskapin hjá Hagstovuni. Endamálið við grannskoðanini var m.a. at kanna, um stovnsleiðslan hevur sett í verk eitt nøktandi og virkið innaneftirlit.

Roknskaparviðurskifti

Játtanin til Hagstovuna er nettojáttan. Virksemið verður fíggjað við játtan í fíggjarlóg og inntøkum av tænastuveitingum.

t.kr.

St.kt.	Heiti	2011	2012	2013	2014	2015
11	Lønir	8.303	8.977	10.287	11.233	10.246
14	Keyp av vørum og tænastum	756	930	724	758	1.133
15	Keyp av útbúnaði	58	347	58	14	245
16,17	Leiga, viðlíkah., skattur o.a.	0	1	34	12	0
21	Søla av vørum og tænastum	-159	-102	-689	-875	-824
71,76	Innanh. flyt. ml. alm. stovnar	0	27	3	-150	103
	Tilsamans	**8.958**	**10.180**	**10.417**	**10.992**	**10.903**
	Nettojáttan	9.041	9.041	10.390	10.815	10.890

Staðfestu inntøkurnar hægri enn játtað.

Árini 2012 til 2015 hevur Hagstovan havt meirnýtslu. Sama tíðarskeið hevur játtanin til inntøkur ligið millum 85-90 t.kr., meðan staðfestu inntøkurnar vóru millum 102-875 t.kr. Samlaða nýtslan er sostatt nakað hægri enn játtanin í fíggjarlógini. Fíggjarmálaráðið metir og ásetir inntøkurnar í fíggjarlógini, men sambært stjóranum ger Hagstovan inntøkumetingar, sum liggja nærri endaliga úrslitinum.

Landsstýrismaðurin hevur í august 2016 kunnað um, at av tí at inntøkurnar eru heldur óvissar, hevur Fíggjarmálaráðið sett tær lágt í játtanini. Lægra inntøkujáttanin hevur onga ávirkan á, at Hagstovan hevur havt meirnýtslu í nøkur ár.

Roknskaparreglugerðin ikki dagførd.

Hagstovan hevur roknskaparreglugerð, sum er góðkend av Fíggjarmálaráðnum í juni 2005. Landsgrannskoðanin mælti til at dagføra reglugerðina.

Í august 2016 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at tørvur er á at dagføra roknskaparrundskrivið, soleiðis at roknskaparreglugerðir kunnu gerast við støði í mannagongdum og virksemisheitum í verandi roknskaparverkgongd. Tá ið ætlaða dagføringin av rundskrivinum er komin í gildi, fer Fíggjarmálaráðið at heita á Hagstovuna at dagføra roknskaparreglugerðina.

Hagstovan hevði ikki fingið loyvi til gjaldkortið.

Hagstovan hevur gjaldkort, sum verður nýtt til keyp og gjald av vørum og tænastum á internetinum. Hagstovan hevði ikki loyvi frá Gjaldstovuni at hava gjaldkort. Sambært Hagstovuni verður tað fingið í rættlag.

Ognaryvirlitið er ikki dagført.

Hagstovan hevur bert ognaryvirlit yvir teldur og telefonir. Landsgrannskoðanin hevur fleiri ferðir, seinast í 2008, mælt til, at ognaryvirlit verður gjørt og dagført regluliga. Vit mæltu enn eina ferð til at gera fullfíggjað ognaryvirlit.

Fíggjarmálaráðið ætlar at gera smávegis broytingar í verandi roknskaparkunngerð, herundir broyta í ásetingini um ognaryvirlit. Sambært landsstýrismanninum verða broytingarnar gjørdar í næstum. Tá ið broytingarnar eru komnar í gildi, fer Fíggjarmálaráðið at heita á Hagstovuna um at gera ognaryvirlit.

Lønir

Vit mæltu til at lýsa lønarumsitingina í roknskaparreglugerðini, herímillum hvussu arbeiðstíð, frítíð, sjúka o.a. verður skrásett.

Við stakroyndum kannaðu vit tríggjar lønir, um umsókn, prógv og setanarskriv vóru í málunum, og um lønirnar svaraðu við galdandi lønarsáttmálar. Onki var at finnast at.

Ikki øll nýta klokkuskipanina.

Hagstovan hevur klokkuskipan, at skráseta arbeiðstíð, feriu o.a. Tað eru tó ikki øll starvsfólkini, ið nýta klokkuskipanina. Stjórin fylgir við, at starvsfólkini arbeiða ásettu tíðina. Starvsfólkini skráseta ikki, hvussu nógv tilfeingi verður brúkt til tað, sum stovnurin avrikar. Stjórin vísti m.a. til hagtalsgrunnin á heimasíðuni, har partur av avrikinum hjá Hagstovuni sæst.

Ásannandi, at lønarútreiðslur er nógv tann størsti parturin av útreiðslum landskassans, heldur Landsgrannskoðanin, tað vera týdningarmikið, at leiðslan tryggjar sær, at lønarútgjaldingarnar eru rættar. Tað kann m.a. gerast við at hava hóskandi tíðarskráseting og neyvar ásetingar um arbeiðstíðir, sambært § 5, stk. 3, í roknskaparkunngerðini. Landsgrannskoðanin mælti til, at øll starvsfólkini nýta klokku-skipanina.

Starvsfólk høvdu stórar tímasaldur.

Vit fingu uppgerð yvir tímasaldur og feriur hjá teimum, ið nýta klokkuskipanina. Fleiri starvsfólk høvdu stórar tímasaldur. Landsgrannskoðanin mælti til, at Hagstovan ásetir reglur um tímasaldur og feriu í roknskaparreglugerðini.

Landsstýrismaðurin hevur kunnað um, at Fíggjarmálaráðið mælir til at ásetingar viðvíkjandi lønarumsiting og tíðarskráseting verða gjørdar í roknskaparkunngerðini.

Aðrar útreiðslur

Landsgrannskoðanin kannaði roknskaparskjøl hjá Hagstovuni fyri 2015. Vit høvdu hesar viðmerkingar:

Á ferðauppgerðum er bert í einstøkum førum drigið frá í dagpengunum fyri kost. Eftir reglunum frá Fíggjarmálaráðnum um ferðing uttanlands skal dragast frá fyri kost, um tann ferðandi hevur fingið máltíðir fyri annans rokning, t.d. um máltíðir eru íroknaðar skeiðsluttøku. Leiðslan hevur kunnað um, at eftirlitið við ferðauppgerðunum verður styrkt.

Hagstovan rindar í mesta lagi 3.200 kr. fyri fartelefon fyri hvørt starvsfólk. Ynskja starvsfólkini dýrari telefon, rindar stovnurin alla upphæddina til seljaran, og starvsfólkini endurrinda Hagstovuni munin. Landsgrannskoðanin gjørdi vart við, at sambært konteringsvegleiðingini frá Gjaldstovuni var skrásetingin ikki røtt og MVG'ið av fartelefonunum var ikki rætt viðgjørt. Vit mæltu Hagstovuni til at broyta mannagongd.

Hagstovan kunnaði um, at skrivligar reglur um fartelefonir verða tiknar við í dagførdu roknskaparreglugerðini við støði í rundskrivi frá Fíggjarmálaráðnum frá 3. desember 2014 um burturbeining av útbúnaði.

Inntøkur

Umframt játtan í fíggjarlógini fær Hagstovan inntøkur av at framleiða og selja hagtøl og aðrar upplýsingar. Heimildin at hava inntøkur er í § 2, stk. 4, í lógini um Hagstovu Føroya, har ásett er, at "stjórin kann eisini áseta avgreiðslugjald fyri at útinna tær uppgávur, ið nevndar eru í § 1, 2. stk., pkt. 2". Sambært nevnda punkti kann Hagstovan átaka sær at savna, viðgera og almannakunngera hagtøl fyri kommunur, feløg, fyritøkur o.o.

Ongar skrivligar reglur um inntøkur.

Hagstovan hevur ongar skrivligar reglur, sum lýsa heimild, skráseting, avsláttur og kreditt. Prísirnir eru lýstir á heimasíðuni hjá Hagstovuni og taka støði í prísunum, sum Danmarks Statistik tekur fyri líknandi uppgávur. Fyri ávísar størri uppgávur verður fastur prísur avtalaður frammanundan. Hendir tað seg, at uppgávurnar taka longri tíð enn væntað, fær Hagstovan ikki inntøkur fyri allar tímarnar, sum verða brúktir.

Landsgrannskoðanin mælti til at lýsa mannagongdirnar um innkrevjing av inntøkum og avskrivingum í roknskaparreglugerðini.

Journal

Ongar reglur um journalisering.

Hagstovan nýtir journalskipanina Doculive. Stovnurin hevur ongar skrivligar reglur um, hvat skal journaliserast. Mannagongdin er, at brævaskifti sum kann hugsast at innlit verður biðið um, verður journaliserað. Teldupostar og bókhaldsskjøl verða ikki journaliserað. Landsgrannskoðanin mælti til at gera skrivligar reglur um journalisering og at taka støðu til, um teldupostar eisini skulu journaliserast.

KT-viðurskifti

Hagstovan hevur dátur, sum hava stóran týdning fyri stovnin og samfelagið sum heild. Tær mest avgerandi eru hagtøl og grunddátur til hagtøl. Ávísar upplýsingar eru í trúnaði og verða sambært Hagstovuni viðgjørdar sambært reglunum hjá Dátueftirlitinum. Hesar dátur verða anonymiseraðar, soleiðis at tær ikki kunnu eyðmerkja ávísar persónar.

Teldurnar á Hagstovuni eru knýttar í Landsnet, og eru tær undir trygdartiltøkunum hjá Landsneti. Til hagtalsvirksemið nýtir stovnurin skipanir og dátuútgerð sum SQL-dátubasur, hagfrøðipakkan R, Microsoftpakkar o.a.

Hagstovan roynir at skipa so fyri, at so fá fólk sum gjørligt hava víð rættindi. Stovnurin kannar regluliga um verandi starvsfólk hava røttu rættindini, og um rættindi hjá fyrrverandi starvsfólkum eru strikað, bæði til Landsnet skipanir og til egnar skipanir.

Hagstovan skipar sjálv fyri KT-trygdartiltøkunum á hagtalsskipanunum. Millum annað er ein váðameting gjørd av, hvønn týdning og hvørjar møguligar avleiðingarnar eru av ymsu váðunum.

3.8 Reglur um matstovur (LG 2014/203-0111)

Í frágreiðing okkara til løgtingsgrannskoðararnar februar 2006 umrøddu vit ymiskar starvsfólkaútreiðslur, m.a. um stovnar og aðalráð rindaðu ískoyti til rakstur av matstovu. Fýra stovnar, herímillum Fíggjarmálaráðið, svaraðu tá, at stovnurin rindaði ískoyti til rakstur av matstovu.

Í 2010 staðfestu vit, at ongar reglur vóru gjørdar um matstovuvirksemi. Í januar 2010 greiddi Løgmansskrivstovan frá, at landsstýrismaðurin í fíggjarmálum umsat økið. Løgmansskrivstovan heitti í 2010 og 2011 á Fíggjarmálaráðið um at skipa so fyri, at dagførdar reglur vórðu gjørdar fyri matstovuvirksemi.

Ongar reglur um matstovuvirksemi. Uppskot til reglur hevur verið til hoyringar.

Í oktober 2013 umrøddi Landsgrannskoðanin aftur málið og staðfesti, at reglurnar vóru ikki gjørdar.

Í august 2016 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Fíggjarmálaráðið hevur gjørt uppskot til rundskriv um starvsfólkamatstovur, sum hevur verið til hoyringar hjá stjórnarráðunum og stovnum. Fíggjarmálaráðið fer nú undir at gera neyðugu tillagingarnar sambært hoyringsskrivunum, soleiðis at rundskrivið um starvsfólka-matstovur kann setast í gildi í heyst (2016).

3.9 Søla av almennum bygningum (LG 2015/203-0111)

Í februar 2016 lat Landsgrannskoðanin løgtingsgrannskoðarunum notat um sølu av bygningum hjá landinum. Niðanfyri er ein samandráttur av kanningini. Notatið í síni heild er at finna á heimasíðuni hjá Landsgrannskoðanini[5].

Við ársenda 2014 seldi Landsverk vegna landsstýrið nøkur sethús hjá landinum. Landssjúkrahúsið hevði brúkt húsini og stóð eisini sum eigari av flestu teirra. Flestu húsini vórðu keypt í 60'unum og høvdu verið nýtt til bústað hjá starvsfólkum o.a.
Játtan at selja almennar bygningar kom í fíggjarlógina 2014 og er eisini við í fíggjar-lógunum 2015 og 2016. Landsgrannskoðanin helt, at ætlanin við játtanunum ivaleyst

[5] www.lg.fo

var skilagóð, men út frá tí tilfari, sum vit høvdu gjøgnumgingið, tyktist ikki, sum inntøkugrundarlagið var lýst á nøktandi hátt.

Mettu inntøkurnar ikki grundaðar á "veruleikakendar vónir".

Í 2014 og 2015 vóru minniinntøkurnar á játtanunum ávikavist 3,5 mió.kr. og 12,4 mió.kr. Tá ið havt verður í huga, at játtanirnar hesi somu árini vóru ávikavist 9 mió.kr. og 15,8 mió.kr., gav tað ábendingar um, at mettu inntøkurnar av sølu av almennum bygningum ikki vóru grundaðar á veruleikakendar vónir sambært § 3 í lógini um landsins játtanarskipan. Játtanin í 2016 er 43 mió.kr.

Seldu bygningarnir høvdu ikki verið hildnir viðlíka í longri tíð, og í veruleikanum hevði tørvur ikki verið á teimum í nógv ár. Landsgrannskoðanin undraðist á, at slíkt kundi standa við í so langa tíð, men helt tó, at tað var stig á rættari leið, at landið setti fokus á hølisviðurskiftini hjá almennum stovnum og ráðum.

Tyktist ógreitt, hvussu og hvør skuldi umsita økið.

Tað tyktist at hava verið ógreitt, hvussu og hvør skuldi umsita økið við atliti at bygningum, sum ikki vóru nýtiligir hjá landinum longur, ella sum tørvur ikki var á.

Tá ið ein játtan kom í fíggjarlógina 2014 til endamálið, helt Landsgrannskoðanin, at tað kundi ikki koma óvæntað á Landsverk, at stovnurin skuldi hava ein virknan leiklut í at selja almennar bygningar v.m. Tá talan var um nýggja høvuðskontu, kundi tó verða roknað við, at avvarðandi aðalráð og stovnurin í góðari tíð samskiftu fyri at tryggja, at høvuðskontan varð umsitin rætt.

Ongar støðulýsingar vóru gjørdar.

Ongar støðulýsingar o.a. vórðu gjørdar í sambandi við bygningarnar, sum vórðu seldir síðst í 2014. Við atliti at keyparunum, men serliga at landið ikki skuldi átaka sær óneyðugt tap av óvissum, helt Landsgrannskoðanin, at almennir bygningar, sum vórðu settir til sølu, áttu at verði lýstir á best møguligan hátt.

Sølan av bygningunum tók heldur ikki nógvar dagar, men snúði seg mest um at verða avgreidd fyri árslok. Landsverk vísti á, at eitt longri sølutíðarskeið var ikki nøkur trygd fyri betri prísi.

Landsgrannskoðanin helt tó, at tá ið ivasamt var, hvørjum standi bygningarnir vóru í, og standurin og møguligi viðlíkahaldstørvurin ikki vóru lýstir nærri, kundi vera neyðugt at geva sær betri stundir, so keyparar kundu hava betri møguleikar at fáa eina fatan av standinum ella viðlíkahaldstørvinum.

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum hevur greitt frá, at upprunaliga ætlanin hjá landsstýrinum var at hava søluinntøkurnar av almennum bygningum undir játtanini "Umvæling av landsins bygningum". Hann ætlar sær at mæla til at venda aftur til upprunaætlanina við tí endamáli, at umvælingarjáttanin verður uppraðfest. Hann heldur eisini, at tað fer at minka um vandan fyri, at sølujáttanin verður sett ov høgt fyri á tann hátt at pynta upp á úrslitið í fíggjarlógini.

Í uppskoti til samtyktar um góðkenning av landsroknskapinum fyri fíggjarárið 2014 Lm. nr. 61/2015 vístu løgtingsgrannskoðararnir í einum broti á týdningin, at játtanin,ið verður løgd fyri Løgtingið, er bygd á veruleikakendar væntanir, og at hon er lýst á nøktandi hátt, eitt nú við at lýsa hvørjar bygningar talan er um.

Løgtingsgrannskoðararnir hildu tað ikki vera nøktandi, at greið heimild at selja bygningarnar ikki fyrilá, áðrenn farið varð í holt við eina sølutilgongd.

Løgtingsgrannskoðararnir hildu tað heldur ikki vera nøktandi, at almennir stovnar og aðalráð varða av bygningum, uttan at teir verða viðlíkahildnir.

3.10 Ómaksgjøld (LG 2014/203-0151)

Ivi um heimild at krevja ómaksgjøld.

Í apríl 2015 spurdi Landsgrannskoðanin, hvørja heimild TAKS hevði at áseta ómaksgjøldini, sum eru umrødd í rundskrivi nr. 1/2014. Landsgrannskoðanin spurdi eisini, hvar innheintingar- og pantiheimildirnar fyri ómaksgjøldini vóru ásettar.

TAKS svaraði, at heimildin at áseta gjøldini var at finna í rættarpraksis. TAKS vísti á, at rættarpraksis ásetir, at ómaksgjøld í trongari merking ikki eru fevnd av hugtakinum "skattur" í § 43 í grundlógini og § 41 í stýrisskipanarlógini og tí kunnu áleggjast uttan at hava heimild í lóg. TAKS vísti til hægstarættardóm U1993.757H (sonevnda Gebyrmálið) og U1983.871H (Vedrørende hjemmelsgrundlaget for kommunes opkrævning af beløb til dækning af barns deltagelse i skoletur).

TAKS hevur ikki nakra siðvenju at áleggja gjøld uttan við lóg ella heimild í lóg. Øll onnur gjøld hava verið lýst í kunngerð ella í lóg, t.d. K. nr. 14/2010 "um tænastugjøld uttan fyri avgreiðslutíð" og K. nr. 39/2010 "um tænastugjøld í samband við tolling og umtolling".

Landsgrannskoðanin er samd við TAKS, at ómaksgjøld o.t. ikki eru "skattir", sum kunnu tulkast at vera fevnd av ávikavist § 43 í grundlógini ella § 41 í stýriskipanarlógini, og at tað merkir, at ómaksgjaldið sjálvt ikki nýtist at vera ásett beinleiðis í lóg. Um gjaldið ikki er ein skattur, kann heimildin at krevja tað latast (delegerast) til fyrisitingina at áseta fyrisitingarliga. Tað krevur tó, at fyrisitingin fær ta heimildina í lóg, ella í serligum førum siðvenju.

Samanumtikið helt Landsgrannskoðanin, at tað tyktist ov ógreitt, hvussu TAKS kom til ta niðurstøðu, at stovnurin av sínum eintingum kundi áleggja ómaksgjøld fyri ikki at nýta Vinnugluggan. Landsgrannskoðanin vísti á, at:

- tað ikki er ásett í lóg, at vinnukundar skulu brúka Vinnugluggan,
- tað ikki er siðvenja hjá stovninum at áleggja ómaksgjøld á brúkarar,
- talan er um "revsing" ella gjald fyri ikki at nýta skipanina, og at
- talan er ikki um eina sjálvbodna skipan (uttan gjald).

Landsgrannskoðanin bað um viðmerkingar frá Fíggjarmálaráðnum.

Ongin pantiheimild.

Í oktober 2015 svaraði landsstýrismaðurin ikki beinleiðis, men segði, at hann ætlaði at leggja uppskot fyri Løgtingið um at gera broyting í meirvirðisgjaldslógini soleiðis, at fyritøkur fingu álagt at nýta Vinnugluggan hjá TAKS í sambandi við at lata inn MVG-uppgerðir og til at gjalda MVG.

Landsgrannskoðanin spurdi eisini Fíggjarmálaráðið, hvar innheintingar- og pantiheimildirnar fyri ómaksgjøldini vóru ásettar. Í august 2015 svaraði landsstýrismaðurin, at vegna vantandi pantiheimild, pantaði TAKS ikki longur fyri tílík gjøld.

Í august 2016 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at Fíggjarmálaráðið arbeiðir við uppskoti um broyting í meirvirðisgjaldslógini at leggja fyri Løgtingið í hesi tingsetuni. Í uppskotinum fáa fyritøkur álagt at nýta Vinnugluggan hjá TAKS til at lata inn MVG-uppgerðir og til at gjalda MVG. Heimild fyri ómaksgjøldum verður partur av hesi lógarbroyting.

3.11 Fígging landsins (LG 2014/203-0151)

Fígging landsins hevur m.a. til uppgávu at umsita gjaldførið og skuldina hjá landinum.

Lógargrundarlagið undir virkisøkinum hjá Fígging landsins er Ll. nr. 140/2012 "um landsins gjaldføris- og skuldarfyrisiting". Sambært § 1 verða landsins gjaldføris- og

skuldarviðurskifti fyrisitin av Gjaldstovuni eftir ásetingum frá Gjaldstovuráðnum, og sambært § 2, stk. 1, er Gjaldstovuráðið ovasti myndugleiki fyri virkseminum.

Landsgrannskoðanin grannskoðar Gjaldstovuna, herundir eisini Fígging landsins. Í sambandi við grannskoðan av Fígging landsins fyri fíggjarárið 2015 hava vit við heimild í § 9, stk. 3, í grannskoðanarlógini útveitt ein part av grannskoðanini til løggilt grannskoðanarvirki. Avtalað er, at Landsgrannskoðanin kannar landskassaskuldina, meðan grannskoðanarvirkið kannar porteføljuskipanina og plaseringar av gjaldføri.

Landsgrannskoðanin hevur eisini kannað tøkan pening, sum Fígging landsins umsitur ein part av. Greitt verður frá tí í serstøkum broti undir fíggjarstøðuni.

3.11.1 Landskassaskuld

Heimild at læna

Sambært § 42 í Ll. nr. 103/1994 “um stýrisskipan Føroya” kann lán ella borgan, ið skuldbindur løgting, landsstýri ella stovnar undir landinum, ikki verða tikið uttan við heimild í lóg. Sambært § 1 í Ll. nr. 116/1991 “um lántøku til landskassan og umlegging av landskassalánum” verður landsstýrinum heimilað landskassans vegna at taka lán til at rinda avdráttir av lánum, til afturrindan av lánum og til framskundaða afturrindan av lánum í Føroyum og uttan fyri Føroyar.

Landsgrannskoðanin hevur kannað lániheimildirnar fyri árini 2011 til 2015. Vit hava onki at finnast at.

Lánini í tráð við prospektið

Í sambandi við lántøku ger Gjaldstovan kunningartilfar til íleggjarar og onnur, nevnt prospekt. Í prospektinum er m.a. kunning um búskaparviðurskifti, upplýsingar um útgevaran av lánsbrøvunum og upplýsingar um lánsbrøvini, so sum samlaða upphædd, rentu, kurs, leypitíð og fondskotu.

Lánini í tráð við prospektini.

Landsgrannskoðanin hevur kannað, um lánini, sum vóru virkin við árslok 2015, eru í tráð við prospektini. Vit hava onki at finnast at.

Skráseting av brævalánum í landsroknskapinum

Í landsroknskapinum, notu nr. 7, eru lánini skrásett við áljóðandi virði umframt tíðaravmarkaðari rentu og kursmuni í sambandi við emission. Samlaða bókaða virðið við árslok 2015 er 4.574 mió.kr. í mun til 4.420 mió.kr. árið fyri.

t.kr./%

Láns-nr.	Heiti	Restskuld við árslok 2015	Tíðargreinað renta	Dagur	Roknað renta %	Ásett renta %
3013	FO-LB 180610	30.603	638	10-06	3,75	3,75
3017	FO-LB 160622	1.350.000	22.390	22-06	3,14	Var.
3019	FO-LB 170627	1.000.000	8.941	27-06	1,75	1,75
3020	FO-LB 190620	1.100.000	10.204	20-06	1,75	1,75
3021	FO-LB 200611	1.045.000	5.796	11-06	1,00	1,00
Tilsamans		**4.525.603**	**47.969**			

Í talvuni hava vit eftirroknað tíðargreinaðu rentuna av hvørjum láni sær í mun til restskuldina við árslok 2015. Vit hava onki at finnast at.

Vit hava somuleiðis funnið kursmunin við emission fyri hvørt lánið og eftirroknað, hvat virðið av kursmuninum fyri hvørt lánið skuldi verið við árslok 2015. Sambært roknskaparmeginreglunum í landsroknskapinum verður sjálvur kursmunurin og ikki aðrar útreiðslur, t.d. sølukostnaður av brævalánunum, avskrivaður yvir lánstíðina. Í talvuni niðanfyri er ein samanbering við tað, sum er bókað í Búskaparskipan landsins.

t.kr.

Láns-nr.	Láns-upphædd	Kursmunur	Ára-mál	Ár eftir	Árlig amortis.	Roknað restvirði	Bókað restvirði
3013	750.000	-8.400	12,55	3,44	-669	-910	-67
3017	1.350.000	0	5,01	1,48	0	0	-257
3019	1.000.000	-270	4,00	2,49	-67	-101	-99
3020	1.100.000	-1.551	5,22	4,47	-297	-1.031	-1.031
3021	1.045.000	1.881	5,01	4,45	376	1.672	1.904
Tils.	**5.245.000**	**-8.340**			**-657**	**-370**	**450**

Árliga amortiseringin er roknað út frá, um lánini verða avdrigin sum ætlað. Í roknaða restvirðinum hava vit tikið hædd fyri, um lánini eru avdrigin skjótari enn ætlað. Vit hava onga viðmerking viðvíkjandi lánunum nr. 3019 og 3020.

Lán nr. 3013

Lánið er eitt annuitetsbrævalán, tó eru einar 333 mió.kr. goldnar meira niður enn ætlað frá 2009 til 2012. Verður parturin av kursmuninum, sum stavar frá meiravdráttinum, drigin frá, átti restvirðið av kursmuninum við árslok 2015 at verið umleið 910 t.kr. Sostatt eru 843 t.kr. ov nógv útreiðsluførdar av kursmuninum til og við 2015. Frá 2013 er avdrátturin minkaður til áleið 9 mió.kr. um árið.

Lán nr. 3017

Lánið varð stovnað við variablari rentu og hevði ongan kursmun í sambandi við emission. Tó eru 2,4 mió.kr. bókaðar inn sum kursmunur í 2011 og síðani amortiseraðar. Fígging landsins hevur greitt frá, at talan er um sølukostnað, sum verður avskrivaður yvir lánstíðina. Lánið er rindað aftur í 2016.

Lán nr. 3021

Fígging landsins hevur greitt frá, at bókaða restvirðið í landsroknskapinum, 1.904 t.kr. er skeivt roknað út. Rætta upphæddin skuldi verða 1.672 t.kr.

Skráseting av rentum v.m. í landsroknskapinum

Sambært landsroknskapinum vóru rentuútreiðslurnar 105,6 mió.kr. í 2015 í mun til 116,8 mió.kr. árið fyri. Upphæddirnar svara til tað, sum er bókað á høvuðskontu 20.50.1.01. “Rentur at gjalda”:

t.kr.

StRk.útgr.	Heiti	2014	2015
5730.1000	Rentur av innanlandsskuld, ið eru goldnar – rentur	129.691	103.265
5730.2000	Rentur av innanlandsskuld, ið eru goldnar – ómaksgjøld	2.200	2.090
5731.0000	Munur – tíðaravmarkað renta og goldin renta (innanlands)	-20.130	-1.719
5770.0000	Kursmunir, ið eru goldnir (staðfestir)	3.050	0
5771.0000	Ikki staðfestir kursmunir av restskuld	1.014	1.038
5790.0000	Aðrar rentuútreiðslur	997	966
Tilsamans		**116.822**	**105.640**

Í talvuni niðanfyri eru goldnar og tíðargreinaðar rentur fyri 2015 býttar á lánini. Vit hava roknað, hvat samlaða rentuupphæddin fyri hvørt lánið er í mun til eina miðalsaldu á láninum í 2015. Roknaða rentan er samanborin við ásettu rentuna á hvørjum láni.

t.kr./%

Láns-nr.	Goldnar rentur	Tíðargr. rentur	Rentur tilsamans	Roknað renta %	Ásett renta %
3013	1.503	-202	1.301	3,68	3,75
3017	51.812	81	51.893	3,84	Var.
3018	13.200	-7.341	5.859	1,50	1,50
3019	17.500	-25	17.475	1,75	1,75
3020	19.250	-28	19.222	1,75	1,75
3021	0	5.796	5.796	1,00	1,00
Tilsamans	**103.265**	**-1.719**	**101.546**		

Eins og undanfarna ár er rentan av láni nr. 3017 út við 52 mió.kr., svarandi til góð 3,8%. Tað er nakað hægri enn fast rentaðu lánini, sum eru tikin seinastu árini. Sambært prospektinum skuldi rentan á láninum upprunaliga svara til CIBOR[6] 3 mánaðir umframt 0,75% meirrentu. Lánið er frá 2011 og er rindað aftur í 2016.

Vit hava gjøgnumgingið bókaðar upphæddir av ómaksgjøldum, staðfestum kursmuni o.ø. Vit hava onki at finnast at.

Amortiseringin fyri eldru lánini er ikki í tráð við upplýstu meginreglurnar.

Amortiseringin í árinum er 1.038 t.kr. Viðvíkjandi lánunum nr. 3013, 3017 og 3018 hava vit víst á, at amortiseringin er ikki røtt í mun til upplýstu roknskaparmeginreglurnar og hevur tí ávirkan á roknskapartølini tey einstøku árini.

Sambært roknskaparmeginreglunum í landsroknskapinum 2015 verður einans kursmunurin amortiseraður yvir lánstíðina. Amortiseringin viðvíkjandi lánum nr. 3013, 3017 og 3018 er tí ikki røtt og hevur tískil ávirkan á roknskapartølini einstøku árini.

Í august 2016 hevur landsstýrismaðurin víst til eina frágreiðing, sum Fígging landsins hevur sent Fíggjarnevndini um skráseting av rentum í landsroknskapinum. Har verður greitt frá, at frá fíggjarárinum 2016 verða rentuútreiðslurnar gjørdar upp eftir marknaðarvirði, eins og rentuinntøkurnar hjá landinum. Sambært Fígging landsins er tað óheppið at nýta tvey ymisk prinsipp á rentuinntøkum og rentuútreiðslum, sum kunnu geva skeivar niðurstøður.

3.11.2 Porteføljuskipanin og plaseringar av gjaldføri

Partur av grannskoðanini er útveittur.

Sum nevnt, hevur Landsgrannskoðanin útveitt ein part av grannskoðanini. Grannskoðanarvirkið hevur grannskoðað hesi øki:

Porteføljuskipanin:

Grannskoðarin hevur útvegað og mett um grannskoðanarváttan, um skipanina, og hevur kannað:

- um øll trygdartiltøk verða hildin (innritan, funktiónsskilnaður, trygdaravrit o.s.fr.),
- um skipanin roknar rætt (goymslu, kursvinning/tap, rentur o.s.fr.),
- um útskriftir eru rættar og álítandi,
- um transaktiónsslóðin millum porteføljuskipanina og Búskaparskipan landsins er í lagi, og
- um samsvar er millum porteføljuskipanina og Búskaparskipan landsins.

Plaseringar av gjaldføri:

Grannskoðarin hevur kannað:

- um Gjaldstovan hevur nøktandi og dagførdar skrivligar mannagongdir um, hvar hon plaserar gjaldførið,
- um mannagongdirnar verða hildnar,
- um plaseringarnar av gjaldførinum eru sambært Ll. nr. 140/2012,
- um plaseringarnar av gjaldførinum eru í tráð við instruksin frá Gjaldstovuráðnum,
- um Fígging landsins heldur seg til roknskaparinstruksin við Fíggjarmálaráðið viðvíkjandi plaseringum av gjaldføri, og
- um starvsfólk, ið gera íløgur, hava heimild, og um tey halda seg til hana.

Niðurstøðan er, at týðandi eftirlit eru nøktandi.

Niðurstøðan hjá grannskoðaranum er, at kontrollirnir, sum eru knýttir at nevndu kontrollmálum, í øllum týðandi lutum kunnu metast at vera nøktandi og hava verið nøktandi í tíðarskeiðnum 1. januar til 31. desember 2015.

Grannskoðarin hevur hesar ískoytisupplýsingar:

[6] Copenhagen Interbank Offered Rate.

"Vit hava undir okkara arbeiði staðfest, at roknskaparinstruksurin við Fíggjarmálaráðið, sum m.a. umfatar ásetingar um plaseringar av gjaldføri, fyriliggur sum uppskot, men ikki er endaliga samtyktur."

Roknskaparinstruksurin enn ikki góðkendur.

Grannskoðarin vísir á, at transaktiónsslóðin millum porteføljeskipanina og Búskaparskipan landsins er ikki optimal, tí at tað ikki ber til at finna allar skrásetingar av einari bóking í Búskaparskipan landsins, men neyðugt er at fara víðari til porteføljuskipanina, um skrásetingar av eini transaktión skulu finnast fram.

3.12 Landsverk (LG 2015/203-0381)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað Landsverk, fyri m.a. at kanna um roknskapurin er rættur, herundir um mannagongdir eru tryggar.

Landsverk virkar sambært reglugerð frá 22. apríl 1998. Sambært viðmerkingunum til fíggjarlógina tekur Landsverk sær m.a. av:

- At byggja og halda landsvegir, tunlar og brýr.
- Málum viðvíkjandi havnum og at røkja sund og firðir.
- Flogvallar- og tyrlupallamálum, soleiðis sum landið tekur sær av hesum.
- Málum viðvíkjandi kommunalum vegum, har landið luttekur.
- Landsins bygningum.
- Ymsum øðrum tøkniligum málum fyri land og kommunur.

Roknskapir fyri høvuðskontur, ið Landsverk hevur ræðisrætt á 2011 til 2015:

t.kr.

Høvuðskt.	Heiti	2011	2012	2013	2014	2015
2.11.1.20	Keyp av bygningi (Løguj.)	0	0	0	0	21.300
2.11.1.21	Umbyg. í Tinganesi (Løguj.)	1.400	1.457	3.084	1.924	1.989
3.11.1.23	Landsins ognir (Rakstrarj.)	-1.267	-1.071	-1.151	-804	-572
3.11.1.56	Umv.alm.bygn. (Løguj.)	24.250	25.490	26.982	24.511	21.552
3.11.1.58	Alm.bygn., søla (Løguj.)	0	0	0	-5.462	-3.372
11.20.2.09	Apoteksverkið (Løguj.)	6.790	3.354	19.394	3.517	0
11.20.3.08	Landssjúkrah., útb.(Løguj.)	26.900	16.350	24.789	12.206	22.600
12.21.1.09	Dugni - skúlin (Løguj.)	161	1.850	401	0	0
12.21.6.02	Bústovnar o.a. (Løguj.)	4.856	3.787	20.576	46.318	21.871
7.23.3.02	Stud.sk.og hf- Ey. (Løguj.)	0	272	1.751	6.503	14.161
7.23.3.07	Tekn.sk. í Klaksvík (Løguj.)	4	415	2.197	10.176	13.481
7.23.3.09	Skúlad.v/Marknagil (Løguj.)	13.953	4.352	52.509	136.013	88.690
7.23.3.28	Stud.sk. í Hoyd.(Løguj.)	3.086	0	0	0	0
7.24.2.09	Tjóðleikhús (Løguj.)	0	1	153	119	32
7.24.4.03	Kringvarp Føroya (Løguj.)	0	0	888	1.033	8.342
7.24.6.13	Ítróttah. Sandoynni (Løguj.)	9.863	14.310	-55	-11	484
15.30.1.02	Oljudálking á sjón. (Løguj.)	443	-1	0	0	0
15.37.4.05	Umhvørvisstovan (Løguj.)	0	3.049	500	0	0
3.38.1.02	Landsverk (Rakstrarj.)	62.381	57.874	60.657	60.336	60.037
3.38.1.07	Nýggir landsvegir (Løguj.)	30.321	59.735	43.563[7]	73.169	95.409
3.38.1.14	Havnir (Løguj.)	135	3.325	4.755	5.965	4.353
3.38.1.18	Infrak. á útoyggj. (Stuðulsj.)	1.727	816	683	328	366
3.38.1.21	Stuðul til havnir (Stuðulsj.)	0	0	1.500	0	0
3.38.2.13	Flogferðsla (Løguj.)	1.771	1.529	0	0	0
	Tilsamans	**186.774**	**196.894**	**263.176**	**375.841**	**370.723**

Flyting av játtanum

Landsverk umsitur løgujáttanirnar vegna aðalráðini og er byggiharri. Onkuntíð er Landsverk samstundis arbeiðstakari.

[7] Ein mió.kr. er flutt til P/f Eysturoyartunnilin sum endurgjald.

Fyri arbeiði, ið Landsverk sjálvt ger, avtala deildirnar Infrakervið og Framleiðsludeildin prísin, sum skal rindast av løgujáttan. Í summum førum verður avtalaða upphæddin goldin, sjálvt um kostnaðurin er minni. Tað ger, at peningur verður fluttur frá løgujáttanum til umsitingina.

Landsgrannskoðanin hevur vístá, at ivi kann verða sáddur, um útreiðslur verða tilvildarliga fluttar ímillum játtanir, tá ið sami stovnur bíleggur, váttar fyri móttøku og rindar fyri tænastur.

Landsverk heldur, at flytingarnar eru ikki tilvildarligar, tá ið bæði bíleggjari og veitari hava váttað. Eisini vísir Landsverk á, at tað er nøktandi eftirlit við flytingunum og ein innbygd trygd, sum við øllum keypi millum tveir partar, tí keypari og veitari hava hvør síni áhugamál, og at keyparin hevur fíggjarrammur fyri keypið.

Landsverk bæði keypari og seljari.

Landsgrannskoðanin vísti á, at tá ið Landsverk er bæði keypari og seljari, er talan um veitingar ímillum partar við áhugafelagsskapi.

Í juni 2016 hevur landsstýrismaðurin í samferðslumálum greitt frá, at Landsverk hevur broytt mannagongdirnar í sambandi við innanhýsis keyp og sølu á stovninum til, at stovnurin altíð nýtir útgreinaði grundskjøl. Sambært landsstýrismanninum kunnu fastar fyriskipanarligar mannagongdir forða fyri møguligum áhugafelagsskapi. Samferðslumálaráðið heldur, at tað eru fleiri fyrimunir enn vansar við verandi skipan, tí at

- tá ið Landsverk bjóðar upp á asfaltering, tryggjar tað eina ávísa kapping, og
- tá ið Landsverk keypir innanhýsis, sæst veruligi kostnaðurin fyri verkætlanir, ið stovnurin fremur.

Inntøkur

Landsverk selur til privat, kommunur, aðrar almennar stovnar og til sín sjálvs og skrásetir størsta partin av inntøkunum á undirkontuna “Inntøkufíggjað virksemi”. Søla 2011 til 2015:

t.kr.

Heiti	2011	2012	2013	2014	2015
Søla av vørum og tænastuv. til kommunur	-28.167	-9.474	-8.443	-9.838	-10.866
Søla av vørum og tæn. til privat	-30.963	-39.504	-37.879	-50.177	-34.890
Søla t.alm. stovnar, virksemi og verkætlanir	-27.324	-35.617	-32.563	-34.885	-26.860
Tilsamans	**-86.454**	**-84.595**	**-78.885**	**-94.900**	**-72.616**

Søluprísurin fyri vørur er grundaður á, hvussu stóra stovnurin metir søluna verða, íroknað avskrivingar og rentur. Stjórin skal góðkenna prísásetingina og prísásetingin skal prógvast í einari sjálvstøðugari mappu á stjórnardeildini.

Prísurin fyri sølu av tænastum til verkætlanir á løgujáttanum, ið Landsverk hevur ræðisrætt á var 410 kr./tíman. Kostnaðurin til onnur var 650 kr./tíman.

Landsverk nýtir egna búskaparskipan at fakturera við. Tey halda ikki, at Búskaparskipan landsins megnar uppgávuna og hevur heldur ikki ta goymsluskipanina, ið Landsverk hevur tørv á.

Keyp

Í 2015 keypti Landsverk útbúnað fyri 8,2 mió.kr. og í 2014 fyri 9 mió.kr. Bilar og maskinur, ið ikki verða latin inn í sambandi við nýkeyp, verða lýst til sølu á heimasíðuni hjá stovninum. Bilarnir, ið ikki eru seldir, verða brúktir til eykalutir.

Í 2013 gjørdi stovnurin trý ára avtalu við telefyritøku um fastan nýtsluprís pr. telefon. Í 2014 keypti Landsverk einar 40-50 fartelefonir frá somu fyritøku. Stovnurin bað ikki

um tilboð, tí avtalan um hald gevur avsláttur á keyp av fartelefonum. Telefonútreiðslur seinastu fimm árini:

t.kr.

Ár	2011	2012	2013	2014	2015
Telefonútreiðslur	613	692	685	737	642

Landsverk rindaði 400 t.kr. fyri innlegging av ventilatión í bygningin hjá Havnar Arbeiðsmannafelag. Sambært landsstýrismanninum ynskti Landsverk at fáa ventilasjón í leigaðu hølini, og fyri at leigan ikki skuldi hækka, rindaði stovnurin kostnaðin.

Landsverk rindar fyri ventilatión í leigaðum hølum.

Ferðaútreiðslur uttanlands seinastu 5 árini eru:

t.kr.

Ár	2011	2012	2013	2014	2015
Ferðaútreiðslur	707	709	806	951	742

Sambært Landsverki hækkaðu ferðaútreiðslurnar nógv fram til 2014, tí stovnurin hevði fleiri "tyngri" verkætlanir, har stovnurin brúkti útlendskar ráðgevarar. Vit kannaðu nakrar ferðaútreiðslur og høvdu onki at finnast at.

Seinastu trý árini hevur matstovan havt 45-50 t.kr. í halli hvørt ár. Sambært Landsverki viðger stovnurin inntøkurnar av matstovuvirksemi eins og Fíggjarmálaráðið ger viðvíkjandi sínari matstovu. Landsgrannskoðanin hevur í frágreiðingum til løgtingsgrannskoðararnar farnu árini víst á, at Fíggjarmálaráðið hevur ikki gjørt reglur fyri matstovuvirksemi hjá tí almenna.

Hall av matstovuvirksemi.

Landsgrannskoðanin vísti á, at avgerðin um at gjalda 417 t.kr. fyri útbúgving hjá stjóranum, skuldi verði tikin í samráði við aðalráðið, tí stjóri er í serligari støðu, tá ið hann bæði gevur loyvi til og játtar útreiðslurnar, ið standast av at útbúgva seg.

Í juni 2016 hevur landsstýrismaðurin svarað Landsgrannskoðanini, at stjórin á Landsverki hevur ræðisrættin til rakstrarjáttanina, eins og allir aðrir stjórar landsins. Eisini vísir hann á, at tað eru ávísar útreiðslur knýttar at stjórastarvinum, og tað, at stjórin tekur eina leiðsluútbúgving gagnar Landsverki, ið hevur eitt sera umfatandi virksemi.

Landsstýrismaðurin heldur, at leiðsluútbúgving av stjóranum gagnar stovninum.

Lønir

Landsgrannskoðanin kannaði við stakroyndum um lønirnar hjá 6 starvsfólkum vóru rættar við at samanhalda setanarskrivini, prógvini o.a. við galdandi lønarsáttmálar. Vit kannaðu eisini, um lýsingar og umsóknir vóru í málunum. Vit høvdu onki at finnast at í sambandi við stakroyndirnar.

Í 2013 og 2014 hevur Landsverk gjørt fráfaringaravtalur við starvsfólk. Sum grundgeving fyri avtalunum vísir Landsverk til reglurnar hjá Lønardeildini í Fíggjarmálaráðnum um uppsagnir.[8]

Landsgrannskoðanin bað Landsverk um skjalprógv fyri kostnaðinum av ávikavist fráfaringaravtalunum og vanligum uppsøgnum. Landsverk svaraði við at vísa til reglurnar hjá Lønardeildini.

Landsgrannskoðanin fekk ikki skjalprógv fyri kostnaði av fráfaringaravtalum í mun til vanliga uppsøgn.

Landsstýrismaðurin svaraði ikki spurningi okkara um, hvat tað kostaði at gera fráfaringaravtalur í mun til vanliga uppsøgn, men hevur í juni 2016 greitt frá, *"at starvsfólkamál eru ofta sera trupul, og hevur Lønardeildin tí gjørt eina nágreiniliga vegleiðing um uppsøgn, sum Landsverk hevur fylgt. Tað skuldi tryggjað starvsfólki virðilig kor í eini truplari støðu, sum er tað avgerandi."*

[8] http://www.fmr.fo/media/4239/veglei%C3%B0ing-um-upps%C3%B8gn.pdf

Tað er týdningarmikið at útgjalda samsýningar, ið eru løn, sum løn.

Samsýningar

Landsgrannskoðanin heldur, at tað er týdningarmikið, at almennir stovnar rinda samsýningar, ið eru løn, sum løn, og at fakturar og rokningar, ið tað almenna rindar fyri, eiga at lúka treytirnar viðvíkjandi krøvum til bókhald og roknskap. Vit vístu á nøkur dømir, har vit hildu, at samsýningarnar vóru at rokna sum løn.

Landsverk vísti á, at tá ið stovnurin fær eina rokning, har p-tal stendur á, er tað ein upplýsing til stovnin at stovna kreditorin eftir.

Í juni 2016 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, *"at Landsverk upplýsir, at lønarútreiðslur stovnsins altíð verða goldnar sum lønir, og at tað í nevndu førum er talan um at keypa uttanhýsis tænastur, sum verða goldnar og bókaðar sum slíkar.*

Í hesum føri snúði tað seg um, at Landsverk hevði keypt eina uttanhýsis tænastu (konta 14), men tá viðkomandi sendir rokningina varð p-talið skrivað á rokningina. Viðkomandi var ikki í starvi hjá Landsverki og skuldi tí ikki hava upphæddina útgoldna sum løn."

Landsgrannskoðanin undrast á svarið, um at móttakari av samsýning skal vera í starvi hjá stovninum, fyri at Landsverk skal rinda samsýningina sum løn.

Fíggjarstøða

Vit kannaðu útgjøld og óvanligar upphæddir á peningastovnskontum og høvdu onki at finnast at.

Landsverk hevði ikki stemmað konturnar av 31. desember 2014. Saldan á peningastovnskontunum í landsroknskapinum og útskriftunum frá peningastovnunum var ávikavist 1.029 t.kr. og 1.359 t.kr. Skuldararnir í landsroknskapinum 2014 stemmaðu heldur ikki við salduna í bókhaldinum.

Sambært Landsverki er mannagongdin broytt soleiðis, at peningastovnskontur og skuldarar verða stemmað av pr. 31. desember.

3.12.1 Inntøkufíggjað virksemi, játtan 3.38.1.02.40.

Landsverk heldur, at inntøkufíggjaða virksemið lýkur treytirnar í kunngerðini um, at "Inntøkufíggjað virksemi í størst møguligan mun javnviga ella geva yvirskot", tá ið yvirskotið seinastu 5 árini eru um eina mió.kr. í miðal um árið:

t.kr.

Ár	2011	2012	2013	2014	2015
Úrslit[9]	-619	-3.135	519	510	158

Landsverk bjóðar flestu uppgávurnar út. Framleiðsludeildin hevur eina entreprenørdeild, sum ger asfaltarbeiði. Sambært Landsverki bjóða kommunurnar ikki asfalteringsarbeiði út, og tí fær Landsverk ikki høvi at bjóða upp á tær uppgávurnar.

Sambært Landsverki er "Inntøkufíggjað virksemi" at meta sum vinnuligt, og skal samlaða úrslitið javnviga. Tað kann tí undra, at ongar inntøkur eru í summum verkætlanum. Landsgrannskoðanin kannaði nakrar verkætlanir í 2014, ið góvu yvirskot og nakrar, ið góvu undirskot:

[9] Í hesari talvuni eru negativ tøl meirinntøkur.

Nr.	Navn	t.kr. Úrslit
7443[10]	Eftirlitsarbeiði Norðoyatunnilin	249
1338	Fres og asf. í Hósvík	103
1317	Spræniasfalt – Selatraðarvegurin	102
7444	Eftirlitsarbeiði Vágatunnilin	88
7434	Asf. á Hólunum og á Heyggi	84
1330	Brúgvarekkverk	-1.000
1310	Skróting í Kunoyartunlinum	-195
1316	Trøllanestunnilin	-151
9191	Starvsfólkadagur	-147
9188	Starvsfólkaveitsla	-195

Brúgvarekkverk, 1330

Landsverk fekk arbeiði í Hvalbiartunlinum 2013 fyri 2,5 mió.kr. Játtanin til arbeiðið var á løgujáttanini "Nýggir landsvegir". Landsverk arbeiddi fyri 3,5 mió.kr. og fekk tí eina mió.kr. meira fyri arbeiðið í 2013, enn avtalað var. Landsverk skrásetti inntøkurnar á "Inntøkufíggjað virksemi", VÆ 1288 "Trygging í Hvalbiartunlinum" og á VÆ 1280 "Ljós og víkipláss í Hvalbiartunlinum".

Undirskotið á verkætlanini "Brúgvarekkverk" í 2014 komst av, at Landsverk rindaði eina mió.kr. aftur til løgujáttanina "Nýggir landsvegir" og skrásetti útreiðslurnar á "Brúgvarekkverk".

Landsgrannskoðanin heldur, at tað forðar gjøgnumskygni, tá ið inntøkurnar í 2013 og útreiðslurnar í 2014 fyri arbeiði í Hvalbiartunlinum ikki eru skrásettar á somu verkætlan. Tað kann eisini hava við sær, at feilir koma í, og roknskapurin verður skeivur.

Flytingar av upphæddum forða fyri gjøgnumskygni og gera at roknskapurin er ikki rættur.

Landsgrannskoðanin heldur, at tað er ikki í tráð við játtanarreglurnar at flyta upphæddir ímillum játtanir á henda hátt. Eisini halda vit, at tað er umráðandi, at roknskapurin verður lagdur soleiðis til rættis, at tað er lætt at fylgja skrásetingunum "úr vøggu í grøv".

Í juni 2016 hevur landsstýrismaðurin boðað frá, at *"Samferðslumálaráðið er samt við Landsgrannskoðanina, at allar útreiðslur til íløgur, til dømis til Hvalbiartunnilin, eiga at verða bókaðar á íløgujáttanini/verkætlanini, so hvørt játtanin verður brúkt. Tað gevur betri gjøgnumskygni, og fylgir verandi ásetingum. Landsverk tekur eisini undir við hesum."*

Skróting í Kunoyartunlinum og Trøllanestunnilin

Í verkætlan 1310 og 1316 er sambært Landsverki talan um tilboðsarbeiði, har tilboðini ikki hildu.

Starvsfólkadagur og –veitsla, 9191 og 9188, jobmatch 9195

Í august 2014 helt Landsverk starvsfólkadag og starvsfólkaveitslu. Útreiðslurnar verða hildnar annaðhvørt ár. Útreiðslurnar til starvsfólkadag eru skrásettar á "keyp av tænastuveitingum annars" og til starvsfólkaveitsluna á "umboðan" undir "Inntøkufíggjað virksemi".

Vanligir rakstrarkostnaðir verða fluttir á inntøkufíggjað virksemi.

Landsgrannskoðanin heldur, at starvsfólkadagur og -veitsla eru vanligir rakstrarkostnaðir, sum skulu bókast á vanliga raksturin og ikki á "Inntøkufíggjað virksemi".

Í november 2015 vísti Landsverk til § 23, stk. 2, í K. nr. 84/2011 "um rakstrarjáttan", og helt seg hava heimild til at brúka yvirskot á inntøkufíggjaðum virksemi til slíkar aktivitetir, og at tað var gjørt sum ein verkætlan, var bert ein eyka dimensjón, ið var sett á bókingina.

[10] Sambært Landsverk eru verkætlanarnummur, ið byrja við 74 "verkætlanir fyri onnur".

Landsgrannskoðanin tekur undir við, at yvirskot frá inntøkufíggjaðum virksemi kann nýtast til rakstur av stovninum annars. Hóast tað játtanarliga er høvuðskontan, ið skal verða hildin, skulu útreiðslurnar skrásetast, har tær hoyra heima, og í hesum førinum er tað á raksturin hjá Landsverki.

Landsgrannskoðanin kannaði eisini verkætlanina jobmatch. Hallið av jobmatch var 54 t.kr. Ongar inntøkur vóru í 2014. Spurd, hví upphæddin var skrásett undir "Inntøkufíggjað virksemi", svaraði leiðslan, at tað gjørdi tað lættari at síggja, hvar peningurin var nýttur, eisini vísti hon til K. nr. 84/2011, § 23, stk. 2.

Landsgrannskoðanin vísti á, at talan er um eina útreiðslu, ið átti at verðið hildin av vanliga rakstrinum hjá Landsverki.

Samferðslumálaráðið samt við Landsgrannskoðanini, at talan er um vanligar rakstrarútreiðslur.

Í juni 2016 hevur landsstýrismaðurin boðað frá, at Samferðslumálaráðið er stórt sæð samt við Landsgrannskoðanina, at talan er um vanligar rakstrarútreiðslur, men at tá ið ein partur av starvsfólkunum hjá Landsverki bert arbeiðir við inntøkufíggjaðum virksemi, kann partur av útreiðslunum møguliga bókast har.

Samanumtikið um inntøkufíggjað virksemi

Vísandi til omanfyri standandi heldur Landsgrannskoðanin, at tá ið Landsverk hevur flutt eina mió.kr. av løgujáttan til rakstur, og tá ið útreiðslur til innanhýsis tiltøk, verða skrásett sum útreiðslur á "Inntøkufíggjað virksemi", verður rakstrarroknskapurin hjá stovninum gruggaður.

Sum fyrr nevnt, hevur Landsverk í november 2015 víst til § 23, stk. 2, í kunngerðini um rakstrarjáttan, og heldur stovnurin seg hava heimild til at brúka yvirskot frá inntøkufíggjaðum virksemi til raksturin.

Landsgrannskoðanin er samd við Landsverki, um at yvirskot kann brúkast til raksturin, men skal samstundis vísa á, at tað hevur týdning, at rakstrarútreiðslur verða skrásettar á vanliga virksemið hjá Landsverki.

3.12.2 Landsvegahald, játtan 3.38.1.02.30.

Játtanin til landsvegahald er á undirkontu 30 á játtanini "Landsverk". Deildin fyri infrakervið tekur sær av haldi og rakstri av landsvegakervinum, samferðsluhavnum, tyrlupallum, flogvallarmálum og oljubasing á sjónum.

Í 2015 vórðu 42,8 mió.kr. játtaðar. Til samanberingar kann nevnast, at í frágreiðing sínari í 2006 metti Landsverk, at tær 53 mió.kr., ið vóru játtaðar, rukku til helvtina av tørvinum.

Forfallið av tunlum, brúm og vegum, 4 ferðir árligu játtanina.

Í frágreiðingini "Fíggjarliga gongdin í játtanini til raksturin hjá Landsverki árini 1996 til 2014" sigur Landsverk, at forfallið av tunlum, brúgvum og vegum er umleið fýra ferðir árligu játtanina til stovnin, og at tað er munandi hægri enn í londunum í Skandinavia.

Verkætlanir

Vit kannaðu tríggjar verkætlanir frá 2014 hjá Landsvegahaldinum, ið góvu yvirskot. Tvær teirra eru gjørdar fyri løgujáttanina "Nýggir landsvegir". Vit bóðu um avtalur og skjøl til bókingarnar og fingu frágreiðingar frá Landsverki saman við einari avtalu.

VÆ 3090 Skifta skeltir

Nettoavlopið á verkætlanini var 16 t.kr. Inntøkurnar frá løgujáttanini "Nýggir landsvegir" vóru 100 t.kr.

Spurdur, hví stovnurin hevði yvirskot av verkætlanini, svaraði Landsverk, at orsøkin var, at verkætlanarleiðarin hevði ikki bókað tímaløn fyri starvsfólk hjá Landsverki á verkætlanina, og at um tímaløn varð bókað, hevði úrslitið verið 0 kr.

VÆ 3106 Tryggjan av síðuareali
Inntøkur frá løgujáttanini "Nýggir landsvegir" vóru 120 t.kr. og nettoavlopið var 56 t.kr. Avtalan er millum ein verkfrøðing og ein økisleiðara, báðir frá Deildini fyri infrakervi, sum ávikavist byggiharra og arbeiðstakara, um at "tryggja síðuareal" fyri 100 t.kr.

Landsgrannskoðanin vísti á, at 120 t.kr. vóru fluttar frá løgujáttanini til rakstrarjáttanina, hóast avtalan var 100 t.kr., og verkætlanin sambært roknskapinum kostaði 64 t.kr.

Landsverk hevur greitt frá, at tað fyri størsta partin er maskinleiga og tímaløn til formannin og verkætlanarleiðaran, sum ikki er bókað á verkætlanina. Sambært leiðsluni eru tiltøk sett í verk, fyri at slíkt helst ikki skal koma fyri aftur. Landsverk er samt við Landsgrannskoðanini um, at upphæddir ikki eiga at verða fluttar ímillum løgur og rakstur, uttan at skjalprógv fyriliggja.

Í juni 2016 hevur landsstýrismaðurin boðað frá, at hann er samdur við niðurstøðuni, at upphæddir eiga ikki at verða fluttar ímillum løgur og rakstur, uttan at grundskjøl fyriliggja.

Útreiðslur fluttar ímillum játtanir, uttan nóg neyv skjalprógv.

VÆ 3122 Reguleringsvegjaðari á Oyggjarvegnum
Nettoavlopið var 31 t.kr. Inntøkurnar 130 t.kr. vóru fluttar frá sama stovnsnummari, verkætlan 3117 "Asfaltering Oyggjarvegur". Sambært Landsverki er avtalan burturblivin, av tí at starvsfólkið, ið gjørdi avtaluna, er farið frá fyri aldur. Avtalan ljóðaði á 150 t.kr. tískil bleiv arbeiðið nakað bíligari.

3.12.3 Nýggir landsvegir, játtan 3.38.1.07.
Deildin fyri infrakervi hjá Landsverki tekur sær av landsvegunum í øllum lutum so sum planlegging, projektering, ognarviðurskiftum, bygging og haldi.

Játtanin til "Nýggjar landsvegir" er løgujáttan á høvuðskontu 3.38.1.07. Sambært viðmerkingunum til fíggjarlógina verður játtanin nýtt til at útbyggja og bøta um vegakervið kring landið, við tí endamáli at fáa eina so munadygga og trygga ferðslu sum gjørligt. Ætlan landsstýrisins er, at øll arbeiði verða boðin út.

Roknskapartøl 2011 til 2015:

t.kr.

St.kt.	Heiti	2011	2012	2013	2014	2015
11	Lønir v.m.	0	1.394	1.887	1.654	1.382
14	Keyp av vørum og tænastum	0	676	808	593	823
16	Leiga, viðlíkahald og skattur	0	30	74	0	0
17	Avskrivingar o.a.	0	3.546	0	0	0
19	Ymsar rakstrarútreiðslur[11]	0	-2.088	-1.769	-2.247	-2.205
21	Søla av vørum og tænastum	-484	-970	-915	-105	0
31	Bygging og løguframleiðsla	28.700	55.453	41.483	72.184	95.042
32	Útvegan av løgu o.ø.	2.105	1.744	1.895	890	319
71	Innanh. flyt. ml. alm. stovn. (útr)	0	0	100	200	48
76	Innanh. flyt. ml. alm. stovn. (innt)	0	-50	0	0	0
	Tilsamans	**30.321**	**59.735**	**43.563**	**73.169**	**95.409**

Í 2012 hevur Landsverk broytt siðvenju til, at lønir til egnar ráðgevarar og eftirlitsfólk verða skrásettar á "Nýggjar landsvegir" eins og søla av gróti o.ø. Upphæddirnar eru eftirsíðan fluttar til "Bygging og løguframleiðsla" og "Útvegan av løgu o.ø."

Játtan og nýtsla 2014
Nýtslan til tær verkætlanirnar, ið vórðu nevndar í viðmerkingunum til fíggjarlógina 2014, var:

[11] Í 2013 eru -2.769 t.kr. drignar frá fyri "løguløn og rakstrarútreiðslur annars", men tá ið ein mió.kr. til P/f Eysturoyartunnil er mótroknað, er saldan -1.769 t.kr.

t.kr.

Verkætlan	Heiti	R 2014	J 2014	Munur
5004	Innkomuvegur	5.745	2.000	-3.745
5032	Signabøvegurin	966	1.000	34
5042	Ábøtur í tunnl.Kalsoy	2.296	3.800	1.504
5152	Ferðgáar	3	0	-3
5162	Dagføring av brúm og tunlum	2.693	4.000	1.307
5239	Viðareiðistunnilin	43.657	37.500	-6.157
5277	Tryggjan av síðuareal	1.744	6.000	4.256
5316	Rundkoyring á Toftum	2.560	1.000	-1.560
5317	Tjørnunes - Breiðkan av vegnum	4.576	3.500	-1.076
5341	Veðurstøð á Fámjinsvegnum	406	400	-6
5360	Ferðsluætlan Vágar, smærri tiltøk	796	5.000	4.204
	Tilsamans	**65.442**	**64.200**	**-1.242**

Saman við framflyting av óbrúktum játtanum og eykajáttan varð samlaða játtanin 83,4 mió.kr. Í 2014 eru 73,2 mió.kr. brúktar til 50 verkætlanir. Samanumtikið víkja flestu upphæddirnar í roknskapinum nógv frá játtanartølunum.

Landsverk broytir raðfestingirnar í samráð við aðalráð.

Í samráð við aðalráðið broytir Landsverk í summum førum raðfestingarnar, tí meira fæst burturúr játtanini við at gera arbeiðir liðug, ístaðin fyri at gera tær ásettu raðfestingarnar fyri hvørt árið sær. Sæð yvir ár, verða raðfestingarnar í viðmerkingunum til fíggjarlógina fylgdar.

Landsgrannskoðanin kannaði verkætlanina “Tjørnunes – breiðkan av vegnum”. Samlaða nýtslan frá 2013 til 2015 var sambært ætlanini.

Inntøkur á løgujáttan

Sjálvt um talan er um eina løgujáttan, eru inntøkur skrásettar í roknskapinum. Í 2013 eru inntøkur frá t.d. kommunum skrásettar sum “Vørusøla til privat”. MVG er eisini roknað av inntøkunum. Tað sæst ikki altíð nóg væl, hvat rokningarnar eru fyri, og hvørjir takstir verða nýttir.

Í november 2015 hevur Landsverk boðað frá, at tey hava rættað MVG’ið, og at tey framyvir fara at gera rokningarnar meira nágreiniligar.

3.12.4 Flyting av lønarútreiðslum til løgur

Í seinastu frágreiðing okkara umrøddu vit lønir hjá Landsverki við atliti at flytingum av lønum frá rakstri hjá stovninum til løgur.

Landsverk greiddi frá, at fyri at hava størsta gjøgnumskygni á verkætlanunum og kunna vísa, hvat verkætlanirnar kosta, so bókaðu tey allar útreiðslur út á løgurnar, sum vóru tongdar at løgunum.

Landsgrannskoðanin skilir áskoðanina hjá Landsverki um at halda skil á, hvussu nógv verkætlanir kosta, og at stovnurin hevur tørv á at gera roknskap fyri hvørja løgu, men er tó ikki samd í, at tað skal gerast við at flyta lønarútreiðslur og annan rakstrarkostnað frá rakstrarjáttanini hjá stovninum til løgujáttanirnar, ið stovnurin hevur ræðisrætt á.

Landsgrannskoðanin hevur áður í sínum frágreiðingum til løgtingsgrannskoðararnar víst á, at tað er ikki rætt at tvinna umsitingarútreiðslur hjá einum stovni saman við øðrum játtanum, ið stovnurin umsitur.

Gjøgnumskygnið minkar, tá ið útreiðslur verða spjaddar á aðrar játtanir.

Landsgrannskoðanin helt, at roknskapurin var ikki nóg gjøgnumskygdur, tá ið ein stovnur pilkaði út nakrar av sínum útreiðslum og spjaddi tær út á aðrar játtanir, ið stovnurin hevði ræði á. Ein slík mannagongd kann vera við til at fjala hækkandi fyrisitingarútreiðslur. Mannagongdin við at minka lønarútreiðslurnar hjá Landsverki ger, at roknskapirnir eru ikki rættir.

Í juni 2015 greiddi Fíggjarmálaráðið frá, at ráðið var samt við Landsgrannskoðanini um, at markamótið millum vanliga virksemið hjá Landsverki og løguverkætlanirnar skuldi vera greitt tilskilað. Eisini ásannaði Fíggjarmálaráðið, at gjøgnumskygni í roknskapinum var ikki nóg gott, serstakliga tí at lønarútreiðslur vórðu bókaðar út á løgur.

Sambært Fíggjarmálaráðnum hevði Landsverk upplýst, at *"játtanin til undirkontuna Byggi- og bygningsumsiting var til grundrakstur, sum er innanhýsis menning, at umsita leigumál, at taka sær av keypi og sølu av ognum, byggifrøðilig ráðgeving til stjórnarráðini, sum ásett í rættarreglum innan bygging, umframt húsaskoðan. Tað svarar væl til upprunaligu uppgávurnar hjá Byggi- og bygningsumsitingini."*

Fíggjarmálaráðið vísti á, at Landsverk í 2014 hevði ræðisrætt til løgujáttanir á 195,3 mió.kr. til landsins bygningar, samanborið við ávikavist 143,7 og 53,6 mió.kr. í 2013 og 2012, og at Landsverk kundi ikki røkja uppgávuna sum byggiharri og hava verkætlanarleiðslu, um útreiðslur hjá stovninum ikki vórðu bókaðar út á løguverkætlanirnar, og at tað var neyðugt fyri at kunna samanbera verkætlanarkostnað.

Í juni 2016 hevur landsstýrismaðurin í samferðslumálum greitt frá, at Samferðslumálaráðið hevur broytt játtanina á høvuðskontu 17.38.1.02. "Landsverk" soleiðis, at allar rakstrarútreiðslur eru tiknar við á kontuni. Nettojáttanin er hin sama, tí lønarútreiðslur og aðrar rakstrarútreiðslur verða fluttar ímillum rakstur og íløgur við innanhýsis flytingum millum almennar myndugleikar. Sambært landsstýrismanninum eru Samferðslumálaráðið og Fíggjarmálaráðið samd um hesa loysnina, sum eisini er gjørd í samskifti við Gjaldstovuna.

Samferðslumálaráðið broytt játtanina til, at lønir v.m. verða fluttar ímillum rakstur og løgur við innanhýsis flytingum ímillum almennar stovnar.

3.12.5 Meirvirðisgjald

Landsverk er MVG-skrásett, tí "Inntøkufíggjað virksemi" selur avgjaldsskyldugar vørur og tænastur í kapping við privatar veitarar.

Í apríl 2016 sendi Landsgrannskoðanin landsstýrismanninum í samferðslumálum frágreiðing um MVG hjá Landsverk. Landsstýrismaðurin svaraði, at Samferðslumálaráðið heldur at verandi samskifti og samstarv ímillum TAKS og Landsverk um MVG-spurningar er nøktandi.

Landsverk leggur MVG á rokningar fyri tænastur til almennar stovnar, har Landsverk ikki hevur ræðisrætt á játtanini, meðan Landsverk ikki leggur MVG á rokningar, tá ið Landsverk hevur ræðisrættin á játtanini. Sambært Landsverki hevur TAKS góðkent mannagongdina.

Í juni 2016 hevur TAKS greitt frá, at TAKS heldur, at Landsverk er ikki í kapping við onnur, tá ið stovnurin veitir tænastu til sín sjálvs ella millum egnar deildir, men at tá ið stovnurin veitir tænastu til onnur uttan fyri stovnin sjálvan, skal MVG leggjast á tænastuna, um tænastan er í kapping við onnur vinnurekandi virki.

Landsgrannskoðanin undrast á niðurstøðuna, sum m.a. inniber, at Landsverk hevur lagt MVG á sølu til t.d. Hjálpartólamiðstøðina og aðalráð, men ikki á aðra byggiráðgeving og –eftirlit hjá stovnum, har Landsverk hevur ræðisrætt á játtanini, t.d. Landssjúkrahúsið.

Landsverk hevur ikki skilt ímillum keyps-MVG til rakstur og til íløgur, men hevur skrásett alt á "Keyps-MVG-rakstur". Stovnurin fer framyvir at broyta ta mannagongdina.

Samanumtikið heldur Landsgrannskoðanin, at tað hevur týdning, at MVG-roknskapurin er rættur. Vit mæltu til, at Landsverk tók støðu til, nær MVG skal roknast av keypi, og at stovnurin tekur hædd fyri, hvat rakstrargøgn verða nýtt til, áðrenn gjørt verður av, hvar meirvirðisgjald skal skrásetast.

Útleiga av persónbilum

Í februar 2016 hevur Landsverk kunnað um, at stovnurin, í samráði við TAKS, er komin til ta niðurstøðu, at *"Um bilar hjá Landsverk vera keyptir og skrásettir í MVG-skyldugum virksemi og síðani leigaðir út til aðrar deildir hjá Landsverk, kann stovnurin draga íløgu-MVG'ið frá. Hetta er tó treytað av, at leigan er verulig, t.v.s. ikki fyri undirprís og at MVG er á leiguni. Tað er í hesum førinum ikki avgerandi, hvat bilurin verður brúktur til í hinum deildunum, sum bilurin verður leigaður til."*

Nýtslan av bilum rokna sum vinna.

Landsgrannskoðanin undrast á, at tað verður roknað sum vinna, at starvsfólk hjá Landsverk nýta bilarnar hjá stovninum at koyra ímillum arbeiðsstøð við.

Í juni 2016 hevur TAKS kunnað Landsgrannskoðanina um, at eitt mál hevur verið viðgjørt í Skatta- og avgjaldskærunevndini um endurrindan av eykaskrásetingargjaldi, sum byggir á somu reglur í MVG-lógini. Treytin, fyri at fáa eykaskrásetingargjaldið endurgoldið, var at bilurin bleiv brúktur fult vinnuligt. Talan var um felag, ið leigaði bilin út til annað felag, har høvuðspartaeigarin brúkti bilin privat.

TAKS heldur, at Landsverk rekur vinnuligt virksemi við at leiga bilar út til sín sjálvs.

Sambært TAKS var niðurstøðan hjá kærunevndini, at støða skuldi takast til, um útleigandi felagið hevði vinnuligt MVG-skyldugt virksemi, og um bilurin einans varð nýttur til MVG-skyldugt virksemi í útleigandi felagnum.

Grundað á hesa niðurstøðuna heldur TAKS, at tað er í lagi, at íløgu-MVG'ið verður drigið frá í MVG-skylduga virkseminum hjá Landsverki, um bilarnir verða leigaðir út til aðrar deildir við MVG og við veruligum leigukostnaði.

3.13 Landsverk, løgujáttanir (LG 2015/203-0381)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað løgujáttanir, ið Landsverk hevur ræðisrætt á. Endamálið við grannskoðanini var at kanna, um roknskapurin er rættur, um ásettar reglur og mannagongdir viðvíkjandi løgum verða fylgdar, og um hóskandi er atborið fíggjarliga. Vit kannaðu hesar løgurnar:

02.11.1.21. Umbygging í Tinganesi
03.11.1.56. Umvæling av almennum bygningum
11.20.3.08. Landssjúkrahúsið, útbygging
12.21.6.02. Bústovnar o.a.

3.13.1 Umbygging í Tinganesi

Játtanin fer til at umbyggja, umvæla og skipa ognir landsstýrisins í Tinganesi, sambært heildarætlanini fyri Tinganes. Frá 2011 til 2015 vóru útreiðslurnar:

t.kr.

	2011	2012	2013	2014	2015
Sambært roknskapinum	1.400	1.457	3.084	1.924	1.989

Umvælingar av fornminum ikki egnaðar at bjóða út.

Landsverk hevur víst á, at tað er sera trupult at bjóða uppá umvæling av fornminnum, tí tað ber ikki til at siga frammanundan, hvat komið verður inn á, tá ið tikið verður frá. Óvissan ger, at bæði meir- og minniveitingar kunnu koma fyri. Tað er ikki nøktandi, hvørki fyri arbeiðstakarar, ráðgevar ella byggiharra og hevur við sær, at arbeiðstøkurnar verða óneyðuga kostnaðarmiklar.

Landsverk gjørdi av, at bjóða arbeiðið at umvæla Bakkapakkhúsið út sum undirhondsboð sambært lisitatiónslógini. Landsverk bað tveir timburmeistarar um at lata undirhondsboð uppá tímasats og eina óbindandi kostnaðarmeting, ið skal verða grundarlag undir valinum av arbeiðstakara. Sambært Landsverki ætla tey um tvey ár at velja tveir aðrar arbeiðsgevarar, soleiðis at fleiri timburmeistarar fáa royndir at umvæla fornminnir.

3.13.2 Umvæling av almennum bygningum

Høvuðskonta 03.11.1.56. fevnir sambært viðmerkingunum í fíggjarlógini um bæði umvæling, viðlíkahald og bjálving av almennum bygningum. *"Bygningar landsins eru yvirhøvur í ringum standi, tí alt ov lítið hevur verið játtað til viðlíkahald í nógv ár. Harafturat eru nógvir bygningar illa bjálvaðir, soleiðis at orkunýtslan er óneyðuga stór. Tí er stórur tørvur á at umvæla og bjálva nógvar av landsins bygningum. Tað skapar virksemi um alt landið, betrar bygningar landsins, og minkar eisini um orkunýtsluna. Samfelagsbúskaparliga er hetta stimbrandi."*

Landsverk hevur frá 2012 til 2014 goldið 1,2 mió.kr., fyri innbúgv, útgerð og gardinur til Læraraskúlan/Venjingarskúlan av løgujáttanini, og í 2015 rindaðu tey 44 t.kr. fyri rullugardinur til Heilsumálaráðið.

Landsverk hevur greitt frá, at lív- og evnafrøðistovurnar vóru í so ringum standi, at neyðugt varð at umbyggja tær, um undirvísingin ikki skuldi steðga. Útgerð og innbúgv vórðu keypt sum partur av umvælingini. Gomlu gardinurnar vóru so eldfimar, tí vórðu tær skiftar út, fyri at tryggja auluna betri ímóti skaða av eldi.

Landsstýrismaðurin vísir á, at umvæling og keyp av útgerð eru innan fyri rammurnar í játtanini.

Í august 2016 hevur landsstýrismaðurin í samferðslumálum greitt frá, at umvælingin av Læraraskúlanum/Venjingarskúlanum kundi vera innan fyri rammurnar av játtanini. Hann vísir á, at talan er um 50 ára gamlar bygningar, har lítið og onki viðlíkahald hevur verið. Sambært landsstýrismanninum er innbúgv í lív- og evnafrøðistovum partur av tí naglafasta, og kundu stovurnar ikki nýtast til undirvísing, uttan at tann parturin eisini varð gjørdur.

Neyðugt at finna praktiskar loysnir.

Landsstýrismaðurin vísir eisini á, at talan er um skúla við fleiri hundrað næmingum, har tað var átrokandi neyðugt at gera umvælingina sum skjótast, og at tað snúði seg um at finna praktiskar loysnir, at taka fíggjarlig atlit og at dygdin og nyttuvirði er í lagi.

Roknskapartøl

Roknskapartøl seinastu 5 árini:

t.kr.

St.kt.	Heiti	2011	2012	2013	2014	2015
11	Lønir v.m.	0	2.191	2.680	2.656	2.569
14	Keyp av vørum og tænastum	0	-1.084	3	-1.294	931
19	Ymsar rakstrarútreiðslur[12]	0	-1.107	-2.683	-1.362	-3.500
21	Søla av vørum og tænastum[13]	-381	-1.474	-286	-341	-1.873
31	Bygging og løguframleiðsla	24.631	26.964	27.261	24.852	23.363
32	Útvegan av løgu o.ø.	0	0	7	0	0
71	Innanhýsis flytingar (útr.)	0	0	0	0	63
	Tilsamans	**24.250**	**25.490**	**26.982**	**24.511**	**21.553**

Samsýningar til Landsverk

Av útreiðslunum á St.kt. 31 eru eisini samsýningar til Landsverk. Undir "Bygningar alment" eru lønir og umsitingargjald og undir "Vegir, tunlar, havnir o.a. alment" eru t.d. asfaltering. Tølini fyri 2011 til 2015:

t.kr.

StRk.	Heiti	2011	2012	2013	2014	2015
3132	Bygningar, alment	1.291	1.957	2.716	2.654	3.545
3142	Vegir, tunnl,havn,alment	14	337	79	6	5
	Tilsamans	**1.305**	**2.294**	**2.795**	**2.660**	**3.550**

Ikki ásettar nærri reglur fyri, hvørjar bygningar, játtanin kann rinda fyri.

Tað eru ikki ásettar nærri reglur, vegleiðingar ella mannagongdir um, hvørjar bygningar løgujáttanin skal rinda fyri, ella hvat er at rokna sum umvæling, viðlíkahald og bjálving av almennum bygningum, enn tað, sum nevnt er í viðmerkingunum í fíggjarlógini.

12 Í 2014 eru 1.307 t.kr. av hesari upphæddini tryggingarendurgjald.
13 Í 2015 er meginparturin frá Tórshavnar kommunu viðvíkjandi viðlíkahaldi av Venjingarskúlanum.

Samsýningin, ið løgujáttanin rindar til Landsverk, er sambært takstum, sum Landsverk hevur ásett fyri tímaløn + umsitingargjald fyri byggileiðslu, eftirlit v.m.

Landsgrannskoðanin mælti til at gera reglur um rindan til nærstandandi partar.

Landsgrannskoðanin vísti á, at flytingarnar frá løgujáttanini til Landsverk kunnu roknast fyri at vera flytingar millum nærstandandi partar. Landsgrannskoðanin mælti tí til at gera skrivligar reglur um, hvørjar útreiðslur viðvíkjandi starvsfólkum hjá Landsverki kunnu rindast av løgujáttanini.

Í august 2016 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at generelt verða allar úreiðslur tiknar við, ið hava við framleiðsluna og arbeiðsplássið at gera. Tímakostnaðurin er fyrst og fremst lønarútreiðslur umframt óbeinleiðis útreiðslur til útgerð, hita, oljunýtslu, húsaleigu o.a., sum er tongt at ávísa arbeiðsplássinum, og svarar til tað, eitt arbeiðspláss kostar samanlagt. Samferðslumálaráðið heldur, at verandi mannagongd er nøktandi.

Verkætlanir

Løgujáttanin "Umvæling av almennum bygningum" er sundurgreinað í verkætlanir. Ein verkætlan er fyri hvønn bygning, ið verður umvældur. Ein verkætlan er fyri hvørt aðalráð, har lønir og umsitingargjøld til starvsfólk hjá Landsverki eru skrásettar. Eisini er ein verkætlan, nevnd ESCO[14]. Útreiðslurnar til verkætlanarleiðslu hava seinastu trý árini verið ímillum 10 og 16%.

Landsverk skrásetir eisini á verkevni, t.e. handverkaraútreiðslur, verkætlanarleiðsla, málsettar útreiðslur, meir/minni veiting o.a. Í summum verkætlanum eru ikki aðrar útreiðslur enn gjald til Landsverk fyri verkætlanarleiðslu.

Til Tekniska skúla í Tórshavn eru 105 t.kr. brúktar í 2015, 100 t.kr. til keyp av "útsúgvingsborðum" og 5 t.kr. fyri tímar hjá Landsverki. Landsverk hevur greitt frá, at tey rindaðu borðini, tí Tekniski skúlin hevði umvælt ventilatiónina í bygninginum og broytt rúmið til slíping fyri at bøta um trygdina hjá teimum, ið starvast har. Skúlin hevði gjørt meginpartin av arbeiðinum, áðrenn bygningsdeildin kom teimum til hjálpar. Landsverk vísir á, at tað skuldi verði umvent, at skúlin rindaði fyri borðini og Landsverk rindaði fyri ístandsetanina.

Landið hevur rindað fyri umvælingar av røktarheimi.

Landsverk hevur skrásett útreiðslur til "Norðoya Røktarheim" á løgujáttanina, hóast eldraøkið 1. januar 2015 varð flutt frá landinum til kommunurnar at umsita (flestu rokningarnar eru vegna elevator til røktarheimið). Landsverk hevur víst á, at bygningurin er landsins ogn, tí hann stendur á økinum hjá Sjúkrahúsinum, og at sama er við Suðuroyar sjúkrahúsið.

Í august 2016 hevur landsstýrismaðurin í samferðslumálum greitt frá, at bygningarnir, Norðoya røktarheim og Suðuroyar røktarheim, fylgdu ikki við, tá ið eldraøkið varð flutt frá landinum til kommunurnar at fyrisita og fíggja.

Sambært landsstýrismanninum er Norðoya røktarheim á matriklinum hjá Klaksvíkar sjúkrahúsi og Suðuroyar røktarheim á matriklinum hjá Suðuroyar sjúkrahúsi, sum eru bygningar, ið landið eigur. Røktarheimini eru í stóran mun samanbygdir og integreraðir partar av sjúkrahúsunum við fleiri felags funktiónum og útreiðslum.

Partarnir royna at finna loysn viðvíkjandi býti av útreiðslum millum kommunur og land.

Samferðslumálaráðið hevur ta fatan, at avvarðandi partarnir arbeiða við at finna eina praktiska loysn fyri býtinum av útreiðslunum, og at prinsippið er, at kommunurnar rinda fyri rakstur og viðlíkahald av tí partinum av bygningunum, sum røktarheimini brúka.

14 Energy Service COmpanies

Spurd, um rokning 141 t.kr. frá ráðgeva fyri "støðumeting av bygninginum hjá Klaksvíkar sjúkrahúsið sambært avtalu" og um arbeiðið varð boðið út, hevur Landsverk svarað, at *"vegna manglandi arbeiðsorku, var hendan uppgávan keypt inn frá einum veitara, sum kendi umstøðurnar. Uppgávan var ov lítil at bjóða út."*

Í november 2015 eru 835 t.kr. skrásettar á Kringvarp Føroya, har teksturin er "aconto-umbøn nr. 11". Landsverk hevur greitt frá, at upphæddin er fyri at skifta ventilatiónsskipanina í gamla húsinum út.

Sambært viðmerkingunum í 7.24.4.03. "Kringvarp Føroya, løgujáttan" 2015 er søluupphæddin fyri gomlu bygningarnar, ið vórðu seldir í 2013, støðlað til *"um- og útbyggjan av bygningum Kringvarpsins í Sortudýki."* Viðmerkt er eisini, at *"Innkomnu tilboðini vóru hægri enn verklagslógin loyvdi at byggja fyri, og tí hevur verið arbeitt við at tillaga byggikostnaðin uttan at hetta fer at ganga út yvir funktionalitet í um- og útbyggjan av bygningunum í Sortudýki. Enn er ikki komið á mál við hesum arbeiðnum."*

Torført at fylgja við kostnaði, tá ið allar útreiðslur til um- og útbygging ikki eru skrásettar á løgujáttanina.

Landsgrannskoðanin heldur, at tá ið Landsverk skrásetir útreiðslur fyri um- og útbygging av bygningunum hjá Kringvarpi Føroya, á fleiri játtanir, ber illa til hjá játtandi myndugleikanum at fylgja við hvat um- og útbyggingin kostar.

Í august 2016 hevur landsstýrismaðurin boðað frá, at tað kann vera ein spurningur, um ventilatiónsskipanin skuldi verið partur av verkætlanini í sambandi við tilbygningin ella ikki, ella at kostnaðurin kundi verið lutaður sundur. Hann vísir á, at Landsverk metti í hesum førinum, at skipanin gjørdi mest gagn í gamla bygninginum heldur enn í tí nýggja, og at Samferðslumálaráðið tí heldur, at bókingarnar eru í lagi.

Í 2015 eru 14.720 kr. goldnar Landsverki fyri verkætlanarleiðslu fyri Sambýli Rúnarvegur. Spurd, hvat tað er fyri verkætlan, hevur Landsverk svarað, at *"Á viðlíkahaldinum eru fólk knýtt at øllum landsins bygningum, og tey brúka orku "tímar" at kanna viðlíkahaldstørvin. Ofta kemur fyri, at arbeiðsuppgávan ikki verður til nakað, tí viðlíkahaldsjáttanin ikki strekkir til alt og tá er neyðugt at prioritera."*

Arbeiðið varð ikki boðið út, tí tað vildi tikið ov langa tíð.

Til bygningarnar í Mjørkadali eru 1.419 t.kr. nýttar, harav 165 t.kr. til Landsverk. Landsverk hevur greitt frá, at Landið yvirtók bygningarnar í Mjørkadali og á Sornfelli í 2014 og kendi tí onki til bygningarnar. Í 2015 ynskti arrestin, ið leigaði ein triðing av høvuðsbygninginum, at leiga ein triðing afturat skjótast gjørligt. Útveggirnir vóru so vánaligir, at teir máttu umvælast, áðrenn tann parturin kundi leigast út. Fyri at spara tíð, setti Landsverk arbeiðstakarar at taka frá útveggunum, fyri at staðfesta hvat skuldi gerast, soleiðis at arbeiðini kundu fremjast, áðrenn veturin kom.

Um Landsverk skuldi fylgt mannagongdunum at bjóða arbeiðini út, hevði tað sambært Landsverki havt umfatandi arbeiði við sær at forkanna, projektera, rokna tilboð, taka støðu til tilboð v.m., við tí úrsliti, at arbeiðið ikki kundi verði gjørt fyrr enn í 2016. Trupulleikar við inniluftini gjørdu, at partar av ventilatiónini máttu broytast, og bað Landsverk arbeiðstakaran, ið kendi ventilatiónina frammanundan, um at fremja uppgávuna. Sambært Landsverki metti stovnurin at prísir o.a. helt seg innan fyri markið, sum vanliga ræður á marknaðinum.

ESCO verkætlan

ESCO var av ongum, vegna vantandi undirtøku.

Samlaði kostnaðurin fyri ESCO verkætlanina 2014 og 2015 var 2.924 t.kr. Landsverk hevur tey bæði árini goldið 2.311 t.kr. av løgujáttanini "umvæling av almennum bygningum" til felagið Spectras A/S.

Landsverk hevur seinni gjørt av at sleppa ESCO verkætlanini vegna ov lítla undirtøku. Landsverk fekk bert eitt tilboð um orkuumvæling, og tað boðið livdi ikki upp til treytirnar, ið Landsverk hevði sett um afturgjaldstíð.

Landsverk hevur greitt frá, *at Spectras A/S "kom okkum til hjálpar, tí førleikin var ikki í Føroyum"*. Landsgrannskoðanin bað um avrit av møguligum tilboði frá ella avtalu við Spectras A/S. Landsverk sendi okkum avrit av telduposti 10. apríl 2014 frá Spectras A/S til Landsverk, har felagið váttar avtalu um, at vera Landsverki til hjálpar við innleiðandi tekniskum greiningum og kanningum/fáa greiðu á útboðum og orkuumvælingum av bygningum í einum ESCO-útboði. Sambært teldupostinum er tímataksturin 850 kr. u/MVG. Afturat tí skal Landsverk rinda fyri ferðing o.a.

Spurdur, um tað er nøktandi skjalprógv fyri tilboði/avtalu, svaraði landsstýrismaðurin, at tá ið talan ikki er um serliga umfatandi arbeiði, heldur Samferðslumálaráðið, at avtalan er nøktandi. Hann vísir annars á. at avtalan er gjørd sambært treytunum í ABR89.

Á rokning frá mai 2015 stendur m.a., at 25 t.kr. eru fyri "honorarer for møder 10.-13. mai 2015" og á somu rokning eru 65 t.kr. fyri *"a-contohonorarer"*. Landsgrannskoðanin spurdi, um taksturin var avtalaður frammanundan og bað Landsverk um nærri frágreiðing um, hvat upphæddirnar vóru fyri. Vit fingu bert avrit av fakturanum, ið vit høvdu víst til og bóðu tí landsstýrismannin um at útvega okkum møguliga avtalu og frágreiðing um, hvat upphæddin er fyri.

Í august 2016 hevur landsstýrismaðurin boðað frá, at Samferðslumálaráðið heldur, at rokningin er væl útgreinað, tá tað stendur, hvat upphæddirnar eru fyri, sum samsvarar við avtaluna, ið Landsverk hevur gjørt við Spectras A/S.

Landsgrannskoðanin fekk ikki svar uppá fyrispurning um, hvat upphædd er fyri.

Landsgrannskoðanin kann staðfesta, at vit onki svar hava fingið um hvat tær 65 t.kr. eru fyri, hóast vit bæði hava spurt Landsverk og landsstýrismannin.

3.13.3 Landssjúkrahúsið, útbygging

Landsverk hevur ræðisrættin á høvuðskontu 11.20.3.08. "Landssjúkrahúsið, útbygging" og ger av, hvørjar útreiðslur verða skrásettar á verkætlanina. Roknskapurin er grannskoðaður av statsautoriseraðum grannskoðanarvirki.

Lógargrundarlagið er Ll. nr. 129/2008 "um at høvuðsumvæla, útbyggja og nútíðargera Landssjúkrahúsið", sum seinast broytt við Ll. nr. 46/2013. Samsvarandi verklagslógini kunnu útreiðslurnar í mesta lagi verða 489,3 mió.kr., og er verklagslógin í gildi til 31. desember 2018.

Landsverk hevur ikki gjørt skrivliga avtalu við Heilsumálaráðið um byggingina, men 4. mai 2015 hava Landsverk og Landssjúkrahúsið gjørt skrivliga avtalu um byggingina, sum er galdandi frá 1. apríl 2014 til og við 31. desember 2019.

Sambært avtaluni hevur Heilsumálaráðið langtíðar áhugamál í verkætlanini og veitir umvegis bygginevndina týdningarmikla vitan í teimum fyrstu fasunum í tilgongdini og hevur sum mál at yvirtaka og reka ein optimalan bygning.

Landsverk er byggiharri, og tekur í tí sambandi avgerðir í sambandi við verkætlanina og hevur ábyrgd mótvegis játtandi myndugleikanum, arbeiðsánaranum, samfelagnum og brúkaranum, at lidna byggingin er nøktandi við atliti at nýtslu, góðsku, byggilist, umhvørvi og kostnaði.

Leikluturin hjá Landssjúkrahúsinum er m.a. at lata Landsverki ræðisrættin til játtanina, at útdelegera byggiharraleiklutin til Landsverk og at hava formansskapin í bygginevndini. Eisini er ásett hvussu tímaprísurin fyri ein verkfrøðing/tekniskan assistent/arkitekt/byggifrøðing er settur saman. Í avtaluni verður víst til fylgiskjøl.

Landsgrannskoðanin bað Landsverk um avrit av fylgiskjølunum, og tá ið vit ikki fingu tey, heittu vit á landsstýrismannin at útvega Landsgrannskoðanini fylgiskjølini.

Landsstýrismaðurin kunnaði um, at orðingin á síðu 4 í avtaluni var eitt sindur óheppin, tí talan er ikki um eina serstaka avtalu. Tímaprísurin er ásettur á sama hátt sum á øðrum verkætlanum.

Roknskaparviðurskifti

Sundurgreining av útreiðslunum á St.kt. 31 frá 2011 til 2015:

t.kr.

StRk.	Heiti	2011	2012	2013	2014	2015
3131	Bygningar, privat	26.405	14.785	25.040	10.447	20.433
3132	Bygningar, alment	731	883	1.086	1.759	2.227
3141	Vegir, tunnlar, havnir o.a., privat	0	-3	-1.400	0	-60
3142	Vegir, tunnl., havnir o.a., alment	1	0	63	0	0
3181	Flyting av óbrúktari løguj. (inn)	-134	0	0	0	0
	Tilsamans	**27.003**	**15.665**	**24.789**	**12.206**	**22.600**

Sambært Landsverki varð onki bygt í 2014, men útreiðslurnar til "bygningar alment" (Landsverk) hækkaðu munandi, tí ymisk viðlíkahald og projektering av H-bygninginum vórðu gjørd. Ein onnur orsøk er, at ein BIM/IKT[15] samskipari, sum eisini virkar sum back up fyri verkætlanarleiðaran, varð settur á verkætlanina.

Í 2012 eru 656 t.kr. avskrivaðar. Landsverk hevur greitt frá, at tað var partur av gerðarrættarmáli ímillum Landsverk og E. Pihl & Søn P/f, ið upprunaliga varð reist í oktober 2004. Í tí sambandinum reisti Landsverk krav móti Sp/f Árna Winther, arkitektar og Landsbyggifelagnum fyri feilprojektering, ávikavist 281 t.kr. og 375 t.kr. Sambært Landsverk mælti sakførarin hjá stovninum til at sleppa krøvunum, tí vórðu tey avskrivað.

Landsverk bað í 2008 skuldarar rinda upphædd sambært semju í gerðarrætti í mai 2006. Í 2009 metti sakførari at kravið var burturfallið, orsakað av at tað varð reist so seint.

Landsverk heitti í mars 2008 á Árna Winther, arkitektar um at endurrinda Landsverki 300 t.kr., og á Landsbyggifelagið um at endurrindað Landsverki 375 t.kr. sambært gerðarrættarniðurstøðuna 29. - 31. mai 2006.

Sambært skjølum frá Landsverki hevur sakførarin í desember 2009 víst á, at hann óttast fyri, at eitt møguligt endurgjaldskrav var burturfallið orsakað av, at Landsverk ikki hevur reist kravið móti ráðgevunum rættstundis samsvarandi pkt. 6.2.3.2 í ABR 89.

Í august 2016 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at sambært Landsverki snýr málið seg um arbeiðir, ið vórðu framd tíðliga í arbeiðsgongdini, og at stovnurin var ikki varugur við feilin, fyrr enn arbeiðið nærum var liðugt. Landsverk veit ikki at siga í dag, hví feilurin ikki varð funnin fyrr, og tá ið sakførarin hjá stovninum metti, at lítil ella ongin møguleiki var fyri at fáa peningin aftur, tók Landsverk tað til eftirtektar. Samferðslumálaráðið hevur ikki annað at viðmerkja.

Samsýningar til Landsverk

Løgujáttanin hevur í 2015 goldið 2.242 t.kr. til Landsverk. Av teimum eru 1.710 t.kr. skrásettar sum "Lønir v.m." og 532 t.kr. sum "Keyp av vørum og tænastum", harav 473 t.kr. fyri umsitingarkostnað og 59 t.kr. fyri skeið og ferðing uttanlands hjá starvsfólkum hjá Landsverki.

Á fakturunum frá Landsverki til "Landssjúkrahúsið, útbygging" sæst ikki, hvussu stórur partur av upphæddini er løn, og hvussu stórur partur er fyri umsiting, men í einum rokniarki sæst, at tímalønin er 335 kr. og samsýningin fyri umsiting er 80 kr./tíma.

Sambært roknskaparreglugerðini hjá Landsverki eru, umframt sáttmálalønina, allar beinleiðis og óbeinleiðis útreiðslur tiknar við, tá ið tímaprísurin fyri verkfrøðingar o.o. verður ásettur.

[15] Bygnings Informations Model/Informations- og kommunikationsteknologi

Landsgrannskoðanin undrast á, at umsitingargjaldið ikki fevnir um útreiðslur til skeiðsgjøld og ferðing hjá starvsfólkunum hjá Landsverki.

Landsverk skilir ímillum útreiðslurnar til generell skeið og skeið, knýtt at ávísum verkætlanum

Landsverk hevur greitt frá, at stovnurin skilir ímillum tey sokallaðu generellu skeiðini og tey skeið, sum eru beinleiðis knýtt at eini ávísari verkætlan. Generellu skeiðini rindar Landsverk, meðan hini rindar verkætlanin beinleiðis.

Í august 2016 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at hátturin, sum Landsverk bókar skeiðsvirksemi, er nøktandi.

At leiða útbyggingina av Landssjúkrahúsinum hevur Landsverk sett verkætlanarleiðara og ein verkfrøðing í tíðaravmarkaði størv, sum enda, tá ið verkætlanin er liðug.

Spurt, eftir hvørjum reglum Landsverk rindar flutningsútreiðslur í sambandi við setan av starvsfólki, og um tað er ein fastur táttur í sambandi við setanir, svaraði Landsverk, at *"Talan var um ein sum var í føstum starvi í Danmark. Fyri at fáa viðkomandi at taka við starvinum varð avtalað, at Landsverk rindaði fyri flytingina. Tað funnust ikki fólk í FØ við tí førleika, sum vit høvdu fyri neyðini. Hetta er ikki ein fastur táttur í sambandi við setanir."*

Landsgrannskoðanin vísti á, at ferðaútreiðslur til starvsfólk hjá Landsverki og Landssjúkrahúsinum vórðu rindaðar av løgujáttanini og ikki av rakstrinum hjá stovnunum.

Landsverk hevur víst á, at eins og útreiðslur til skeið o.a. verða ferðaútreiðslur, ið beinleiðis eru tongdar at einari ávísari verkætlan, rindaðar av henni.

Útreiðslur til verkstovu

Í 2014 rindaði løgujáttanin 68 t.kr. fyri innbúgv o.a. til verkstovu, og í 2013 eru 21 t.kr. goldnar av løgujáttanini fyri tvær teldur til verkætlanarleiðararnar. Landsverk hevur greitt frá, at verkstovan var í Heilsu- og innlendismálaráðnum, og at hon nú er niðurløgd. Innbúgvið verður goymt í smiðjuni hjá Landsverki í Kollafirði, tó er ein partur læntur til verkætlanina Glasir. Ætlanin er at nýta innbúgvið aftur á Landssjúkrahúsinum, tá ið byggiplássið skal stovnast í september/oktober í ár.

Í apríl 2015 gjørdi Landsverk avtalu við Heilsumálaráðið um leigu av skrivstovuhølum við innbúgvi í B75 frá 1. mars 2015 til 31. mai 2016 fyri 8 t.kr. um mánaðin íroknað el, hita og reingerð v.m.

Landsverk hevur greitt frá, at *"ein verkstova bleiv upprættað beinleiðis í sambandi við hesa verkætlan. Hetta er ein verkætlan, sum krevur rættiliga nógv av samskifti v.m. og tí varð mett at rættast var at leiga eitt høli, sum HMR frammanundan hevði til taks. HMR vildi ikki lata hølini ókeypis. Møblarnir eru keyptir í hesum sambandi. Tá verkætlanin væntandi verður liðug, verða møblarnir seldir ella burturbeindir, alt eftir hvørjum standi teir eru í tá. Neyðugt var at tillaga hølini til endamálið og hampa um tey."*

Aðrar útreiðslur

Løgujáttanin hevur goldið ymiskar útreiðslur, ið kunnu sýnast at hoyra til umsitingina hjá Landsverki ella hjá Landssjúkrahúsinum, ella eru at meta sum vanligt viðlíkahald hjá Landssjúkrahúsinum. T.d. er goldið fyri "gávur í sambandi við námsferð" "mús til teldu", RIB 62 "leigutúrur Tórshavn – Nólsoy", og 10.315 kr. til verkætlanarleiðara fyri "mat til starvsfólk hjá Landsverki, Landssjúkrahúsinum og ráðgevunum í sambandi við ein arbeiðsfund um kvøldið aftaná ráðstevnuna, og verkætlanin betalti nátturðan".

Spurt, hevur Landsverk greitt frá, at her er eisini talan um at útreiðslur, ið eru beinleiðis tongdar at verkætlanini, verða bókaðar á verkætlanina, og at játtanin fevnir bæði um løgur og viðlíkahald sambært fíggjarlógini.

Nærstandandi partar

Í grannskoðanarprotokollini fyri 2014 fyri "Útbyggingin av Landssjúkrahúsinum" greiðir SPEKT Sp/f m.a. frá, hvørjar transaktiónir stovnurin hevði havt við nærstandandi partar. Nevnt verður, at 1.749 t.kr. eru goldnar Landsverki fyri innanhýsis ráðgeving og leiðslu v.m.

Tær 1.749 t.kr., svara til lønarútreiðslurnar til starvsfólk hjá Landsverki. Umframt lønirnar eru aðrar útreiðslur, t.d. ferðaútreiðslur hjá starvsfólki hjá Landsverki goldnar av játtanini.

Ógreiða er um transaktiónir millum nærstandandi partar.

Landsverk svaraði ikki spurninginum frá Landsgrannskoðanini, um ferðaútreiðslurnar ikki eisini eru at meta sum transaktiónir ímillum nærstandandi partar, men vísti á, at *"vanlig mannagongd er, at útreiðslur til ferðing verða bókaðar frá StRk. 14 til StRk. 19 til StRk. 31."*

Sambært grannskoðanarprotokollini 2014 fyriliggur onki skrivligt avtalugrundarlag viðvíkjandi innanhýsis faktureringini. Felagið vísir á, at samstarvsavtala er gjørd millum Landssjúkrahúsið og Landsverk um ábyrgdar-, heimildar- og arbeiðsbýti í sambandi við útbyggingina, har ásett er, at serstøk avtala skal gerast fyri tímaprís í sambandi við keyp av tænastum frá Landsverki, ið skal endurskoðast árliga. Sambært SPEKT Sp/f var ongin slík avtala, men hon skuldi gerast fyri 2015.

Í august 2016 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at tað var ein óheppin orðing, at ein serstøk avtala skuldi gerast um tímaprís, tí tímaprísurin er tann sami, sum Landsverk hevur ásett fyri aðrar verkætlanir og at hann verður tikin upp til eftirmetingar á hvørjum árið, og um ongin broyting er í teimum undirliggjandi viðurskiftunum, sum ganga inn í tímaprísin, verður tímaprísurin heldur ikki broyttur.

3.13.4 Bústovnar o.a.

Játtanin er á høvuðskontu 12.21.6.02. "Bústovnar o.a." Sambært viðmerkingunum í fíggjarlógini er talan um tríggjar verklagslógir,

- Ll. nr. 78/2011 "um bygging av sambýli í Tórshavn til fólk við sálarsjúku",
- Ll. nr. 79/2011 "um bygging av stovni í Eysturoynni til børn við fjølbreki", og
- Ll. nr. 81/2011 "um at byggja vardar bústaðir í Norðoyggjum og Eysturoynni til fólk við serligum tørvi".

Depil til fjølbrekað børn í Eysturoy

Sambært verklagslógini kunnu útreiðslurnar í mesta lagi vera 26,5 mió.kr. Útreiðslurnar 2010 til 2015 hava verið:

t.kr.

StRk.	Heiti	2011	2012	2013	2014	2015
3131	Bygningar, privat	3	789	5.880	15.918	613
3132	Bygningar, alment	57	159	191	434	142
3141	Vegir, tunnlar, havnir o.a., privat	0	0	0	16	0
3142	Vegir, tunnl., havnir o.a., alment	0	8	27	1	0
	Tilsamans	**60**	**956**	**6.098**	**16.369**	**755**

Arbeiðið varð boðið út í høvuðsarbeiðstøku ímillum frammanundan góðkendar veitarar. Sambært Landsverki bjóðaðu 5 arbeiðstakarar. Tikið varð av lægsta tilboðnum. Sáttmálin ímillum Landsverk og arbeiðstakaran var 15.183 t.kr.

Í 2012 gjørdi Landsverk avtalu við arkitektavirki um projektering fyri fastan prís á 1.011.225 kr. Frá 2012 til 2015 hevur Landsverk goldið virkinum 1.103.193 kr. Afturat tí fekk arkitektavirkið 111.712 kr. fyri broytingar í projektinum, ið bygningsánarin ynskti.

Í 2013 hevur Landsverk rindað einum virki 53 t.kr. fyri at projektera elevatorskakt. Landsverk hevur greitt frá, at tann projekteringin var ikki við upprunaliga. Eftir at byggingin var byrjað, kom bygningsánarin við ynski um ein elevator ístaðin fyri lyft, tí mátti handlast skjótt, fyri at arbeiðstakarin ikki skuldi steðga upp, tí tað hevði havt ein væl størri meirkostnað við sær.

Í mai 2013 gjørdi Landsverk avtalu við ráðgevara um fakeftirlit í sambandi við byggingina av Depli til fjølbrekað børn í Eysturoy. Fastur prísur á 372 t.kr. varð avtalaður fyri eftirlit í 14 mánaðir. Tilboðsupphæddin varð býtt í 14 og goldin út sambært ákontoumbøn eina ferð um mánaðin. Landsverk gjørdi eisini avtalu við eina fyritøku um byggileiðslu fyri fastan prís á 326 t.kr. fyri byggileiðslu í 14 mánaðir.

Meirkostnaður vegna longda byggitíð.

Í juli 2016 hevur Landsverk kunnað um, at byggitíðin varð longd við 5 mánaðum, tí varð meirkostnaðurin av fakeftirlitinum 135 t.kr. og av byggileiðsluni 116 t.kr.

Landsgrannskoðanin spurdi Landsverk, um keyp av innbúgvi og tólum fyri ávikavist 1.461 t.kr. og 635 t.kr. vórðu boðin út, og um so var, hvussu tað varð gjørt. Landsverk hevur greitt frá, at av ókendum orsøkum gekk ov long tíð, áðrenn innbúgv og tól vórðu boðin út í lisitatión. Av tí at ov nógvir feilir vóru í útboðnum, og ov stutt tíð var eftir, til bygningurin skuldi takast í nýtslu, gjørdi Landsverk av at annulerað lisitatiónina. Í staðin keypti Landsverk innbúgv og tól frá teimum, ið høvdu sýnt áhuga. Keypið av gardinum varð tó boðið út, og varð tikið av lægsta tilboðnum.

Samanumtikið

Kostnaðurin av Deplinum til fjølbrekað børn í Eysturoynni er sambært Búskaparskipan landsins 24.262 t.kr. Harumframt eru 115 t.kr. brúktar til verkætlanina í 2016.

Flestu uppgávurnar eru bodnar út, og kostnaðurin er innan fyri tær 26,5 mió.kr. ið er mesta upphædd, sum kundi nýtast til byggingina sambært verklagslógini.

Sum fyrr nevnt, varð byggitíðin longd við 5 mánaðum. Bygningurin varð avhendaður í november 2014 og ikki 1. juli, sum ásett í arbeiðstakarasáttmálanum.

Bústaðir til menningartarnaði í Klaksvík og Eysturoy

Sambært verklagslógini kunnu útreiðslurnar til verkætlanirnar í mesta lagi vera 38 mió.kr. tilsamans. Lógin fer úr gildi 31. desember 2016. Útreiðslurnar til báðar verkætlanirnar hava frá 2012 til 2015 verið:

t.kr.

StRk.	Heiti	2012	2013	2014	2015
3131	Bygningar, privat	1.047	1.106	15.931	17.418
3132	Bygningar, alment	246	276	94	140
3142	Vegir, tunnlar, havnir o.a., alment	15	0	0	0
	Tilsamans	**1.308**	**1.382**	**16.025**	**17.558**

Vit kannaðu sáttmálar, avtalur o.a. viðvíkjandi bygninginum í Klaksvík, har útreiðslurnar, býttar á verkevni, 2012 til 2015 hava verið:

t.kr.

Heiti	2012	2013	2014	2015
Handverkaraútreiðslur	0	39	8.437	6.839
Projekteringsútr. Ext	316	619	244	904
Eftirlit, byggil.v.m. Ext	0	0	255	115
Verkætlanarleiðsla	112	137	61	69
Útgerð og tól	0	0	0	198
Málásettar útreiðslur	6	6	86	83
Eyka og meir/minni veiting				26
Tilsamans	**434**	**801**	**9.083**	**8.234**

Sambært tølunum frammanfyri eru góðar 18,5 mió.kr. skrásettar á verkætlanina.

Sambært sáttmála við høvuðsarbeiðstakaran var samlaða sáttmálaupphæddin 14,6 mió.kr. Ein avtala er gjørd um samsýning 1.250 t.kr. fyri ábyrgd av eyka útreiðslum og sparingum. Í desember 2015 fekk arbeiðstakarin 330 t.kr. fyri meir- og minniveitingar og í 2016 fekk hann 235 t.kr. fyri prísbroytingar.

Projekteringin av bygninginum kostaði sambært sáttmála við arkitektafelag 1.052 t.kr. Afturat tí fekk arkitektafelagið 193 t.kr. fyri umprojektering at minka bygningin.

Í 2012 setti Landsverk 50 t.kr. av sum skuld til arkitektafelagið. Sambært Landsverki er upphæddin ikki goldin enn.

Sambært endauppgerð hjá Landsverki desember 2015 hevur stovnurin goldið arkitektafelagnum 1.132 t.kr. og skyldar felagnum 78.515 kr. Landsverk hevur drigið 44.520 kr. frá fyri projekteringsfeilir. Í 2015 eru 40 t.kr. settar av sum skuld til arkitektafelagið.

Sambært faktura frá arkitektafelagnum 31. desember 2014 eigur felagið 140.517 kr. tilgóðar hjá Landsverki sambært sáttmálanum.

Ósemja um upphædd til ráðgeva.

Landsstýrismaðurin hevur greitt frá, at orsøkin til millumverandi millum arkitektafelagið og Landsverk var, at tekningin sum grivið var út eftir, samsvaraði ikki við tekningina, sum byggjast skuldi eftir. Tá ið Landsverk skuldi stoypa fundamentir, varð neyðugt at grava ein part av stykkinum umaftur. Heilt ítøkiliga var talan um ein kjallara, sum mátti flytast tríggjar metrar.

Í september 2013 hevur Landsverk gjørt avtalu við fyritøku um høvuðsfakeftirlit við bygging av vardum íbúðum í Runavík og Klaksvík fyri 510 t.kr. Í mai 2015 gjørdi Landsverk avtalu við fyritøkuna um eyka ráðgeving fyri vardar íbúðir í Klaksvík og Runavík; 42.500 kr. fyri februar og mars 2015 og 24 t.kr. um mánaðin fyri hvønn mánað til verkætlanirnar vórðu lidnar.

Sambært uppgerð hjá Landsverki var kostnaðurin fyri eftirlitið í Klaksvík 369 t.kr.

Sambýli til sálarsjúk í Tórshavn

Sambært verklagslógini kunnu útreiðslurnar í mesta lagi vera 20,8 mió.kr. Verklagslógin fór úr gildi 31. desember 2015.

Útreiðslurnar 2011 til 2015 býttar á verkevni:

t.kr.

Heiti	2011	2012	2013	2014	2015
Handverkaraútreiðslur	0	51	8.312	11.162	-1.604
Projekteringsútr. Ext	1.050	129	100	-545	547
Eftirlit og byggileiðsla v.m. Ext	0	0	225	292	0
Verkætlanarleiðsla	87	132	282	292	110
Útgerð og tól	0	0	0	800	0
Málásettar útreiðslur	3	15	35	65	80
Eyka og Meir/minni veiting	0	0	0	-782	810
Tilsamans	**1.140**	**327**	**8.954**	**11.284**	**-57**

Sambært roknskapinum hevur samlaða nýtslan higartil verið góðar 21 mió.kr. Í juli 2016 hevur Landsverk greitt frá, at verkætlanin er ikki endaliga gjørd upp enn, og at Landsverk er í samráð við Almannamálaráðið um endauppgerð.

Høvuðsarbeiðstøka

Byggifyritøka hevur gjørt høvuðsarbeiðstøkuna fyri 13.285 t.kr. sambært arbeiðstakarasáttmála. Tilboðið frá februar 2013 var 14.740 t.kr. Síðani eru projektsparingar gjørdar fyri 1.455 t.kr. Sambært fylgiskjali til sáttmálan, er møguleiki at taka gjørdar sparingar í sáttmálanum innaftur sum meirveiting, vísandi til tilboð arbeiðstakarans.

Sambært heimasíðuni hjá Landsverk var sáttmálin galdandi fyri bygningar nr. 1-4, meðan serstakur sáttmáli varð gjørdur fyri bygning 5, eftir at arbeiðið varð byrjað. Spurd, um bygningur 5 var við í útbjóðingini, hevur Landsverk svarað, at *"Bygningur 5 var ikki upprunaliga við, men allar nøgdir eru við í nøgdarlistanum. Sostatt hevur prísurin verið útsettur fyri kapping."*

Í juli 2013 hevur Landsverk gjørt arbeiðstakarasáttmála við byggifyritøkuna um bygning 5. Kostnaðurin var 2.769 t.kr.

Í fíggjarstøðuni 2014 hevur Landsverk avsett 3.888 t.kr. sum skuld til høvuðsarbeiðstakaran fyri rokningar, sum Landsverk ikki vildi gjalda uttan nærri samráðingar.

Roknskapurin 2015 vísir -57.273 kr. Handverkaraútreiðslurnar eru negativar við 1,6 mió.kr., harav 0,8 mió.kr. eru skrásettar sum útreiðslur og 2,4 mió.kr. sum inntøkur (kreditnotur) til høvuðsarbeiðstakaran. Dagbøtur á 806 t.kr. eru inntøkuførdar í 2014, og upphæddin er útreiðsluførd í 2015 sum "eyka og meir/minniveiting".

Endalig uppgerð ikki gjørd fyri byggingina.

Í juli 2016 hevur Landsverk boðað frá, at talan er um reguleringar, í sambandi við at tey arbeiða við einari endaligari uppgerð.

Projektering, fakeftirlit o.a.

Avtala um heildarprojektering av Sambýlinum er gjørd í 2011 fyri fastan prís 1.250 t.kr. Tilsamans hevur Landsverk rindað 1.300 t.kr, harav 50 t.kr. fyri eyka ráðgeving vegna eykaarbeiði. Í roknskapinum 2014 inntøkuførdi Landsverk 545 t.kr. sum "endurgjald fyri ráðgeving". Landsverk hevur kunnað um, at kravið varð slept, og upphæddin tí inntøkuførd í 2015.

Avtala um 300 t.kr. fyri fakeftirlit endaði við at kosta 506 t.kr.

Landsverk gjørdi avtalu við fyritøku um fakeftirlit fyri 300 t.kr. Við tveimum ískoytisavtalum varð samlaði kostnaðurin góðar 506 t.kr. Sambært Landsverki hækkaði kostnaðurin, tí verkætlanin varð longd og bleiv størri í vavi.

Sambært Landsverki eru keyp av køki, innbúgvi og gardinum boðin út ímillum fleiri.

Endalig uppgerð

Í juli 2016 hevur Landsverk kunnað um, at endaliga uppgerðin fyri kostnaðin av byggingini í mun til verklagslóg, mettan kostnað og tilboð er ikki gjørd enn.

3.14 Tinglýsingargjald (LG 2014/220-0522)

Ongar reglur fyri virðismeting.

Í seinastu frágreiðing umrøddu vit grannskoðan av tinglýsingargjøldum. Tinglýsingargjaldið var 1.000 kr. + 0,5 prosent av keypsprísi av fastari ogn og av veðtryggjaðu upphæddini, tá ið rættarveð verður tinglýst. Umhvørvisstovan hevði ikki ásett reglur fyri meting av virðinum av ognum, ið skuldu tinglýsast. Tað hevur týdning, tá ið talan er um gávur ella arv, ið skulu tinglýsast.

Í juli 2015 boðaði Fiskimálaráðið frá, at ráðið ætlaði at fáa greiði á, hvussu føst skipan kundi setast í verk fyri at meta um ogn, ið ikki verður seld á fría marknaðinum.

Landsstýrismaðurin í heilsu- og innlendismálum hevur í august 2016 greitt frá, at enn er ongin føst skipan sett í verk at meta um ogn, ið ikki verður seld á fría marknaðinum.

Tinglýsingargjaldið bleiv 1. januar 2016 hækkað frá 0,5% til 1% av keypsprísinum av føstu ognini og veðtryggjaðu upphæddini, tá ið rættarveð verða tinglýst.

Kunningartøkni

Landsgrannskoðanin helt tað ikki vera nøktandi, at bert ein persónur kendi til og serviseraði kassaskipanina. Vit mæltu Umhvørvisstovuni til at umhugsa tiltøk, sum kundu minka um vandan, av at vera bundin at einstøkum persóni. Eisini mæltu vit til at gera formligar mannagongdir, um hvussu farast skal fram, tá ið skipanin ikki virkar í styttri ella longri tíðarskeið.

Í juli 2015 kunnaði Fiskimálaráðið um, at ráðið visti, um ávísar trupulleikar við KT-skipanum hjá Umhvørvisstovuni. Fiskimálaráðið vónaði, at verkætlanin Talgildu Føroyar fór at varpa ljós á, hvat best var at gera. Sambært ráðnum var neyðugt at tillaga og endurskoða mannagongdirnar viðvíkjandi KT-skipanunum.

Í august 2016 hevur landsstýrismaðurin í heilsu- og innlendismálum greitt frá, at viðvíðkjandi kunningartøkni hevur Umhvørvisstovan víst á verkætlanina Talgildu Føroyar, har tinglýsingin er týðandi og raðfestur partur. Í tí sambandi verður hugt eftir einari samlaðari loysn, sum eisini fevnir um kassaskipanina, ið handfer tinglýsingar-skipanina.

3.15 Tvørgangandi lønargrannskoðan (LG 2015/511-0000)

Í 2013 gjørdi Landsgrannskoðanin eina tvørgangandi grannskoðan av almennum lønum. Niðurstøðan var, at flestu stovnar nýta tíðarskráseting, har starvsfólk skráseta, nær tey koma og fara, feriu, sjúku o.a. Flestu stovnar hava eisini ásetingar um flextíð, men í fleiri førum hildu stovnarnir ikki egnar reglur um flextíð. Á onkrum stovnum áttu fleiri starvsfólk ímillum 80 og 300 tímar tilgóðar, og nøkur skyldaðu ímillum 50 og 400 tímar.

Landsgrannskoðanin vísti á, at sambært býtinum av málsøkjum er tað Fíggjarmálaráðið, sum skal syrgja fyri, at sáttmálar, avtalur o.a. í almenna geiranum verða hildin. Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum segði, at trupulleikin var ov stórur til at vera óloystur, og at Fíggjarmálaráðið fór at taka stig til at bøta um trupulleikan.

Viðmerkingar frá Fíggjarmálaráðnum í 2016

Síðani lønargrannskoðanina í 2013, hevur Fíggjarmálaráðið viðgjørt spurningin um skrásetingar av arbeiðstíð. Í hesum sambandi hevur Fíggjarmálaráðið kannað, hvørjar tíðarskrásetingar verða brúktar, bæði hjá tí privata og tí almenna.

Í januar 2016 hevur Fíggjarmálaráðið greitt frá, at samlaða niðurstøðan hjá ráðnum er, at tað er leiðslan á arbeiðsplássinum, sum skal kunna skjalprógva, at lønarútgjaldingarnar eru rættar, og leiðslan eigur eisini at kunna vísa, hvat er avrikað í mun til brúkta tilfeingið. Harafturímóti ber ikki til at koma við einum eintýddum tilmæli til leiðslurnar hjá landinum um, hvussu tað skal gerast.

Tíðarskrásetingar at tryggja rættar lønarútreiðslur

Fíggjarmálaráðið heldur, at so ógvuslig frávik eiga ikki at koma fyri. Ráðið vísir á, at tað er viðkomandi leiðsla, sum hevur ábyrgdina av at fáa viðurskiftini í rættlag. Tað er ein týðandi leiðsluábyrgd at halda skil á lønarútreiðslunum, eins og á øllum øðrum útreiðslum.

Fíggjarmálaráðið vísir í hesum sambandi til § 5, stk. 3, í K. nr. 22/2007 “um roknskaparverk landsins o.t.”, har ásett er, at stovnsleiðarin skal skipa fyri, at hóskandi tíðarskráseting er á stovninum, so lønarútgjaldingarnar eru rættar.

Stovnar skulu hava hóskandi tíðarskrá-seting, sum kunnu sanna, at lønirnar eru rættar.

Eisini vísir ráðið til punkt 3.2 í rundskrivi frá Fíggjarmálaráðnum frá 1. februar 2001 um roknskaparreglugerðir, har m.a. er ásett, at í roknskaparreglugerðini skulu tey einstøku ábyrgdarøkini verða greinað sundur, so til ber at síggja, hvør kann gera

fíggjarliga bindandi avtalur, so sum at góðkenna, at lønarútgjaldingarnar eru rættar í mun til, hvat ið gjørt er, og nær arbeitt er, frítíð, sjúku, avspáking og møguligar lønarfrádráttir. Tað skal verða skipað við hóskandi tíðarskráseting.

Fíggjarmálaráðið heldur, at tað sostatt er rættiliga greitt, at tað er ein leiðsluábyrgd at skjalprógva, at tíðarnýtsla og lønarútgjaldingar samsvara, men ongar greiðar ásetingar eru um, hvussu tað skal gerast.

Tíðarskrásetingar at lýsa tilfeingisnýtslu

Í § 7, stk. 6, í roknskaparkunngerðini er ásett, at fyri at lýsa virksemið á stovninum, m.a. at stuðla undir stýringsmeginreglurnar sambært § 7, stk. 1, skulu verða skrásettar hóskandi nøgdarupplýsingar, sum fevna um tað, stovnurin avrikar, og um tilfeingisnýtslu (t.d. tíðarnýtslu hjá starvsfólkum).

Tíðarskráseting at lýsa tilfeingisnýtslu er ikki eitt krav.

Fíggjarmálaráðið vísir á, at tíðarskrásetingar á uppgávur ella hvat arbeiðstíðin er brúkt til, kunnu vera eitt av amboðunum hjá leiðsluni at síggja, hvat er avrikað, men tíðarskráseting á uppgávur er ikki krav fyri, at lønarútgjaldingarnar skulu vera rættar.

Fíggjarmálaráðið hevur kannað spurningin um skráseting av arbeiðstíð á uppgávur. Kanningin vísti, at næstan bara starvsfólk í privatu vinnuni ítøkiliga skráseta, hvat arbeiðstíðin verður brúkt til, og tað er tí, tey skriva rokningar til kundar.

Fíggjarmálaráðið vísir á, at tað er ein leiðsluuppgáva at hava skil á, hvørjum uppgávum starvsfólkini arbeiða við. Um tíðarskrásetingar á uppgávur verða settar í verk, eiga starvsfólkini greitt at fáa at vita, hvat skrásetingarnar skulu brúkast til. Um skrásetingarnar ikki skulu brúkast til nakað, so eiga tær ikki at verða settar í verk, tí í flestu førum finnast onnur hagtøl og skrásetingar, ið kunnu lýsa tilfeingisnýtslu og avrik.

4 Fiskivinnumál

4.1 MRCC og Tórshavn Radio (LG 2015/205-0311)

Bygnaðarligar broytingar vórðu gjørdar í 2012, sum bóru í sær, at MRCC og Tórshavn Radio gjørdust partur av samlaða stovninum Vørn. Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað MRCC og Tórshavn Radio fyri m.a. at kanna, um roknskapurin er rættur, herundir eisini um innanhýsis mannagongdir eru tryggar.

MRCC og Tórshavn Radio eru ISO 9001 góðkend. Talan er um eina skipaða góðsku-stýring av mannagongdum og virkisgongdum.

Mál- og avrikssáttmáli varð gjørdur og sendur aðalráðnum í 2012, men onki svar kom aftur frá ráðnum, og datt arbeiðið niðurfyri. Mál- og avrik eru tó sett í góðsku- og trygdarskipanina. Landsgrannskoðanin mælti til, at stovnurin tekur spurningin um mál- og avrikssáttmálan upp við aðalráðið.

Í august 2016 hevur Fiskimálaráðið greitt frá, at ráðið hevur undanfarin ár gjørt fleiri avrikssáttmálar við undirliggjandi stovnar. Leiðslan í Fiskimálaráðnum hevur umrøtt innanhýsis, hvørt skipanin við avrikssáttmálum skal endurskoðast og broytast. Fiskimálaráðið heldur tað er ivasamt, um tað er rætt at halda fram við júst hesi skipan. Ráðið ætlar at umrøða við Vørn, hvussu best møgulig tænasta fæst fyri tillutaða játtan.

Fiskimálráðið ivast í, um tað er rætt at gera avrikssáttmála eftir verandi skipan.

Sambært Fiskimálaráðnum samskiftir landsstýrið í løtuni um, hvussu skipanin við avrikssáttmálum skal vera.

Roknskaparviðurskifti o.a.

Vørn hevur ikki roknskaparreglugerð, sum er góðkend av aðalráðnum. Roknskapar-mannagongdir eru ásettar í ISO-certifiseringini hjá stovninum.

Roknskaparreglu-gerðin ikki góðkend.

Roknskaparreglurnar vórðu sendar Fiskimálaráðnum at góðkenna í apríl 2016. Sambært Fiskimálaráðnum verða tær í løtuni viðgjørdar og verða væntandi góðkendar í heyst (2016).

Vørn hevur ikki dagført ognaryvirlit, men hevur eitt yvirlit yvir tekniska útgerð frá juli 2012. Leiðslan hevur ætlanir um at gera eitt samlað ognaryvirlit.

Stovnurin hevur tveir bilar, sum verða nýttir, tá fólk hava tilkallivakt. Starvsfólkini føra logbók fyri nýtsluna av bilunum.

Leigumál

Stovnurin leigar hølir frá Føroya Tele ymiskar staðir í landinum til útgerð. Eisini rindar stovnurin fyri leigu av linjum. Farið er undir at nútímansgera støðirnar, og avtala er gjørd við fyritøku um at gera ritbúnað og útgerð til 9 støðir.

Stovnurin leigaði høli á Sornfelli frá Arktisk kommando. Leigukostnaðurin var tá góðar 18 t.kr. um árið. Eftirsíðan hevur Føroya Landsstýri yvirtikið støðina á Sornfelli, sum Landsverk nú umsitur. Eftir yvirtøkuna er leigukostnaðurin hækkaður upp í 47 t.kr. um árið, harav 24 t.kr. fyri el-nýtslu og 5 t.kr. fyri trygdarskipan/húsavørð. Leiðslan heldur at kostnaðurin er ov høgur og samskiftir við Landsverk um hann, men tey eru ikki komin á mál.

Stovnurin hevur journalskipan, men arbeiðir við at fáa felags journalskipan við Fiskiveiðieftirlitið. Mannagongdir um inngangandi post eru í góðsku- og trygdarskipanini.

Lønir og starvsfólkaviðurskifti
Starvsfólkini á MRCC og Tórshavn Radio arbeiða í tveimum ymiskum vaktarskipanum, men leiðslan ætlar at leggja vaktarskipanirnar saman.

Starvsfólkini hjá MRCC eru tænastumenn og verða lønt sambært avtaluni við Tænastumannafelagið, meðan starvsfólkini á Tórshavn Radio verða lønt sambært sáttmála við Starvsmannafelagið. Tá ið tað ikki longur er ein serskild útbúgving fyri telegrafistar, roknar stovnurin við, at framyvir verða skipsførarar settir, hóast tað ikki er eitt krav. Kravið er, at starvsfólk skal hava royndir í navigatión. Til samanberingar nevndi stjórin, at aðrastaðni verða t.d. flogskiparar settir i starv og upplærdir.

Við støði í lønarútgjaldingunum í november 2015 hevur Landsgrannskoðanin kannað fýra lønarútgjaldingar. Vit samanhildu setanarskriv, prógv, tíðarskrásetingar o.a. við galdandi lønarsáttmálar. Vit høvdu onki at finnast at.

Upplýsingar og KT-viðurskifti
Eitt grannskoðanarvirki hevur í 2014 gjørt váðameting fyri samanlagda stovnin Vørn.

Vørn hevur trygdarpolitikk, sum byggir á ISO 9001 góðkenning. Í "Váðameting av KT-nýtslu" hevur grannskoðanarvirkið gjøgnumgingið trygdarpolitikkin og hevur gjørt viðmerkingar til fleiri viðurskifti.

Stovnurin hevur servarar á tveimum ymiskum støðum til tess at tryggja, at um annar steðgar, so eru allar dátur tøkar á hinum servaranum.

Persónsupplýsingar
Allar samrøður verða skrásettar í dagbókum, sum finnast á einari access-skipan. Skipanin virkar eisini sum uppslagsverk, tá ið upplýsingar skulu finnast fram t.d. í sambandi við neyðstøður. MRCC og Tórshavn Radio hava hvør sína dagbók og síggja dagbøkurnar hjá hvørjum øðrum.

Allar samrøður, sum fara um MRCC, verða bandaðar á ljóðfílum, ið verða goymdir í ambætarum á tveimum støðum: hjá Fiskiveiðieftirlitinum og hjá MRCC. Bandaðu samrøðurnar verða goymdar í ein mánað uttan so, at biðið verður um, at tilfarið verður goymt í longri tíð, t.d. til sjóforhoyr.

Trygdartiltøk
MRCC hevur elektroniska lásaskipan. Bert starvsfólk, sum ganga vakt, hava atgongd til sjálvt vaktarrúmið. Øll atgongd verður skrásett í logg.

Tólini, sum røkja sambandi við umheimin, standa í kjallaranum. Tekniski leiðarin hevur ábyrgd av teimum, men umvælingar o.a. verða gjørdar av danska veitaranum og av føroyskari fyritøku, sum stovnurin hevur skrivligan samstarvssáttmála við.

Samstarvssáttmáli við veitara ikki dagførdur síðani 2006.

Stovnurin hevur samstarvssáttmála við uttanhýsis veitara um tænastuveitingar. Sáttmálin varð gjørdur í 2006 og er ikki endurnýggjaður síðani. Í váðametingini um

KT-nýtslu, vísir grannskoðanarvirkið á, at sáttmálin, eftir teirra áskoðan, ikki er nóg fullfíggjaður, hvat trygd viðvíkur.

Landsgrannskoðanin mælti leiðsluni til at taka stig til at dagføra samstarvssáttmálan við uttanhýsis veitaran.

Í august 2016 hevur Fiskimálaráðið boðað frá, at ráðið er varugt við vandarnar við manglandi KT-trygd. Fiskimálaráðið vísir á, at KT landsins hevur bestu førleikarnar at meta um váðarnar í sambandi við dáturnar hjá Vørn, og ætlar Fiskimálaráðið at fáa KT landsins og Vørn at seta seg saman at finna fram til, hvussu Vørn best kann skipa sínar dátur.

4.2 Búnaðarstovan (LG 2014/205-0332)

Í seinastu frágreiðing umrøddu vit grannskoðan av Búnaðarstovuni og játtanini "Stuðul til stráfóður".

KT-trygd

Búnaðarstovan hevur avtalu við KT landsins og er fevnd av teirra reglum um kunningartøkni. Í 2012 gjørdi stovnurin ávegis váðameting, sum fevndi um journalskipan, skjala- og ílegugoymslur, umframt maskinur, amboð og bygningar. Stovnurin hevði ikki serligar reglur um trygdarpolitikk. Landsgrannskoðanin mælti til at gera skrivligar reglur um trygdarpolitikk.

Í august 2016 hevur Fiskimálaráðið kunnað um, at øll starvsfólk á Búnaðarstovuni hava verið á skeiði í KT-trygd, fyriskipað av KT landsins. "Leiðreglur fyri brúkarar" og "Brúkaraváttan um KT-trygdarpolitikk" verða settar í verk.

Roknskaparviðurskifti

Landsgrannskoðanin vísti á, at skjølini í sambandi við sølu umvegis kassan luku ikki vanlig bókhaldskrøv. Vit mæltu til persónsskilnað millum bókhald og kassa, at avgreiða rokningar umvegis Gjaldstovuna og at flyta inntøkurnar av sølu beinleiðis í landskassan.

Skilnaður ímillum bókhald og kassa er sett í verk.

Í august 2016 hevur Fiskimálaráðið kunnað um, at Búnaðarstovan í 2016 hevur tikið í nýtslu kassatól og gjaldkortterminal, ið lúka ásetingarnar hjá Gjaldstovuni og TAKS. Fiskimálaráðið vísir eisini á, at virksemið hjá Búnaðarstovuni er soleiðis háttað, at tørvur er at avgreiða viðskiftafólk, ið rinda við reiðum peningi. Kassin verður gjørdur upp og avroknaður við Gjaldstovuna hvønn mánað. Í 2016 er persónsskilnaður settur í verk millum bókhald og kassa. Aðrar inntøkur verða avgreiddar umvegis bókhalds-skipanina hjá Gjaldstovuni.

Stuðulsverkætlanir

Landsgrannskoðanin mælti til, at formligt loyvi varð útvegað til virksemið, ið varð fíggjað av øðrum, og at tað varð sett á sjálvstøðuga undirkontu í landsroknskapinum soleiðis, at tað sást í sundurgreiningini í fíggjarlógini og í landsroknskapinum, hvussu virksemið hjá stovninum er sett saman.

Fiskimálaráðið vísir á, at við eykajáttanarlógini apríl 2016 hevur Búnaðarstovan fingið heimild til inntøkufíggjað virksemi. Verkætlanir við uttanhýsis fígging (heilt ella lutvís) verða hereftir skrásettar á hesum rakstrarstaðnum.

Bygningar

Í 2013 vórðu 5,1 mió.kr. av innistandandi hjá Búnaðargrunninum markaðar til Búnaðarstovuna til ábøtur á bygningarnar í Kollafirði.

Í juli 2015 kunnaði landsstýrismaðurin um, at enn var ikki greitt, hvat skuldi gerast við bygningarnar, og tí var peningurin ikki nýttur.

Ikki komið á mál við ábótum á bygningar.

Í august 2016 hevur Fiskimálaráðið greitt frá, at nýggja leiðslan á Búnaðarstovuni er ikki komin á mál við at gera menningarætlan fyri stovnin, har ábøtur á bygningarnar fara at vera natúrligir partar. Tí er avgjørt neyðugt, at stovnurin framhaldandi hevur hesa fígging tøka til endamálið.

4.3 Umhvørvisstovan (LG 2015/206-0374)

Í ársfrágreiðingini 2012 umrøddu vit grannskoðan á Umhvørvisstovuni og høvdu nøkur tilmæli.

Í 2013 greiddi landsstýrismaðurin í innlendismálum frá, at Innlendismálaráðið arbeiddi saman við Umhvørvisstovuni at gera uppskot til kunngerð um fólkaskráseting o.a. Ætlanin var, at kunngerðin skuldi vera liðug í juli 2014.

Í § 2 í lógini um fólkayvirlit stendur í pkt. 2: “Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um leiklutin hjá kommunustýrunum at halda Landsfólkayvirlitið við líka.”

Í august 2016 hevur landsstýrismaðurin vísst á at, tá ið lógin um fólkayvirlit varð sett í gildi, bar ikki til tøkniliga at lúka øll krøvini í nýggju lógini orsakað av tøkniligu avmarkingunum í gomlu landsfólkayvirlitsskránni. Nú nýggj talgild landsfólkayvirlitsskrá er ment og tikin í nýtslu, ber til at seta írestandi ásetingarnar í lógini í verk. Heimildin í § 55, stk. 4, verður væntandi brúkt til endamálið.

Sambært landsstýrismanninum hevur málið ligið stilt og verður tikið uppaftur til viðgerðar.

4.4 Avgjald av fiskatilfeingi (LG 2014/220-0522)

Landsgrannskoðanin kannaði í 2015 reglurnar fyri innkrevjing av avgjaldinum á fiskatilfeingi, roknskaparviðurskiftini og eftirstøður v.m., sum Vørn umsitur.

Avgjøldini verða á hvørjum ári ásett sambært lóg. Kilogjald varð fyri norðhavssild og makrel, mált í rundari vekt, undantikið hjá eigarum av fiskiførum á føroysku landleiðunum, sambært § 28, stk. 1, í Ll. nr. 28/1994 “um vinnuligan fiskiskap”.

Renturokning

Í lógunum um avgjøld av fiskatilfeingi er ásett, at renta skal roknast av ov seint goldnum upphæddum.

Vørn roknaði ikki rentu og helt seg ikki hava ábyrgd av tí, men vísti til, at tað var Gjaldstovan, ið skuldi rokna rentuna.

Landsgrannskoðanin helt tað ikki vera nøktandi, at lógarásettar reglur um renturokning ikki vórðu fylgdar, og mælti leiðsluni til at finna eina loysn, soleiðis at kravið um renturokning varð fylgt.

Í november 2015 vísti Fiskimálaráðið á, at “sambært lógini skal tann, sum krevur inn rokna rentu av eftirstøðuni. Sambært avtalu millum Vørn og TAKS er tað TAKS, sum skal krevja inn eftirstøðurnar. Fiskimálaráðið hevur onga orsøk til at halda, at TAKS ikki heldur lógina.”

Sambært Fiskimálaráðnum sendi Vørn krøvini til TAKS til innheintingar í teirri trúgv, at krøvini (íroknað rentur og kostnaðir annars) vórðu kravd inn eftir galdandi reglum. Tá ið tað stendur í lógini, at TAKS skal heinta rentur inn, og TAKS ikki hevði heitt á Vørn um at heinta inn, mátti tað skiljast sum, at TAKS hevði aksepterað at áseta renturnar og eftirfylgjandi at heinta tær inn. Hendan akseptin kundi skiljast sum ein avtala.

Landsgrannskoðanin staðfesti, at § 7, stk. 4, í Ll. nr. 154/2013[16] ásetir, at renta skuldi roknast við 1% fyri hvønn byrjaðan mánað eftir at gjaldsfreistin á 10 dagar var farin. Vørn hevði ikki roknað rentu av teimum krøvum, ið vóru goldin ov seint, men ikki send TAKS til innheintingar. TAKS hevði heldur ikki roknað rentu av krøvunum, ið TAKS hevði kravt inn. Rentan av krøvunum, ið TAKS heintaði inn í 2014 átti at verið góðar 160 t.kr.

Í uppskoti til samtyktar í februar 2016 – Lm. nr. 61/2015 – vístu løgtingsgrannskoðararnir á, at *tað er Vørn, sum sendir rokningar út, og tað er TAKS, sum kann panta. Um goldið verður ov seint, áleggur lógin renturokning, men ongin heldur seg hava hesa uppgávu, og tí missir landið pening. Løgtingsgrannskoðararnir halda tað als ikki vera nøktandi, at lógarásettu reglurnar um renturokning ikki verða fylgdar.*

Vørn roknar nú rentu.

Í august 2016 hevur Fiskimálararáðið boðað frá, at Vørn hevur kunnað ráðið um, at renta nú verður roknað sambært galdandi reglum, og at skipanirnar hjá Vørn og Gjaldstovuni eru tillagaðar soleiðis, at rentan verður roknað sjálvvirkandi.

[16] Fyri 2013 var ásetingin í § 5, stk. 4, í Ll. nr. 73/2012.

5 Vinnumál

5.1 Kunngerðir o.a. til vinnufelagalógina (LG 2014/206-0111)

Í seinastu frágreiðing umrøddu vit nýggju vinnufelagalógina, Ll. nr. 73/2011 “um parta- og smápartafeløg”, sum kom í gildi 1. januar 2012. Nýggja lógin tók av gomlu lógirnar um parta- og smápartafeløg, anordning nr. 1356/2007 og nr. 1111/2007.

Í nýggju vinnufelagalógini fekk landsstýrismaðurin fleiri heimildir at áseta nærri reglur, herundir serligu reglurnar fyri landspartafeløg í vinnufelagalógini og ársroknskaparlógini. Landspartafelag er sambært § 5, nr. 26, í lógini eitt partafelag, har landið hevur sama tilknýti, sum móðurfelag hevur til dótturfelag.

Við nýggju lógini vóru kunngerðir, fyriskipanir, loyvir, góðkenningar v.m. sambært gomlu lógini framvegis galdandi, til tær vórðu broyttar, afturkallaðar, fóru úr gildi ella vórðu strikaðar eftir ásetingunum í nýggju lógini. Gomlu kunngerðirnar eru frá 2007 og 2009, og eru allar enn í gildi.

Í desember 2014 segði Vinnumálaráðið seg leggja seinastu hond á kunngerðirnar. Ætlanin var, at tær skuldu koma í gildi stutt eftir ársskiftið 2014/15, men tann ætlanin helt ikki.

Kunngerðir eru ávegis.

Í juni 2016 hevur Uttanríkis- og vinnumálaráðið kunnað um, at Skráseting Føroya eftir summarfrítíðina ætlar at senda hesar kunngerðir til hoyringar:

- kunngerð um lán til útlendsk móðurfeløg,
- kunngerð um treytir hjá kapitalfeløgum í sambandi við skráseting av umbýtiligum skuldarbrøvum í einari virðisbrævamiðstøð, og
- kunngerð um útloysingarskyldu.

Seinni í heyst er ætlanin at senda til hoyringar:

- kunngerð um fráboðan, skráseting, avgreiðslugjald og almannakunngering v.m. hjá Skráseting Føroya (Fráboðanarkunngerðin),
- kunngerð um fráboðan um týðandi kapitalpostar, og
- kunngerð um starvsfólkaumboð í parta- og smápartafeløgum.

K. nr. 86/2009 “um gjøld fyri útflýggjan av upplýsingum og skjølum frá Skráseting Føroya” og K. nr. 87/2009 “um gjøld til Skráseting Føroya fyri parta- og smápartafeløg” verða endurskoðaðar og gjørdar av nýggjum.

Uppskot til eigarapolitikk landsins er sent til hoyringar.

Í juni 2016 hevur Uttanríkis- og vinnumálaráðið eisini kunnað um, at embætisbólkurin, sum hevur arbeitt við eigarapolitikki landsins, hevur sent til hoyringar uppskot um eigarapolitikk landsins og uppskot um landspartafeløg. Í uppskotinum um landspartafeløg eru uppskot til fýra kunngerðir:

- uppskot til kunngerð um at seta ásetingar um landspartafeløg í vinnufelagalógini og ársroknskaparlógini í gildi,

- uppskot til kunngerð um almannakunngering av fráboðanum frá landsparta-feløgum,
- uppskot til kunngerð um broyting í innlatingarkunngerðini, og
- uppskot til kunngerð um frágreiðing um virkisleiðslu og frágreiðing um samfelagsábyrgd á heimasíðu felagsins.

Í álitinum til Lm. nr. 42/2010 mælti Vinnunevndin til, at ein føroysk vegleiðing varð gjørd til lógina. Nevndin helt tað vera umráðandi at gera eina greiða vegleiðing til eina so týðandi lóggávu, sum ávirkar øll parta- og smápartafeløg, soleiðis at lætt og ómaksleyst var hjá øllum at skilja galdandi reglur. Vinnunevndin helt, at ein vegleiðing hevði lætt um hjá komandi íverksetarum.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið kunnaði í 2015 um, at fyrimyndin til nýggju lógina var danska selskabsloven. Erhvervsstyrelsen hevði gjørt 32 ymiskar vegleiðingar til donsku lógina; harav nakrar heilt drúgvar. Ráðið hevur tikið upp spurningin við Skráseting Føroya um at gera vegleiðingar til vinnufelagalógina.

5.2 Sjóvinnustýrið (LG 2015/206-0351)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað roknskaparviðurskiftini á Sjóvinnustýrinum. Sjóvinnustýrið umsitur m.a. Ll. nr. 165/2001 “um trygd á sjónum”. Í lógini er tilskilað, at landsstýrismaðurin kann leggja tær heimildir, hann sjálvur hevur sambært lógini, til Sjóvinnustýrið at fyrisita.

Játtanin til Sjóvinnustýrið er á høvuðskontu 6.35.1.08. Undir høvuðskontuni eru undirkonta 20, Skipaskrásetingin og undirkonta 21, Skipaeftirlitið. Í 2015 er netto-útreiðslujáttan 8.600 t.kr., 13.440 t.kr. til útreiðslur og 4.840 t.kr. til inntøkur.

Avrikssáttmáli við Vinnumálaráðið fyri 2015 var undirskrivaður í januar 2015. Sambært Sjóvinnustýrinum hevur sáttmálin verið regluliga viðgjørdur á fundum við aðalráðið gjøgnum árið.

Roknskaparviðurskifti

Landsgrannskoðanin mælti til at greina lønarumsitingina.

Sjóvinnustýrið hevur eina roknskaparreglugerð, sum fevnir um Skipaskrásetingina og Skipaeftirlitið. Landsgrannskoðanin mælti til at greina lønarumsitingina nærri í reglugerðini, so til ber at síggja, hvør kann gera og góðkenna fíggjarliga bindandi avtalur.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið tekur undir við, at tað verður formaliserað, hvør hevur heimild at seta og loysa fólk úr starvi, og hvør hevur heimild til at játta yvirtímar. Ráðið hevur í august 2016 kunnað um, at Sjóvinnustýrið fer at taka hesi viðurskifti við í roknskaparreglugerðina, tá ið hon verður endurskoðað.

Sjóvinnustýrið hevur ikki ognaryvirlit.

Sjóvinnustýrið hevur ikki ognaryvirlit. Sambært landsstýrismanninum fer stovnurin í næstum undir at skráseta ognirnar.

Útreiðslur

Lønir

Sjóvinnustýrið brúkar tíðarskrásetingina TotalView; starvsfólkini skráseta nær tey koma og fara, fráveru og feriu. Landsgrannskoðanin mælti til, at mørkini fyri flexsaldur verða ásett í innanhýsis reglunum. Sjóvinnustýrið hevur boðað frá, at tey fara at verða sett í Dygdarhondbókina.

Við støði í lønarútgjaldingunum fyri januar 2015 hevur Landsgrannskoðanin kannað nakrar lønarútgjaldingar. Útgoldnu lønirnar samsvara við setanarskrivini og lønarsáttmálar.

Ferðaútreiðslur
Landsgrannskoðanin kannaði tríggjar ferðauppgerðir. Sjóvinnustýrið hevur greitt frá orsøkini til, at tað í sambandi við ta einu ferðina var neyðugt at fara upp um ásettu upphæddina fyri gisting. Landsgrannskoðanin hevur ikki aðrar viðmerkingar.

Húsaleiga
Sjóvinnustýrið hevur framleigað hølir frá Fjarskiftiseftirlitinum til virksemið hjá Skipaskrásetingini og FAS, fyri 115 t.kr. um árið. Stovnurin leigar hølir í Miðvági til virksemið hjá Skipaeftirlitinum, fyri 494 t.kr. um árið. Rindaðu upphæddirnar samsvaraðu við avtalaðu leiguprísirnar.

Í august 2016 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at umsitingin hjá Sjóvinnustýrinum í Tórshavn nú er flutt í onnur hølir. Í Vágunum er umsitingin fyribils flutt í onnur hølir orsakað av soppi, sum helst stavar frá lekum og sum heild vantandi viðlíkahaldi.

Danskur momsur
Landsgrannskoðanin kannaði nøkur keyp, m.a. um keypið er veruligt, viðvíkir stovninum, er rætt konterað og váttað av persóni við heimild. Einasta viðmerkingin var, at útlendskt MVG eigur ikki at verða drigið frá. Sambært Sjóvinnustýrinum er drigið frá av misgáum.

Inntøkur
Inntøkurnar verða skrásettar á undirkonturnar "Skipaskrásetingin" og "Skipaeftirlitið". Í roknskaparreglugerðini eru inntøkurnar liðaðar sundur eftir, hvørji gjøldini eru, eftir hvørji heimild tey verða kravd, og hvussu gjøldini skulu skrásetast.

Skipaeftirlitið
Skipaeftirlitið – inntøkur: *t.kr.*

Útgr.	Heiti	2011	2012	2013	2014	2015
	St.kt. 21					
8020	Sigl.b., manningarl. hýruavtform, dagb.	-73	-64	-64	-57	-55
8030	Skipsbløð	-96	-84	-50	-41	-149
8038	Skráseting av søluskjali	0	0	-3	0	0
9000	Onnur vørusøla (handilsv.)	-1	-3	0	-2	-3
0000	Ógreinað	0	0	0	0	-3
	Tilsamans	*-170*	*-151*	*-117*	*-100*	*-210*
	St.kt. 25					
1000	Eftirlit	-14	0	0	-65	-85
300	FAS	-1.723	-2.015	-2.292	-2.060	-2.376
400	Løggilding, vinnubrøv o.tíl.	-389	-346	-431	-438	-936
	Tilsamans	*-2.126*	*-2.361*	*-2.723*	*-2.563*	*-3.397*
	Inntøkur tilsamans	**-2.296**	**-2.512**	**-2.840**	**-2.663**	**-3.607**

Skipaskrásetingin
Skipaskrásetingin – inntøkur: *t.kr.*

Útgr.	Heiti	2011	2012	2013	2014	2015
	St.kt. 21					
8030	Skipsbløð	-20	-17	-36	-14	-15
8031	Skráseting av pantibrævi	-150	-69	-96	-36	-39
8038	Skráseting av søluskjali	-143	-224	-144	-206	-132
8090	Ymsar útskriftir og listar	-1	0	0	-2	-0
9000	Onnur vørusøla (handilsv.)	-2	-9	-1	-4	-1
	Tilsamans	*-316*	*-319*	*-277*	*-262*	*-187*
	St.kt. 25					
100	Ársgjald skrás. av bátum og skipum	0	0	0	0	-745
300	FAS	-913	-1.980	-954	-428	-1.318
310	Tjóðskaparbrøv	-448	-393	-211	-282	-364
	Tilsamans	*-1.361*	*-2.373*	*-1.165*	*-710*	*-2.427*
	Inntøkur tilsamans	**-1.677**	**-2.692**	**-1.442**	**-972**	**-2.614**

Landsgrannskoðanin kannaði nakrar kassauppgerðir, um inntøkurnar eru skrásettar á rætta kontu sambært roknskaparreglugerðini, og um heimild er fyri upphæddunum. Onki var at finnast at.

Peningastovnskontur

Peningastovnskonturnar hjá Sjóvinnustýrinum eru skrásettar í Búskaparskipan landsins. Við stakroyndum kannaðu vit konturnar og høvdu onki at finnast at.

Sjóvinnustýrið hevur gjaldkort, sum er knýtt at einari kontu. Heimild, nýtsla og uppgerð av kortinum er ásett í roknskaparreglugerðini.

KT

Sjóvinnustýrið hevur týdningarmiklar KT-skipanir og dátugrunnar.

Sjóvinnustýrið hevur skipanir og dátugrunnar, sum hava týdning fyri endamál og virksemi stovnsins, aðrar stovnar og samfelagið sum heild, herundir:

- Teyggjan
- Skipaskrásetingin
- Vinnubrævaskipanin
- Journalskipanin
- Læknakanningar eldri enn 2015

Sjóvinnustýrið varð innlimað í Landsnet í oktober 2013 og hevur FAK-SLA sáttmála við Landsnet. Sjóvinnustýrið hevur gjørt váðameting og dátuflokking í samstarvi við Gjaldstovuna gjøgnum trygdarpakkan. Í dygdarhondbókini hjá Sjóvinnustýrinum er endamálið við KT-politikkinum lýst.

5.3 Umsiting av aliloyvum (LG 2015/206-0361)

Í 2016 hevur Landsgrannskoðanin grannskoðað játtanina til umsiting av aliloyvum á høvuðskontu 6.36.1.02.

Roknskapartøl 2011 til 2015:

t.kr.

St.kt.	Heiti	2011	2012	2013	2014	2015
11	Lønir v.m.	334	422	433	432	440
14-17	Keyp, leiga og avskrivingar	12	54	20	10	7
25	Eftirlits- og umsjónaravgjøld	-357	-444	-444	-420	-420
71	Innanh. flyt. millum alm. stovn. (útr)	24	0	0	0	216
76	Innanh. flyt. millum alm. stovn. (innt)	0	0	0	0	-243
	Tilsamans	**13**	**32**	**9**	**22**	**0**

Fyrisitingin av aliloyvum verður fíggjað við gjøldum sambært K. nr. 97/2009 “um gjøld fyri aliloyvi”. Landsstýrismaðurin kann við heimild í kunngerðini geva undantak til gjald, tá ið talan er um ikki-vinnuligt aliloyvi.

Í 2015 vóru inntøkurnar 420 t.kr. Árliga gjaldið fyri aliloyvi er 12 t.kr. Sambært heimild í kunngerðini eru aliloyvini hjá Sílaveiðifelagnum undantikin regluni at rinda.

Í juni 2016 hevur Uttanríkis- og vinnumálaráðið boðað frá, at avgerð, um hvørt gjaldast skal fyri aliloyvi, verður tikin út frá, um loyvið er kommersielt ella ikki. Tað vil siga, at vanliga verður ikki rindað fyri royndarloyvi og heldur ikki fyri loyvi hjá Sílaveiðifelagnum.

Í eigaraavmarkingini eru tilsamans 25 loyvir á sjónum, og í uppgerðini yvir aliloyvi á landi eru 11 aliloyvi. Tað merkir, at í 2016 verða væntandi sendar rokningar fyri 36 loyvi á 12 t.kr. ella tilsamans 432 t.kr.

Vit kannaðu lønarútreiðslur hjá Aliumsitingini og høvdu onki at finnast at.

Árini 2011 til 2014 svaraðu lønarútreiðslurnar stórtsæð til inntøkurnar fyri gjøld, tó at meirnýtsla millum 9 t.kr. og 32 t.kr. hevur verið. Í 2015 vóru útreiðslurnar tó munandi hægri enn inntøkurnar. Tá ið partur av umsitingini av alilógini í 2014 varð fluttur til Heilsufrøðiligu starvsstovuna, skuldi Skrásetingin kanna ræðisviðurskiftini í einum alifelagi sambært § 7, stk. 2, í Ll. nr. 83/2009 "um aling av fiski v.m." Spurningurin um, hvør skuldi rinda fyri kanningina, varð sambært Heilsufrøðiligu starvsstovuni viðgjørdur á fundum í Vinnumálaráðnum. Millum annað var viðgjørt, um kostnaðurin skuldi fíggjast við eykajáttan e.ø.

Heilsufrøðiliga starvsstovan rindaði útreiðslur hjá Aliumsitingini.

Í 2014 rindaði Heilsufrøðiliga starvsstovan Skrásetingini 50 t.kr. fyri kanningina. Í 2015 rindaði stovnurin Aliumsitingini 243 t.kr., fyri at hall ikki skuldi vera.

Kanningararbeiðið hastaði, og tá ið raksturin hjá Heilsufrøðiligu starvsstovuni gekk væl, avgjørdi stjórin at rinda fyri arbeiðið hjá Skrásetingini. Stjórin kunnaði Uttanríkis- og vinnumálaráðið um avgerðina, tá ið hann góðkendi mánaðarroknskapirnar.

Í november 2015 hevur Uttanríkis- og vinnumálaráðið spurt Fíggjarmálaráðið, um Heilsufrøðiliga starvsstovan hevði heimild at gjalda rokningar fyri Aliumsitingina.

Játtanin er útreiðsluneutral rakstrarjáttan.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið hevur í august 2016 greitt frá, at niðurstøðan hjá Fíggjarmálaráðnum er, at játtanin til Aliumsitingina er útteiðsluneutral rakstrarjáttan, sum verður fyrisitin av Heilsufrøðiligu starvsstovuni. Út frá tí heldur Fíggjarmálaráðið, at tað hevur týdning, at Aliumsitingin hevur sjálvstøðugan roknskap og verður fíggjað við gjøldum.

Ivamál eru um, hvør skal gjalda fyri serligar kanningar.

Lagt hevur verið upp til, at alifyritøkur við gjøldum rinda fyri vanligu aliumsitingina. Nú serstøk viðurskifti hava verið kannaði sýnist ikki at hava verið greið fatan av, hvussu hesin eykakostnaður skal fíggjast. Ivamál hava verið, um alifyritøkan skal rindað fult, um alifyritøkurnar skulu rindað í felag, ella um tað liggur uttan fyri vanligu Aliumsitingina, hvørs kostnaður skal berast av Aliumsitingini, ella hann skal berast av Heilsufrøðiligu starvsstovuni.

Í øllum førum heldur Fíggjarmálaráðið, at kostnaðurin eigur at verða tikin við undir Aliumsitingina, tí ynskiligt er at síggja samlaða kostnaðin av virkseminum.

Fíggjarmálaráðið heldur, at tað kann góðtakast, at HS rindar fyri Aliumsitingina í serligum førum.

Av tí, at málsøkið aliumsiting er undir málsræði hjá Heilsufrøðiligu starvsstovuni, heldur Fíggjarmálaráðið, at tað kann góðtakast, at Heilsufrøðiliga starvsstovan bar kostnaðin av kanningini av serstøkum viðurskiftum.

Fíggjarmálaráðið hevur heitt á Uttanríkis- og vinnumálaráðið um at dagføra kunngerðina um gjøld fyri aliloyvi í mun til kostnaðin av kanningum av serstøkum viðurskiftum, og at umhugsa at flyta Aliumsitingina at verða undirkonta til játtanina hjá Heilsufrøðiligu starvsstovuni.

Sambært Uttanríkis- og vinnumálaráðnum hava tey ikki tikið støðu til, hvørt gjøldini skulu hækka ella skipast á annan hátt, men ráðið tekur undir við, at Aliumsitingin verður undirkonta undir høvuðskontuni hjá Heilsufrøðiligu starvsstovuni.

5.4 Brúkaraumboðið (LG 2015/206-0371)

Landsgrannskoðanin hevur í 2016 grannskoðað roknskapin hjá Brúkaraumboðnum. Brúkaraumboðið virkar eftir Ll. nr. 19/2008 "um marknaðarføring". Brúkaraumboðið er óheftur stovnur undir Uttanríkis- og vinnumálaráðnum og hevur eftirlit við, at lóg um marknaðarføring verður hildin.

Endamál stovnsins er lýst í marknaðarføringslógini, í fíggjarlógini og á heimasíðuni. Játtanin er á høvuðskontu 6.37.1.15. Í 2015 var nettoútreiðslujáttanin 1.100 t.kr., 1.230 t.kr. til útreiðslur og 130 t.kr. til inntøkur.

Brúkaraumboðið hevur mál- og avriks-sáttmála við aðalráðið.

Brúkaraumboðið hevði í 2015 avrikssáttmála við Vinnumálaráðið. Í 2016 hevur stovnurin gjørt avrikssáttmála við Uttanríkis- og vinnumálaráðið, ið er skipaður á sama hátt sum sáttmálin fyri 2015. Sáttmálin er ikki undirskrivaður, men sambært teldusamskifti millum partarnar hevði ráðið ongar viðmerkingar til hann.

Roknskaparviðurskifti o.a.

Roknskaparreglu-gerðin verður partur av reglugerðini hjá Vinnustovninum.

Brúkaraumboðið hevði orðað roknskaparreglugerð í 2013. Stovnurin sendi reglugerðina til Uttanríkis- og vinnumálaráðið til góðkenningar í februar 2016, men hon varð ikki góðkend. Avtalað er millum Brúkaraumboðið, Uttanríkis- og vinnumála-ráðið og Vinnustovnin, at Brúkaraumboðið verður partur av roknskaparreglugerðini hjá Vinnustovninum.

Brúkaraumboðið brúkar Búskaparskipan landsins til bókhaldið. Stovnurin hevur ikki egnar búskaparskipanir.

Roknskapartøl frá 2011 til 2015:

t.kr.

St.kt.	Heiti	2011	2012	2013	2014	2015
11	Lønir v.m.	942	871	732	766	781
14-17	Keyp, leiga og avskrivingar	447	381	249	236	373
21	Søla av vørum og tænastum	0	-14	0	0	-63
71	Innanh. flyt. ml. alm. stovn. (útr.)	30	10	61	75	79
76	Innanh. flyt. ml. alm. stovn. (innt.)	-209	-150	-146	-177	-180
	Tilsamans	**1.210**	**1.098**	**896**	**900**	**990**

Brúkaraumboðið váttar mánaðarligu roknskapirnar umvegis Roknskapargóðkenning-arskipanina hjá Gjaldstovuni. Landsgrannskoðanin kannaði við stakroyndum, um mánaðarroknskapirnir verða váttaðir áðrenn evstu freist. Vit høvdu onki at finnast at.

Ognaryvirlit

Brúkaraumboðið hevur yvirlit yvir ognirnar hjá stovninum.

Lønir

Brúkaraumboðið brúkar tíðarskrásetingina TotalView, og starvsfólk skráseta, nær tey koma og fara, fráveru og feriu. Vit mæltu til, at mørkini fyri flexsaldum verða ásett í innanhýsis reglunum.

Við støði í lønarútgjaldingunum fyri september 2015 kannaðu vit umsitingina av tveimum lønum. Útgoldnu lønirnar samsvaraðu við setanarskrivini og lønarsáttmálar.

Ferðaútreiðslur

Landsgrannskoðanin hevur við stakroyndum kannað nakrar ferðauppgerðir. Í einari uppgerð var bland komið í kursirnar, og Brúkaraumboðið hevur tikið stig til at rætta feilin. Í tveimum uppgerðum hevur stovnurin goldið meira enn hægst loyvda takst fyri gisting á hotelli í Danmark. Brúkararumboðið hevur víst á, at stovnurin strembar eftir at halda reglurnar fyri kostnaðin av gisting, men at tað kann verða trupult ávís tíðarskeið at finna kømur undir mest loyvda prísin. Landsgrannskoðanin hevur ikki aðrar viðmerkingar.

Heimasíða

Stovnurin hevur nýggja heimasíðu, sum føroyskur veitari hevur ment. Heimasíðan er gjørd eftir sama leisti sum heimasíðurnar hjá Vinnustovninum.

Arbeiðið at gera heimasíðuna hevur higartil kostað 91 t.kr. v/MVG. Sambært Brúkaraumboðnum er orsøkin til, at arbeiðið ikki varð boðið út, at tað hevði stóran

skund, tí stovnurin var uttan heimasíðu. Vandi var fyri, at tilfarið, ið lá á gomlu heimasíðuni, varð burtur. Brúkaraumboðið ynskti, at heimasíðan skuldi knýtast í skipanina hjá Vinnustovninum og valdi tí sama veitara, sum tey høvdu. Brúkaraumboðið bað veitaran um tilboð, og tilboðið frá honum lá undir markinum á 50 t.kr. u/MVG, sum reglurnar um útboð áseta.

Brúkaraumboðið helt, at tað var ikki neyðugt at bjóða heimasíðuna út.

Brúkaraumboðið heldur, at umframt at upprunaligi kostnaðurin varð mettur at verða undir 50 t.kr., at keypið er fevnt av undantøkunum í reglunum um útboð, bæði undantakinum, um at:

"Rundskrivið er ikki galdandi fyri KT-veitarar, har virðið á sáttmálanum er undir 800 t.kr. u/MVG. Fyri keyp av vanligum KT-útbúnaði er markið tó 50 t.kr. u/MVG – Talan er í hesum føri um KT-veiting, ið verður keypt og ikki talan um vanligan KT-útbúna",

og undantakinum um at:

"Rundskrivið er ikki galdandi fyri viðlíkahald, eftirlit og keyp av eykalutum, har upprunaliga vøran ella tænastan er bundin av ávísum veitara. Heimasíðan hjá Brúkaraumboðnum er ein undirsíða til heimasíðuna hjá Vinnustovninum. Talan er sostatt um eitt eykakeyp til vøru frá sama veitara, sum Vinnustovnurin longu hevur keypt frá og er tí ikki fevnt av reglunum um útboð."

Brúkaraumboðið heldur tí ikki, at talan er um brot á útboðsreglurnar.

Journalskipan

Stovnurin brúkar journalskipanina 360^0 til at skráseta málsviðgerð av klagumálum og til ávís umsitingarlig mál og hevur skrivliga mannagongd fyri journalisering.

KT

Brúkaraumboðið er limað inn í Landsnet og hevur ikki serstakar skipanir til virksemi stovnsins. Stovnurin arbeiðir eftir KT-trygdarpolitikkinum hjá Vinnustovninum[17], uttan tó formliga at verða fevndur av politikkinum. Síðani eftirlitið hevur Brúkaraumboðið avtalað við Vinnustovnin, at stovnurin formliga fer at verða fevndur av trygdarpolitikkinum.

5.5 Rúsdrekkasøla landsins (LG 2015/206-0373)

Seinasta árið hevur Landsgrannskoðanin verið á ófráboðaðum kassa- og goymslueftirlitum á nøkrum deildum hjá Rúsdrekkasølu landsins. Vit stemmaðu dagligu sølurnar av við bókhaldið og peningastovnskonturnar og stemmaðu goymslurnar á sølustøðunum av við goymsluyvirlitið í høvuðsbókhaldinum. Um ársskiftið gjørdu vit eftirlitsteljingar av goymsluni. Onki var at finnast at.

5.6 Strandfaraskip landsins (LG 2015/206-0382)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað Strandfaraskip landsins, fyri m.a. at kanna, um roknskapurin er rættur, og um innanhýsis mannagongdir eru tryggar.

Strandfaraskip landsins verður rikin sambært reglugerð frá 30. august 2015. Virksemið á Oyggjaleiðum er skipað eftir Ll. nr. 82/2001 "um fólka- og farmaflutning".

[17] Trygdarpolitikkur hjá Fjarskiftiseftirlitinum og tilhoyrandi stovnum.

Játtanar- og roknskapartøl

Í 2015 var játtanin til stovnin 133,6 mió.kr. á høvuðskontu 6.38.2.01. “Strandfaraskip landsins”, rakstrarjáttan og 10,7 mió.kr. á høvuðskontu 6.38.2.02. “Strandfaraskip landsins”, løgujáttan.

Strandferðslan helt játtanirnar í 2015, bæði rakstrarjáttanina og løgujáttanina.

Roknskapartøl fyri rakstrarjáttanina seinastu 5 árini:

t.kr.

St.kt.	Heiti	2011	2012	2013	2014[18]	2015
11	Lønir v.m.	65.602	66.380	69.446	70.632	73.395
14-19	Keyp og avskrivingar	132.184	137.983	133.999	134.849	123.916
21	Søla av vørum og tænastum	-57.468	-59.209	-59.754	-59.521	-63.819
31	Bygging og løguframleiðsla	0	0	0	56	0
52	Tilskot til einstaklingar	321	259	282	262	267
67	Rentuinnt. og vinningsbýti	0	0	0	-47	-2
71	Innanh.flyt.m.alm.stovn.(útr.)	0	2.549	0	4	4
76	Innanh.flyt.m.alm.stovn.(innt.)	-518	-548	-550	-549	-535
	Tilsamans	**140.121**	**147.414**	**143.425**	**145.686**	**133.226**

Roknskapartøl fyri løgujáttanina seinastu 5 árini:

t.kr.

St.kt.	Heiti	2011	2012	2013	2014	2015
11	Lønir v.m.	0	0	0	365	0
14-17	Keyp	0	0	19.022	12.502	1.456
19	Ymsar rakstrarútr.	0	0	-19.022	-7.093	0
31	Bygging og løguf.	0	20.049	23.937	10.082	9.292
42	Søla av løgu o.ø.	0	0	0	-200	0
76	Innanh.flyt.m.alm.stovn. (innt)	0	-2.549	0	0	0
	Tilsamans	**0**	**17.500**	**23.937**	**15.656**	**10.748**

Innaneftirlit

Innaneftirlit er eitt hitt týdningarmesta amboðið hjá einari leiðslu at røkka sínum málum. Vaksandi skjalamongd og vaksandi KT-nýtsla hava gjørt tað neyðugt hjá grannskoðanini í størri mun at leggja dent á at meta um, hvørt stovnurin hevur skipað eina virkna og trygga mannagongd (innaneftirlit) á øllum týðandi økjum.

Innaneftirlit eru tey tiltøk, sum leiðslan setir í verk fyri at fáa nóg stóra vissu fyri, at roknskapurin er rættur og álítandi, at raksturin er effektivur, og at lógir og reglur verða hildnar.

Leiðslukunning

Leiðslukunning er partur av einum virknum innaneftirliti, sum skal tryggja, at roknskaparupplýsingar, sum stovnurin letur, byggja á eitt virkið og skjalfest innaneftirlit. Endamálið er at tryggja, at roknskapurin lýkur roknskaparligu reglurnar og vísir eina rættvísandi mynd av virkseminum hjá stovninum.

Eftirlitsumhvørvið er veikt.

Landsgrannskoðanin heldur, at eftirlitsumhvørvið hjá Strandferðsluni er ov veikt, m.a. vanta skrivligar ásetingar og skjalfesting av teimum eftirlitum, ið leiðslan fremur t.d. í sambandi við góðkenning av tíðarskeiðsroknskapunum í RGS[19].

Strandferðslan er ikki samd og vísir á arbeiðsmannagongdirnar millum stjóran og fíggjarleiðaran á stovninum. Vit ætla at taka málið upp av nýggjum við Strandferðsluna.

[18] Í 2014 varð staðfest, at primopostarnir hjá Strandfaraskipum landsins ikki stemmaðu við upphæddirnar, sum vóru latnar Gjaldstovuni undanfarin ár. Tað ger, at í 2014 eru 9,9 mió.kr. í óvanligum útreiðslum, sum ikki eru tiknar við í søguligu roknskapartølunum.

[19] Stytting fyri RoknskaparGóðkenningarSkipanin

Roknskapargóðkenningar

Strandferðslan brúkar RGS til góðkenningar av mánaðarroknskapum. RGS skal tryggja, at roknskapartilfarið og skrásetingarnar í Búskaparskipan landsins eru eftirfarandi, og er ein avgerandi roknskaparlig kunningarskipan millum stovnin og landsroknskapin.

Manglandi innanhýsis mannagongdir fyri eftirkanning og góðkenning av mánaðarroknskapum.

Í tilvísing 2.2.2 í grannskoðanarprotokollini 9. juli 2015 gjørdi táverandi grannskoðarin vart við, at *"Ongar skrivligar innanhýsis mannagongdir eru fyri eftirkanning og góðkenning av mánaðarligu roknskapunum mótvegis stjóra"*.

Í roknskaparreglugerðini eru 8 tiltøk ásett um "Innanhýsis roknskapargóðkenning, tá ið fíggjarleiðarin endar mánaðarroknskapin". Flestu eftirlitini eru ikki skjalfest. Tó eru stig tikin til at fylgja tilmælinum við, at fíggjarleiðarin fastar dagar hvønn mánað sendir áminningar til deildarleiðararnar um at syrgja fyri, at allar útreiðslur og inntøkur eru skrásettar.

Leiðslan hevur eisini víst á, at Strandferðslan hevur mánaðarligar fundir við ráðið, har fíggjarliga støðan verður løgd fram, umframt at fíggjardeildin hevur vikufundir, har fíggjarligu høvuðsøkini, so sum skuldarar, ognarar, lønir og MVG verða viðgjørd.

Egnar búskaparskipanir

1. januar 2014 varð Strandferðslan innlimað í Búskaparskipan landsins. Áður hevði stovnurin rapporterað roknskapardátur til búskaparskipanina við sumbókingum soleiðis, at roknskaparupplýsingarnar komu í landsroknskapin.

Strandferðslan brúkar enn Navision[20] til nakað av sínum virksemi. Stovnar, ið hava egnar búskaparskipanir, skulu hava loyvi frá Fíggjarmálaráðnum. Strandferðslan hevur ikki formligt loyvi til at brúka Navision, sum forskipan og heldur ikki formligt loyvi til "lønarskipan". Í juni 2016 hevur Strandferðslan sagt okkum, at stovnurin fer at taka neyðugu stigini at útvega sær loyvini.

Strandferðslan hevur ikki formligt loyvi til egna búskaparskipan.

5.6.1 Inntøkur og skuldarar

Inntøkurnar hjá Strandferðsluni eru í høvuðsheitum frá sølu av ferðaseðlum og farmi umframt sølu í kiosk og kantinu. Reglur um sølu eru í roknskaparreglugerðini.

Í fíggjarlógini 2015 varð roknað við 59,7 mió.kr. í inntøkum. Sundurgreinað á StRk. var sølan:

t.kr.

StRk.útgr.	Heiti	2015
2150.0700	Húsaleiga og íbúðargjald, Gisting, koyggjur	-9
2160.0100	Leiga av økjum, uppsitaraavgjald o.a., Útleigan av økjum	-42
2181.2000	Vørusøla til privat, Kantinur	-5.245
2181.2050	Vørusøla til privat, Kiosk	-5.489
2191.0200[21]	Leiga og langtíðarleiga, privat, Útleigan av útbúnaði	-405
2191.0300	Inntøkur frá ferðaseðlum og atgongumerkjum	-21.713
2191.8500	SSL - Farmagjald innanlands (konta 8030)	-17.218
2191.8520	Ferðaseðlar lestrarkort (konta 8130)	1
2191.8540	SSL - Ferðaseðlar ítróttafólk (konta 8140)	-890
2191.8560	Ferðaætlan (konta 8450)	-95
2191.8580	Tænastuseðlar (konta 8180)	-3.924
2191.8620	SSL - Ferðaloyvir (konta 8430)	-317
2191.8640	Skúlakort, 10-túrakort o.tíl. (konta 8440)	-71
2191.9000	Annað	-8.402
Tilsamans		**-63.819**

Ferðaseðlasølan hjá Bygdaleiðum verður skrásett í Búskaparskipan landsins. Hinar inntøkurnar verða skrásettar í Navision.

[20] Egin búskaparskipan, sum Strandferðslan brúkti, áðrenn Búskaparskipan landsins.
[21] StRk. 2191 er "Onnur søla av tænastum".

Skipini
Inntøkurnar frá kassaskipanini á Smyrli verða sjálvvirkandi fluttar talgildar eina ferð um dagin til Navision. Inntøkurnar frá hinum skipunum verða bókaðar við einari kassauppgerð um dagin. Gisting umborð á Smyrli verður goldin í kioskini.

Farmur
Farmastøðirnar skráseta ordrarnar fyri farm í Navision. Farmabrøv eru ikki til bløðini ella til størri farm í sambandi við útjavningarstuðulin. Høvuðsskrivstovan fakturerar ordrarnar tvær ferðir um mánaðin.

Ongin skráseting av blokkum við farmabrøvum

Tey, sum avgreiða farm, fáa talmerktar blokkar frá farmastøðunum. Farmastøðirnar skráseta ikki, hvør fær blokkarnar. Hátturin, sum farmabrøvini verða goymd, ger tað torført at fylgja eftirlitsslóðini. Tí ber illa til at staðfesta, um allur farmur verður faktureraður, og at sølan harvið er røtt.

Strandferðslan tekur undir við, at blokkarnir við farmabrøvum eiga at verða skrásettir, og at Strandferðslan eigur at viðgera, hvussu stovnurin kann tryggja sær, at allur farmur verður faktureraður.

Bygdaleiðir
Strandferðslan hevur avtalu við bussfyritøkur um at røkja Bygdaleiðir. Hvønn mánað ger Strandferðslan avrokningar til fyritøkurnar.

Í "Reglugerð fyri búnar" er ásett, at Strandferðslan útvegar búnar til privatar arbeiðstakarar. Strandferðslan rindar 1/3 av kostnaðinum og arbeiðstakarin 2/3. Strandferðslan hevur skrásett latingina av búnunum sum sølu, men er samd við Landsgrannskoðanina um, at tað ístaðin átti at verði mótbókað á keypskontuna.

Studni
Sambært sáttmála frá 2001 millum Strandferðsluna og Studna um skúlakort, skrásetir Strandferðslan alla ferðing og avroknar hálvárliga við Studna. Næmingarnir gjalda sjálvir 100 kr. fyri 20 túrar aftur og fram í skúla.

Orsakað av at Strandferðslan skuldi taka nýggja ferðaseðlaskipan í nýtslu, hevur Studni, síðani 2011, goldið ein fastan prís við støði í nettogjøldunum, ið Studni hevði goldið síðstu árini.

Studni hevur frá januar til november 2015 goldið 337 t.kr. um mánaðin og í desember 2015 eina mió.kr. Sambært stjóranum var upphæddin úrslit av samráðingum, har semja varð gjørd um at møtast á miðjuni. Ongin formlig avtala er gjørd. Eftir at FARA-skipanin[22] varð tikin í nýtslu, sást, at Studni hevði hægri nýtslu, enn áður hildið, og boðaði Strandferðslan Studna frá tí. Úrslitið varð, at Studni skuldi gjalda eina mió.kr. fyri desember.

Formlig avtala um skúlakort við Studna er nú gjørd.

Sambært Strandferðsluni er nýggur sáttmáli undirskrivaður, sum fær gildi frá 1. august 2016. Tá verður faktureræd eftir nýtslu við 30% í avsláttri. Higartil í ár hevur Studni rindað 417 t.kr. um mánaðin.

Ítróttasamband Føroya
Ítróttafeløg fáa ítróttakort. Nýggjasta avtalan millum ÍSF og Strandferðsluna er frá 1. apríl 2015. Sambært avtaluni kunnu limir í ítróttafeløgum ferðast ókeypis við skipum hjá Strandferðsluni og við bussum hjá Bygdaleiðum í Suðuroy og Sandoy. Ítróttakortini kunnu nýtast til dystir, venjingarlegur og landsliðsvenjingar, men ikki til vanligar venjingar.

[22] FARA er nýggja ferðaseðlaskipanin.

Strandferðslan ger nýtsluna upp mánaðarliga, við at heinta tøl úr FARA-skipanini, og sendir rokning til ÍSF. Rokningarnar fyri januar, februar og mars 2015 vóru 100 t.kr. um mánaðin.

Vinnukort
Í staðin fyri tænastuseðlar hevur Strandferðslan nú vinnukort við debitornummari á, sum viðskiftafólk, ið hava debitorkontu, kunnu nýta til ferðaseðlar, keyp í kafeterium og í kioskum.

Uppbýti millum MVG-fría og MVG-skylduga sølu
Sambært roknskaparreglugerðini er sølan býtt sundur í hvørji inntøkusløg eru MVG-frí og hvørji eru MVG-skyldug.

Tað tykist, sum Strandferðslan hevur ikki hildið MVG-fría og MVG-skylduga sølu nóg væl atskilda. Í juni 2016 hevur Strandferðslan greitt frá, at mannagongdin verður broytt skjótast gjørligt.

MVG-frí og MVG-skyldug søla ikki nóg væl atskild.

Prísir
Sambært Strandferðsluni skulu prísbroytingar av ferðaseðlum og farmi viðgerast av Samferðslumálaráðnum. Prísirnir á ferðaseðlum eru seinast broyttir í 2012. Prísirnir fyri farm eru ásettir í einari gamlari prísskipan og eru ikki broyttir í nógv ár. Prísirnir eru eftir stødd og vekt. Tænastuleiðarin ásetir prísirnar í kioskini og kafeteriuni.

Í roknskaparreglugerðini hjá Strandferðsluni stendur, at prísir fyri kateringsølu eru sambært galdandi prísum. Sambært Strandferðsluni ásetir katering prísirnar í mun til eftirspurningin frá kundunum.

Landsgrannskoðanin skal vísa á, at í roknskaparrundskrivinum frá 1. februar 2001 pkt. 4.1 er ásett, at "hevur stovnur inntøkur av at selja vørur og tænastur, skal í roknskaparreglugerðini verða greitt frá um heimildir, prísáseting, avsláttir og kredittir. Eisini skal verða greitt frá, hvussu skrásetingin er løgd til rættis, og hvussu prís-ásetingin verður gjørd, so til ber at kanna, um samsvar er ímillum vørukeyp, vørunýtslu og sølu".

Ásetingin av prísum neyvan í tráð við rokn-skaparrundskrivið.

Skuldarar
Strandferðslan skrásetir skuldarar í egnari búskaparskipan. Vit hava stemmað av, um saldurnar í Navision og Búskaparskipan landsins stemma 31. desember 2015. Munurin, 535 t.kr. svaraði til útjaðarastuðulin fyri 2015, sum varð goldin út í 2016.

Í roknskaparreglugerðini eru ásetingar um skuldararøkt, har víst verður til skuldarapolitikk stovnsins. Skuldarapolitikkurin er orðaður í trimum skjølum:

1. Mannagongdir ísv stovning av skuldarakontu
2. Mannagongd søla og avrokning
3. Mannagongd ísv rykking eftir eftirstøðum

Stovning av skuldara
Landsgrannskoðanin kannaði tríggjar fyrispurningar um kreditt. Bert í einum máli var skjalfest, at mannagongdirnar í sambandi við kredittmetingar vóru framdar. Strandferðslan tekur undir við tilmælinum um, at kredittmetingar skulu vera skjalfestar í samsvari við skuldarpolitikkin.

Kredittmetingar ikki altíð skjalfestar sambært skuldar-politikkinum.

Mannagongd við sølu og avrokning
Sambært mannagongdini, skal eftirlit vera við saldunum hjá skuldarunum. Strandferðslan hevur greitt frá, at ein listi verður skrivaður út uppá aldursbýtta saldu aftaná, at mánaðarligu kontuavritini eru send út. Út frá hesum verður hugt eftir og rykt eftir falnari skuld.

Landsgrannskoðanin vísti á, at í yvirlitinum eru feløg, ið eru strikað hjá Skráseting Føroya, og at fleiri skuldarar høvdu somu saldu við ársbyrjan sum við ársenda, tí ongin rørsla var í árinum. Strandferðslan tekur undir við tilmælinum, um at meta um skuldin kann fáast inn og viðgera skuldararnar samsvarandi.

Strandferðslan kannar, um renta skal roknast av faldnari skuld.

Hvørki í roknskaparreglugerðini ella í skuldarapolitikkinum eru ásetingar um at rokna rentu. Í juni 2016 hevur Strandferðslan boðað frá, at spurningurin um at rokna rentu verður kannaður og lýstur nærri við tí fyri eyga at seta í verk renturokning.

Innheinting

Fallin skuld verður innheintað.

Í mannagongdunum fyri skuldarbókhaldið stendur, at skuldarar, sum ikki hava goldið sína skuld, verða sendir til innheintingar. Strandferðslan hevur greitt frá, at gjaldkomin skuld, sum ikki goldin eftir fleiri áheitanir, verður latin til sakførara at innheinta. Sambært Strandferðsluni eru seks mál send til innheintingar í 2016.

Stakroyndir av skuldarakontum

Einstakir munir í saldum hjá skuldarum.

Landsgrannskoðanin hevur við stakroyndum kannað skuldarar pr. 31. desember 2015. Munur var í tveimum. Sambært Strandferðsluni verður arbeitt við báðum málunum.

Avsetingar

Strandferðslan hevur sett 347 t.kr. av móti tapi uppá skuldarar. Avsetingin byggir á eina meting frá 2014. Hóast Strandferðslan gjørdi ávísa fyrireiking til avsetingar fyri 2015, vóru tær ikki dagførdar.

Avsetingar uppá skuldarar ikki dagførdar.

Í juni 2016 hevur Strandferðslan boðað frá, at avsetingarlistin yvir møgulig tap verður gjøgnumgingin regluliga, og at talan er um eitt mistak, tá ið skuldin hjá einum felag øktist í 2015, hóast sett var av uppá sama felag í 2014.

5.6.2 Keyp av vørum og tænastum

Í roknskaparreglugerðini er ásett, hvussu farast skal fram í sambandi við tilboð v.m., og hvussu avtalur skulu gerast. Reglugerðin er ikki dagførd.

Skipsinspektørurin góðkennir keyp til skipini, tá ið upphæddin fer upp um 3 t.kr. Hann biður um tilboð fyri keyp, størri enn 20 t.kr. Keyp frá starvsfólkum skulu hava loyvi frá stjóranum í hvørjum einstøkum føri.

Strandferðslan nýtir KT-skipanina Premaster til keyp og viðlíkahald. Skipanin er eisini eitt slag av goymslustýring og stendur hvørki í samband við Navision ella Búskaparskipan landsins. Skipanin verður ikki brúkt til keyp av provianti ella til keyp til víðari sølu umborð.

Vit kannaðu keyp hjá Smyrli. Vit mæltu til, at leiðslan tryggjar sær, at tað, sum stovnurin rindar fyri, samsvarar við móttiknu vørurnar, og at tað verður skjalfest. Strandferðslan tekur undir við tilmælinum.

Í 2015 keypti Strandferðslan vørur, tænastur, útbúnað v.m. fyri 124 mió.kr. Talan er um eykalutir til skip, proviant, keyp til víðari sølu o.a. Afturat tí kemur keyp til høvuðsskrivstovuna, til farstøðirnar og tænastur frá privatum at reka bussruturnar.

Landsgrannskoðanin kannaði við stakroyndum keyp av vørum og tænastum, keyp av útbúnaði v.m. Vit kunnu ikki út frá stakroyndunum siga, um biðið verður um tilboð. Í fleiri førum koma rokningar langt aftaná, at vørurnar eru keyptar, og tað sæst ikki altíð, hvat er keypt. Rokningarnar eru ikki altíð váttaðar av teimum, sum hava móttikið vørurnar.

Í juni 2016 hevur Strandferðslan víst á, at tey biðja ofta um tilboð ella kanna prísir frá meira enn einum veitara. Tá ið talan er um størri keyp/arbeiðir, t.d. keyp/bygging av

nýggjum skipi, verður tað bjóðað út. Leiðslan fer í framtíðini at leggja skjalprógv fyri tí saman við fakturunum.

Vit kannaðu nakrar størri upphæddir, um biðið var um tilboð, um biðið var um prís frá fleiri veitarum, hvussu nógv bjóðaðu, og hvat tilboðini ljóðaðu uppá.

StRk.	Vøra	Kr.	Viðmerkingar frá Strandferðsluni
1510	Trekkjarar	985.000	Strandferðslan bað um tilboð frá einum føroyskum veitara uppá 2 bilar.
1540	Møblar	55.188	Strandferðslan kannaði prís frá trimum veitarum.
1540	3 kaffimaskinur	86.697	Strandferðslan bað um prís frá einum øðrum latara, enn stovnurin fyrr hevði havt maskinur frá. Tað gav 30% avsláttur í mun til listaprís.
1469	Arbeiðsklæðir	598.424	Strandferðslan hevði sáttmála við veitaran galdandi frá august 2008 til august 2014. Í 2015 gjørdi leiðslan av at royna annan veitara, ið tey eru væl nøgd við. Fyrra hálvár 2016 eru 200 t.kr. nýttar til keyp av arbeiðsklæðum.
1469	Ferðaseðlaskipan	29.200	Veitarin hevur sett seg í samband við Strandferðsluna eftir at hava gjørt kanningar og metingar av uttanhýsis ynskinum um at fáa eina bókingarskipan. Eftir tað bað Strandferðslan fyritøkuna um at gera meira við uppgávuna.
1479	Faldari	40.740	Veitarin beyð Strandferðsluni eina tænastu, ið stovnurin ikki hevði áður, og sum stovnurin tók av.
1479	Fotografering	36.720	Strandferðslan bað um prís frá tveimum latarum. Hesin latarin var munandi bíligari.
1479	Jólaborðhald	104.000	Strandferðslan bað um tilboð frá fýra veitarum.Trý tilboð komu inn. Eitt tilboð kom ov seint og ein tók tilboðið aftur.

Í rundskrivi 1. oktober 2013 frá Fíggjarmálaráðnum um keyp av vørum og tænastum eru reglur um alment útboð fyri upphæddir størri enn 800 t.kr. og um tilboðsfyrispurningar til keyp ímillum 50 t.kr. og 800 t.kr.

Strandferðslan heldur ikki reglurnar um tilboð.

Landsgrannskoðanin heldur ikki, at reglurnar um tilboð v.m. eru hildnar, t.d. tá ið Strandferðslan hevur biðið eina fyritøku um tilboð upp á tveir lastbilar og biðið eina fyritøku um prís fyri arbeiðsklæðir. Eisini átti stovnurin at biðið meira enn eina fyritøku um prís á kaffimaskinum.

Strandferðslan hevur ymiskar langtíðarleigusáttmálar við ein veitara um bjargingarbátar umborð á Smyrli, Teistanum, Rituni og Sildberanum. Hinar bátarnar eigur Strandferðslan og hevur tænastusáttmálar við ein veitara um viðlíkahald.

Landsgrannskoðanin vísti á, at sambært § 3 í kunngerðini um rakstrarjáttan er ikki loyvt at gera avtalur um langtíðarleigu. Sambært § 3, stk. 2, kunnu avtalur um langtíðarleigu verða gjørdar, um landsstýrismaðurin í fíggjarmálum metir, at slíkar avtalur hava munandi og eyðsýndar fyrimunir fyri landið. Okkum kunnugt hevur landsstýrismaðurin í fíggjarmálum ikki góðkent nevndu langtíðarleigur.

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum ikki góðkent langtíðar leigusáttmálar.

Matur og drykkjuvørur, proviantur, StRk. 1430

Við stakroyndum kannaðu vit nøkur keyp og høvdu nakrar viðmerkingar. Millum annað vóru rokningar ikki nóg væl útgreinaðar. Tað sást ikki altíð, hvat var keypt. Onkur rokning vantaði, og ivasamt var, um allar rokningarnar, sum vóru skrásettar á proviant, veruliga vóru fyri proviant.

Ivasamt, um allar rokningarnar fyri proviant veruliga eru fyri proviant.

Í juni 2016 hevur Strandferðslan greitt frá, at tey fara at krevja betur útgreinaðar rokningar, og at rokningar koma innan ávísa freist, annars verða tær ikki goldnar.

Keyp frá starvsfólki

Keyp frá starvsfólki ikki váttað av stjóra, og tí í stríð við innanhýsis reglurnar.

Í roknskaparreglugerðini er ásett, at stjórin skal vátta rokningar fyri keyp frá starvsfólki. Eftirlitið vísti, at stjórin hevur ikki altíð váttað rokningarnar, og onki MVG er á teimum.

Keyp av vørum annars StRk. 1469

337 t.kr. fyri ferðaútreiðslur, mat og gistingar, ið eru bókaðar sum "starvsfólkakostnaður" í Navision, eru bókaðar á StRk. 1469 "keyp av vørum annars" í Búskaparskipan landsins. Landsgrannskoðanin heldur ikki, at tað er í samsvari við kontuvegleiðingina at skráseta starvsfólkakostnað sum vørukeyp.

Í februar 2014 mælti táverandi grannskoðari stovnsins leiðsluni til at taka støðu til, um reglurnar viðvíkjandi fríum ferðum hjá starvsfólkunum til og frá arbeiði við bussum og skipum hjá stovninum framvegis skuldu galda, og hvussu tað fyrisitingarliga skuldi skipast. Grannskoðarin vísti eisini á, at tað mátti metast at vera sera avmarkaðir møguleikar at fylgja við, um ferðirnar eru í tráð við reglugerðina. Í juli 2015 vísti grannskoðarin á, at málið enn var opið.

Starvsfólkini ferðast frítt við skipum og bussum hjá Strandferðsluni til og frá arbeiði.

Í juni 2016 hevur Strandferðslan boðað frá, at leiðslan framvegis heldur, at starvsfólk eiga at hava rætt til at ferðast ókeypis við skipum og bussum hjá Strandferðsluni til og frá arbeiði.

Keyp av tænastuveitingum annars

Samsýningar, sum tykjast at vera løn, bókaðar sum keyp av tænastum.

Í onkrum førum hevur Strandferðslan bókað samsýningar sum "keyp av tænastum", ið síggja út til at vera lønarsamsýningar. Landsgrannskoðanin heldur, at tað er týdningarmikið, at almennir stovnar rinda samsýningar sum løn, tá ið talan er um løn, eisini um móttakarin ikki er í starvi hjá stovninum.

Á onkrum rokningum frá fyritøkum er ikki roknað meirvirðisgjald.

Leiga, viðlíkahald og skattur

Í 2015 hevur Strandferðslan goldið 514 t.kr. í leigu fyri skrivstovubygning. Í 2014 var leigan 400 t.kr. Stovnurin hevur leigað onnur hølir, meðan hølini, tey vóru í, vórðu umvæld.

Í juni 2016 hevur Strandferðslan greitt frá, at stovnurin hevur avtalað við útleigaran, at tey skuldu rinda leigu, ímeðan bygningurin varð umvældur, og at upphæddin skuldi mótroknast í komandi leigugjøldum. Sambært Strandferðsluni er meirkostnaðurin gjørdur upp og verður mótroknaður í komandi húsaleigu.

Sambært leigusáttmálanum er húsaleigan 500 t.kr. um árið. Leigan er MVG-frí. Sambært Strandferðsluni er tað ein feilur, at Gjaldstovan hevur skrásett 33.334 kr. á húsaleigu og 8.333 kr. á keyps-MVG. Skrásetingin ger, at leiguútreiðslurnar eru 100 t.kr. ov lágar í 2014 og 2015.

Strandferðslan langtíðarleigar kopimaskinu í stríð við reglurnar á økinum.

Strandferðslan hevur langtíðarleigað kopimaskinu fyri 59 t.kr. í 2015. Vit vístu á, at sambært játtanarreglunum hava almennir stovnar ikki heimild til at gera sáttmálar um langtíðarleigu.

Í juni 2016 hevur Strandferðslan víst á, at teimum kunnugt verða kopimaskinur ofta leigaðar á henda hátt hjá øðrum almennum stovnum, og at stóri fyrimunurin við leiguni er, at tænastusáttmáli er við í avtaluni.

Ferðing og flutningur

Stovnurin nýtir sama skjal til uppgerðir av ferðaendurgjaldi innan- og uttanlands. Ferðauppgerðirnar vóru ikki altíð nøktandi fyltar út. Í nøkrum førum vóru ferðauppgerðir gjørdar fyri longri tíð. Sambært "Rundskriv frá Fíggjarmálaráðnum 1. apríl 2007" skal avroknast eina ferð um mánaðin.

Landsgrannskoðanin mælti til, at standardskjølini hjá Gjaldstovuni verða nýtt til ferðauppgerðir, at upplýst verður á t.d. matstovurokningum, hvørjir luttakarar eru, og at uppgerðirnar verða gjørdar regluliga.

Í 2015 hevur Strandferðslan goldið 51 t.kr. til Hotel Tvøroyri fyri gisting og uppihald. Tær flestu upphæddirnar eru fyri starvsfólk á høvuðsskrivstovuni. Landsgrannskoðanin hevur spurt, eftir hvørjum reglum tær útreiðslurnar eru hildnar, vit hava ikki fingið svar.

Ognarar

Við stakroyndum kannaðu vit nakrar ognarar, og teir flestu stemmaðu. Munirnir vóru ikki so týðandi, at teir gera samlaðu fíggjarstøðuni 31. desember 2015 skeiva.

Ognararnir stemmaðu.

Goymslur

Strandferðslan hevur yvirlit yvir vørugoymslurnar umborð á Smyrli og Teistanum. Yvirlit er eisini yvir proviant á goymslu hjá Smyrli. Broytingarnar í mun til 2014 eru bókaðar í fíggjarstøðuni. Landsgrannskoðanin hevur ikki kannað vørugoymslur.

Tað ber ikki til út frá goymslulistunum at siga, um virðið á goymsluni er rætt, ella um vørurnar vóru til staðar. Ongin hevur skrivað undir listarnar, og teir eru heldur ikki váttaðir av leiðsluni. Strandferðslan ásannar, at listarnir burdu verið undirskrivaðir, og at tað eftir ætlan verður gjørt hereftir.

Til bar ikki at staðfesta um virðið á goymsluni er rætt.

Í frágreiðing sínari gjørdi fyrrverandi grannskoðarin vart við, at goymslan av klæðum var stór. Sambært Búskaparskipan landsins var goymslan 825 t.kr. 31. desember 2015, t.e. 50 t.kr. minni enn í 2014. Av tí at talan er um rættiliga nógv starvsfólk, er neyðugt við ávísari nøgd á goymslu.

Meirvirðisgjald

Virksemið hjá Strandferðsluni fevnir um fólka- og farmaflutning og um sølu av vørum í kantinu og kioskum. Strandferðslan skal tí gera ein býtislykil[23] eftir tí MVG-skyldugu og MVG-fríu søluni, hvussu stóran part frádráttur fæst fyri.

Strandferðslan hevur bæði MVG-frítt og MVG-skyldugt virksemi.

Strandferðslan gav skeiv tøl upp til TAKS fyri 1. og 2. ársfjórðing 2015. Flestu uppgerðirnar eru latnar ov seint inn, og tí hevur stovnurin rindað sektir og rentur.

Flestu MVG-uppgerðirnar latnar inn ov seint. Tí hevur stovnurin rindað sektir og rentur.

31. desember 2015 var saldan á sølu-MVG -765 t.kr., og saldan á keyps-MVG 583 t.kr. Upphæddirnar stava frá rættingum, ið Strandferðslan gjørdi fyri 4. ársfjórðing 2014. Í apríl 2016 hevur Gjaldstovan enn eina ferð rættað meirvirðisgjaldið.

Avstemman ímillum Búskaparskipan landsins og TAKS

Í 2015 var ikki samsvar ímillum bókingarnar hjá Strandferðsluni í Búskaparskipan landsins og kontuavrit frá TAKS.

20. apríl 2016 kannaðu vit, um samsvar tá var millum saldurnar hjá TAKS og Strandferðsluni og staðfestu, at ein munur var. Strandferðslan hevur síðani boðað frá, at tey fara at stramma upp á MVG-mannagongdirnar, fyri at forða fyri, at støðan endurtekur seg.

Uppgerð av MVG-fríari sølu til TAKS

Sambært Strandferðsluni hevur býtið 7/25 og 18/25 verið galdandi í langa tíð, men stovnurin kann ikki skjalprógva upprunan til tað. Út frá sølukontunum heldur Landsgrannskoðanin, at býtið ikki er heilt rætt. Vit mæltu til, at skrásetingin verður løgd soleiðis til rættis, at uppgerðirnar til TAKS eru rættar.

Ivasamt um býtið millum MVG-skyldugt og MVG-frítt virksemi er rætt.

Í juni 2016 hevur Strandferðslan boðað frá, at tey taka tilmælið til eftirtektar.

[23] Býtið millum MVG-skyldugu og MVG-fríu søluna er, sum nú er, sett til 7/25 og 18/25.

Bókingar av inngangandi MVG

Strandferðslan býtir keyps-MVG'ið soleiðis, at "keyp til víðari sølu" og "keyp til skipini" verða skrásett á StRk. 0831, harav tey hvønn ársfjórðing flyta 7/25 til StRk. 7510, meðan MVG'ið av keypi til umsitingina verður skrásett beinleiðis á StRk. 7510.

Landsgrannskoðanin ivast í, um MVG-uppgerðir tá verða rættar, tí partur av MVG-num hjá umsitingin eisini hoyrir til MVG-skylduga virksemið.

Í juni 2016 hevur Strandferðslan kunnað um, at tey halda, at partur av MVG av keypi til umsitingina eisini skal roknast við í MVG-skylduga virksemið, og at Strandferðslan vil umrøða MVG í heila tikið víðari við Landsgrannskoðanina.

Stakroyndir

Bókingar av MVG á rokningum eru óneyvar.

Við stakroyndum kannaðu vit nøkur skjøl við atliti at MVG. Kanningin vísti, at á fleiri rokningum, ið Strandferðslan hevur fingið, er onki MVG roknað. Í øðrum førum hevur stovnurin ikki bókað MVG, har tað á rokningini er upplýst, at MVG er við í prísinum.

Samanumtikið

Samanumtikið heldur Landsgrannskoðanin, at tað eru ov nógvir feilir í MVG-num, so sum feilskrásetingar, skeivar uppgerðir, býtið ímillum skylduga og ikki skylduga sølu er ógreitt, og uppgerðirnar verða ikki latnar inn rættstundis. Vit mæltu til, at Strandferðslan fær mannagongdir, sum tryggja, at viðgerðin av MVG verður røtt.

Í juni 2016 hevur Strandferðslan boðað frá, at tey taka tilmælið til eftirtektar og fara skjótast gjørligt at gera mannagongdir.

Aðrir fíggjarstøðupostar

Landsgrannskoðanin hevur sett Strandferðsluni nakrar fyrispurningar viðvíkjandi fíggjarstøðupostum í Búskaparskipan landsins og í Navision. Fyri stóran part er talan um reguleringar, sum eru gjørdar av primopostum, tá ið Strandferðslan varð innlimað í Búskaparskipan landsins 1. januar 2014, og sum ikki eru avgreiddir endaliga enn.

Landsgrannskoðanin hevur gjørt av at viðgera tað í seinni frágreiðingum.

5.6.3 Lønir

Ásannandi, at lønarútreiðslur eru størsti útreiðsluposturin hjá Strandferðsluni, heldur Landsgrannskoðanin tað vera týdningarmikið, at leiðslan tryggjar sær, at lønar-útgjaldingarnar eru rættar. Tað kann m.a. verða gjørt við at hava hóskandi tíðar-skráseting, tryggar góðkenningarmannagongdir og neyvar ásetingar um arbeiðstíðir. Sí eisini § 5, stk. 3, í roknskaparkunngerðini.

Lønir hjá Strandfaraskipum landsins seinastu 5 árini:

t.kr.

Heiti	2011	2012	2013	2014	2015
Mánaðarlønt	43.117	44.604	45.638	49.532	51.137
Tímalønt	14.061	13.557	15.391	13.316	13.430
Samsýningar, eftirlønir o.a.	8.424	8.219	8.417	7.784	8.828
Tilsamans	**65.602**	**66.380**	**69.446**	**70.632**	**73.395**

Lønarøkið ikki komið í tryggari rammur enn.

Lønirnar verða avgreiddar umvegis web-løn, men Strandferðslan hevur ikki ásett mannagongdir at skipa lønarøkið í tryggari rammur, soleiðis sum Vinnumálaráðið boðaði frá í 2013.

Umsitingin av lønum kann vera sárbær.

Í 2013 staðfesti Landsgrannskoðanin í sambandi við tvørgangandi lønar-grannskoðan, at umsitingin av lønum hjá Strandferðsluni kundi vera sárbær, tá ið bert ein persónur avgreiddi lønirnar hjá 200 starvsfólkum við nógvum ymiskum lønarsløgum. Ikki minst, tá ið viðkomandi noyddist at arbeiða nógvar tímar yvir normalu arbeiðstíðina, og ongan avloysara hevði.

Leiðslan vísti tá á, at síðani stovnurin varð fluttur til Tvøroyrar, var starvsfólkatalið á høvuðsskrivstovuni minkað nógv, men at tey tó royndu at tryggja sárbæri við nýggjum KT-skipanum innan fíggjarstýring, viðlíkahald, skráseting v.m.

Í september 2013 greiddi landsstýrismaðurin frá, at Vinnumálaráðið hevði umrøtt málið við leiðsluna á Strandferðsluni. Tey vóru komin ásamt um at kanna møguleikarnar fyri at nýta "VaktPlan" og rinda lønirnar umvegis Gjaldstovuna. Vinnumálaráðið hevði avtalað við Strandferðsluna at skipa lønarøkið í tryggari rammur sum part av mál- og avrikssáttmálanum fyri 2014.

Fyrrverandi grannskoðarin hjá Strandferðsluni hevði somu viðmerkingar í grannskoðanarprotokollini 10. februar 2014. Lønarumsitingarleisturin ger harafturat støðuna ótrygga. Okkara kanningar týða ikki uppá, at viðurskiftini eru broytt.

Í juni 2016 hevur Strandferðslan greitt frá, at *"P.t. verður arbeitt við at leggja skipini inn í TotalView"*.

Mannagongdir

Skipanin við at gera lønir hjá Strandferðsluni kann býtast í trý: skráseting av tímum, lønarumsiting og lønarflyting.

Niðanfyri er ein mynd, sum í høvuðsheitum lýsir lønarumsitingina. Myndin vísir m.a., hvørjir váðar eru í sambandi við lønaravgreiðslurnar, og hvørji eftirlit eru, sum skulu byrgja upp fyri feilum.

Lønarumsitingin SSL - 2016



1. Vandi fyri at saldur verða ikki rætt yvirførdar
2. Vandi fyri at ov nógvir tímar skrásettir
3. Vandi fyri, at tímar verða skeivt avroknaðir
4. Manuel inntøpping letur upp fyri feilum
5. Vandi fyri feili í upprætting av nýggjum ørkum, rekkjum, kolonnum etc
6. Avsett upphædd avspáking ikki staðfestast. Kann ikki stemmast av
7. Møguleiki fyri at broyta saldur
8. Viðlagda skjalfestingin ikki nøktandi

2. Skiparin hevur eftirlit/ábyrgd
4. Stjóri/fíggjarstjóri eftirlit/ábyrgd

Landsgrannskoðanin heldur, at ein tann størsti váðin í roknskaparviðurskiftunum hjá Strandferðsluni liggur í avgreiðslu av lønum.

Okkara grannskoðan vísir, at lønarumsitarin, ið er einsamallur á økinum, ger sítt ítarsta fyri at avgreiða lønirnar rætt og rættstundis.

Lønarumsitari einsamallur við allari lønarumsitingini.

Lønarupplýsingar liggja í rokniørkum.

Ein av vansunum við lønaravgreiðsluni er, at allir tímar verða skrásettir í rokniørkum. Upplýsingarnar verða kopieraðar og fluttar ímillum rokniørk og goymdar í cloud loysnum.

Spurd, hvussu leiðslan tryggjar sær, at:

- tímaseðlarnir eru rættir,
- møgulig mistøk verða funnin og rættað,
- hvørji eftirlit leiðslan fremur at tryggja sær, at rokniørkini háttað sær sum ætlað, og
- yvirførdu saldurnar eru í samsvari við til- og frágongd av avspáking,

hevur leiðslan svarað, at hon hevur tikið stig til at betra um eftirlitið við at seta ein næming á skrivstovuni, sum fyri tað mesta fer at arbeiða á lønarøkinum saman við lønarumsitaranum, og at fíggjarleiðarin fer saman við starvsfólkunum og stjóranum at seta út í kortið, hvussu eftirlitsumhvørvið og avgreiðslan verður framd.

Strandferðslan hevur eisini boðað frá, at tey frá 1. juni 2016 fara at skráseta tímar í TotalView.

Lønarumsiting og eftirlit við skipanini er samantvinning av uppgávum.

Leiðslan eigur eftirlitið við skipanini.

Landsgrannskoðanin heldur, at uppgávurnar hjá lønarumsitaranum er ein samantvinning av lønarumsiting og eftirliti við "skipanini". Vit skulu vísa á, at eftirlit við skipanini og dátustreymum, og avstemmingar av innihaldinum eru leiðsluuppgávur og eiga at liggja hjá leiðsluni.

Strandferðslan er samd við Landsgrannskoðanini og vísir á, at fyrsta stigið, at bøta um tað, er at seta eitt fólk afturat í lønarumsitingina. Leiðslan heldur, at tað tá verður størri møguleiki at fremja innanhýsis eftirlit og at byrgja fyri, at tað ikki altíð er ein og sami persónur, sum ger alt arbeiðið.

Feriur, serstøk frívika og avspáking

Í reglugerð frá 10. mars 2014 "Viðvíkjandi summarfrí og avspáking" hevur stjórin ásett mannagongdir viðvíkjandi summarfrí og avspáking av uppspardum tímum. Í reglugerðini verður m.a. ásett, at sjófólk umborð á skipunum kunnu umrokna sær møguligar meirtímar upp til eina vakt. Starvsfólk á landi kunnu umrokna møguligar meirtímar upp til eina arbeiðsviku.

Sambært reglugerðini skuldu starvsfólk, sum tá áttu meira tímar enn ásett, hava avgreitt teir innan 31. desember 2014.

Yvirlit yvir feriur og serstakar frídagar hjá starvsfólkunum í umsitingini vísir, at fleiri eiga nógvar dagar tilgóðar. Seks fólk áttu serstaka fríviku tilgóðar frá eldri árum.

Onki samlað yvirlit yvir feriuágóðar.

Strandferðslan hevur ikki samlað yvirlit yvir feriuágóðar hjá sjófólkunum. Saldurnar eru á tímaseðlunum hjá hvørjum einstøkum starvsfólki. Sambært lønarumsitaranum verða tær dagførdar hvørja ferð broytingar eru. Landsgrannskoðanin hevur ikki kannað feriusaldurnar.

Í juni 2016 hevur Strandferðslan greitt frá, at orsøkin til stóru feriusaldurnar er, at fólk vórðu kalla aftur úr feriu í 2013-14 at vera til taks hjá grannskoðara, ið av landsstýrismanninum varð biðin um at gera eyka kanningar og frágreiðingar um fíggjarligu støðuna á stovninum. Eisini í sambandi við fíggjarætlan fyri 2015 máttu fólk kallast inn úr feriu.

Leiðslan sigur, at feriudagarnir kunnu ikki haldast á vanligan hátt, so hon fer saman við Lønardeildini at kanna, hvat annars kann verða gjørt.

Leiðslan ásannar, at hon átti at havt yvirlit yvir feriuágóðarnar hjá sjófólkunum eisini, og at tað skal gerast, tá ið TotalView kemur upp at koyra fyri skipini, ætlandi eftir summarfrítíðina í ár.

Tímaskráseting o.a. hjá starvsfólki á landi

Í starvsfólkareglugerðini er ásett, at arbeiðstíðin er 39 tímar um vikuna. Starvsfólkini á landi skráseta ikki arbeiðstíðina. Kontrollarin umsitur feriur og serstaka fríviku hjá starvsfólkunum.

Strandferðslan hevur kunnað um, at frá 1. juni 2016 er TotalView sett at virka til fulnar, t.v.s. at starvsfólk skulu skráseta tímar, feriur, avspákan, sjúku o.a. Higartil hevur TotalView bert verði nýtt til at skráseta, um starvsfólk vóru til staðar.

Nøkur starvsfólk eru lønt eftir sáttmálanum hjá Havnar arbeiðsmannafelag við fastari løn fyri 50 tíma arbeiðsviku. Sambært vaktarskipanini arbeiða tey 100 normaltímar aðru hvørja viku.

Út frá vaktarskipanini og arbeiðsseðli sást ikki, hvar normaltímarnir, ið eru grundarlag undir føstu lønini, liggja. Vit bóðu um frágreiðing um, hvussu normala arbeiðstíðin var ásett.

Vit fingu avrit av einum skrivi frá starvsfólkum, har tey lýsa sína arbeiðstíð. Summi fáa løn fyri 50 tíma arbeiðsviku fyri at hava ábyrgd. Greitt verður m.a. frá, at tey umsita pening, skriva rokningar o.a. Víst verður á, at Smyril er farin at sigla meira, at stovnurin hevur spart húsavarðatænastu v.m.

Normaltímar ikki skrásettir.

Samanumtikið hava vit staðfest, at normaltímarnir á 100 tímar um vikuna (aðru hvørja viku) eru ikki skrásettir. Vit kunnu tí ikki sanna, at lønin hjá teimum er røtt.

Í juni 2016 hevur Strandferðslan boðað frá, at tímarnir framyvir fara at verða skrásettir í TotalView. Viðvíkjandi sáttmálanum um 50 tíma arbeiðsviku hevur Strandferðslan greitt frá, at ávís starvsfólk hava 40 tímar arbeiðsviku, men fáa løn fyri 50 tímar, tí teir 10 tímarnir eru fyri at vera leiðarar, íroknað umsiting, telefon-avgreiðslu, ábyrgd v.m. Landsgrannskoðanin dugir ikki at síggja, at Fíggjarmálaráðið hevur góðkent lønarásetingina.

Landsgrannskoðanin heldur tað vera ivasamt, um starvsfólk hava rætt til yvirtíð, eftir t.d. at hava arbeitt 80 tímar eina viku, tá ið lønin er ásett fyri 100 tíma viku. Sambært okkara kanning fekk eitt starvsfólk yvirtíðarløn fyri 44,5 tímar í ein mánað, uttan at “vanligu tímarnir” vóru skrásettir.

Fráfaringaravtalur

Í 2015 hevur Strandferðslan gjørt fráfaringaravtalur við tvey starvsfólk. Sambært stjóranum, var talan um tvey óvanlig mál, har umstøðurnar hjá starvsfólkunum fyri uppsøgn kundu skaða tey. Tí valdi stjórin at gera sjálvbodna avtalu millum partarnar, sum kundi verja starvsfólkini móti almennum innliti. Starvsfólkini fingu somu treytir og uppsagnarløn, ið tey vildu fingið, vórðu tey søgd úr starvi eftir vanligum reglum.

Sjófólk

Starvsfólkini á skipunum eru lønt sambært sáttmálunum við Skipara- og navigatør-felagið, Maskinmeistarafelagið og Starvsmannafelagið. Í 2015 var arbeiðstíðin hjá navigatørum, maskinfólki og øðrum starvsfólkum sambært sáttmálunum 203,7 tímar um mánaðin. Arbeiðstíðin skal leggjast soleiðis til rættis, at arbeiðstíðin í 2 mánaðir ikki er oman fyri 394,4 tímar, tó soleiðis at arbeiðstíðin í ein mánað ikki er oman fyri 250 tímar.

Sambært sáttmálunum kann í staðbundnari avtalu, gjørd millum reiðarí og felag, verða vikið frá ásetingunum um, hvussu langt tíðarskeið, arbeiðstíðin verður gjørd upp fyri. Okkum kunnugt hevur Strandferðslan ikki gjørt slíka avtalu við fakfeløgini.

Í 2015 var arbeiðstíðin 47 tímar í eina viku ella 94 tímar í tvær vikur. Í 2016 er arbeiðstíðin 197,2 tímar um mánaðin, ella 45,5 tímar um vikuna. Í einum dømi, vit sóu, kundu vit ikki staðfesta, at starvsfólkið í februar 2016 hevði arbeitt teir 197,2 tímarnar, sum sáttmálin ásetti. Strandferðslan ger onga avstemman, um tímarnir, sum eru lagdir inn í vaktarskipanina, svara til 197,2 tímar um mánaðin, ella 394,4 tímar fyri 2 mánaðir.

Landsgrannskoðanin mælti til, at leiðslan váttar, at starvsfólk arbeiða tað tímatalið, ið er avtalað sambært sáttmálunum. Í juni 2016 hevur Strandferðslan boðað frá, at málið verður tikið við í samlaðu ætlanina at styrkja lønarumsitingina.

Strandferðslan hevur eisini kunnað um, at hon fer at taka støðu til at fáa nógvu uppspardu tímarnar avgreiddar.

Skyldug løn hjá sjófólki

Strandferðslan hevur skrásett skylduga løn í fíggjarstøðuni á StRk. 0888-0030 “Skuld – løn o.t.” Frá 2011 til 2015 hevur skuldin verið:

t.kr.

Endamál	Heiti	2011	2012	2013	2014	2015
0	Ógreinað.	-359	-359	0	-71	-249
1500	Ritan	0	0	0	1	-70
1520	Sam	0	0	0	-4	-200
1560	Ternan	0	0	0	50	-99
1580	Teistin	0	0	0	90	13
1600	Sildberin	0	0	0	0	-17
1620	Smyril	0	0	0	288	261
9320	Avspáking	0	0	-2.624	-2.624	-2.624
9420	Skyld. lønir og lønarendurgj.	0	0	-167	-167	-167
	Tilsamans	**-359**	**-359**	**-2.791**	**-2.438**	**-3.153**

Útgjøld/avspákan

Skyldugi lønar-kostnaðurin ikki rættur.

Avsettu upphæddirnar eru grundaðar á ta tímalønina, sum var galdandi, tá ið peningurin varð avsettur og útreiðsluførdur. Starvsfólk fáa elstu upphæddirnar goldnar fyrst, men tímalønin er hon, ið er galdandi við útgjaldstíðarskeiðið.

Fleiri av sjófólkunum eiga tímar tilgóðar tíggju ár aftur í tíðina ella longur. Upphæddin, ið er sett av í roknskapinum, svarar tí ikki til tann kostnað, ið stovnurin velur at rinda út eftir, og er skyldugi kostnaðurin tí ikki rættur.

Í juni 2016 hevur Strandferðslan greitt frá, at tey halda, at rættast hevði verið at rudda upp í avsettu upphæddunum. Tað ávirkar ikki raksturin hjá stovninum.

Ivi kann vera um, um stovnurin fylgir ásetingunum í sáttmálunum um, hvussu meirarbeiðstímar skulu avgreiðast, tá ið starvsfólk eiga upp í fleiri hundrað tímar tilgóðar, enntá fyri fleiri ár.

Sambært sáttmálanum hjá Skipara- og navigatørfelagnum fáa skiparar í bólki 1 ikki útgoldið meirtímar, tí teir eru viðroknaðir í føstu lønini. Skipararnir á Smyrli eru í tí bólkinum.

Sambært sáttmálanum hjá Skipara- og navigatørfelagnum kunnu skiparar/stýrimenn, sum hava nógv álagt meirarbeiði, fáa meirarbeiðsviðbót, ið verður givin fyri 35 meirarbeiðstímar um ársfjórðingin. Strandferðslan hevur upplýst, at tey hava ikki gjørt nýtslu av hesi viðbótini.

Stakroyndir av lønarmálum
Landsgrannskoðanin kannaði 17 tilvildarliga vald lønarmál, um lýsingar, umsóknir, prógv og setanarsáttmálar vóru í málunum. Vit høvdu sum heild onki at finnast at, men høvdu onkrar spurningar, ið vit fingu svaraðar.

Sambært Strandferðsluni hava tey fingið loyvi frá manningarfeløgunum at seta avloysarar, og hevur stovnurin brúkt somu avloysarar umborð á skipunum í longri tíð.

Naturalveitingar
Sambært starvsfólkareglugerðini hjá Strandferðsluni kunnu starvsfólk fáa virðiskort til at ferðast til og frá arbeiði við farleiðunum hjá Strandferðsluni, t.v.s. at starvsfólk rinda ikki fyri ferðing, mat o.a. umborð. Í reglugerðini verður gjørt vart við, at starvsfólk hava ikki rætt til ferðastuðul frá TAKS í tíðarskeiðinum, tá ið kortið verður brúkt.

Í juni 2016 hevur Strandferðslan greitt frá, at reglan er gomul og í øllum førum frá tí, at umsitingin varð flutt til Tvøroyrar.

Starvsfólk, ið búgva norðanfjørðs brúka virðiskortini at rinda fyri gisting, mat o.a. umborð á Smyrli, tá ið tey eru til arbeiðis á Tvøroyri. Gistingin verður skrásett sum søla og sum vørukeyp í roknskapinum.

Stjórin greiddi frá, at hann hevur givið starvsfólkunum møguleikan at gista ókeypis umborð, tí annars fær hann ikki skikkað starvsfólk, ið hava teir førleikar, ið stovnurin hevur tørv á. Stjórin hevur eisini sjálvur gist umborð, men hevur nú útvegað sær bústað á Tvøroyri.

Í juni 2016 hevur Strandferðslan greitt frá, at Strandferðslan hevur gjørt leiguavtalu um eina íbúð við tveimum kømurum fyri 4.000 kr. um mánaðin. Starvsfólkini rinda 1.000 kr. fyri hvørt kamar, samanlagt 2.000 kr. um mánaðin.

Kassaeftirlit
Landsgrannskoðanin gjørdi kassaeftirlit á Smyrli og Ternuni. Kassaeftirlitið vísti, at samsvar var ikki millum saldurnar í bókhaldinum og kassauppgerðunum umborð á Smyrli. Sambært Strandferðsluni er tað nú komið í rættlag. Vit hava ikki aðrar viðmerkingar.

KT-viðurskifti
Fleiri KT-skipanir hjá Strandferðsluni hava týdning fyri raksturin av stovninum. Harumframt hevur stovnurin ein ferðafólkateljara, sum er ein skipan, ið vendir sær til trygd á sjónum. Skipanirnar eru:

- Navision: Fíggjarskipan at skráseta inntøkur, inngjøld og skuldarar.
- 360^0: journalskipan.
- Premaster: Viðlíkahaldsskipan sum vísir, hvat er keypt til viðlíkahald, hvat er móttikið, og hvat er á goymslu á skipunum.
- Ferðafólkateljari: Call in skipan, ið av skipunum boðar frá, hvussu nógv ferðafólk eru umborð og skrivar ein strimmul út á skrivstovuni við ferðafólkatalinum á hvørjum túri.
- FARA-ferðaseðlaskipanin: Skrásetir ferðaseðlasølu.

Strandferðslan er innlimað í Landsnet, har allar KT-skipanirnar undantikið Ferðafólkateljarin eru við. Raksturin av skipanunum í Landsneti er skipaður í SLA, meðan raksturin av fakskipanunum er skipaður í FAK-SLA avtalur. Strandferðslan varar ikki sjálv av nøkrum servara.

Strandferðslan er komin í Landsnet.

Leiðslan hevur ikki dagført váðametingina leypandi og hevur heldur ikki orðað KT-trygdarpolitikk. Onki regluligt eftirlit er við brúkararættindum. Tað er ikki í trá við rundskrivið frá Vinnumálaráðnum 21. juni 2007, um at seta í verk KT-trygd.

Strandferðslan dagfører ikki váðameting og KT-trygdarpolitikk leypandi.

Landsgrannskoðanin mælti til, at orða KT-trygdarpolitikk, ið byggir á váðametingina og at gera mannagongdir fyri brúkarastýring.

Landsgrannskoðanin mælti til, at Strandferðslan tryggjar sær, at backup/restore/recovery virkar eftir ætlan. Eisini mæltu vit til, at leiðslan ger mannagongdir fyri change management og ásetir reglur fyri fjararbeiðspláss.

Strandferðslan hevur í skrivi til Landsgrannskoðanina tikið tilmælini til eftirtektar.

5.6.4 Høvuðskonta 6.38.2.02. Strandfaraskip landsins, løgujáttan.

Í játtanini 6.38.2.02. Strandfaraskip landsins (Løgujáttan)[24] eru fleiri undirkontur, ein til hvørt skipið, ein til "Umvælingar av smærri skipum", og ein til "Størri tólbúnað". Í fíggjarlógini 2016 er ongin játtan til endamálið.

Í desember 2015 eru tveir trekkjarar keyptir fyri tilsamans 985 t.kr., og teir eru bókaðir sum keyp av útbúnaði (St.kt. 15) á rakstrarjáttanini hjá stovninum. Strandferðslan heldur, at tað kann vera torført at skilja ímillum, nær ið talan er um rakstrar- ella løguútreiðslu – ikki minst, tá ið talan er um rakstrargøgn, sum Strandferðslan hevur serliga átrokandi tørv á. Upprunaliga umbønin til løgujáttanina "Størri tólbúnaður" var 11 mió.kr. Játtaðar blivu 1,5 mió.kr. – tí blivu trekkjararnir í hesum førinum útreiðsluførdir í rakstrinum.

Strandferðslan hevur bókað keypið av einum bili fyri 175.217 kr. á undirkontu 23 "Størri tólbúnaður" á løgujáttanini, har keyp av Terberg mafivognum annars eru skrásett. Strandferðslan hevur greitt frá, at bilurin varð keyptur fyrst og fremst tí pláss var á løgujáttanini fyri hesum. Pláss hevði verið á rakstrarjáttanini, men so hevði úrslitið verið eitt minni avlop á rakstrinum, ímeðan ein tilsvarandi upphædd hevði verið støðlað á tólbúnað-løgujáttanini og mestsum brúkt árið eftir.

5.6.5 Viðmerkingar frá landsstýrismanninum

Vísandi til § 12 í grannskoðanarlógini, bóðu vit landsstýrismannin um viðmerkingar og spurdu, hvørji tiltøk og ætlanir frágreiðingin um grannskoðan á Strandfaraskipum landsins hevði elvt til.

Í august 2016 hevur landsstýrismaðurin í samferðslumálum svarað, at viðmerkingar og tilmæli frá Landsgrannskoðanini yvirhøvur verða tiknar til eftirtektar hjá Strandfaraskipum landsins, og neyðugar broytingar og rættingar gjørdar so við og við. Landsstýrismaðurin leggur afturat, at fíggjarstýring stovnsins betrast støðugt, og at stovnurin heldur játtanirnar.

5.7 Akstovan (LG 2015/206-0384)

Landsgrannskoðanin hevur í 2016 fylgt upp tilmælunum til Akstovuna, sum vóru lýst í ársfrágreiðing okkara 2014. Niðanfyri eru brotini úr frágreiðingini endurtikin saman við viðmerkingunum hjá stovninum.

Tinglýsing og veðhavaralýsingar

Akstovan leggur út fyri tinglýsingargjøld og gjøld fyri veðhavaralýsingar fyri viðskiftafólk. Stovnurin krevur gjøldini inn frá eigarunum, tá ið akførini verða skrásett.

Í 2014 var ein munur á 7 t.kr. Akstovan hevur í 2016 greitt frá, at meginparturin av muninum stavar frá tíðaravmarkingum, og at stig eru tikin, sum bøta um viðurskiftini.

[24] Frá fíggjarárinum 2016 høvuðskonta 17.38.2.02.

KT-viðurskifti

Málið um KT- trygdaravrit er ikki loyst.

Teldurnar hava samband við alnetið gjøgnum Landsnet, og Akstovan luttekur eisini í trygdarpakkanum hjá KT landsins. Akstovan hevur fakskipanir, har stovnurin sjálvur skipar trygdartiltøkini, m.a. koyrikortsskrá, akfarsskrá, vegskattaskrá, sýnsskrá og kassaskipan.

Akstovan tekur trygdaravrit dagliga og hevur lýst mannagongdirnar í trygdarhandbókini. Skipanin er sett upp soleiðis, at ambætararnir verða speglaðir. Speglambætarin stendur í sama rúmi sum høvuðsambætarin. Rúmið er ikki brandtrygt.

Landsgrannskoðanin mælti til, at trygdaravrit varð goymt trygt, og á øðrum staði enn á Akstovuni. Í seinastu frágreiðingini varð nevnt, at ætlanin var at flyta speglambætaran til hølini hjá Akstovuni í Klaksvík. Tann ætlanin er nú slept, tí Akstovan arbeiðir við aðrari loysn saman við KT landsins.

Landsgrannskoðanin mælti til, at KT-fundir og KT-hendingar verða skjalfest, og váttað av stjóranum. Í 2016 hevur Akstovan greitt frá, at regluligir fundir verða hildnir, og fundarfrágreiðingarnar goymdar í journal.

Kassaeftirlit

Í mai 2016 hevur Landsgrannskoðanin verið á ófráboðaðum kassaeftirliti. Samsvar var millum talda peningin, salduna í Búskaparskipan landsins og kassauppgerðina. Vit samanhildu eisini saldurnar á peningastovnskontuavritunum við mánaðarenda við saldurnar í Búskaparskipan landsins; tær samsvaraðu. Landsgrannskoðanin hevði onki at finnast at.

5.8 Barsilsskipanin (LG 2014/220-0521)

Sambært § 20 í Ll. nr. 48/2001 ”um barsilsskipan” kunnu persónar, sum hava aðra inntøku av vinnu enn A-inntøku, tekna eina trygging. Sambært § 1 í K. nr. 59/2002 er gjaldið fyri tryggingina 500 kr. um árið fyri hvønn tryggjaðan.

Gjaldið til sjálvbodnu tryggingina er ongantíð endurskoðað.

Gjaldið fyri sjálvbodna trygging hevur frá fyrstan tíð verið 500 kr. um árið og varð ásett eftir einari meting. Upphæddin, 500 kr., er lutfalsliga lítil í mun tey 0,62% av A-inntøkuni, sum aðrir løntakarar gjalda. Sjálvbodnu tryggingartakararnir hava hóast tað sama rætt at fáa pening úr skipanini sum A-skattgjaldarar.

Í juli 2013 kunnaði landsstýrismaðurin í vinnumálum um, at gjaldið á 500 kr. um árið varð ásett eftir einari meting, har árliga miðalinntøkan varð sett at vera 200 t.kr. Við einum tryggingargjaldi á 0,25%, svarar tað til 500 kr. um árið. Vinnumálaráðið ásannaði, at 500 kr. árliga fyri at verða partur av einari slíkari skipan helst var í lægra lagi og boðaði frá, at ráðið fór at heita á umsitingina um at gera tilmæli til eitt hóskandi gjald.

Í apríl 2015 hevur Vinnumálaráðið í svari til Løgmansskrivstovuna boðað frá, at ráðið hevði arbeitt við at endurskoða gjaldið og fór í næstum at gera uppskot til broyting av gjaldinum, soleiðis at tað varð í samsvari við tær lønarhækkingar, sum hava verið síðan 2002.

Barsilsskipanin er síðani løgd til Samferðslumálaráðið at umsita.

Í juni 2016 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Samferðslumálaráðið arbeiðir við at endurskoða gjaldið til sjálvbodnu barsilspeningatryggingina, og at eftir ætlan verður broyting sett í verk í ár.

6 Mentamál

6.1 Mentamálaráðið (LG 2014/207-0111)

Í seinastu frágreiðing umrøddu vit grannskoðan av játtanini til Mentamálaráðið, høvuðskonta 7.11.1.09. og til Próvtøkur, høvuðskonta 7.23.1.31.

KT-trygd

Mentamálaráðið hevur gjørt váðameting, og KT-skipanirnar eru umfataðar av nýtslu- og trygdarreglunum hjá KT landsins.

Í juni 2015 kannaði eitt grannskoðanarvirki, hvussu Mentamálaráðið heldur krøvini hjá KT landsins og vísti á, at einasta "reyða" økið í váðametingini var Próvstovan. Sambært landsstýrismanninum er Próvstovan í 2016 innlimað í Landsnet, og lýkur harvið krøvini í trygdarpakkanum frá KT landsins.

Lønir

Landsgrannskoðanin helt, at tað var alt ov nógv, at starvsfólk skuldi eiga fleiri 100 tímar tilgóðar, og at tað var heldur ikki í tráð við reglurnar hjá ráðnum, sum loyva flexsaldur +30/-30 tímar.

Í juni 2016 hevur landsstýrismaðurin boðað frá, at stóru flexsaldurnar eru avgreiddar, og at Próvstovan nú bygnaðarliga vísir til stjóran í Námi, sum harvið hevur ábyrgdina av starvsviðurskiftunum í Próvstovuni.

Stóru flexsaldurnar eru avgreiddar.

6.2 Nám (LG 2014/207-0231)

Í seinastu frágreiðing umrøddu vit grannskoðan av Námi.

Undirvísingaramboð

Ll. nr. 53/2014 "um at útvega undirvísingarmiðlar o.a." er sett í gildi í mai 2014. Samstundis fór lógin frá 2005 úr gildi. Í september 2014 kunnaði landsstýrismaðurin um, at reglur vóru ikki gjørdar um virksemið hjá stovninum og um stuðulsveitingina sambært ásetingunum í § 3 í lógini.

Í august 2015 greiddi landsstýrismaðurin frá, at arbeitt varð við kunngerðini um stuðul at gera undirvísingarmiðlar, men at arbeiðið við kunngerðini um virksemið hjá stovninum var ikki byrjað.

Ongar reglur eru gjørdar um virksemi hjá stovninum.

Í juni 2016 sigur landsstýrismaðurin, at enn eru ongar reglur gjørdar.

KT-trygd

Nám hevði ikki gjørt váðameting, sum ásett í rundskrivi frá Vinnumálaráðnum. Stovnurin hevði heldur ikki skrivligar reglur um trygdartiltøk, men fylgdi reglunum hjá KT landsins fyri skipanirnar, sum eru í Landsneti.

Í august 2015 greiddi landsstýrismaðurin frá, at Nám hevði arbeitt saman við KT landsins við váðameting av dátugoymslu og trygd. Dátugoymslan var flokkað samsvarandi tilmæli frá KT landsins. Ivamál vóru tó um servaran hjá svar.fo.

Í juni 2016 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at ivamálini um KT-trygd og servaran hjá svar.fo eru loyst.

Eftirútbúgving og skeið

Arbeiðið at skipa eftirútbúgvingina í síni heild, sum byrjaði í 2013, er sambært landsstýrismanninum ikki liðugt.

Roknskaparreglugerð

Í 2015 mælti Landsgrannskoðanin Námi til at dagføra roknskaparreglugerðina, soleiðis at hon svarar til støðuna á samanlagda stovninum. Leiðslan tók undir við tilmælinum, og í februar 2015 kunnaði Mentamálaráðið um, at ráðið hevði fingið uppskot til nýggja roknskaparreglugerð til góðkenningar.

Ongin roknskaparreglugerð er sett í verk.

Í juni 2016 hevur landsstýrismaðurin upplýst, at Nám í løtuni endurskoðar reglugerðina, og verður hon broytt samsvarandi nýggja bygnaðinum og galdandi mannagongdum. Hon verður undirskrivað eftir summarsteðgin. Tað sama er galdandi fyri roknskaparreglugerðina fyri Prófstovuna.

Kassi og peningastovnskonta

Nám hevði ein stovnskassa, sum varð brúktur til sølu av bókum v.m. og til smærri útreiðslur. Vit mæltu leiðsluni til at taka støðu til, um tað framvegis var neyðugt at hava kontantkassa.

Nám hevði eisini peningastovnskontu, sum gjaldkort var knýtt at. Landsgrannskoðanin vísti á, at inntøkurnar áttu at verðið goldnar beinleiðis á kontu hjá Gjaldstovuni, og at útreiðslurnar, sum gjaldkortið varð nýtt til, eins væl kundu verðið rindaðar umvegis Búskaparskipan landsins.

Í juni 2016 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at kassin er tikin av og peningastovnskontan verður søgd upp. Nám hevur fingið Eurocard heldur enn gjaldkort knýtt at peningastovnskontu.

6.3 Rásin (LG 2014/207-0232)

Í seinastu frágreiðing umrøddu vit grannskoðanina av Rásini, sum er eitt skúlatilboð til børn við breki.

Journalisering, skjalasavn og persónsmál

Stovnurin hevði onga journalskipan, og sambært okkara kanningum vórðu persónsupplýsingar, ið kundu vera eymar, ikki goymdar forsvarliga.

Mentamálaráðið tók undir við Landsgrannskoðanini, at skjølini skuldu verða goymd, soleiðis, at lætt var at finna tey aftur, at eymar upplýsingar verða viðgjørdar og goymdar á rættan hátt, og at tær verða fyribeindar skynsamt.

Í juni 2016 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Rásin er ávegis inn í Landsnet. Ætlanin er eisini at fáa eina journalskipan. Í løtuni verða persónsupplýsingar goymdar í arkivskápi, sum bert leiðarin og varðaleiðarin hava atgongd til.

Rásin hevur onga journalskipan.

Skráseting av ognum

Sambært landsstýrismanninum hevur Rásin gjørt eitt dagført ognaryvirlit frá 1. februar 2016.

Roknskaparviðurskifti o.a.

Í 2007 góðkendi Mentamálaráðið roknskaparreglugerðina hjá stovninum, men starvsfólkini høvdu ikki nýtt hana. Gjaldstovan hevði síðani 2013 konterað rokningarnar. Gjaldstovan hyggur at, um kreditorarnir eru rættir, um rokningarnar hoyra til Rásina, men stemmar ikki av.

Í juni 2016 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at stovnurin hevur sent uppskot um roknskaparreglugerð til Mentamálaráðið, sum er sent aftur til rættingar. Væntandi verður reglugerðin undirskrivað í næstum.

Roknskaparreglugerð er ikki dagført.

Næmingagjøld

Næmingarnir á Rásini rinda 3.000 kr. um mánaðin, hóast ongar reglur eru gjørdar, sum ásett er í lógini.

Landsgrannskoðanin vísti á, at viðurskiftini kunnu sammetast við sambýlir undir Almannamálaráðnum, sum hevur reglur um, hvat sambýli kann rinda av játtanini, og hvat búfólkini sjálvi skulu gjalda.

Í august 2015 boðaði Mentamálaráðið frá, at ráðið fór at gera reglur um næmingagjøld og fór at kunna seg um reglurnar, ið Almannamálaráðið hevur.

Í juni 2016 hevur landsstýrismaðurin svarað, at reglur eru ikki gjørdar men skulu gerast í næstum, og at Mentamálaráðið fer at kanna, hvørjar reglur Almannamálaráðið nýtir fyri døgnstovnatilboð.

Væntandi reglur um næmingagjøld.

Mannagongdir í sambandi við námsferðir

Rásin hevði ikki skrivligar mannagongdir í sambandi við námsferðir. Stovnurin rindaði lønir og flogferðir hjá starvsfólkum, og næmingarnir rindaðu restina. Ein partur av lesiætlanini er, at næmingarnir fara námsferðir. Tó at tað ikki er nøkur ófrávíkilig treyt hjá næmingum at luttaka, hava allir næmingarnir verið við á ferðunum.

Landsgrannskoðanin mælti til, at leiðslan gjørdi skrivligar reglur fyri námsferðir, og at Rásin fylgdi vegleiðingini hjá Fíggjarmálaráðnum um ferðauppgerðir.

Landsstýrismaðurin hevur í juni 2016 kunnað um, at Rásin nýtir skjølini til almennar ferðauppgerðir og ger ferðafrágreiðingar v.m. sambært almennum reglum.

6.4 Fiskivinnuskúlin (LG 2014/207-0233)

Landsgrannskoðanin hevur í 2015 grannskoðað Fiskivinnuskúlan.

Fiskivinnuskúlin hevur egna KT-skipan við upplýsingum um næmingar, starvsfólk v.m. Servarin stendur í avlæstum rúmi og er vardur av brandmúri og virusverju. Til at røkja KT-skipanina hevur skúlin avtalu við telduvørð, sum dagliga tekur trygdaravrit av øllum dátum. Øll próvtøl verða tøppað í KT-skipan, sum Mentamálaráðið umsitur.

Fiskivinnuskúlin hevur gjørt váðameting og trygdarpolitikk.

Í juni 2016 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at Fiskivinnuskúlin hevur orðað trygdarpolitikk og gjørt váðameting. Skúlin hevur reglur fyri, hvussu dáturnar kunnu endurskapast og hevur eisini gjørt yvirlit yvir ognir skúlans.

6.5 Musikkskúlaskipanin (LG 2014/207-0235)

Í seinastu frágreiðing vísti Landsgrannskoðanin á, at vit síðani 2002 høvdu gjørt vart við, at samsvar var ikki ímillum ásetingar í lógini "um stuðul til musikkskúlar" og fyrisitingarligu mannagongdirnar. Hóast tað, var onki ítøkiligt hent.

Ósamsvar er ímillum § 1 í lógini, um at landskassin letur studning og § 5, um at landsstýrismaðurin setir lærararnar. Lógin verður heldur ikki umsitin, sum talan er um studning úr landskassanum. Landskassin rindar allar lønarútreiðslurnar til lærarar, og kommunurnar endurrinda landskassanum 50% í mun til talið av tillutaðu tímunum.

Lógin um stuðul til musikkskúlar hevur verið í gildi síðani 1984. Landsgrannskoðanin heldur, at gongdin í málinum um Musikkskúlaskipanina bendir á, at Mentamálaráðið og skiftandi landsstýrismenn hava skákað sær undan at loysa trupulleikarnar við at seta nevndir at kanna, gera uppskot o.a., uttan at tað hevur fört til ítøkilig úrslit.

Samanumtikið ber til at siga, at fyrisitingarligu mannagongdirnar í 30 ár hava ikki verið í tráð við allar ásetingarnar í lógini, men hóast skiftandi landsstýrismenn hava vitað um manglandi samsvarið, er lógin óbroytt og fyrisitingin ikki sambært lógini.

Løgtingsgrannskoðararnir hava eisini aftur og aftur hvassliga átalað, at onki ítøkiligt hendir viðvíkjandi Musikkskúlaskipanini. Í uppskoti til samtyktar í februar 2016 - Lm. nr. 61/2015 - vístu løgtingsgrannskoðararnir aftur á, at sambært lógini eru tað kommunurnar, sum fyrisita, og landið endurrindar, men í veruleikanum fyrisitur landið, og kommunurnar endurrinda. Skiftandi landsstýrisfólk hava síðani 2002 sagt seg vilja fáa greiði á málinum, men onki ítøkiligt er gjørt við tað. Løgtingsgrannskoðararnir hildu tað als ikki vera nøktandi og átalaðu harðliga.

Enn er ikki samsvar ímillum lógina og fyrisitingarligu mannagongdirnar.

Í juni 2016 greiðir landsstýrismaðurin frá, at hann er farin undir eina tilgongd saman við kommununum, so loysn kann finnast viðvíkjandi fyrisitingarligum mannagongdum. Eftir ætlan verður broytingaruppskot til musikkskúlalógina lagt fyri Løgtingið í komandi tingsetu.

6.6 Frítíðarundirvísing (LG 2014/207-0235)

Í ársfrágreiðingini 2013 umrøddu vit grannskoðan av frítíðarundirvísing. Enn eru øll mál ikki avgreidd.

Dagføring av kunngerðum

Í september 2014 kunnaði landsstýrismaðurin um, at arbeiðið at dagføra kunngerðirnar steðgaði, tá ið frítíðarundirvísingin sambært lóggávuni varð løgd til kommunurnar at umsita. Ráðið var tó í holt við at dagføra tær.

Í august 2015 greiddi landsstýrismaðurin frá, at kunngerðirnar vórðu ikki dagførdar, tí Mentamálaráðið helt, at neyðugt var at dagføra lógina, Ll. nr. 70/1983 "um frítíðarundirvísing v.m."

Landsstýrismaðurin hevur í juni 2016 kunnað um, at lógin enn ikki er broytt. Sambært landsstýrismanninum er eitt upprit um at skipa vaksnamannaútbúgving í Føroyum sent til landsstýrisfund, og verður frítíðarundirvísingin helst ein partur av tí útbúgvingini.

Roknskaparviðurskifti

Í 2013 rindaði Mentamálaráðið nakrar samsýningar beinleiðis, m.a. til lærarar á Sernámi, sum høvdu serliga útbúgving at undirvísa fólki, ið eru rakt av afasi[25]. Undirvísingarleiðarin helt, at rættari hevði verið, at Sernám rindaði lønirnar, og at tær síðani vórðu endurgoldnar av Mentamálaráðnum.

Í august 2015 segði landsstýrismaðurin, at Mentamálaráðið ætlaði at broyta mannagongdina í 2016 soleiðis, at játtanin til undirvísing av fólki, ið eru rakt av afasi, fór at verða flutt til Sernám sambært ásetingum í rundskrivi nr. 5 frá 1984 "um serundirvísing vaksnamanna".

Í juni 2016 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at viðurskiftini eru broytt soleiðis, at Sernám nú rindar lønirnar. Ein C.átekning heimilar landsstýrismanninum at gera innanhýsis flytingar millum høvuðskontu 7.23.5.07. "Frítíðarundirvísing" og høvuðskontu 7.23.2.02. "Sernám".

6.7 Granskingarráð Føroya (LG 2014/207-0236)

Í undanfarnum frágreiðingum hava vit umrøtt roknskaparreglugerðina hjá Granskingarráð Føroya frá 2012, sum fevnir um Granskingargrunnin og Granskingarráðið. Reglugerðin bleiv send Mentamálaráðnum, men varð ikki góðkend, tí ógreiða var millum Granskingargrunnin og Mentamálaráðið, hvørt avlop av óbrúktari játtan hjá grunninum skuldi fella aftur til landskassan.

Í oktober 2013 greiddi landsstýrismaðurin frá, at Mentamálaráðið var farið undir at greina løgfrøðiligu støðuna hjá Granskingargrunninum fyri at tryggja samsvarandi ásetingar og mannagongdir.

Í september 2014 segði landsstýrismaðurin, at Mentamálaráðið miðaði eftir at góðkenna roknskaparreglugerðina "í næstum".

Í november 2015 boðaði landsstýrismaðurin frá, at Mentamálaráðið hevði viðgjørt handfaringina av stuðlinum hjá Granskingargrunninum saman við Gjaldstovuni og fór í næstum at taka teir prinsipiellu spurningarnar upp við Fíggjarmálaráðið. Miðað varð eftir, at Mentamálaráðið saman við Fíggjarmálaráðnum kom til eina niðurstøðu innan árslok 2015.

Landsstýrismaðurin hevur í juni 2016 kunnað um, at Mentamálaráðið arbeiðir enn við málinum og væntar at koma til eina niðurstøðu í heyst (2016).

Roknskaparreglugerðin enn ikki góðkend.

6.8 Sjónám (LG 2014/207-0236)

Sjónám fevnir um samanløgdu stovnarnar Klaksvíkar sjómansskúla og Trygdarmiðstøðina, ið vórðu lagdir saman í 2012.

Í seinastu frágreiðing umrøddu vit, at Klaksvíkar sjómansskúli hevði roknskaparreglugerð frá 2011, sum ikki var góðkend av Mentamálaráðnum. Roknskaparreglugerðin hjá Trygdarmiðstøðini var ikki dagført síðani 2001. Leiðslan hevði gjørt roknskaparreglugerð fyri Sjónám og sent hana til Mentamálaráðið at góðkenna.

Í juni 2016 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at roknskaparreglugerðin enn ikki er góðkend, men at arbeitt verður við málinum.

Roknskaparreglugerðin ikki góðkend.

[25] Trupulleikar við málinum, orsakað av skaða á heilanum ella heilaskaða.

6.9 Fróðskaparsetur Føroya (LG 2014/207-0236)

Roknskaparreglugerð

Í seinastu frágreiðing vísti Landsgrannskoðanin á, at Fróðskaparsetur Føroya, ið er samanlagdur stovnur frá 2008, hevði ikki gjørt felags roknskaparreglugerð fyri stovnin.

Roknskaparreglugerðin enn ikki góðkend.

Í november 2015 segði Mentamálaráðið, at ráðið hevði móttikið roknskaparreglugerðina frá Fróðskaparsetrinum og hevði umrøtt hana við Gjaldstovuna. Okkum kunnugt er reglugerðin ikki góðkend enn.

Verkætlanir

Landsgrannskoðanin grannskoðaði í 2014 verkætlanir hjá Fróðskaparsetri Føroya við m.a. at kanna, um roknskapir vóru í samsvari við fíggjarætlanir, ið vóru grundarlag undir m.a. stuðulsumsóknum, um verkætlanarroknskapir í landsroknskapinum eru rættir, og um skrivligar mannagongdir og innaneftirlit eru.

Okkara kanningar vístu, at roknskapir fyri verkætlanir vóru ikki nøktandi, m.a. vóru inntøkur í stóran mun ikki skrásettar í rakstrarroknskapinum, men bert í fíggjarstøðuni. Reglurnar um endurrindanir av ferðakostnaði, dagpeningi o.a. vóru ikki hildnar.

Í 2014 heitti Mentamálaráðið á stýrið fyri Fróðskaparsetrið um at syrgja fyri, at mannagongdirnar viðvíkjandi verkætlanum verða allýstar við nýggjari roknskaparreglugerð.

Í juni 2016 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Fróðskaparsetrið hevur gjørt tríggjar mannagongdir til umsiting av verkætlanum:

1. Rakstrargjald fyri Ph.D verkætlanir,
2. Hvussu verkætlanir verða umsitnar á Setrinum, og
3. Býti av overhead.

Í mai 2015 bað Landsgrannskoðanin Mentamálaráðið um endaligar uppgerðir fyri nakrar verkætlanir.

Verkætlanin “Normer” er ein Ph.D verkætlan, ið skuldi vara frá 2012 til 2015, har NordForsk[26] skuldi fíggja NOK 2.760 t.kr. Landsgrannskoðanin viðmerkti, at vit fóru at venda aftur til roknskapin, tá ið verkætlanin var liðug.

Í juni 2016 hevur landsstýrismaðurin boðað frá, at verkætlanin varð longd eitt ár vegna farloyvi. Fróðskaparsetrið hevur í hesum sambandi fingið játtað NOK 72 t.kr. til meirútreiðslur.

Verkætlanin “Ældre og aldring på Færøerne” varð mett at kosta 1,6 mió.kr., harav skuldi Granskingarráðið fíggjað 950 t.kr. og Setrið sjálvt 650 t.kr. Sambært Búskaparskipan landsins hevur Setursins partur higartil verið 720 t.kr.

Í juni 2016 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at verkætlanin er liðug og endaliga uppgjørd. Setursins partur bleiv størri enn upprunaliga mett, tí verkætlanin tók longri tíð, enn ætlað.

Verkætlanin “Craft International” skuldi fíggjast av NPP[27], og sambært fíggjarætlanini varð kostnaðurin 1.559 t.kr. Eftir ætlan skuldi hon enda við árslok 2013. Frá 2011 til 2014 vórðu 1.272 t.kr. brúktar til verkætlanina. Ongin inntøka er komin tey árini. Í 2015 eru slakar 400 t.kr. goldnar verkætlanini frá Hordaland Fylkeskommune. Landsgrannskoðanin fekk ikki frágreiðing frá Mentamálaráðnum, hví so stórur munur

[26] Nordic Center for Research on Marine Ecosystem and Resources under Climate Change.
[27] Northern Periphery Programme.

er á ætlaðu fíggingini frá NPP og upphæddunum, sum Fróðskaparsetrið hevur móttikið.

Landsstýrismaðurin hevur í juni 2016 boðað frá, at tað framvegis verður arbeitt við fíggingini frá NPP, og væntar Fróðskaparsetrið, at arbeiðið verður liðugt í heyst. Fróðskaparsetrið væntar somuleiðis verkætlanina "Craft International" at verða lidna í heyst (2016).

6.10 Tjóðpallur Føroya (LG 2015/207-0242)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað roknskaparviðurskiftini á Tjóðpalli Føroya. Endamálið var at kanna innanhýsis eftirlit, og um roknskapurin var rættur.

Tjóðpallur Føroya er sjálvstøðugur almennur stovnur og virkar sambært Ll. nr. 68/2003 "um Tjóðpall Føroya og stuðul til leiklist v.m." Virksemið hjá Tjóðpallinum er lýst í §§ 5-8. Stovnurin kom í staðin fyri Leikpall Føroya, sum var sjálvsognarstovnur, stovnaður í 1989. Tjóðpallurin heldur til í leigaðum hølum hjá Tórshavnar kommunu.

Landsstýrismaðurin hevur lýst tvær kunngerðir: K. nr. 18/2004 "um stuðul til leiklist v.m." og K. nr. 110/2003 "um leiklistaráð".

Landsstýrismaðurin hevur sett eitt leiklistaráð við 7 limum, sum hevur til endamáls at seta og loysa úr starvi stjóra, umrøða og góðkenna fíggjarstøðu og mál av týdningi fyri Tjóðpallin og leiklist. Ráðið skal staðfesta virksemi stovnsins eftir tilmæli stjórans.

Játtanin til stovnin er á høvuðskontu 7.24.2.06. "Leiklist (Rakstrarjáttan)". Roknskapartølini fyri vanliga virksemið hjá Tjóðpallinum á undirkontu 20 seinastu 5 árini:

t.kr.

Heiti	2011	2012	2013	2014	2015
Lønir v.m.	2.844	2.665	3.002	3.490	3.215
Keyp av vørum og tænastum	1.701	1.060	988	1.120	1.577
Keyp av útbúnaði, netto	201	361	354	50	58
Leiga, viðlíkahald og skattur	258	375	287	322	384
Søla av vørum og tænastum	-776	-406	-302	-601	-638
Vanligar flytingarinntøkur	0	0	-210	0	0
Tilsamans	**4.228**	**4.055**	**4.119**	**4.381**	**4.596**
Játtan í fíggjarlóg	4.315	4.315	4.315	4.315	4.515

Undir høvuðskontuni eru tríggjar aðrar undirkontur:

21. Meginfelag áhugaleikara Føroya, sum er stuðul til áhugaleiklist.
22. Stuðul til yrkisleiklist, sum eisini kann brúkast til førleikamenning.
40. Inntøkufíggjað virksemi hjá Tjóðpalli Føroya.

Grannskoðanin hevur bert fevnt um vanliga virksemið hjá Tjóðpallinum á undirkontu 20. Onki er bókað á undirkontu 40.

Roknskaparreglugerð

Roknskaparreglugerðin fyri Tjóðpallin er frá mai 2007. Í 2014 var uppskot til nýggja reglugerð sent Mentamálaráðnum, og ætlaði ráðið at gjøgnumganga hana saman við Tjóðpallinum.

Roknskaparhaldið er ikki nøktandi skipað.

Vit gjøgnumgingu uppskotið til roknskaparreglugerð og dagligar mannagongdir o.a., sum eru viðkomandi fyri roknskaparhaldið. Okkara fatan var, at roknskaparhaldið á fleiri økjum ikki var nøktandi skipað, og hevði tað við sær óvissur.

Landsgrannskoðanin helt, at óvissurnar vóru álvarsamar og mælti leiðsluni til at fáa skipað roknskaparhaldið betur og at fáa eina roknskaparreglugerð góðkenda við ábyrgdar- og heimildarreglum, ið svara til reglurnar, ið landsstýrið hevur ásett.

Í mars 2016 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Mentamálaráðið fer at tryggja, at roknskaparhaldið á Tjóðpallinum verður nøktandi skipað við mannagongdum sambært roknskaparkunngerðini.

Lønir

Til føst størv lýsir Tjóðpallurin alment eftir starvsfólki. Sambært semju við Mentamálaráðið lýsir stovnurin ikki eftir fólki til leikir og pallsmíð v.m., men biður fólk í samráði við leikstjóra.

Tjóðpallurin hevur ikki skipaða tímaskráseting, men leikarar fáa ikki yvirtíð fyri kvøldarbeiði. Stovnurin hevur eitt parttíðarsett skrivstovufólk. Starvsfólkini eru lønt eftir sáttmálum við Starvsmannafelagið, Leikarafelagið og Tænastumannafelagið.

Lønarmálini eru ikki nøktandi skjalprógvað.

Landsgrannskoðanin mælti til, at lønarmál vórðu nøktandi skjalprógvað. Sambært Tjóðpallinum vórðu skjøl oyðiløgd av sótskaðanum, stovnurin hevði í 2014. Mentamálaráðið hevur heitt á Tjóðpallin um at skjalfesta øll lønarskjølini.

Landsgrannskoðanin mælti til, at eftirlønargjøld verða avgreidd sambært reglunum, tá ið talan er um starvsfólk í eftirlønaraldri. Mentamálaráðið fer at heita á Tjóðpallin um at fáa hesi viðurskifti í rættlag sambært galdandi reglum.

Stjórin og onnur í føstum starvi

Í lógini um Tjóðpallin er ásett, at stjórin er áramálssettur, men onki verður sagt um, hvussu langt stjóraskeiðið skal vera. Sambært viðmerkingunum til lógina er tað í mesta lagi 5 ár í senn.

Setanarsáttmálin við stjóran, ið er frá februar 2015 til januar 2020, er góðkendur av Fíggjarmálaráðnum.

Samsýning til ráðslimir og fundarpeningur

Í § 4, stk. 5, í lógini um Tjóðpallin stendur, at limir í Leiklistaráðnum fáa goldið samsýning eftir reglum landsins um fundarpening. Formaðurin fær 3.637 kr. um mánaðin, men fær annars ikki fundarpening. Hinir ráðslimirnir fáa fundarpening.

Eitt av starvsfólkunum hjá Tjóðpallinum er limur í Leiklistaráðnum. Siðvenja var, at starvsfólkið fekk fundarsamsýning eins og hini. Flestu fundir, ella partar av teimum, eru uttan fyri arbeiðstíð.

Mentamálaráðið hevur boðað Tjóðpallinum frá, at nevndarlimur, ið er í starvi hjá stovninum, ikki eigur at fáa fundarsamsýning, tí nevndararbeiðið natúrliga má metast at hoyra til starvið. Í staðin eigur viðkomandi at fáa frí frá arbeiði til at luttaka á fundum, ið eru í vanligari arbeiðstíð, og kann avspáka, tá ið fundir eru uttan fyri vanliga arbeiðstíð.

Siðvenja um samsýning til starvsfólkaumboð er broytt.

Sambært Mentamálaráðnum er siðvenjan nú broytt, soleiðis at starvsfólkaumboðið fær ikki samsýning fyri nevndararbeiðið í leiklistaráðnum.

Aðrar lønir, bókaðar á St.kt. 11

Í 2014 eru hevur Tjóðpallurin goldið 1.248 t.kr. sum “Aðrar samsýningar og viðbøtur”. Av teimum eru 524 t.kr. goldnar um felags lønarskipanina hjá Gjaldstovuni, meðan 724 t.kr. eru avgreiddar umvegis kreditorskipanina.

Sambært Kontuskipan landsins skal standardkonta 11 bert nýtast til lønir v.m., og sambært skattalógini skulu lønir gjaldast um skattaskipanina.

Í fleiri førum lúka rokningar ikki minstu-krøv til bókhald.

Vit hava gjøgnumgingið nøkur útgjøld, ið ikki eru goldin um skattaskipanina, og í nógvum førum lúka rokningarnar heldur ikki krøvini til fakturar. Landsgrannskoðanin mælti Tjóðpallinum til at ávísa lønirnar um skattaskipanina, og tá ið goldið verður um kreditorskipanina at ansa eftir, at krøvini til fakturar eru lokin.

Mentamálaráðið hevur í mars 2016 boðað frá, at ráðið hevur heitt á Tjóðpallin um at fylgja tilmælinum frá Landsgrannskoðanini.

Aðrar útreiðslur

Ferðaútreiðslur

Fyri at tryggja bíligastu ferðaseðlarnar keypir stjórin allar uttanlandsferðaseðlar. Sum heild tyktust ferðaútreiðslurnar at vera tilvildarliga skrásettar á standardroknskapar-kontur. Stovnurin hevur tikið okkara tilmæli til eftirtektar um at kontera neyvari.

Tað sæst ikki altíð á skjølunum, hvat endamálið hevur verið við ferðaútreiðslunum hjá teimum, ið ferðast fyri rokning hjá Tjóðpallinum. Landsgrannskoðanin mælti til at fylgja ásetingunum í roknskaparreglunum um ferðauppgerðir o.a. Sambært lands-stýrismanninum, er tilmælið tikið til eftirtektar.

Gjald fyri bústað og ferðing til og frá arbeiði

Tjóðpallurin rindar ferðaseðlar fyri leikstjórar og leikarar, ið búgva uttanlands, fyri at koma til Føroyar at arbeiða og rindar í ávísum førum fyri bústað til leikstjóra. Eisini rindar stovnurin t.d. skattafría dag- og náttarviðbót til leikstjóra. Stovnurin endurrindar eisini leikarum útreiðslur av at koma til og frá arbeiði í Føroyum.

Landsgrannskoðanin mælti til, at Tjóðpallurin, í samráði við Mentamálaráðið og TAKS, fekk greiði á spurningunum viðvíkjandi skattligu viðgerðini av fríari ferðing til og frá útlandinum, fríum bústaði og fríari ferðing til og frá arbeiði í Føroyum.

Mentamálaráðið hevur kunnað um, at tey í samráði við Tjóðpallin og TAKS fara at taka stig til at fáa greiði á hesum viðurskiftum.

Keyp av vørum o.a.

Tjóðpallurin skjalfestir ikki altíð keypið nøktandi. Stjórin hevur greitt frá, at fleiri keyp eru frá endurnýtsluhandlum hjá t.d. Reyða krossi og Bláa krossi, men at hon hevur gjørt starvsfólk varug við, at kvittanir skulu fáast til vega, og at tað skal síggjast, hvat er keypt.

Ognaryvirlit

Tjóðpallurin hevur yvirlit yvir ognir. Vit tóku tvær stakroyndir fyri at vita, um ognirnar vóru til staðar. Vit høvdu onki at finnast at.

Stovnurin hevur yvirlit yvir klæðir o.a., ið tey læna út. Higartil hava tey ikki kravt samsýning fyri leigu, men tey hava umhugsað møguleikan og fara at taka spurningin upp við Mentamálaráðið.

Inntøkur

Sambært lóg um Tjóðpall Føroya verður stovnurin fíggjaður við “inntøkufíggjaðum virksemi, stuðli og játtan á løgtingsfíggjarlógini”. Á høvuðskontu 7.24.2.06. “Leiklist” er undirkonta 40 ætlað til inntøkufíggjað virksemi.

Sambært kunngerðini um rakstrarjáttan skal søluprísurin í inntøkufíggjaða virksem-inum ásetast soleiðis, at hann ikki er kappingaravlagandi og soleiðis, at miðal langtíðarkostnaðurin verður fíggjaður. Ein treyt er eisini, at inntøkufíggjaða virksemið skal kunna skiljast frá øðrum uppgávum hjá stovninum.

Í lógini um Tjóðpallin er ikki neyvari greinað, hvat skal skiljast sum inntøkufíggjað virksemi. Í fíggjarlógini er heldur ongin frágreiðing. Landsgrannskoðanin spurdi Mentamálaráðið, hvussu inntøkufíggjað virksemi hjá Tjóðpallinum skuldi skiljast og hvussu skilt verður ímillum, hvør partur av rakstrinum hoyrir til ávíkavist vanliga virksemið og inntøkufíggjaða virksemið.

Mentamálaráðið vísti á, at sambært viðmerkingunum til lógina varð hildið, at tað var umráðandi, at Tjóðpallurin hevði møguleika fyri at hava aðrar inntøkur enn játtanina í fíggjarlógini. Serliga varð hugsað um sponsorering av ymiskum slagi til ávís tiltøk, kommunalan stuðul, atgongugjøld, sølu v.m.

Inntøkurnar hjá Tjóðpallinum hava, hóast ásetingina um inntøkufíggjað virksemi, verðið bókaðar á vanliga rakstrinum. Av tí at inntøkurnar mugu metast at hoyra til vanliga virksemið hjá stovninum, heldur Mentamálaráðið tað vera í lagi at bóka allar inntøkurnar á vanliga raksturin.

Mentamálaráðið umhugsar at strika undirkontuna Inntøkufíggjað virksemi, tí tørvur er ikki á henni, og tí tekur Tjóðpallurin undir við.

Prísáseting

Ongar reglur um prísáseting og avsláttarskipanir.

Í roknskaparreglugerðini er brot um inntøkur, sum stava frá atgongumerkjum, arbeiði fyri aðrar stovnar v.m. Um stovnurin fyriskipar tiltøk fyri onnur, er prísurin eitt rakstrargjald, sum skal dekka útreiðslurnar av meirarbeiðinum.

Stjórin ásetir prísir fyri atgongumerkir, arbeiði fyri onnur v.m. og kunnar Leiklistaráðið um broytingar. Sambært stjóranum fer hon at taka spurningin um prísáseting upp við Leiklistaráðið, fyri at finna ein leist fyri ásetingini og møguligum avsláttarskipanum.

Landsstýrismaðurin hevur vístá, at Mentamálaráðið hevði umrøtt við Tjóðpallin, at prísáseting og avsláttir skuldu verða ásett í roknskaparreglugerðini. Hann legði afturat, at Mentamálaráðið fer at tryggja, at greiðar ásetingar verða í reglugerðini um prísásetingar.

Atgongumerkjasøla

Tjóðpallurin prentar sjálvur síni atgongumerkir og eyðmerkir tey við numrum. Alt eftir, hvussu nógvir áskoðarar kunnu koma til hvørja sýning, verða atgongumerkini merkt frá nr. 1 og til ásetta talið. Sýningardagarnir eru eyðmerktir við hvør sínum liti.

Kontantsølan við dyrnar fer í kassan, meðan peningurin fyri aðra søla fer á peningastovnskontuna hjá stovninum.

Mannagongdir viðvíkjandi kassanum

Tjóðpallurin hevur kassa, sum verður brúktur til inntøkur frá atgongumerkjasølu, sølu av kaffi og til ymisk keyp í handlum. Í roknskaparreglugerðini er ásett, at kassahámarkið er 10 t.kr., og stjórin hevur eftirlit við kassanum. Um nógvur peningur er í kassanum, verður hann settur á peningastovnskontuna. Kassin verður gjørdur upp fyri ein mánað í senn.

Sambært roknskaparkunngerðini skal kassin einans brúkast til smáar útreiðslur, sum ikki eru hóskandi at avgreiða um Búskaparskipan landsins og kann ikki verða brúktur til ferðaforskot, ferðapening ella samsýningar av nøkrum slagi. Landsgrannskoðanin mælti til, at kassin bert varð brúktur til ásetta endamálið.

Forkvinnan í Leiklistaráðnum hevur sambært roknskaparreglugerðini ábyrgd av at gera kassaeftirlit. Onki kassaeftirlit var gjørt. Landsgrannskoðanin mælti til at fylgja ásetingunum.

Kassauppgerðirnar vóru ikki bókaðar regluliga. Í nøkrum førum vóru fleiri mánaðir ímillum, at uppgerðir vóru skrásettar í Búskaparskipan landsins. Eisini vístu fleiri kassauppgerðir, at kassahámarkið var ikki hildið.

Mentamálaráðið hevur kunnað um, at sambært Tjóðpallinum er innanhýsis eftirlitið við kassanum nú skipað sambært roknskaparkunngerðini.

Kontantsøla við dyrnar

Landsgrannskoðanin helt, at mannagongdin er ivasom, tá ið øll tilgongdin - frá móttøku av peningi til endaliga kassauppgerð - verður framd av sama persóni. Tá ið sølan harumframt ikki verður skjalfest regluliga á annað enn rokniark, er ivasamt, um talan er um nakað eftirlit.

Vit mæltu til, at stovnurin skipar fyri hóskandi skilnaði, t.d. at annar persónur fær ábyrgd av kassanum, soleiðis at stjórin kann hava eftirlit.

Vit gjørdu eisini vart við, at tað var átrokandi, at stovnurin skipaði fyri nøktandi skráseting av sølu, hvørja ferð sýningar vóru, t.d. í kolonnubók við neyvum upplýsingum um atgongumerkir, prísir o.a.

Í desember 2015 hevur stjórin greitt frá, at annar persónur nú tekur sær av atgongumerkjasøluni og førir søluna í kolonnubók hvørt kvøld, og at skrivstovufólkið hevur fingið ábyrgd av kassanum.

Peningastovnskontan

Tjóðpallurin hevur peningastovnskontu, ið kortterminalur og gjaldkort eru knýtt at. Kontan verður brúkt til at taka móti gjøldum fyri atgongumerkir og annars til aðra sølu. Peningur úr kassanum verður eisini settur á kontuna.

Ivi var, um heimildarváttan var gjørd til gjaldkortið, og í mars 2016 kunnaði Mentamálaráðið um, at ráðið fer at fylgja málinum upp.

Í roknskaparreglugerðini er ásett, at forkvinnan í Leiklistaráðnum hevur ábyrgd av kassaeftirlitinum, men onki er um kort, terminal, hámarksupphædd o.a.

Stjórin hevur greitt frá, at í uppskoti til nýggja roknskaparreglugerð vera ásetingar um gjaldkort, terminal, salduhámark, atgongumerkjaskipan á netinum, ábyrgd o.a.

Peningastovnskonta ikki regluliga bókað.

Vit hava gjøgnumgingið nakrar uppgerðir av peningastovnskontuni. Onkuntíð ganga fleiri mánaðir, áðrenn uppgerðir verða bókaðar í Búskaparskipan landsins. Sambært roknskaparreglugerðini ábyrgist stjórin fyri, at inntøkur verða tiknar við í roknskapin til tíðina.

Landsgrannskoðanin mælti til at fylgja roknskaparreglugerðini og bóka uppgerðirnar regluliga. Vit mæltu eisini til at áseta hámarksupphædd fyri peningastovnskontuna. Í desember 2015 hevur stjórin greitt frá, at í uppskoti til nýggja roknskaparreglugerð er hámark ásett.

Avsláttur

Stjórin førdi yvirlit á rokniarki yvir seld atgongumerkir, prísir v.m. Sambært yvirlitinum vóru ymiskir prísir galdandi, t.d. kunnu limir í fakfelag fáa avsláttur á 50 kr. fyri hvørt atgongumerki, tó 25 kr., um prísirnir eru settir niður.

Avsláttarskipanin er gjørd eftir tilmæli frá stjóranum, og sambært henni eru tílíkar skipanir vanligar í øðrum londum. Stjórin fer at taka málið upp við Leiklistaráðið fyri at áseta mannagongdir.

Spurdur, svaraði landsstýrismaðurin, at Mentamálaráðið heldur ikki, at tað er nøkur áseting í lógini fyri Tjóðpallin ella í fíggjarlógini, sum forðar Tjóðpallinum at hava avsláttarskipan. Mentamálaráðið hevur sum so ikki nakra viðmerking til, at Tjóðpallurin hevur avsláttarskipan, men ráðið hevur avgjørt áhuga í, at skipanin ikki gongur út yvir inntøkugrundarlagið hjá stovninum, tá ið tað er við til at fíggja raksturin. Prísásetingin eigur tí at taka støði í kostnaðinum av framleiðsluni.

Mentamálaráðið fer at tryggja, at prísásetingar verða settar í roknskaparreglugerðina fyri Tjóðpallin, at tað verður greitt frá møguligum avsláttarskipanum, og hvussu prísásetingin í slíkum førum verður gjørd.

Meirvirðisgjald

Tjóðpallurin er skrásettur at rinda meirvirðisgjald, og sambært stjóranum er alt virksemið MVG-skyldugt. MVG-skylduga sølan stavar frá atgongumerkjasølu og sølu av tænastum til Kringvarp Føroya.

Tjóðpallurin bókar sølu- og keyps-MVG á konturnar í fíggjarstøðuni og avroknar avgjaldstilsvarið til TAKS. Harumframt bókar Tjóðpallurin keyps-MVG á StRk. 7510 “Keyps-MVG land” og fær tann partin afturgoldnan frá Gjaldstovuni.

Mentamálaráðið hevur kunnað um, at ráðið heldur tað vera ruddiligast at bóka alt inngangandi MVG á 7510 keyps-MVG og at bóka sølu-MVG á 0833 og avrokna sølu-MVG’ið eftir reglunum hjá TAKS. Sambært Mentamálaráðnum fara TAKS og Gjaldstovan at umrøða mannagongdina, og ráðið fer at kunna Landsgrannskoðanina um niðurstøðuna.

6.11 Mentanargrunnur landsins (LG 2015/207-0242)

Í 2016 hevur Landsgrannskoðanin grannskoðað játtanina til Mentanargrunn landsins. Endamálið við grannskoðanini var m.a. at kanna, um leiðslan hevur sett í verk nøktandi og virkið innaneftirlit.

Mentanargrunnur landsins er skipaður sambært Ll. nr. 84/2000 “um Mentanargrunn Landsins”. Endamál grunsins er at styðja starv fyri føroyskum máli, bókmentum, list, vísindum og øðrum mentanarmálum bæði hjá leikum og lærdum.

Í K. nr. 109/2000 “um Mentanargrunn Landsins”, eru ásetingar um endamál, nevnd, umsóknir, starvslønir, íverksetanarstuðul, verkætlanir og um mentanarligt virksemi sum heild og treytir.

Starvsskipanin fyri nevndina ásetir fundarskipan, viðgerð av umsóknum, treytir, eftirmeting o.a. Skipanin umrøður eisini ógegni og tagnarskyldu.

Sambært § 1 í kunngerðini veitir grunnurin stuðul til starvslønir, íverksetarastuðul, styttri skeið hjá listafólkum og stuðul til ymiskar verkætlanir. Grunnurin kann, eftir umsókn, stuðla bóka- og fløguútgávum við upp til 30% av útgávukostnaðinum. Vísindaligt arbeiði, framsýningar, framførslur o.l. kunnu eftir umsókn fáa stuðul.

Roknskaparviðurskifti o.a.

Í 2015 varð stuðul m.a. latin til 68 bøkur og 71 fløgur og sjónbandaløg. Niðanfyri er eitt yvirlit yvir, hvussu stuðulin varð býttur:

kr.

Bóka-útgáva	Íverk-setanar-stuðul	Starvsløn	Tónlistalig tiltøk	Útgáva av fløgum	Mentanarlig tiltøk	Annað
690.000	150.000	2.892.860	596.000	631.000	512.000	171.000

Kelda: http://www.mentanargrunnur.fo/hagtol.html

Játtanin til Mentanargrunn landsins er býtt í høvuðskontu 7.24.2.05. “umsiting av mentanargrunninum (rakstrarjáttan)” og høvuðskontu 7.24.2.04. “Mentanargrunnurin (stuðulsjáttan)”.

Stuðulsjáttanin, 5.746 t.kr., er flutt grunninum í september 2015.

Forkvinnan váttar mánaðarligu roknskapirnar fyri umsitingina av grunninum umvegis RGS[28]. Mentanargrunnur landsins (stuðul) er skrásettur sum eksternur grunnur í landsroknskapinum og er ikki umfataður av RGS.

Roknskaparreglugerð
Grunnurin sendi í januar 2016 eina roknskaparreglugerð til Mentamálaráðið at góðkenna.

Støðling
Í ávísum førum hevur nevndin játtað pening, sum ikki er útgoldin, antin tí at talan er um starvslønir, ella tí at nevndin ikki hevur fingið endaligt prógv fyri, at verkætlanin verður framd.

Mentanargrunnurin hevur tikið stig til at umskipa bókhaldið soleiðis, at skyldur grunsins altíð eru greiðar og kendar. Partar av umskipanini eru at skipa fyri, at játtaður og støðlaður peningur, ið ikki er goldin út í játtanartíðarskeiðnum, verður fluttur aftur á stuðulskontuna. Sambært forkvinnuni verður umskipanin væntandi liðug í heyst (2016).

Lánigrunnur/útlán
Mentanargrunnurin eigur 1,5 mió.kr. tilgóðar av “gamlari” áogn. Mentanargrunnur Føroya Løgtings varð stovnaður við lóg í 1946. Nakað eftir tað, varð Lánigrunnurin stovnaður, sum serliga veitti lán til bókaútgávur, men eisini til t.d. plátuútgávur. Grunnurin var, nevndini kunnugt, virkin fram til einaferð í 1980’unum, tá ið prentkostnaðurin var minkaður so mikið, at ikki var neyðugt at lána pening til bókaútgávur o.a. Nevndini kunnugt er peningur ikki læntur úr Lánigrunninum síðani.

Í 2000 varð Mentanargrunnur Føroya Løgtings við lóg umskipaður til Mentanargrunn landsins. Við lógarbroytingini hvarv møguleikin at lána úr Lánigrunninum, tó at grunnurin framvegis var til, tí nøkur lán enn vóru virkin.

Sambært forkvinnuni er meginparturin av samlaðu útlánunum úr Lánigrunninum mistur, tí skuldararnir eru deyðir. Mentanargrunnurin hevur ikki boðað frá sínum krøvum á rætta staði í tøkum tíma, og staðfestast kann tí, at størsti parturin av áognini er mistur.

Grunnurin ætlar at avskriva góðar 1,3 mió.kr. í Lánigrunninum.

Mentanargrunnurin fer í næstum formliga at staðfesta, at størsti parturin av áognini er fallin burtur, og at roknskapurin fyri Lánigrunnin skal vísa tað. Grunnurin fer at biðja Gjaldstovuna, sum umsitur Lánigrunnin, um at avskriva góðar 1,3 mió.kr. Forkvinnan hevur upplýst, at grunnurin hevur viðgjørt málið um restáognina, ið er slakar 200 t.kr., og gjørt av at umleggja hana til stuðul til bókaútgávu. Umleggingin verður gjørd soleiðis, at restupphæddin verður játtað av stuðulsjáttan grunsins og flutt Lánigrunninum. Síðani verður Lánigrunnurin gjørdur upp og endaður.

Í juli 2016 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Mentamálaráðið er í samskifti við Mentanargrunnin um Lánigrunnin og ætlanirnar við honum. Miðað verður ímóti, at málið er loyst á heystið 2016.

[28] Roknskapargóðkenningarskipanin hjá Gjaldstovuni.

Málsviðgerð o.a.

Umsøkjarar lata Mentanargrunninum umsóknir á serligum umsóknarblaði. Eitt oyðiblað er til starvsløn, eitt til bókaútgávu og eitt til fløguútgávu. Umsøkjari, ið søkir um íverksetanarstudning ella annað slag av stuðli, skal senda inn sjálvgjørda umsókn, har hann greiðir frá verkætlanini, og leggja kostnaðarætlan við.

Nevndin viðger allar umsóknir á nevndarfundum og boðar umsøkjarum frá, um umsókn er gingin á møti. Í játtanarskrivi verður boðað frá, at peningurin verður goldin, tá ið grunnurin fær vissu fyri, at verkætlanin verður framd. Eisini boðar grunnurin frá, at um játtanin ikki verður nýtt innan eitt ár, og ongin onnur avtala er gjørd, fellur peningurin aftur til grunnin. Søkjast kann tá av nýggjum.

Sambært starvsskipanini skal nevndin grundgeva fyri sínum avgerðum og kunna umsøkjararnar. Stakroyndirnar vístu, at um umsókn var gingin á møti, fekk umsøkjari skrivligt svar, um hvussu nógvur stuðul verður latin. Í svørunum vanta tó skrivligar grundgevingar, tá ið øll upphæddin ikki verður játtað.

Í roknskaparreglugerðini ella í mannagongdum annars, er ikki skjalfest, hvussu upphæddirnar verða ásettar, men tað tykist sum upphæddirnar fylgja einum jøvnum mynstri. Sambært forkvinnuni er talan um eina kvalifiseraða meting. Tað er sjáldan, at umsøkjarar fáa alla upphæddina, ið teir søkja um.

Forkvinnan vísti á, at fíggjarligu fortreytir grunsins hava við sær, at ikki ber til at játta øllum dygdargóðum umsóknum fulla starvsløn. Tað eru tey fægstu, ið fáa alla ta starvsløn, tey søkja um. Síðani er tað upp til hvønn einstakan umsøkjara at gera av, um viðkomandi tekur av játtaðu starvsløninni ella ikki.

Mentamálaráðið hevur vístá, at ráðið heldur mannagongdina vera í lagi.

Eftirmeting av grunni

Ongin árlig eftirmeting er av kunngerð og viðtøkum.

Sambært § 7 í starvskipanini fyri grunnin, skulu kunngerð og viðtøkur á hvørjum ári eftirmetast av nevndini og Mentamálaráðnum í felag. Eftirmetingin skal gerast í sambandi við, at roknskapur og ársfrágreiðing verða latin landsstýrismanninum.

Ongin felags eftirmeting er gjørd, men nevndin eftirmetir eftir nevndarfundirnar, tó tað ikki er skjalfest. Ongin formlig ársfrágreiðing verður gjørd, men fundur er javnan við Mentamálaráðið, har kunnað verður um viðurskifti av týdningi fyri grunnin og ráðið.

Spurdur, um § 7 verður nøktandi umsitin, svaraði landsstýrismaðurin, at Mentamálaráðið eftir tørvi hevur fundir við Mentanargrunn landsins, har virksemið verður umrøtt, og mál av týdningi verða tikin upp til viðgerðar. Mentamálaráðið heldur ikki, at tørvur er á formliga at eftirmeta kunngerð og viðtøkur fyri grunnin á hvørjum ári, soleiðis sum starvsskipanin leggur upp til. Ráðið fer at umrøða tað nærri við grunnin og møguliga at tillaga ásetingina í starvsskipanini.

Stakroyndir

Vit kannaðu 18 játtaðar umsóknir í 2015, um upphædd, kontering, ávísing, skráseting og grundgeving vóru í lagi. Talan var um starvsløn, íverksetarastuðul og annan stuðul. Samanumtikið høvdu vit onki at finnast at upphæddum, kontering, ávísing og skráseting. Tó høvdu vit nakrar viðmerkingar um ávís viðurskifti:

Íverksetanarstuðul

Vit kannaðu eina umsókn um íverksetanarstuðul í 2015 og høvdu onki at finnast at.

Um játtaða upphæddin er størri enn 50 t.kr. skal umsøkjari sambært starvsskipanini lata inn grannskoðaðan roknskap og frágreiðing, tá tiltakið er av. Tekur verkætlanin fleiri ár, er frágreiðingin at meta sum ávegisfrágreiðing.

Tað er ikki siðvenja hjá grunninum at biðja um grannskoðaðan roknskap ella at krevja roknskap fyri játtanir yvir 50 t.kr. Forkvinnan heldur, at tað er kostnaðarmikið at fáa roknskap grannskoðaðan í mun til játtaðu upphæddirnar, og at peningurin tí er betur brúktur við ikki at lata roknskapin grannskoða.

Ikki siðvenja at biða um grannskoðaðan roknskap fyri játtan yvir 50 t.kr.

Landsgrannskoðanin mælti til, at nevndin heldur seg til reglurnar í starvsskipanini, ella at nevndin á annan hátt tryggjar sær, at útgoldni peningurin verður nýttur til tað, hann er játtaður til. Mentanargrunnurin tók undir við tilmælinum.

Annar stuðul

Umsøkjari fær peningin goldnan, tá ið nevndin fær vissu fyri, at verkætlanin verður framd. Forkvinnan heldur, at nevndin hevur nóg stóran kunnleika um mentanarliga økið til, at hon sjálv kann siga at útgjaldast kann. Landsgrannskoðanin mælti til at skjalfesta avgerðirnar um útgjald.

Stakroyndirnar vístu, at flestu umsóknir um annan stuðul, eru sendar grunninum við telduposti uttan undirskrift frá umsøkjara.

Sambært forkvinnuni eru flestu umsóknirnar undirskrivaðar av umsøkjarunum. Fyri at hava eina so smidliga og skjóta umsiting og viðgerð sum gjørligt, góðtekur Mentanargrunnurin, at umsóknir verða móttiknar og viðgjørdar, hóast tær ikki eru undirskrivaðar av umsøkjarunum. Forkvinnan heldur, at grunnurin er so mikið væl kunnaður um økið og kennir flestu umsøkjarar. Tí eru fyrimunirnir við skjótari viðgerð størri enn vansarnir við at krevja umsóknirnar sendar inn av nýggjum vegna vantandi undirskrift.

Flestu umsóknir um annan stuðul eru uttan undirskrift.

Landsstýrismaðurin hevur greitt frá, at tað hevur týdning, at upplýsingarnar í umsóknunum eru rættar, og at samsvar er millum umsøkjaran og tann, sum stuðulin verður goldin út til. Tað er tað, ið verður váttað við undirskrift. Tá ið talgild undirskrift fer at virka í Føroyum, heldur ráðið, at Mentanargrunnurin átti at umhugsa at brúkt hana.

Landsgrannskoðanin heldur tað vera uppá sítt pláss við formellari undirskrift fyri at tryggja rættleika og gildugt skjalprógv.

Generellar viðmerkingar

Vanligar mannagongdir eru ásettar í lóg, kunngerð og starvskipan fyri grunnin. Aðrar mannagongdir eru ikki niðurskrivaðar. Har lóg ella kunngerð ikki ásetir nærri boð, verður tað ein kvalifiserað meting hjá nevndini, ið ásetir, hvør skal hava stuðul, og hvat ein hóskandi upphædd er.

Landsgrannskoðanin heldur, at tað kann verða ein vansi fyri umsitingina, ella t.d. fyri eina nýggja nevnd, at ongar skrivligar mannagongdir eru og mælti til at lýsa mannagongdirnar í t.d. roknskaparreglugerðini.

Forkvinnan hevur greitt frá, at eftir teimum lógum og reglum, ið eru galdandi fyri Mentanargrunnin, skal nevndin gera eina ítøkiliga meting av hvørjari einstakari umsókn. Um metingin ella fortreytirnar, ið eru brúktar, verða niðurskrivaðar og á tann hátt gjørdar ítøkiligar, heldur forkvinnan, at meting nevndarinnar kann verða sett til viks til fyrimuns fyri eina standardiseraða avgreiðslu. Tað vildi verið ólógligt sambært meginregluna um at seta meting undir reglu. Mentanargrunnurin heldur tí, at tað skal vera nevndin, sum eftir eini ítøkiligari meting, avger at játta stuðul ella ikki, og hvussu stórur ein játtaður stuðul skal vera.

Landsgrannskoðanin heldur, at talan má vera um eina misskiljing av okkara tilmæli. Landsgrannskoðanin mælir ikki til at standardisera avgreiðsluna av umsóknunum, men vit halda tað vera skilagott at hava skrivligar mannagongdir, sum lýsa eina málsviðgerð, ið kann tryggja gjøgnumskygni.

A-inntøka ella B-inntøka

Landsgrannskoðanin hevur áður umrøtt spurningin um, at Mentanargrunnurin ikki rindar studning til einstaklingar sum A-inntøku, hóast ásett er í skattalógini § 60, stk. 1, 6), at sum A-inntøka verður roknað "studningar og aðrir skattskyldugir styrkir, veittir av almennum myndugleikum ella stovnum og felagsskapum ella av almennum ella privatum grunnum, gávufægrunnum og tílíkum".

Mentanargrunnurin hevur greitt frá, at tey rinda út studningin soleiðis, sum avtalað varð við TAKS í 2004. Avtalað varð, at TAKS skuldi kunna lesa øll útgjaldsskjøl hjá grunninum í telduskipanini hjá Gjaldstovuni.

Sambært TAKS eru tey av teirri áskoðan, at stuðulin er íroknaður roknskapum, sum umsøkjarar senda TAKS saman við sjálvuppgávum.

Landsgrannskoðanin hevur staðfest, at TAKS hevur ikki atgongd til skjølini í Búskaparskipan landsins. TAKS hevur kunnað okkum um, at tey ætla at fáa atgongdina aftur, fyri at hava møguleikan at hyggja eftir skjølunum.

TAKS hevur ikki atgongd til útgjaldsskjøl í BSL.

Landsstýrismaðurin hevur greitt frá, Mentamálaráðið hevur ikki verið vitandi um, at TAKS ikki hevur havt atgongd til at lesa útgjaldsskjølini í Búskaparskipan landsins. Ráðið fer í næstum at kanna málið nærri við tí fyri eyga, at TAKS fær allar neyðugar atgongdir, sum teimum tørvar, fyri at kunna fremja neyðugu grannskoðanina.

Landsstýrismaðurin vísir á, at tá ið TAKS aftur hevur fingið atgongd til útgjaldsskjølini hjá Mentanargrunninum, skuldi málið verið loyst frá teirra síðu. Mentamálaráðið fer í heyst at umrøða málið við TAKS.

Landsgrannskoðanin heldur, at so leingi tað er ásett í skattalógini, at stuðul er A-inntøka, átti stuðulin at verði ávístur um skattaskipanina. Er ætlanin at stuðulin ikki skal verða A-inntøka, áttu reglurnar at verði broyttar.

6.12 Søvn landsins (LG 2014/207-0243)

Í frágreiðingum okkara seinastu árini hava vit umrøtt Søvn landsins.

Lóggáva

Í september 2014 kunnaði landsstýrismaðurin um, at uppskot til:

- løgtingslóg um vernd av mentanararvi og náttúruarvi í sambandi við økisráðlegging og ognarumsiting (lógin skal koma ístaðin fyri lógina um at friða fornminni og bygningar),
- løgtingslóg um at broyta lógina um bókasavnsvirksemi,
- løgtingslóg um musealt virksemi, ið skal koma í staðin fyri lógirnar um fornminnissavn, um náttúrugripasavn, um bygdasøvn við mentanarsøguligum týdningi, og til
- løgtingslóg um skjalasavnsvirksemi, ið er endurskoðan av skjalasavnslógini

fóru at verða løgd fyri Løgtingið.

Landsstýrismaðurin kunnaði seinni um, at uppskot til løgtingslóg um savnsvirksemi var fyri á landsstýrisfundi í apríl 2015, har undirtøka var fyri at leggja uppskotið fyri Løgtingið. Gjørt varð tó av at bíða við at leggja málið fyri Tingið til eftir ólavsøku 2015.

Arbeiðið við savnslógini vísti seg at vera drúgvari enn væntað, og tí metti Mentamálaráðið, at arbeiðið við uppskotum til løgtingslóg um vernd av mentanar- og

náttúruarvi, um bókasavnsvirksemi og um skjalasavnsvirksemi eisini fóru at taka longri tíð, enn av fyrstan tíð ætlað.

Dagføringin av lógum og kunngerðum er ikki liðug.

Í juni 2016 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at tillagingar verða gjørdar í uppskoti um løgtingslóg um savnsvirksemi, sum eftir ætlan verður lagt fyri Løgtingið komandi tingsetu. Síðan verður farið undir at arbeiða við uppskotum til løgtingslógir um vernd av mentanar- og náttúruarvi, um bókasavnsvirksemi og um skjalasavnsvirksemi.

Hølisviðurskifti

Í oktober 2013 ásannaði landsstýrismaðurin, at hølisviðurskiftini hjá Søvnum landsins vóru ikki nøktandi, og at arbeitt varð við at finna loysnir. Í fyrsta umfari varð roynt at útvega starvshøli, soleiðis at málini í samanleggingartilgongdini kundu verða rokkin skjótast gjørligt. Í øðrum lagi varð arbeitt við at nøkta tørvin á goymslu- og framsýningarhølum.

Í august 2015 greiddi landsstýrismaðurin frá, at arbeitt hevði verið við ymiskum uppskotum um loysn á hølisviðurskiftunum, men endalig støða var ikki tikin.

Hølisviðurskiftini eru ikki loyst.

Í juni 2016 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at arbeitt verður framvegis við at finna eina loysn á hølisviðurskiftunum hjá Søvnum landsins.

6.13 Kirkjugrunnurin (LG 2014/207-0245)

Í seinastu frágreiðing vístu vit á, at sambært Ll. nr. 60/2007 “um fólkakirkjuna í Føroyum” ásetir landsstýrismaðurin neyvari reglur um virksemið hjá stiftsstjórnini, og sambært Ll. nr. 61/2007 “um fíggjarviðurskifti fólkakirkjunnar” ásetir landsstýrismaðurin reglur fyri, hvussu kirkjuráðini gera fíggjarætlanir.

Í september 2014 kunnaði landsstýrismaðurin um, at ætlanin var at gera kunngerðirnar í 2015.

Kunngerðirnar eru ikki gjørdar.

Í november 2015 segði landsstýrismaðurin, at Mentamálaráðið fór undir kunngerðararbeiðið tá.

Í juni 2016 hevur landsstýrismaðurin boðað frá, at Mentamálaráðið er enn ikki komið á mál við arbeiðinum.

7 Heilsumál

7.1 Læknakanningar av børnum (LG 2014/211-0201)

Landsgrannskoðanin hevur í fleiri ár gjørt vart við vantandi heilsukanningar av skúlabørnum. 12. mars 2014 kom í gildi Ll. nr. 9/2014 "um broyting í løgtingslóg um fyribyrgjandi heilsuskipanir fyri børn og ung", sum hevði við sær, at fleiri skúlabørn kundu taka av tilboðnum um heilsukanningar.

Játtan og nýtsla til læknakanningar av børnum seinastu 5 árini:

t.kr.

	2011	2012	2013	2014	2015
Játtan	850	850	850	850	850
Nýtsla	690	656	661	656	683
Minninýtsla	**160**	**194**	**189**	**194**	**167**

Í oktober 2014 kunnaði landsstýrismaðurin um, at umsitingin av profylaksum[29] var flutt til Heilsutrygd, men at enn sást ikki aftur í hagtølunum, at kommunulæknar høvdu fingið heimild til at gera kanningarnar.

Í juli 2015 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Heilsutrygd hevði sent kommunulæknunum og kommunulæknaviðtalunum vegleiðandi tilfar frá Sundhedsstyrelsen umframt kunning um lógarbroytingina í 2014 fyri at fáa fleiri børn og ung at taka av tilboðnum.

Heilsumálráðið heitti á Heilsutrygd um at finna eina skipan at kunna um tilboðið um heilsukanning við skúlabyrjan, og innan ásetta undirvísingarskyldan endar.

Sambært landsstýrismanninum skuldi Heilsutrygd senda øllum børnum, sum byrjaðu í skúla eftir summarsteðgin 2015, bræv við tilboði um heilsukanningar. Eisini tey ungu skuldu fáa líknandi kunning frá Heilsutrygd. Kunningarskipanin skuldi vera ein royndarskipan fyri 2015/2016.

Í august 2016 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at í 2015 bar Heilsutrygd øllum barnaskúlum í landinum "postkort" at lata næmingum í 1. og 9. flokki. Á postkortinum varð kunnað um heilsukanningina við inn- og útskúling. Endamálið var at fáa fleiri at taka av tilboðnum.

Tað sæst ein broyting, við tað at, tað nú eru fleiri sum taka av tilboðnum. Niðanfyri er talva, sum vísir hvussu nógvar heilsukanningar eru gjørdar við inn- og útskúling í 2015 og til august 2016:

Læknakanningar	2015	2016
Læknakanningar 1. flokkur	139	174
Læknakanningar 9. flokkur	15	46

[29] Heilsuvísindaligt heiti á fyribyrgjandi tiltøkum.

Heilsutrygd fer aftur í ár at bera skúlunum “postkort” at lata næmingunum í 1. og 9. flokki eftir summarfrítíðina.

Tølini tykjast sostatt at økjast eitt sindur, men enn er ikki komið á mál.

7.2 Heilsutrygd (LG 2015/211-0202)

Landsgrannskoðanin hevur í 2016 grannskoðað Heilsutrygd fyri m.a. at kanna, um roknskapurin er rættur, herundir eisini um innanhýsis mannagongdir eru tryggar. Heilsutrygd umsitur Ll. nr. 178/2009 “um almenna heilsutrygd” og er frá mai 2015 setanarmyndugleiki hjá kommunulæknum og setir heilsustarvsfólk í starv í avmarkað tíðarskeið í læknaviðtaluhølunum.

Heilsutrygd hevur gjørt uppskot til mál- og avrikssáttmála við Heilsu- og innlendismálaráðið. Ráðið hevur enn ikki skrivað undir sáttmálan. Sambært landsstýrismanninum í heilsu- og innlendismálum verður sáttmálin undirskrivaður 31. august 2016.

Roknskaparreglugerðin er ikki dagført og inniheldur ikki reglur viðvíkjandi Kommunulæknaskipanini.

Heilsutrygd hevur í 2014 gjørt avtalu við KT landsins um at fylgja trygdarásetingunum hjá KT landsins. Stovnurin hevur gjørt váðameting sambært rundskrivinum frá Vinnumálaráðnum, og í 2015 hevur grannskoðanarvirki gjørt kanning av trygdarpakka hjá Heilsutrygd í samráð við Gjaldstovuna.

Heilsutrygd hevur FAK-SLA[30] við KT landsins, og við Elektron og E7 um aðrar KT-skipanir.

Síðani 1. januar 2016 hevur Heilsutrygd brúkt journalskipanina 360^0. Skilnaður er í skipanini ímillum mál, men ongar skrivligar mannagongdirnar eru. Landsgrannskoðanin mælti til at gera skrivligar mannagongdir um journalisering.

Stovnurin viðger mál, ið innihalda eymar persónsupplýsingar, t.d. starvsfólkamál og mál um stuðul til hjálparráð. Leiðslan kunnaði um, at hon fer at broyta uppsetingina soleiðis, at øll skjøl, ið hoyra til trúnaðarmál, verða bólkað sum trúnaðarmál.

Roknskaparviðurskifti

Sambært roknskaparreglugerðini hevur Heilsutrygd skipað eina innanvirkis roknskapargóðkenning, har fíggjar- og fyrisitingarleiðarin áteknar mánaðarroknskapin. Síðani november 2015 hevur stjórin góðkent roknskapin, tí ongin fíggjar- og fyrisitingarleiðari hevur verið í starvi síðani tá.

Týdningarmikið at rokningar lúka minstukrøv til bókhald.

Við stakroyndum kannaði Landsgrannskoðanin nakrar útreiðslur. Vit høvdu onki at finnast at, men gjørdu vart við, at tað er týdningarmikið, at ansa eftir at rokningar, ið stovnar rinda, lúka almennar ásettar reglur, og at hóskandi verður borðið at fíggjarliga, tá ið vørur og tænastur verða útvegaðar, t.d. við at biðja um prísir frá fleiri veitarum. Vit mæltu eisini til at ansa eftir, at samsýningar, ið eru at meta sum løn, verða rindaðar sum løn, eisini tá ið móttakarin ikki frammanundan er í starvi hjá stovninum.

Í 2013 til 2016 hevur Heilsutrygd goldið um 1,2 mió.kr. til fyritøku fyri leigubilar til kommunulæknaavloysarar. Í 2014 tók Heilsutrygd av tilboði frá sama veitara um sáttmála til apríl 2017.

[30] SLA: Sáttmáli um tænastustig.

Lønir hjá umsitingini

Vit kannaðu lønirnar hjá tveimum starvsfólkum fyri november 2015. Vit høvdu onki at finnast at.

Av teimum 9 starvsfólkunum áttu trý ímillum 57 og 110 tímar tilgóðar, og trý onnur skyldaðu frá 60 til 181 tímar í mai 2016. Landsgrannskoðanin vísti á, at tá ið so nógv starvsfólk eiga nógvar tímar til góðar ella skylda nógvar tímar, kann roknskapurin ikki sigast at vera rættur.

Flexsaldurnar eru væl størri enn innanhýsis reglurnar loyva.

Í juli 2016 hevur Heilsutrygd kunnað um, at starvsfólkini skulu halda seg innan fyri reglurnar um flekstíð, og at avtala er gjørd um at minka nógvu minustímarnar.

7.2.1 Heilsutrygdarveitingar

Játtanin er á høvuðskontu 11.20.2.03. Sambært § 24, stk. 1, í Ll. nr. 178/2009 rinda øll, sum hava fylt 18 ár, og sum eru fevnd av lógini, 175 kr. um mánaðin umframt 0,6% av skattskyldugu inntøku sínari til Heilsutrygd í 2015. Persónar, ið búgva í Føroyum og t.d. sigla úti, gjalda mánaðarliga gjaldið.

Sambært Heilsutrygd hevur ein persónur fingið viðhald frá Skattakærunevndini, at hann ikki skuldi gjalda til Heilsutrygd, tí hann rindar til norska Folketrygd. Spurd, um avgerðin fær aðrar fylgjur fyri stovnin, svaraði Heilsutrygd, at tey framvegis viðgera málið og vænta at vera komin á mál stutt eftir summarfrítíðina (2016).

Inntøkurnar seinastu 5 árini:

t.kr.

Heiti	2011	2012	2013	2014	2015
Skattur og avgjøld	-104.142	-113.375	-114.929	-121.164	-127.280
Rentuinntøkur og vinningsbýti	-157	-209	-245	-218	-243
Avskriving/avseting	0	4	22	13	-6
Tilsamans	**-104.299**	**-113.580**	**-115.152**	**-121.369**	**-127.529**

TAKS krevur gjøldini inn fyri Heilsutrygd og roknar 0,7% í rentu fyri hvønn byrjaðan mánað eftir gjaldsfreist. Lønareftirhald og panting kann fara fram sambært reglunum í skattalógini. Í mai 2016 var eftirstøðan 2,85 mió.kr.

Sambært Heilsutrygd hava tey óskrivaðar mannagongdir um, hvussu umsóknir um útgjøld verða viðgjørdar.

Óskrivaðar manna-gongdir um viðgerð av umsóknum.

Stovnurin brúkar skipanina Cosmic til at gera samlirokningar frá læknum at rinda út eftir. Í Cosmic eru nakrir innbygdir kontrollar, t.d. kann ein lækni ikki fáa fleiri gjøld fyri somu tænastu sama dag, uttan at hann greiðir frá tí í skipanini. Heilsutrygd kannar rokningar við stakroyndum úti hjá læknum.

Heilsutrygd hevur ikki skrivligar mannagongdir fyri eftirlitunum. Tey skriva frágreiðingar, tá ið tey hava verið á eftirliti.

Sambært Heilsutrygd hava tey í 2014 gjørt stakroyndir hjá fleiri kommunulæknum fyri at kanna, um skjølini samsvaraðu við avtalaðu upphæddirnar, og um m.a. reglan um undirskriftir var hildin. Samlaða niðurstøðan hjá Heilsutrygd er, at í flestu førum var onki at viðmerkja. Tó vóru í einstøkum førum ov nógvar rokningar, ið ikki vóru undirskrivaðar. Fekk lækni ikki viðurskiftini rættað, mótroknaði Heilsutrygd í fylgjandi gjøldum.

Heilsutrygd ger eftirlit úti hjá kommunu-læknum.

Í 2016 hevur Heilsutrygd framt tvey gjølligari eftirlit. Í øðrum førinum høvdu tey ongar viðmerkingar, men hitt eftirlitið er ikki liðugt, og tí er frágreiðing ikki skrivað enn.

Tilskot til einstaklingar

Seinastu 5 árini hava útreiðslurnar til "Tilskot til einstaklingar" verið 144 til 153 mió.kr. um árið.

Heilsutrygd kannar flestu rokningarnar, sum koma frá viðgerðarstøðum og apotekum. Tey kannað m.a., um treytirnar fyri útgjaldi eru loknar, um takstirnir eru rættir, og um persónarnir búgva í Føroyum.

Landsgrannskoðanin kannaði nøkur útgjaldssløg við stakroyndum. Vit høvdu onki at finnast at, tó at vit mæltu til at gera skrivligar mannagongdir um eftirlit við útgjøldum.

Tilmæli um mannagongdir at gjøgnumganga loggar.

Allir fótarøktarar í landinum hava atgongd til allar upplýsingarnar í fótarøktarskipanini, tí tað skal bera til hjá teimum at kanna, um ein persónur, tey viðgera, lýkur treytirnar fyri at fáa tilskot. Heilsutrygd hevur munnliga spurt Dátueftirlitið, um upplýsingarnar í fótarøktarskipanini kunnu metast sum eymar persónsupplýsingar. Dátueftirlitið hevur svarað, at tað halda tey ikki.

Heilsutrygd tekur undir við tilmælinum frá Landsgrannskoðanini um at gera mannagongdir fyri, hvussu loggar viðvíkjandi fótarøktarskipanini verða gjøgnumgingnir.

7.2.2 Fíggjarstøða

Stovnurin hevur eina kontu í peningastovni, ið er skrásett í Búskaparskipan landsins. Heilsutrygd tekur undir við tilmælinum hjá Landsgrannskoðanini um at seta reglur um peningastovnskontu í roknskaparreglugerðina og at tøma kontuna regluliga.

Heilsutrygd rindar TAKS fyri at umsita innkrevjingina av heilsutrygdargjaldi. Ongin skrivlig avtala er ímillum Heilsutrygd og TAKS. Heilsutrygd ger ikki annað við innheintingina. Sambært yvirliti úr innheintingarskipanini hjá TAKS, 9. mai 2016, eru 2.847 t.kr. útistandandi í gjøldum til Heilsutrygd.

Sambært landsstýrismanninum áliggur tað TAKS at umsita eftirstøður og innkrevjing.

Í juni 2016 hevur landsstýrismaðurin í heilsu- og innlendismálum kunnað um, at TAKS krevur gjald til Heilsutrygd inn sambært ásetingum í lógini, og at stjórin á TAKS er stovnsleiðari á stovnsnummarinum í landsroknskapinum. Sambært Heilsu- og innlendismálaráðnum umsitur TAKS innkrevjingina og eftirstøðurnar av inngjøldum. Ráðið heldur, at sum heild er ábyrgdarøkið hjá TAKS væl og greitt avmarkað, og um ivamál eru, verða tey tikin upp til viðgerðar. Ráðið heldur, at ávísar eftirstøður kunnu altíð væntast at vera, og at TAKS skal tryggja, at tær ikki verða ov stórar.

Sambært roknskaparreglugerðini skal leiðslan í sambandi við átekning av mánaðarroknskapunum m.a. málsviðgera eftirstøður fyri seinasta skeið.

Í juli 2016 hevur Heilsutrygd greitt frá, at leiðslan kannar eftirstøður í mun til sínar veitarar. Í førum, har stovnurin hevur goldið ov nógv ella skeiva upphædd út, kannar leiðslan eisini tær eftirstøðurnar. Kanningin verður ikki skjalfest, men málini verða í flestu førum avgreidd beinanvegin.

Á játtanini Heilsutrygdarveitingar, St.kt. 08 "stuttfreistað skuld" eru avsettar góðar 2 mió.kr. Seinastu 5 árini hava avsetingarnar verið:

t.kr.

St.kt.	Heiti	2011	2012	2013	2014	2015
81	Skuld, sum er greidd til útgj.	-187	-202	0	0	-486
88	Onnur stuttfreistað skuld	-100	-650	-1.605	-1.533	-1.533
	Nettojáttan	**-287**	**-852**	**-1.605**	**-1.533**	**-2.019**

Til skuld, greidd til útgjaldingar eru 486 t.kr. settar av. Í juli 2016 hevur Heilsutrygd greitt frá, at øll upphæddin er goldin í 2016.

Avseting í 2013 til stilling av gjøldum stendur við.

Í 2013 eru 1.533 t.kr. settar av til basisgjald til kommunulæknar, ið áður var fryst fast. Sambært skrivi 14. februar 2014 frá Heilsutrygd til Gjaldstovuna, er talan um eina hóttandi útreiðslu, ið stovnurin mátti seta av til.

Í juli 2016 hevur Heilsutrygd greitt frá, at stilling av basisgjaldi til kommunulæknar var í fastari legu til apríl 2011. Tá vóru Kommunulæknafelag Føroya øðrumegin og Heilsutrygd og Heilsumálaráðið hinumegin ósamd um eina serliga stilling av gjaldinum.

Heilsutrygd sigur víðari, at:
"Ósemjan førdi til gerðarrættardóm, og síðani tá er basisgjaldið ikki stillað. Kommunulæknafelagið hevur strongt á at fáa stillingina aftur at virka, og tí hevur Heilsutrygd sett av til hesa hóttandi útreiðsluna.
Heilsutrygd hevur í ár, saman við Heilsu- og innlendismálaráðnum og Fíggjarmálaráðnum roynt at fingið semju við Kommunulæknafelagið um framtíðarstilling av basisgjaldinum. Semja er ikki fingin í lag enn, men vit meta framvegis, at hetta er ein hóttandi útreiðsla."

Sambært Heilsu- og innlendismálaráðnum hava tey ikki viðmerkingar til, at upphæddir eru settar av. Ráðið vísir á, at samráðingar eru ímillum Fíggjarmálaráðið og Kommunulæknafelagið um málið.

7.2.3 Kommunulæknaskipanin, játtan 11.20.2.04.

Lógargrundarlagið undir Kommunulæknaskipanini er Ll. nr. 28/1999 "um kommunulæknaskipan". Í 2013 er umsitingin av Kommunulæknaskipanini, og í 2014 er heilsukanningarskipanin (profylaksur) flutt frá Heilsumálaráðnum til Heilsutrygd. Kommunulæknarnir hava skyldu til at skráseta allar viðgerðir/veitingar í "Samlirokning", har Heilsutrygd heintar út upplýsingarnar um gjøld til kommunulæknarnar eina ferð um mánaðin.

Í 2015 rindaði Kommunulæknaskipanin 1,3 mió.kr. fyri "keyp av vørum og tænastum". 481 t.kr. fyri "ferðing og flutning uttanlands", fyri kommunulæknar í føstum starvi og avloysarar. 111 t.kr. fyri trygging av kommunulæknum. 369 t.kr. eru goldnar fyri leigu av bili hjá avloysarum og 246 t.kr. til vikarfyritøkur fyri at útvega avloysarar.

Lønir/samsýningar

Eini 50 starvsfólkamál eru í Kommunulæknaskipanini umframt avloysarar. Heilsutrygd ætlar at fara at brúka skipanina VaktPlan til skrásetingar av tímum hjá føstum læknum, kostráðgevum og viðtalustarvsfólki.

Kommunulæknar eru løntir eftir sáttmála millum Kommunulæknafelag Føroya og Heilsumálaráðið 1. juli 2008. Grundupphæddin var 18.618 kr. um mánaðin og verður stillað samsvarandi lønum hjá tænastumonnum landsins. Læknar í Sandoyar læknadømi fáa dupulta grundupphædd. Kommunulæknar fáa vaktargjøld og veitingargjøld, sum verða javnað tvær ferðir um árið við støði í talinum av borgarum.

Vaktargjøldini eru ikki javnað síðani 2011, men veitingargjøldini verða javnað tvær ferðir um árið við støði í donskum takstum. Afturat lønini kunnu avloysarar fáa endurrindaðar útreiðslur eftir reglum í K. nr. 65/2004 "um hvørjar útreiðslur kommunulæknaavloysarar kunnu fáa endurgoldnar".

Heilsutrygd rindar samsýningar til læknar í føstum størvum um kreditorskipanina. Grundgjaldið verður goldið um skattaskipanina. Kommunulæknar í avloysarastørvum fáa allar samsýningarnar um skattaskipanina, uttan profylaksir, ið verða goldnar um kreditorskipanina. Heilsutrygd veit ikki, hví munur verður gjørdur á skattingini. Stovnurin fylgir siðvenjuni, ið varð galdandi, áðrenn Heilsutrygd tók yvir umsitingina av økinum.

Spurdur, hevur landsstýrismaðurin svarað, at ráðið hevur samskift við Heilsutrygd um útgjald av samsýningum frá Heilsutrygd til kommunulæknaavloysarar fyri profylaksir. Heilsu- og innlendismálaráðið hevur biðið Heilsutrygd endurskoða mannagongdina og gera eina niðurstøðu um, um samsýningarnar ikki áttu at farið um A-skattaskipanina eins og aðrar samsýningar til kommunulæknaavloysarar.

Fyri at javnseta samsýningar til avloysarar við samsýningar til læknar í føstum størvum, rindar Kommunulæknaskipanin lønir til viðtalustarvsfólk hjá avloysarum og lønir til viðtalustarvsfólk, tá ið lækni í føstum starvi gerst sjúkur ella fer í barsil. Harafturat rindar skipanin lønir til avloysarar fyri viðtalustarvsfólk hjá kommunulæknum í føstum starvi undir sjúku ella barsli.

Nettoútreiðslurnar til endurgjald í sambandi við lønir, ið var 3-400 t.kr. í 2012-2014, er 1,1 mió.kr. í 2015. Heilsutrygd hevur kunnað um, at orsøkin til hækkingina er, at tað hava verið fleiri sjúkraskrivingar.

Vit kannaðu lønirnar hjá tveimum starvsfólkum, um umsókn, prógv og setanarskriv vóru í málunum, og um lønirnar svaraðu til galdandi lønarsáttmálar.

Stovnurin brúkar ikki standard setanarsáttmálarnar hjá tí almenna.

Setanarsáttmálarnir innihalda ikki reglur um uppsøgn í sambandi við sjúku. Harafturat viðmerkti Heilsutrygd, at sjúkrarøktarfrøðingarnir, sum starvaðust í viðtalunum, høvdu víst á, at reglurnar í sáttmálanum hjá sjúkrarøktarfrøðingunum ikki vóru galdandi fyri viðtalustarvsfólk. Tað varð broytt við semjuni, sum varð gjørd í sambandi við sáttmálasamráðingarnar í 2016.

Lønin hjá øðrum starvsfólkinum var ikki regulerað sambært avtaluni í setanarskrivinum. Í juli 2016 hevur Heilsutrygd kunnað um, at feilurin verður rættaður. Eisini upplýsir stovnurin, at eftir summarfrítíðina verða lønirnar avgreiddar um VaktPlan, og at øll setanarskrivini verða kannað fyri at tryggja, at upplýsingarnar, ið verða tøppaðar í VaktPlan, eru rættar.

8 Almannamál

8.1 Barnapeningur veittur í forskoti (LG 2015/212-0213)

Landsgrannskoðanin hevur í 2016 grannskoðað lógarbundnu játtanina til barnagjald veitt í forskoti. Endamálið við grannskoðanini var at kunna okkum um, hvussu skipanin við barnagjaldi virkar og at kanna, um roknskapurin er rættur. Vit hava við stakroyndum kannað, um móttakararnir lúka treytirnar fyri at fáa barnagjald veitt í forskoti, sambært lógini um barnagjald og sambært innanhýsis vegleiðingum hjá Almannaverkinum.

Barnagjald veitt í forskoti er heimilað í Ll. nr. 71 frá 20. mai 1996 “um barnagjald til einsamallar uppihaldarar v.fl.” Lógin skipar bæði forskotsrindað barnagjald, gjald til børn, tá ið einans annað av foreldrunum livir, umframt til faðir- og móðurleys børn og serligt barnaískoyti til einsamallar uppihaldarar.

Lógin heimilar landinum at gjalda barnagjaldið forskotsvíst, tá ið tað ikki er goldið forfallsdagin av tí gjaldsskylduga.

Landið rindar, um barnagjaldið ikki verður goldið til tíðina.

Barnagjaldið verður javnað á hvørjum ári sambært Ll. nr. 107/1999 “um áseting og javning av almannaveitingum”. Í 2015 var barnagjaldið 12.996 kr. um árið.

Avgerðir hjá Almannaverkinum kunnu kærast til Kærunevndina í almanna- og heilsumálum.

Barnagjald veitt í forskoti er játtað á høvuðskontu 12.21.3.04., býtt á tvær undir-kontur. Niðanfyri eru roknskapartølini frá 2011 til 2015:

t.kr.

Heiti	2011	2012	2013	2014	2015
01. Forskotsrindan	13.274	13.057	12.697	11.990	11.781
02. Innkrevjing av forskotsrindan av barnapeningi	-11.607	-11.087	-10.863	-12.019	-11.214
Barnagjald í forskot netto	**1.667**	**1.970**	**1.834**	**-29**	**567**

Sum tølini vísa, er meira forskotsrindað seinastu 5 árini, enn tað er heintað inn, tó ikki í 2014. TAKS krevur inn barnagjaldið frá gjaldsskyldugu.

Stakroyndir

Við stakroyndum valdu vit 38 mál at grannskoða. Vit høvdu nakrar viðmerkingar, sum Almannaverkið hevur svarað. Við støði í stakroyndunum og tøkum upplýsingum, kunnu vit staðfesta, at tey, ið fáa barnagjald i forskoti, hava øll søkt um tað og lúka treytirnar í lógini.

Samanumtikið halda vit, at umsitingin virkar væl. Í málum, sum eru stovnað fyri 2004, eru ongi onnur skjøl, enn gjaldsavgerðir, skrásett talgilt. Í nýggjaru málunum vóru sum heild nøktandi upplýsingar og skjalprógv. Í einstøkum málum hevði Almanna-

verkið goldið ov nógv, okkurt gjald kundi verði steðgað fyrr, og í onkrum føri var goldið dupult.

Rætturin til barnagjald í forskoti

Persónur, sum uppiheldur einum barni og hevur rætt til barnagjald, kann eftir nærri treytum, fáa barnagjaldið forskotsrindað. Umsókn skal latast Almannaverkinum, tá ið tann, ið hevur skyldu at gjalda, ikki hevur goldið rættstundis (forfallsdagin). Umframt vanligt barnagjald, kann Almannaverkið rinda onnur serstøk gjøld, s.s. fyri útreiðslur í sambandi við føðing, barnsins dóp og konfirmatión.

Barnagjaldið skal verða álagt av myndugleika, verða fallið til gjaldingar uttan at vera goldið, og sambært § 3, stk. 1 og 2, í lógini, kann gjaldið verða rindað forskotsvíst, til barnið er 18 ár, treytað av, at:

1. barnið ella foreldramyndugleikin hevur danskan heimarætt,
2. barnið er búsitandi í Føroyum,
3. barnið ikki er gift,
4. barnið ikki er sett heiman, ella á stovni ella uppihildið av tí almenna,
5. tann, sum gjaldast skal til, býr í Føroyum, og
6. tann, sum gjaldast skal til, ikki býr saman við gjaldsskylduga.

Sambært § 3, stk. 3, kann víkjast frá bústaðarskylduni hjá barninum, um barnið fyribils fer uttanlands í útbúgvingarørindum, tó í mesta lagi í eitt ár.

Ein gjaldsavgerð tekur støði í kapittel 2 í L. nr. 200/1960 “om børns retsstilling”. Sambært §§ 13 og 18 í lógini hevur annað foreldri rætt at krevja barnagjald frá hinum grundað á, at viðkomandi uppiheldur barninum og hevur foreldramyndugleikan, ella á annan lógligan hátt hevur barnið í pleygu.

Landsgrannskoðanin spurdi, hvørji eftirlit tryggja rættar upplýsingar um bústað, og hvørji eftirlit tryggja, at gjaldsmóttakari og barn framhaldandi lúka treytirnar fyri at móttaka barnagjald í forskoti.

Eftirlitið eru skrá-setingarnar í Landsfólkayvirlitinum

Sambært Almannaverkinum eru upplýsingarnar í Landsfólkayvirlitinum prógv fyri bústaði. Almannaverkið dagførir KT-heildarskipanina eina ferð um vikuna við upplýsingum frá Landsfólkayvirlitinum og dagførir samstundis eftirlitslista til málsviðgerðina. Á eftirlitslistanum sæst m.a., um barnið er flutt ella um foreldrini búgva saman.

Rættleikin er treytaður av, at fólk boða fólkayvirlitinum frá flyting.

Avgerðirnar hjá Almannaverkinum eru tí treytaðar av, at viðskiftafólkini boða fólkayvirlitinum frá, tá ið flutt verður.

Rætturin til barnagjald í forskoti heldur uppat

Heimild er at veita barnagjald í forskoti, til barnið fyllir 18 ár, og móttakari og barn lúka treytirnar í § 3, stk. 2, nr. 1-6. Tað merkir, at mánaðin barnið fyllir 18 ár, rindar Almannaverkið partvíst gjald.

Munur er á, tá ið gjaldið steðgar við 18 ára aldur, og tá ið gjaldið steðgar av øðrum orsøkum.

Mannagongdin er ikki eins greið, tá ið rætturin fellur burtur av aðrari orsøk. Leiðbeiningin hjá Almannaverkinum sigur onki um rættin til gjald, um umstøðurnar í mun til § 3, stk. 2, nr. 1-6 broytast. Um goldið er í forskoti ein mánað fram, og gjaldsmóttakarin flytir í tí mánaðinum, verður gjaldið ikki lækkað, heldur ikki tá ið goldið verður í forskoti hálvárliga.

Sambært landsstýrismanninum lækkar Almannaverkið gjøld, um stovnurin veit um broytingina, tá ið forskotsrindað verður. Móttakari skal lúka treytirnar, tá ið barnagjaldið verður forskotsrindað og aftur við næsta forfallsdag. Lógin inniheldur ikki krav um, at gjaldsmóttakari skal lúka treytirnar í tíðarskeiðnum millum forfallsdagarnar.

Serlig heimild krevst fyri at heinta inn.

Víðari sigur landsstýrismaðurin, at barnagjaldið er ein veiting til uppihalds hjá einum barni. Gjaldsmóttakarin móttekur gjaldið og hevur fult ræði á peninginum. Um broytingar í viðurskiftunum hjá gjaldsmóttakaranum gera, at hann ikki framyvir lýkur treytirnar t.d., at barnið flytir av landinum, so krevst serlig heimild, um veitingin skal krevjast afturgoldin frá gjaldsmóttakara.

Sambært § 21 í lógini verður gjaldsmóttakari afturgjaldsskyldugur, um hann av órøttum og ímóti betri vitan hevur móttikið stuðulin. Ásetingin heimilar Almannaverkinum at krevja gjøld aftur, um móttakarin við sviki ella við vilja hevur latið rangar upplýsingar, hevur fjalt neyðugar upplýsingar fyri Almannaverkinum ella ikki boðað frá broytingum í egnum ella barnsins viðurskiftum.

Innheinting av barnagjøldum móttikin av órøttum

Meginparturin av barnagjøldum, sum eru móttikin av órøttum, verða ikki goldin aftur.

Í august 2016 er eftirstøðan av barnagjaldi, móttikin av órøttum, 445 t.kr. Eftirstøðan verður kravd inn av Almannaverkinum, og rokna tey við, at meginparturin verður ikki goldin.

Spurt, hvørjar ítøkiligar ætlanir Almannaverkið hevur fyri at fáa peningin inn, svaraði stovnurin, at tey regluliga senda krøv og áminningar. Um skuldarin ikki kann rinda alla upphæddina í einum, fær hann boðið eina avdráttarskipan. Áminningar verða sendar skuldarunum, avtalur verða gjørdar um afturgjald og viðhvørt verður mótroknað í forskotsrindan av barnagjaldi.

Endurskoða mannagongdirnar.

Almannaverkið er í holt við at endurskoða mannagongdirnar at krevja gjøld aftur, ið eru goldin av órøttum. Millum annað umhugsa tey møguleikan at senda krøv til innkrevjing hjá advokati, beinanvegin staðfest er, at afturgjaldsavtala ikki fæst.

Áðrenn krav kann setast borgarum um afturgjald, skal Almannaverkið skjalprógva, at peningurin er móttikin av órøttum og móti betri vitandi. Sambært Almannaverkinum ber sum oftast til at staðfesta, um upphæddin er móttikin av órøttum. Tað kann tó vera trupult at lyfta prógvbyrðuna fyri, at móttakarin visti ella átti at vita, at hann hevði móttikið peningin av órøttum. Við í hesa meting skal takast, at ofta er talan um reglulig útgjøld, ið móttakari hevur havt rætt til í longri tíð, og er torført at vísa á, at móttakarin var ella átti at verið varugur við, at útgjaldið ikki steðgaði til ásettu tíðina. Talan er um eina ítøkiliga meting, grundað á upphædd, longd á útgjaldstíðarskeiði, umstøðurnar í málinum, og at talan er um pening til lívsuppihald.

Hevur borgarin latið Almannaverkinum skeivar upplýsingar ella ikki givið boð um broytingar, sum hava týdning fyri útgjaldið, eigur málið at verða sent til innkrevjing beinanvegin, staðfest verður, at afturgjaldsavtala ikki fæst í lag.

Innheintingin kundi virka betur.

Landsstýrismaðurin ásannar, at innheintingin kundi virka betur. Almannaverkið er farið at endurskoða mannagongdirnar og samskiftir við TAKS og Almannamálaráðið um møguleikan, at TAKS heintar inn krøvini. Til tað krevst lógarbroyting.

8.2 Einkjubarnastyrkur (LG 2014/212-0213)

Í seinastu frágreiðing umrøddu vit grannskoðanina av umsitingini av játtanini til einkjubarnastyrk. Við stakroyndum kannaðu vit, um móttakarin hevði rætt til barnagjald, um umbøn og nøktandi skjalprógv vóru í málinum, at gjaldið steðgaði rættstundis, og um møguligt barnagjald, móttikið av órøttum, var kravt aftur.

Ásetingarnar um einkjubarnastyrk eru í §§ 15-19 í Ll. nr. 71/1996 “um barnagjald til einsamallar uppihaldarar v.fl.” og fevna um gjøld til børn, hvørs faðirskapur ikki er staðfestur og til børn, har annað ella bæði foreldrini ikki eru á lívi. Almannaverkið kann eisini játta serstøk gjøld í sambandi við dóp, ferming o.l.

Landsstýrismaðurin hevur heimild at áseta nærri reglur um fyrisitingina av lógini. Landsstýrismaðurin hevur ikki ásett nærri reglur, tí tørvur hevur ikki verið at áseta tær.

Tørvur á einari vegleiðing.

Landsgrannskoðanin mælti Almannaverkinum til at orða eina greiða vegleiðing um, hvør hevur rætt til einkjubarnastyrk, nær rætturin steðgar og um skjalfesting av málsviðgerð. Almannamálaráðið var samt við Landsgrannskoðanini um, at tørvur var á einari innanhýsis vegleiðing, og ætlaði at skriva vegleiðingina í 2016. Viðvíkjandi fráboðanarskylduni, helt Almannamálaráðið, at tað var nøktandi, at kunning framgongur av játtanarskrivinum í hvørjum einstøkum føri.

Fer at verða goldið um KT-heildarskipanina í 2016.

Samanumtikið helt Landsgrannskoðanin, at málsviðgerðin var ikki nøktandi skjalprógvað, hóast umsóknir og viðkomandi skjøl vóru í málunum. Har Almannaverkið nýtti uppritið í journalini, var lætt at fylgja málsgongdini. Uppritið var tó sjáldan nýtt. Í nýggju KT-heildarskipanini skuldu eftirkanningar verða innbygdar, og Almannamálaráðið helt, at einkjubarnastyrkurin fór at verða goldin umvegis KT-heildarskipanina í 2016.

Rætt til barnagjald

Avgerandi treytir fyri at fáa barnagjald eru, at barnið ikki er fylt 18 ár, at barnið ella foreldramyndugleikin hevur danskan heimarætt e.l., at barnið er búsitandi í Føroyum ella uttanlands í upp til eitt ár í útbúgvingarørindum, og at barnið ikki er gift, ikki sett heiman ella á annan hátt uppihildið við almennum stuðli. Móttakarin av barnagjaldinum, skal hava fastan bústað í Føroyum.

Sambært leiðbeiningini[31] byrjar almenna forsorgin, tá ið eitt barn verður uppihildið av tí almenna á stovni, í pleygu e.l.

Almannaverkið hevur greitt frá, at persónur, ið hevur rætt til barnagjald, fær veitingina, sjálvt um barnið er partvís á stovni, í pleygu ella til umlætting v.m., tí viðkomandi hevur útreiðslur av at uppihalda barninum í vikuskiftum v.m. Rætturin at móttaka einkjubarnastyrk er somuleiðis treytaður av, at móttakarin hevur rætt at krevja eitt gjald sambært lóggávu um rættarstøðu barnanna, L. nr. 200/1960 “om børns retsstilling”.

Almannaverkið legði afturat, at sambært § 18, stk. 2, í lógini “om børns retsstilling”, hevur tann, sum “...afholder udgifterne ved barnets forsørgelse, såfremt den pågældende har eller ved forældremyndighedens ophør havde forældremyndigheden over barnet eller lovligt har barnet i pleje.” rætt at krevja barnagjald.

Tvey dømir vóru, ið ikki vóru viðgjørd eins, hóast foreldrini í hvørgum føri vóru gift. Í øðrum førinum fekk pápi barnagjald mánaðin eftir, at hann hevði fingið foreldramyndugleikan. Í hinum førinum fekk pápi, sum hevði viðmerkt í umsóknini, at hann enn ikki hevði foreldramyndugleikan, barnagjald mánaðin eftir andlátið.

Almannaverkið ásannaði, at munur var á viðgerðunum, men at fyrra nevnda avgerðin var røtt, tí sambært lógini er treytin at fáa barnagjald, at foreldramyndugleikin er staðfestur.

Í desember 2015 kunnaði landsstýrismaðurin um, at talan var um ítøkiligan málsviðgerðarfeil, sum Almannamálaráðið harmaðist um.

[31] Leiðbeining nr. BP-2 “Barnagjald til einsamallar uppihaldarar (forskotsrindað)” útgreinar almennar treytir, ið eisini eru galdandi fyri einkjubarnastyrk.

Barnagjaldið steðgar rættstundis

Í játtanarskrivinum kunnar Almannaverkið umsøkjararnar um, at teir hava skyldu at boða Almannaverkinum frá broytingum í egnum ella barnsins viðurskiftum, sum kunnu hava við sær, at stuðulin minkar ella fellur burtur. Sambært lógini skal barnagjaldið steðga mánaðin eftir, at rætturin at móttaka gjaldið heldur uppat.

Spurt, hvørjar fyriskipanir stovnurin hevur, ið tryggja, at útgjaldið steðgar rættstundis, svaraði Almannaverkið, at veitingin steðgar, tá ið barn fyllir 18 ár. Flytir eitt barn uttanlands, steðgar veitingin, tá ið p-talið verður gjørt óvirkið.

Almannaverkið fær fráboðan frá Fútaskrivstovuni í faðirskapsmálum, og Barnaverndartænastan hevur skyldu at boða frá, tá ið barn verður sett heiman. Annað verður ikki gjørt fyri at kanna, um broytingar eru í viðurskiftunum hjá móttakarum.

Landsstýrismaðurin heldur, at eftirlitið er nøktandi.

Í 2015 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at nøktandi eftirlit er í umsitingini. Sambært Almannaverkinum verða skrásetingarnar í Landsfólkayvirlitinum kannaðar regluliga, og Almannaverkið fær neyðugar fráboðanir frá viðkomandi myndugleikum, s.s. Fútaskrivstovuni og Barnaverndartænastunum.

Mótrokning av endurgjaldi í sambandi við mistan uppihaldara

Um barn hevur rætt til endurgjald fyri mistan uppihaldara, skal endurgjaldið verða drigið frá í einkjubarnastyrkinum. Sambært viðmerkingunum til lógina, skulu allar endurgjaldsupphæddir tó ikki mótroknast.

Endurgjøld verða ikki kannað.

Almannaverkið hevði ikki mótroknað í nøkrum barnagjaldi í 2014. Í trimum málum, vit kannaðu, vóru umsóknir, har umsøkjarin hevði kunnað um, at barnið hevði rætt til endurgjald. Í journalini sást ikki, um Almannaverkið hevði kannað málini nærri ella spurt, hvat rætturin til endurgjald snúði seg um.

Almannaverkið hevur ásannað, at málsviðgerðin hevur ikki verið nóg neyv í teimum trimum førunum, og at mannagongdin í framtíðini verður broytt.

Fara at gera vegleiðing.

Í desember 2015 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Almannaverkið í næstum fer at gera eina vegleiðing til umsitingina av barnagjøldum, í førum tá ið einans annað ella hvørki av foreldrunum eru á lívi. Vegleiðingin fer at áseta reglur um, nær endurgjald fyri mistan uppihaldara skal dragast frá gjaldinum.

Móttikið av órøttum

Sambært § 21, stk. 2, í lógini skal barnagjald, sum umsøkjari hevur móttikið av órøttum, gjaldast aftur.

Tað framgongur ikki av lógini, hvørji amboð Almannaverkið kann ella skal brúka at krevja gjaldið aftur við. Landsgrannskoðanin vísti á, at við hesum í huga, átti Almannaverkið at styrkt um eftirlitið, sum skal forða fyri, at barnagjald verður móttikið av órøttum. Tá ið faðirskapur er staðfestur, hevur ein mamma ikki longur rætt til einkjubarnastyrk. Í stakroyndunum var dømi um, at mamma fekk barnagjald í nakrar mánaðir, eftir at faðirskapurin varð staðfestur.

Í 2012 avskrivaði Almannaverkið góðar 90 t.kr. av skuld tí eitt mál var fyrnað. Móttakarin hevði móttikið barnagjøld av órøttum frá 1998 til 2003. Almannaverkið hevði kravt móttakaran eftir peninginum og hevði í áminning frá november 2003 boðað frá, at um peningurin ikki varð afturgoldin, varð kravið sent til sakførara til innkrevjingar. Hóttanin varð ikki framd í verki.

Sambært landsstýrismanninum var talan um skeiva málsviðgerð hjá Almannaverkinum í einstaka døminum. Almannaverkið ætlaði í fyrra hálvári 2016 at fara undir at gera eina innanhýsis skrivliga vegleiðing, sum vónandi fór at avmarka feilir í umsitingini.

Viðvíkjandi reglum um innkrevjing av útgjøldum, heldur Almannamálaráðið tað vera neyðugt at umrøða málið nærri saman við TAKS og Almannaverkinum.

Journal

Almannamálaráðið kunnaði um, at einkjubarnastyrkur í framtíðini verður goldin um KT-heildarskipanina, og at tá fer at bera betur til at avmarka skeivar skrásetingar. Sambært ráðnum fer nýggja skipanin at virka soleiðis, at hvørja ferð tey skráseta eitt skjal, verður ein viðgerð stovnað, og á tann hátt styðjar skipanin undir, at einans røtt skjøl verða skrásett.

8.3 Barnaískoyti (LG 2015/212-0213)

Í seinastu frágreiðing umrøddu vit grannskoðanina av lógarbundnu játtanini til barnaískoyti á høvuðskontu 12.21.3.06.

Endamálið við Ll. nr. 71/1996 “um barnagjald til einsamallar uppihaldarar v.fl.” er at veita einsamøllum uppihaldarum eyka ískoyti til betri fíggjarligar umstøður at liva og at taka lut í samfelagnum. Treytin fyri at fáa ískoyti er, at persónur sendir Almannaverkinum umsókn og eina ferð um árið váttar, at hann lýkur treytirnar. Ískoytið er ein føst upphædd uttan mun til fíggjarlig kor, og tað er ikki skattskyldugt.

Landsstýrismaðurin hevur heimild at áseta nærri reglur um fyrisitingina av lógini. Í desember 2015 kunnaði landsstýrismaðurin um, at nágreinað heimild er sett inn í § 19d, stk. 3, í lógini, sum heimilar, at Almannaverkið kann heinta inn upplýsingar frá skattamyndugleikum, Landsfólkayvirlitinum, kommunalum myndugleikum og øðrum viðkomandi, ið eru av týdningi fyri viðgerð av málum um barnaískoyti. Tað hava helst verið heimildir m.a. av hesum slagi, ið § 22 hevur verið ætlað til, men síðani reglurnar um serligt barnaískoyti eru settar inn eftirfylgjandi[32], eru fyrisitingarligar heimildir settar beinleiðis í lógina, eins og víst er á omanfyri, heldur enn at nýta heimildina í § 22 til at seta hesar reglur í gildi við kunngerð.

Vit kannaðu 20 mál í 2014 og spurdu m.a., hvussu Almannaverkið hevði eftirlit við, at móttakararnir luku treytirnar, og hvussu stovnurin kravdi inn, tá ið onkur, hóast betri vitandi, hevði móttikið barnaískoyti av órøttum. Stakroyndirnar vístu onki dømi um, at Almannaverkið hevði nýtt víðu heimildirnar at kanna veruligu samlívsstøðuna hjá umsøkjarum. Endamálið við víðkaðu heimildunum er at forða fyri at goldið verður út á skeivum grundarlagi og at svikað verður. Um Almannaverkið fær eina fráboðan, aloftast dulnevnda, verða upplýsingarnar kannaðar av nýggjum.

Ongar ábendingar um, at skipanin verður misnýtt.

Í desember 2015 segði Almannamálaráðið, at ongar ábendingar vóru um, at skipanin varð misnýtt, og sostatt vóru ongar ábendingar um, at eftirlitið átti at herðast. Eitt hert eftirlit hevði kravt meira umsitingarliga orku, og tað skal haldast upp ímóti endamálinum við herdum eftirliti.

Tulkingarspurningur

Ein treyt fyri at móttaka serligt barnaískoyti er, at barnið og móttakarin eru búsitandi í Føroyum. Undantakið er, at barnið uppiheldur sær uttanlands, í mesta lagi eitt ár, í útbúgvingarørindum. Almannaverkið játtaði einum pápa barnaískoyti, hóast børnini ikki búðu hjá honum við tí grundgeving, at tey vóru á eftirskúla. Børnini vóru ikki uttanlands, men búðu og gingu í skúla í aðrari kommunu.

Landsgrannskoðanin ivaðist í, um tað at ganga í skúla og arbeiða í aðrari kommunu, var at meta sum “uttanlands í útbúgvingarørindum”, og heimilaði barnaískoyti.

[32] Ll. nr. 38 frá 21. mai 2008 “um barnagjald til einsamallar uppihaldarar v. fl.”

Analog tulking.

Í desember 2015 kunnaði Almannamálaráðið um, at tað tók undir við tulking Almannaverksins og helt, at lógin átti at tulkast "analogt", soleiðis at stakur uppihaldari, ið uppiheldur barni, sum fyribils er flutt til annað stað í Føroyum í útbúgvingarørindum, verður javnsettur við stakan uppihaldara, sum uppiheldur barni, ið fyribils er flutt uttanlands í útbúgvingarørindum. Almannamálaráðið ásannaði tó, at lógin um barnagjald til einsamallar uppihaldarar átti at verði broytt samsvarandi oman fyri nevndu tulking.

Árligt eftirlit

Barnaískoyti verður goldið út fyrstu ferð ársfjórðingin eftir, at umsókn er játtað. Eitt ár seinni verður skriv sent móttakaranum, har hann skal vátta, at hann framhaldandi lýkur treytirnar. Sambært § 21, stk. 1, í lógini hevur móttakari av barnaískoyti skyldu at boða frá, um viðurskiftir, sum hava ávirkan á ískoytið, broytast.

Almannaverkið hevur ikki kravt, at umsøkjari skal upplýsa dato fyri, nær hann ikki longur lýkur treytirnar at móttaka serligt barnaískoyti. Landsgrannskoðanin helt, at dagfestingin var týdningarmikil, tí barnaískoyti varð goldið forút hvønn ársfjórðing, og váttanarskjølini vóru partur av árligum eftirliti. Almannaverkið tók undir við Landsgrannskoðanini.

Sambært landsstýrismanninum hevur Almannaverkið broytt mannagongdina og hevur kunnað viðkomandi málsviðgerar.

Ivi um innheintingarheimild

Sambært § 21, stk. 2, í lógini skal tann, sum hevur móttikið barnaískoyti móti betri vitan, gjalda upphæddina aftur. Tað framgongur ikki av lógini, hvørji amboð Almannaverkið kann ella skal brúka at krevja peningin aftur.

Ivi um innheintingarheimildir.

Sambært Almannaverkinum var mannagongdin, at hoyringsskriv og avgerðarskriv vórðu send borgarum. Bókhaldið skrásetti síðani krøvini í roknskapin hjá Almannaverkinum og sendi tvær áminningar, um upphæddin ikki varð goldin.

Av tí at ivi hevur verið um innheintingarheimildirnar, heldur Almannamálaráðið, at tað er neyðugt at umrøða málið nærri saman við TAKS og Almannaverkinum.

8.4 Dagpeningur vegna sjúku v.m. (LG 2014/212-0214)

Í seinastu frágreiðing okkara greiddu vit frá um grannskoðanina av dagpeningaskipanini á Almannaverkinum.

Vit kannaðu m.a., um Almannaverkið hevði skrivligar mannagongdir til umsitingina av dagpeningi, um umsøkjararnir høvdu rætt til dagpening, um inntøkumissurin var veruligur, um veitingarnar vóru rættar, og hvussu stovnurin hevði grundgivið fyri avgerðum og skjalprógvað tær.

Innheinting frá arbeiðsgevarum

Almannaverkið kravdi inn pening frá arbeiðsgevarum fyri tveir teir fyrstu sjúkradagarnar hjá løntakarunum, sum fingu úr dagpeningaskipanini. Sambært § 20 í lógini um dagpening, skal TAKS krevja peningin inn, og hevur TAKS heimild at panta eftir reglunum í skattalógini. Mannagongdin gjørdi, at Almannaverkið ikki hevði yvirlit yvir útistandandi pening. TAKS skrásetir eftirstøðuna í landsroknskapin saman við øðrum krøvum.

Almannaverkið ætlaði at gera mannagongdir fyri, hvussu inntøkur skrásettar í Búskaparskipanini verða stemmaðar av ímóti teimum krøvum, sum eru send TAKS.

Fara at stemma av mótvegis TAKS.

Almannaverkið ætlaði eisini at gera mannagongdir fyri avskrivað krøv soleiðis, at samsvar var millum TAKS og Almannaverkið.

Í juni 2016 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at farið er í holt við at orða mannagongdir.

Inntøkumissur skal vera veruligur

Endamálið við lógini er at veita fólki fíggjarligan stuðul fyri mista inntøku. Sum grundarlag fyri einstøku játtanini kannar Almannaverkið inntøkurnar, ið eru skrásettar í skattaskipanini og upplýsingarnar, sum arbeiðsgevarar lata. Málið endar, um sjúkutíðarskeiðið ikki verður longt.

Tá ið sjúkutíðarskeið verða longd, kannar Almannaverkið inntøkuviðurskiftini frammanundan longdu sjúkraskrivingini. Landsgrannskoðanin helt, at manuella kanningin av inntøkunum var ikki nøktandi skjalfest.

Landsstýrismaðurin er samdur við Landsgrannskoðanini í, at skjalfestingin av eftirlitinum eigur at verða greiðari. Almannaverkið fer at raðfesta broyting í KT-heildarskipanini, so at inntøkan í skattaskipanini sjálvvirkandi verður eftirkannað og skjalfest, áðrenn játtað verður. Hervið sæst beinleiðis í KT-heildarskipanini, hvør skráseting hjá TAKS hevur verið nýtt sum grundarlag undir eftirlitinum, uttan at neyðugt er at leita fram upplýsingarnar í skipanini hjá TAKS.

Tað er føst mannagongd at kanna, um dagpeningamóttakarin hevur havt inntøku í sjúkutíðarskeiðnum. Er ongin inntøka, skal málsviðgerðin viðmerkja tað í KT-heildarskipanini. Almannamálaráðið heldur ikki, at neyðugt er at leggja útskrift frá TAKS sum skjalprógv í mál, tí tað ber altíð til at eftirkanna inntøkurnar. Almannaverkið fer at leggja áherðslu á, at eftirlitini verða skjalfest, og gera regluligar stakroyndir av inntøkueftirlitinum.

Tilmæli um at skjalfesta og grundgeva avgerðir

Í onkrum føri samsvaraðu upplýsingar í játtanarskrivum ikki við upplýsingar frá umsøkjara og arbeiðsgevara. Landsgrannskoðanin kundi tí ikki sanna, um umsøkjararnir høvdu fingið rættar upphæddir. Vit mæltu til, at Almannaverkið skjalfesti avgerðirnar soleiðis, at til bar at eftirkanna tær. Almannaverkið tók undir við tilmælinum.

Í juni 2016 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at telduskipanin hjá Almannaverkinum goymir øll mál og allar avgerðir, bæði játtanir og sýtanir. Um mál víkja frá vanligum játtanum ella sýtanum, ella ivamál eru, skulu málsviðgerar skriva upprit í málsbók.

Ásetingar og avgerðir um dagpening til stjórar

Í einstøkum málum høvdu stjórar fingið sjúkradagpening. Sambært Kærunevndini í almanna- og heilsumálum hava stjórar ikki rætt til dagpening undir sjúku, tí teir eru ikki fevndir av persónsskaranum í § 3 í dagpeningalógini. Sambært Almannaverkinum ber tó til hjá stjórum í ávísum førum at fáa dagpening undir sjúku, t.d. um talan er um útróðrarmann, ið er stjóri í felag, sum rekur útróður.

Almannaverkið ætlar at broyta oyðublaðið viðvíkjandi dagpeningi.

Landsgrannskoðanin mælti til at styrkja eftirlitið og helt tað vera óheppið, at vegleiðingin á oyðublaðnum kundi misskiljast. Mælt varð til at broyta vegleiðingina til oyðublaðið, soleiðis at greitt var, hvør hevði rætt til sjúkradagpening.

Sambært landsstýrismanninum verður arbeitt við at endurskoða umsóknarblaðið og vegleiðingina til umsóknarblaðið.

Inntøkugrundarlag

Mannagongdir eru gjørdar.

Í onkrum føri hevði Almannaverkið stytt tíðarskeiðið fyri arbeiðsinntøkuni heldur enn at brúkt seinastu 5 arbeiðsvikurnar, sum lógin ásetir. Sambært Almannaverkinum var talan um ein feil. Landsgrannskoðanin helt tað vera óheppið, at ikki var heilt greitt, hvussu inntøkugrundarlagið sambært § 8 í lógini skuldi roknast. Almannamálaráðið tók undir við Landsgrannskoðanini, at skrivligar mannagongdir áttu at verðið gjørdar og ætlaði at raðfesta tað.

Í juni 2016 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at mannagongdir eru gjørdar.

8.5 Ansingarsamsýning (LG 2014/212-0216)

Í seinastu frágreiðing umrøddu vit grannskoðanina av ansingarsamsýning. Vit kannaðu, um roknskapurin var rættur, og um ansararnir luku treytirnar í lóg, kunngerð og leiðbeining hjá Almannaverkinum. Frá 1. januar 2015 varð skipanin við ansingarsamsýning løgd kommununum at umsita. Ansingarsamsýning verður í dag veitt sambært K. nr. 127/2014 “um umsiting av samsýning fyri ansing av eldri og óhjálpnum persónum”.

Frítíðarløn

Spurningurin, um ansingarsamsýning er fevnd av frítíðarlógini, verður tikin upp við Uttanríkis- og vinnumálaráðið.

Spurt, um ansingarsamsýningin var fevnd av frítíðarlógini, svaraði Almannamálaráðið, at Vinnumálaráðið umsat frítíðarlógina. Tá ið skipanin við ansingarsamsýning varð løgd til kommunurnar at umsita, vórðu tað ikki gjørdar stórvegis broytingar í skipanini. Sambært Almannamálaráðnum skuldi skipanin endurskoðast um ársskiftið 2015/2016, og ætlaði ráðið tá at taka málið upp við Vinnumálaráðið, um ansingarsamsýningin skuldi vera fevnd av frítíðarlógini.

Reglur um 20 tímar um vikuna

Samsýningin var treytað av, at ansarin ikki í størri mun átók sær annað lønandi arbeiði. Hann kundi í mesta lagi arbeiða 20 tímar um vikuna uttan fyri heimið og skuldi tá tryggja sær, at tann óhjálpni fekk røkt og hjáveru, í tann mun tað var neyðugt. Landsgrannskoðanin helt, at Almannaverkið átti at havt regluligt eftirlit við, at treytirnar um hægst 20 tímar vórðu fylgdar.

Vantandi læknaváttan fyri ansaran

Sambært § 13 í áður galdandi K. nr. 58/2004 skuldi m.a. læknaváttan um heilsustøðuna hjá ansarum og frágreiðing og tilráðing frá heimarøktini fyriliggja. Almannaverkið kravdi í sínari vegleiðing bert læknaváttanir í ivamálum. Landsgrannskoðanin helt, at tað var ikki í tráð við ásetingarnar í kunngerðini, at Almannaverkið ikki bað um læknaváttanir frá ansarum, tí tað er ein partur av grundarlagnum fyri avgerðini. Almannamálaráðið var samt við Landsgrannskoðanini og helt, at rættast var at broyta kunngerðina soleiðis, at tað varð ásett, nær læknaváttan varð kravd.

Eftirlitsskylda

Almannaverkið hevði ikki havt eftirlit við, um røktin heima nøktaði tørvin, ella um tørvur framvegis var á henni. Flestu málini vóru gomul, og høvdu ansararnir sostatt fingið ansingarsamsýning í fleiri ár. Almannaverkið hevði havt nøkur mál, har samsýningin var steðgað, tí fráboðan var komin um, at ansarin ikki hevði røkt sína uppgávu til fulnar.

Sambært Almannaverkinum var onki ásett í lógini ella kunngerðini um regluligt eftirlit, ið skuldi tryggja, at røktin samsvaraði við ansingartørvin. Almannaverkið helt tó, at tørvur var á eftirliti og hevði gjørt avtalu við Heimatænastuna um regluligar vitjanir. Orsakað av bygnaðarbroyting v.m. varð tað tó ongantíð sett í verk.

Landsgrannskoðanin helt tað ikki vera nøktandi, at onki skipað eftirlit hevði verið, sum tryggjaði, at tørvurin á ansing og røkt varð nøktaður.

Kunngerðin um ansingarsamsýning verður endurskoðað.

Í juni 2016 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at arbeiðið at endurskoða kunngerðina um "umsiting av samsýning fyri ansing av eldri og óhjálpnum persónum" er ikki liðugt. Almannamálaráðið fer at viðgera viðmerkingarnar frá Landsgrannskoðanini í sambandi við, at kunngerðin verður endurskoðað.

8.6 Eldri og serforsorg (LG 2014/212-0216)

Í seinastu frágreiðing umrøddu vit grannskoðanina av játtanini til eldri og serforsorg m.a. spurningar um váðameting og KT-trygd. KT-deildin hjá Almannaverkinum hevði gjørt váðameting, og arbeiddi við at gera mannagongdir fyri, hvussu ymisku váðarnir skulu handfarast.

Landsgrannskoðanin vísti á, at viðkvæmar persónsupplýsingar viðvíkjandi búfólkum vórðu skrivaðar í samstarvsbøkur. Landsstýrismaðurin kunnaði í 2014 um, at Almannaverkið hevði samskift við Dátueftirlitið um SharePoint, og at Almannaverkið helt, at tann loysnin leyk galdandi reglur um dátutrygd.

Í juni 2016 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at nú brúka næstan allar eindirnar í Trivnaðardeplinum Share Point.

8.7 Vanlig forsorg (LG 2014/212-0217)

Dagføring av forsorgarlógini o.a.

Síðani nítiárini hava skiftandi landsstýrismenn í almannamálum boðað frá, at teir arbeiddu við nýggjari lóggávu, og at øll almannalóggávan fór at verða lagað til føroysk nútíðarviðurskifti.

Fyrsta stigið í broytingunum var skipanin við hjálparráðum frá 2010. Annað stigið í broytingunum var lógin um arbeiðsfremjandi tiltøk, sum kom í gildi í 2013. Tá vantaði at endurskoða ásetingarnar um fyribils og varandi hjálp, um tilboð til børn sum bera brek og um tilboð til eldri og vaksin við serligum tørvi.

Í oktober 2013 ásannaði landsstýrismaðurin, at forsorgarlóggávan átti ikki at verða savnað í einari einstakari lóg, og broytti tí upprunaligu verkætlanina. Yvirskipað var ætlanin at gera nýggja lóggávu um uppihaldsveitingar og nýggja lóggávu um tænastur. Tær skuldu, sum frá leið, avloysa verandi forsorgarlóg.

Í apríl 2015 setti landsstýrismaðurin ein arbeiðsbólk at orða ein tænastupolitikk, sum skuldi vera grundarsteinurin undir einari tænastulóg. Lógin skuldi betra innihaldið í tænastum og rættartrygdina hjá borgarum við serligum avbjóðingum, ið hava tørv á tænastum. Miðað varð eftir at náa á mál í august 2015, men arbeiðið steðgaði, tá ið val varð skrivað út.

Landsstýrismaðurin ætlar at leggja nýggja tænastulóg fyri Løgtingið í 2017.

Í juni 2016 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at miðað verður eftir at fáa tænastupolitikkin lidnan í summar. Gongst sum ætlað, leggur landsstýrismaðurin í almannamálum fram uppskot um nýggja tænastulóg fyri Løgtingið tíðliga komandi ár. Tænastulógin verður eftir ætlan ein nýggj høvuðslóg, sum kemur ístaðin fyri ásetingarnar í forsorgarlógini um tænastur, sum t.d. stuðulsfólkaskipanina og bútilboð.

8.8 § 15 í Forsorgarlógini (LG 2014/212-0217)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðanina av § 15 í forsorgarlógini. Við stakroyndum samanhildu vit avgerðir um útgjøld við lógargrundarlag og vegleiðingar hjá Almannaverkinum. Vit kannaðu eisini, um avgerðirnar vóru skjalfestar, grundgivnar, og um tær fylgdu fyrisitingarlógini.

Landsgrannskoðanin mælti til at grundgeva greitt fyri avgerðunum við tilvísing til heimildir. Almannaverkið tók undir við tilmælinum.

Upphæddirnar í vegleiðingunum eru leiðbeinandi. Landsgrannskoðanin helt tí, at borgarin sambært fyrisitingarlógini átti at fáa skrivliga grundgeving og kæruvegleiðing, tá ið hann fekk partvísa játtan. Almannaverkið tók undir við Landsgrannskoðanini.

Sambært Almannamálaráðnum gevur Almannaverkið nú skrivliga grundgeving og kæruvegleiðing, tá ið borgari fær partvísa játtan.

8.9 Varandi veiting (LG 2015/212-0217)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað lógarbundu játtanina til varandi veiting sambært § 13 í forsorgarlógini. Endamálið við grannskoðanini var at kunna okkum um, hvussu skipanin virkar og at kanna, um roknskapurin er rættur. Vit hava eisini kannað, um móttakarnir lúka treytirnar fyri at fáa varandi veiting.

Varandi veiting er játtað á høvuðskontu 12.21.7.01. Roknskapartøl 2011 til 2015:

t.kr.

Heiti	2011	2012	2013	2014	2015
Játtan	1.190	1.190	1.210	910	1.210
Goldið út í varandi veiting	857	723	850	813	713
Minninýtsla	**333**	**467**	**360**	**97**	**497**

Játtanin til varandi veiting var í 2015 1,2 mió.kr., meðan nýtslan var 713 t.kr. Seinastu 5 roknskaparárini hevur minninýtsla verið.

Heimild og nærri treytir fyri varandi veiting eru í §§ 13-14 í Lbk. nr. 100/1988 “om offentlig forsorg” forsorgarlógin. Almannaverkið hevur skrivligar innanhýsis leiðbeiningar um, hvussu varandi veiting verður umsitin, F-13 “varandi veiting” og F-14 “varandi veiting – fyritreytir”.

Varandi veiting verður veitt persóni, sum hevur tørv á hjálp til sítt og familjunnar uppihald. Varandi veiting kann ikki veitast fyrr enn framtíðarútlitini, aftaná nyttuleysar royndir við øðrum stuðlandi fyriskipanum, mugu metast at verða soleiðis, at fíggjarlig hjálp má veitast, inntil viðkomandi fær rætt til pensjón eftir lógini um almannapensjónir.

Varandi veiting er 10.233 kr. um mánaðin og er skattskyldug.

Varandi veiting er í mesta lagi 60% av dagpeningaupphæddini um mánaðin. Dagpeningaupphæddin er 80% av lønini sambært sáttmála millum Føroya Arbeiðsgevarafelag og Føroya Arbeiðarafelag. Upphæddin fyri varandi veiting fylgir sáttmálanum, og frá 1. mai 2016 er hon 10.233 kr. um mánaðin. Upphæddin er skattskyldug og lækkar um móttakarin t.d. er sambúgvandi, ikki-forsyrgjari, undir 25 ár ella býr saman við foreldrum. Mótroknað verður, um hjúnafelagi hevur inntøku, ið er hægri enn 60% av dagpeningaupphæddini.

Almannaverkið hevur harafturat heimild at rinda fyri aðrar einstakar útreiðslur og kann í undantaksføri veita størri gjald enn mánaðarligu veitingina.

Umsiting

Almannaverkið ger sjálvt av, um persónur skal hava varandi veiting í staðin fyri fyribilshjálp. Tað merkir í flestu førum eina lægri upphædd.

Ein fyritreyt fyri at fáa varandi veiting sambært § 14 er, at bæði umsøkjari og hjúnafelagi kunnu gera sannlíkt, at tey ikki eru før fyri at átaka sær arbeiði, ið tey fáa ávíst, grundað á heilsuligar ella sosialar fyritreytir. Heldur Almannaverkið, at hjúnafelagin kann veita týðandi ískoyti til familjunnar uppihald, t.d. við útbúgving, eigur hjálp at verða veitt honum ella henni sambært lóg um arbeiðsfremjandi tiltøk.

Fyribilshjálp sambært § 9 í forsorgarlógini kann bara veitast, um Almannaverkið heldur, at persónurin á tann hátt verður førur fyri at uppihalda sær og sínum.

Sambært § 12 skulu mál um fyribils hjálp regluliga eftirmetast, og Almannaverkið skal kanna, um hjálpin kann halda fram, ella um neyðugt er við aðrari hjálp, fyri at stuðla viðkomandi til fíggjarligt sjálvbjargni.

Lægsta fyritíðarpensjón kann veitast persónum millum 50 og 67 ár.

Eftir lógini um almannapensjónir kann lægsta fyritíðarpensjón tillutast persónum millum 50 og 67 ár, tá viknandi heilsa, vantandi arbeiðsmøguleikar ella aðrar serligar umstøður gera, at viðkomandi hevur brúk fyri hjálp til uppihald. Í leiðbeining frá Almannaverkinum til varandi veitingar stendur, at um persónurin er 50 ár ella eldri, og samlaða almenna- og heilsustøðan ger, at hann kemur ikki burturúr støðuni, sum gjørdi, at hann fekk fyribilshjálp, og tað er útlitaleyst at royna arbeiðsbúgving, eigur viðkomandi at søkja fyritíðarpensjón grundað á sosialu støðuna.

Málsgjøgnumgongd

Við grundarlagi í KT-heildarskipanini hjá Almannaverkinum kannaðu vit øll málini, um varandi veiting í 2015. Vit kannaðu:

- um tað ber til at siga, at persónur, ið er fevndur av reglunum í § 13, hevur varandi tørv á hjálp, tí fyribils hjálp er veitt í “longri” tíð,
- um upphæddin er røtt,
- um persónar yvir 50 ár, fáa fyritíðarpensjón, samsvarandi lógini um almannapensjónir,
- um størri veiting verður veitt undantaksvíst, og avgerðin er grundgivin,
- um persónurin hevur hjúnafelaga, sum hevur inntøku, og at hon verður mótroknað, og
- um inntøkukanning verður gjørd 3. hvønn mánað.

Gongdin í einstøku málunum og samskifti millum Almannaverkið og viðskiftafólkini eru grundarlag undir avgerðunum at veita varandi hjálp. Sambært upplýsingum í málunum, hava allir persónarnir, ið fáa veiting eftir § 13, fingið antin fyribils hjálp ella varandi hjálp í nógv ár.

Almannaverkið hevur ikki ásett greiðar reglur fyri, hvussu leingi fyribilshjálp kann verða veitt, áðrenn farið verður til varandi veiting. Greiðar reglur eru heldur ikki fyri, hvussu leingi fólk kunnu fáa varandi hjálp, eftir at tey eru fylt 50 ár. Meira enn helvtin av teimum, ið fingu varandi veiting í 2015, vóru yvir 50 ár.

Long viðgerðartíð.

Ein persónur varð 50 ár í 2009, og skuldi Almannaverkið tá taka upp mál um fyritíðarpensjón til viðgerð. Í 2016 er málið ikki avgreitt. Almannaverkið ásannaði, at tey generelt ikki hava fylgt nóg neyvt við, og tí er støða ikki tikin til fyritíðarpensjón. Landsgrannskoðanin heldur, at tað er ikki nøktandi.

Í august 2016 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at í framtíðini verður álagt ráðgevum at hava málini í áminning fyri at tryggja, at neyvari verður fylgt við. Nýggja KT-skipanin skal eisini hava innbygda áminningarskipan. Landsstýrismaðurin heldur, at átøkini fara at tryggja málsgongdina framyvir.

Í stakroyndunum var dømi um, at persónur, sum hevur fingið varandi hjálp í fleiri ár, er farin í arbeiði, og kann uppihalda sær uttan hjálp frá Almannaverkinum.

Dømi var um persón, sum fekk fyribilsveiting í minsta lagi 10 ár, fyri síðani at fáa varandi veiting í 20 ár. Viðkomandi lat inn umsókn um fyritíðarpensjón í september 2015: tá var hann yvir 50 ár. Málið um fyritíðarpensjón er ikki avgreitt enn, tí sambært Almannaverkinum er neyðugt at biðja um frágreiðing frá serlækna fyri at kunna taka endaliga støðu um fyritíðarpensjón. Frágreiðing frá serlækna er umbiðin í apríl 2016.

Sambært landsstýrismanninum er talan um vanliga viðgerð av fyritíðarpensjón. Almannaverkið hevur móttikið læknaváttan frá kommunulækna, og helt, at neyðugt varð við serlæknaváttan.

Hóast áratíggjur við fyribils- og varandi hjálp varð serlækna-váttan kravd fyri at taka støðu til fyritíðar-pensjón.

Almannaverkið hevur ikki goldið nøkrum hægri veiting enn vanligu mánaðarligu upphæddina í 2015. Harafturímóti eru dømir um, at upphæddirnar verða ikki broyttar, tá ið dagpeningaupphæddin broytist. Í tveimum málum eru skeivar upphæddir goldnar út í fleiri ár. Almannaverkið ætlar at kanna málini og rindar møguligt eftirgjald.

Sambært landsstýrismanninum er talan um mistøk, sum nú eru rættað.

Eftirgjald er goldið teimum, sum høvdu fingið skeivar upphæddir.

Í leiðbeiningin hjá Almannaverkinum er ásett, at deildarleiðari ger av, hvussu ofta kanning skal gerast av inntøkuviðurskiftunum. Hevur umsøkjari ella hjúnafelagi inntøku, sum ger, at umsøkjarin fær eina lægri upphædd, enn hægstu varandi veiting, skal Almannaverkið hava eftirlit við hvørjum einstøkum útgjaldi. Hevur umsøkjari onga inntøku ella bara hevur inntøku av og á, skal inntøkueftirlit gerast í minsta lagi 3. hvønn mánað. Landsgrannskoðanin kann ikki staðfesta, at inntøku-eftirlitini eru gjørd, og hevur mælt til at skjalfesta eftirlitini.

Í august 2016 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at tá ið varandi veiting fer at verða skrásett í KT-heildarskipanini, verður møguligt at gera sjálvvirkandi kanning av inntøkuviðurskiftunum. Tað verður gjørt seinni í ár ella fyrst í komandi ári. Við hesi broyting gerst eftirlitið og skjalfestingin betri. Til arbeiðið við nýggju KT-heildarskipanini er liðugt, fer Almannaverkið at seta øll mál í áminning 3. hvønn mánað.

Sjálvvirkandi kanningar í nýggju KT-heildarskipanini.

8.10 Sjúkratrygd (LG 2015/212-0344)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað lógarbundnu játtanina til sjúkratrygd. Endamálið við grannskoðanini var at kunna okkum um, hvussu skipanin virkar og at kanna, um roknskapurin er rættur. Vit kannaðu við stakroyndum, um móttakararnir lúka treytirnar í Ll. nr. 30 frá 19. mai 2004 “um sjúkratrygd til fiskimenn”.

Sjúkratrygd verður veitt mynstraðum fiskimonnum við bústaði í Føroyum, um teir fara sjúkir í land, og tað verður váttað av skipara og lækna. Fiskimenn skulu vera undir skipanini við minstuløn og mynstraðir við føroyskt skrásettum fiskiskipi.

Sjúkratrygd er ein partur av virkseminum hjá Trygdargrunninum. Í 2011 yvirtók Trygdargrunnur Fiskivinnunar virksemi hjá táverandi Lønjavningarstovuni. Samstarvsavtala varð gjørd millum Trygdargrunnin og Arbeiðsloysisskipanina, og í 2013 varð stjórin á Arbeiðsloysisskipanini settur stjóri fyri Trygdargrunnin.

Trygdargrunnurin sendir árliga rokning á 200 t.kr. fyri umsiting av sjúkratrygd til Almannamálaráðið. Á stovninum arbeiða 5 fólk.

Umsiting

Trygdargrunnurin hevur útvegað sær egna umsitingarskipan “TGumsitingarskipanin” til at umsita inntøkutrygd, sjúkratrygd og flutningsstuðul. Skipanin er ikki liðugt ment, men er tikin í brúk.

Í TGumsitingarskipanini verður gjaldið fyri sjúkratrygd roknað og skjalfest. Tá ið ein umsókn er viðgjørd, t.v.s. at allar upplýsingar eru tøppaðar í skipanina og gjaldið roknað, verða lønarupplýsingarnar tøppaðir manuelt í lønarskipanina hjá Gjaldstovuni, sum rindar út. Sjúkratrygd verður goldin hvønn hósdag fyri undanfarnu viku.

Trý starvsfólk hava heimild at skráseta lønir í lønarskipanini hjá Gjaldstovuni. Ongin leysgevur lønirnar, tí tey arbeiða beinleiðis í skipanini. Grunnurin hevur sent Gjaldstovuni umbøn um at brúka web-løn, sum krevur skilnað millum tey, sum skráseta og tey, sum leysgeva.

Deildarleiðarin góðkennir mánaðarroknskapin mótvegis Almannamálaráðnum. Hann stemmar lønirnar av mánaðarliga og ger stakroyndir av útgjøldunum. Landsgrannskoðanin mælti til at skjalfesta stakroyndirnar.

Trygdargrunnurin hevur sína egnu navnaskrá, sum er partur av TGumsitingarskipanini. Landsfólkayvirlitið letur upplýsingar um p-tal og bústað, meðan fiskimenn lata inn upplýsingar um peningastovns kontunummur.

Øll starvsfólk hava atgongd til at broyta upplýsingarnar. Allar broytingar verða loggaðar, og loggurin er atkomuligur.

Ongar ásetingar eru um innheinting, um ov nógv skuldi verið goldið út. Sambært Trygdargrunninum kemur tað sjáldan fyri, tí goldið verður afturút. Um tað hendir, verður antin mótroknað í sjúkratrygd ella heitt á viðkomandi um at rinda aftur. Sjúkratrygd hevur ongar pengar útistandandi.

Lógin um sjúkratrygd heimilar hjúnafelaga ella maka at søkja um sjúkratrygd, um fiskimaður doyr umborð ella eftir at hann fór sjúkur ella skaddur í land. Sambært stjóranum, setir grunnurin seg í samband við reiðaríið í slíkum førum. Ongin hjúnafelagi ella maki hevur søkt um sjúkratrygd seinastu árini.

Mótrokning av dagpeningi frá Vanlukkutryggingini

Dagpeningur frá Vanlukkutryggingini verður ikki mótroknaður í sjúkratrygdini. Í viðmerkingum til Lm. nr. 64/2003, verður sagt, at vísandi til, at bæði sjúkratrygdin og dagpeningaupphæddin frá Vanlukkutryggingini eru avmarkað, verður ikki mælt til, at sjúkratrygdin heldur uppat, um dagpeningur verður rindaður frá Vanlukkutryggingini.

Roknskaparreglugerð o.a.

Trygdargrunnurin hevur roknskaparreglugerð fyri sjúkratrygd og flutningsstuðul. Roknskaparreglugerðin, ið er dagfest 1. oktober 2012, er ikki góðkend.

Í apríl 2016 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Trygdargrunnurin fyrisitur ávísar uppgávur fyri Almannamálaráðið sambært avtalu millum partarnar frá 1. januar 2012. Ráðið umhugsar at gera eina serliga roknskaparreglugerð fyri umsitingina av játtanini.

Deildarleiðarin og starvsfólkini hava atgongd til at broyta dagsatsirnar í TGumsitingarskipanini, og øll starvsfólkini hava atgongd til at bóka lønir. TGumsitingarskipanin er ikki ein útgjaldsskipan, og tí fara útgjøldini fram í lønarskipanini hjá Gjaldstovuni. Skipanirnar eru leysar av hvørjari aðrari.

Umsókn um sjúkratrygd

Trygdargrunnurin hevur gjørt eitt umsóknarblað til sjúkratrygd. Á umsóknini skal skiparin vátta, at tilburðurin hendi umborð. Eisini skal lækni upplýsa, nær fiskimaðurin varð óarbeiðsførur, og hvussu leingi hann fer at vera óarbeiðsførur. Fiskimaður skal hava verið hjá lækna innan 14 dagar, og umsóknin skal vera send Trygdargrunninum innan 60 dagar eftir, at fiskimaðurin er komin í land.

Onki serstakt játtanarskriv verður sent, tá ið fiskimaður søkir um sjúkratrygd, og umsóknin verður gingin á møti. Hvørja viku sendir Trygdargrunnurin skriv "Avrokning av sjúkratrygd" til fiskimannin við upplýsingum um gjald og uppgerð av dagatali.

Verður umsókn noktað, verður skriv sent fiskimanninum við grundgeving. Trygdargrunnurin vegleiðir ikki um kærumøguleikar, og ongar ásetingar eru um tað í lógini um sjúkratrygd.

Ongar ásetingar um kærumøguleika.

Í apríl 2016 hevur landsstýrismaðurin vísst á, at tá ið ongar ásetingar eru í lóggávu um kærumøguleika, kann avgerðin kærast til hægri myndugleika. Tað er landsstýrismaðurin í almannamálum, ið varðar av Trygdargrunninum, og tí kunnu avgerðir grunnsins kærast til Almannamálaráðið.

Almannamálaráðið fer at boða Trygdargrunninum frá, at grunnurin í sýtanum kann vegleiða um kærumøguleika til hægri myndugleika. Eisini vísir § 5 í lógini um sjúkratrygd til Fiskimálaráðið, og eigur lógin at broytast soleiðis, at vísst verður til rættan myndugleika. Í sambandi við hesa broyting, fer Almannamálaráðið eisini at seta reglur inn um kærumøguleika og kærufreist.

Veitingin

Sjúkratrygd verður veitt frá 1. degi eftir, at fiskimaður er komin í land sjúkur ella skaddur. Goldið verður 60% av 8 vanligum tímalønum um dagin 7 dagar um vikuna sambært sáttmála millum Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag.

Treytin fyri at fáa veiting er, at fiskimaður er mynstraður umborð á føroyskt skrásettum fiskiskipi. Trygdargrunnurin hevur mynstringarlistar í TGumsitingarskipanini.

Grundtímaløn 1. mai 2015 er 120,44 kr. Upphæddin til Sjúkratrygd fyri hvønn dag er 578,12 umframt 12% í frítíðarløn. Av veitingini skulu arbeiðsmarknaðargjøld verða rindað, men ikki bundna eftirlønargjaldið sambært Ll. nr. 49/2013 "um eftirløn".

Málsgjøgnumgongd

Landsgrannskoðanin hevur gjøgnumgingið 10 mál við grundarlagið í umsókn um sjúkratrygd, skrásetingarnar í TGumsitingarskipanini og útgjøld frá Gjaldstovuni. Onki var at finnast at.

Samanumtikið

Umsitingin virkar væl.

Samanumtikið heldur Landsgrannskoðanin, at umsóknir verða avgreiddar skjótt, og sambært stjóranum vísir Trygdargrunnurin til Almannaverkið, tá ið umsóknir ikki verða gingnar á møti, og tá ið tíðarskeiðið er lokið. Sjúkratrygd kann veitast í mesta lagi í 75 samfeldar dagar og í mesta lagi 180 dagar í einum álmanakkaári.

Av tí at talan er um ein lítlan stovn, er ikki skipanarligur skilnaður millum tey, sum skráseta, og tey, sum leysgeva. Útgjøldini verða kannað við stakroyndum.

Landsgrannskoðanin mælti Trygdargrunninum til at kanna, um fiskimenn fara í vinnu á landi, áðrenn sjúkratíðarskeiðið heldur uppat, sum ásett er í lógini. Landsgrannskoðanin helt tað ikki vera nøktandi at ganga út frá, at fiskimaðurin sigur frá sjálvur, at hann er farin í aðra vinnu á landi.

Í august 2016 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Trygdargrunnurin hevur atgongd til upplýsingar hjá TAKS. Stovnurin skal kanna, um umsøkjarin hevur havt lønarinntøku í tíðarskeiðnum, hann var sjúkrameldaður. Upplýsingarnar hjá TAKS siga onki um, hvat tíðarskeið inntøkan fevnir um. Talan kann vera um avrokning fyri tíðarskeið, áðrenn sjúkratíðarskeiðið. Avgerandi er, at Sjúkratrygd ikki rindar fyri tíðarskeið, viðkomandi hevur vunnið sær rætt til løn.

Allar útgjaldingar í 2015 kannaðar. Ongin feilur.

Trygdargrunnurin hevur, í samráði við Almannamálaráðið, kannað allar útgjaldingar í 2015. Úrslitið varð, at eitt mál mátti kannast nærri. Viðkomandi arbeiðsgevari hevur skrivliga váttað, at lønin varð ov seint útgoldin, og at inntøkan var fyri tíðarskeið áðrenn sjúkratíðarskeiðið.

9 Orðalisti

360^0 - er ein journalskipan, sum fleiri almennir stovnar brúka.

Brúkararættindi - eru rættindini hjá tí einstaka til at lesa og/ella broyta dátur í KT-skipanum.

Búskaparskipan landsins - er felagsheiti fyri allar skipanirnar, sum Gjaldstovan umsitur.

C.átekning - við C.átekning kann heimild verða givin til at flyta óbrúktar løgujáttanir til seinni fíggjarár, ella til innanhýsis flytingar millum høvuðskontur sama ár.

Change management - Broytingarleiðsla ella stýring av broytingum fyri at tryggja, at allar broytingar verða gjørdar eftir ávísum standardum, at tryggja kvalitetin á broytingunum.

Cosmic - er ein KT-skipan til at gera samlirokningar frá læknum at rinda úr eftir.

Doculive - er ein journalskipan.

Eftirlitsumhvørvi - leggur støði undir hugburðin, starvsfólkini hava til eftirlit og stýring, og er grundarlagið undir, hvussu væl innaneftirlitið er skipað.

Eksternir grunnar - eru grunnar, sum ikki eru tiknir við í fíggjarstøðu landskassans, og sum hava sjálvstøðugan roknskap.

Eykajáttanarlóg - fevnir um broytingar, sum Løgtingið ger í játtanum, eftir at fíggjarlógin er samtykt.

Fígging landsins - deild hjá Gjaldstovuni, sum hevur umsiting av gjaldførinum hjá landinum um hendi.

Fíggjargrannskoðan - er, at ansa eftir, at roknskapurin er rættur, og at tær avgerðir, sum roknskapurin fevnir um, eru samsvarandi veittum játtanum, galdandi lógum og fyriskipanum, verandi avtalum og vanligum siði.

Fyrisitingargrannskoðan - er, at ansa eftir, at tað er hóskandi atborið fíggjarliga í sambandi við umsiting av ognum og viðvíkjandi rakstri av teimum stovnum og tí virksemi, roknskapurin fevnir um.

Gjaldstovuráðið - tað er Gjaldstovuráðið, sum ger ásetingarnar um røktina av landsins gjaldføri og skuld, sum Fígging Landsins fyrisitur eftir. Ásetingar um landssins gjaldføri og skuld eru at finna í løgingslóg nr. 49 frá 12. mai 2015 “um broyting í løgtingslóg um landsins gjaldføris- og skuldarfyrisiting”.

Grannskoðanarlógin - løgtingslóg nr. 25/1999 “um grannskoðan av landsroknskapinum v.m.”

Høvuðskonta - játtanir verða veittar á høvuðskontum, og tað er høvuðskontan, ið er sjálv játtanin, sum Løgtingið atkvøður um.

Íløgujáttan/løgujáttan - er eitt játtanarslag. Løgujáttan verður nýtt í sambandi við bygging, ognan ella avhending av bygningum, løgum og skipum o.ø. og í sambandi við stór viðlíkahaldsarbeiði.

Innaneftirlit - eru tiltøk, sum leiðslan setir í verk fyri at fáa nóg stóra vissu fyri, at roknskapurin er rættur og álítandi, at raksturin er effektivur, og at lógir og reglur verða hildnar.

Innheintingarskipanin hjá TAKS - er ein KT-skipan til at krevja inn skatt og o.a., sum er fallið til gjaldingar.

Inntøkufíggjað virksemi - er virksemi, ið ber handilsligan dám, og kann landsstýrismaðurin í fíggjarmálum loyva stovnum at hava inntøkufíggjað virksemi. Nærri reglur um inntøkufíggjað virksemið eru í kap. 6 í K. nr. 84/2011 “um rakstrarjáttan”.

Kervisskoðan - er grannskoðan av KT-skipanum.

Kontuskipan landsins - er kontuplanur fyri tað almenna.

KT-heildarskipanin - í frágreiðingini meinast við nýggju KT-heildarskipanina hjá Almannaverkinum, sum partvíst er tikin í brúk.

KT landsins - er deild hjá Gjaldstovuni, sum hevur til uppgávu at veita almennum stovnum KT-tænastur og at samskipa KT á yvirskipaðum stigi.

Landsnet - er tænasta, sum KT landsins veitir. Tænasturnar fevna um hýsing og rakstur av servarum og netverkum, uppseting og atgongd til grundleggjandi forrit á brúkarateldum og KT-support til brúkarar.

Landspartafelag - er eitt partafelag, sum landið hevur sama tilknýti til, sum móðurfelag til dótturfelag, sbr. §§ 6 og 7 í vinnufelagalógini.

Landsroknskapurin - er samlaði ársroknskapurin hjá landinum og fevnir um allar inntøkur og útreiðslur landsins fyri farið fíggjarár og aktiv og passiv landsins. Gjaldstovan setir landsroknskapin upp.

Løgfrøðislig- og kritisk grannskoðan - er grannskoðan, har hugt verður eftir, at tær avgerðir, sum roknskapurin fevnir um, eru samsvarandi veittum játtanum, galdandi lógum og fyriskipanum , verandi avtalum og vanligum siði.

Mál- og avrikssáttmáli - er sáttmáli millum aðalráð og teirra stovnar um mál og nádd úrslit.

Markamót - er heiti fyri sambindingarlið millum ymsar skipanir.

Premaster - er KT-skipan hjá Strandferðsluni til keyp og viðlíkahald

Profylaksir - er eitt heilsufrøðiligt heiti á fyribyrgjandi tiltøkum.

Ræðisrættur - er at hava ræði á einari kontu ella játtan.

Rakstrarjáttan - er ein játtan, sum fevnir um at seta starvsfólk og at halda útreiðslur í hesum sambandi, herímillum at keypa vørur og tænastur o.a.

Roknskapargóðkenningarskipanin - stytt RGS, er ein KT-skipan, sum góðskutryggjar tann almenna roknskapin við góðkenningum av stovnsroknskapum.

Roknskaparlógin - løgtingslóg nr. 33/1994 “um landsins almenna roknskaparhald v.m.”

Roknskaparkunngerðin - Kunngerð nr. 22/2007 “um roknskaparverk landsins”

Roknskaparreglugerð - er ein reglugerð fyri roknskaparhaldið hjá stovninum við ábyrgdar og heimildarreglum.

Roknskaparrundskrivið - Roknskaparrundskriv frá Fíggjarmálaráðnum frá 2001 um vegleiðing um roknskaparreglugerðir.

Samlirokning - er KT-skipan hjá m.a. Heilsutrygd at rinda veitingar eftir.

SLA - er heiti fyri eina rakstrar- og viðvíkahaldsavtalu millum partar.

Stovnskassi - er ein peningakassi til smákeyp.

TAKS-skipanir - í frágreiðingini meinast við KT-skipanir hjá TAKS

TGumsitingarskipan - er nýggj KT-skipan hjá Trygdargrunninum, til m.a. at rokna og skjalfesta gjøld fyri sjúkatrygd.

TotalView - er ein klokkuskipan, sum fleiri almennir stovnar brúka.

Trygdarpolitikkur - er ein yvirskipaður politikkur, ið tekur atlit at váðum, ið hótta.

Undirkonta - verður brúkt, tá tað er neyðugt at býta eina játtan sundur í fleiri virkisøki.

Váðameting - er at eyðmerkja og greina teir vandar, sum mest sannlíkt kunnu raka stovnin meint.

VaktPlan - er ein KT-skipan til at skráseta arbeiðstímar í og avgreiða lønir við.

Verkætlan - tað er t.d. bygging av einum bygningi, vegi, granskingarverkætlanir.

Verkætlanarleiðsla - leiðari fyri eina verkætlan.

Verklagslóg - er ein lóg, sum eigur at verða løgd fyri Løgtingið, tá ið íløguætlan er 10 mió.kr. ella størri.

Víðkað fyrisitingargrannskoðan - er ein størri og meira djúptgangandi kanning enn vanlig fyrisitingargrannskoðan, sum løgtingsgrannskoðararnir kunnu biðja um.

Vinnugluggin - er ein portalur, har virkir og feløg kunnu avgreiða síni viðurskifti við TAKS.

Web-løn - er ein KT-skipan til lønaravgreiðslu hjá Gjaldstovuni.